# NÁTTÚRUSØGA

Dýr og plantur

THEODOR HANSEN

# NÁTTÚRUSØGA

## Dýr og plantur

Føroya Skúlabókagrunnur

Theodor Hansen: Náttúrusøga. Dýr og plantur.
© Føroya Skúlabókagrunnur og høvundurin.
Perma: Grafikstudio.
Seting og umbróting: Føroyaprent.
Prent: Bookpartner.
Føroya Skúlabókagrunnur,
Tórshavn 2005.

ISBN 99918-0-332-7

# Innihaldsyvirlit

**Formæli** .................. 11

## 1. PARTUR

**Plantur við hús** ............ 14
Mold .................. 14
Vatn ................... 14
Vatn og salt ............ 15

**Várið kemur** .............. 16

**Fræ** ...................... 17
Fræ nælir .............. 17

**Hvussu planta er bygd** ...... 18
Rótin .................. 18
Leggurin .............. 18
Blaðið ................. 19
Blaðið ger sukur ........ 19

**Blóman** .................. 20
Sáing .................. 20

**Plantur húsanna millum** .... 21

**Plantur fram við vegjaðara** .. 22
Sóleya ................. 22
Hvonn ................. 23

**Prýðisplantur** ............. 24
Trø .................... 24
Urtagarður ............. 25
Tulipánur .............. 26

**Gagnplantur** .............. 28
Rabarbur .............. 28
Jarðber ................ 29
Grønkál ............... 30
Epli ................... 30

**Dýr, sum fylgja menniskjum** . 32
Kettan ................. 32
Hundurin .............. 33

**Alidýr** .................... 34
Neyt .................. 34
Seyðurin ............... 35
Rossið ................. 38
Svínið ................. 39
Geitin ................. 40

**Alifuglar** ................. 41
Høsn .................. 41
Dunnan ................ 42
Heimagásin ............ 43

**Fuglar við hús** ............. 44
Starin ................. 44
Steinstólpan ............ 45
Grátítlingurin ........... 45
Títlingurin ............. 46
Mortítlingurin .......... 47
Títlingskongur .......... 47
Gráspurvurin ........... 48
Erla kongsdóttir ........ 48

**Gnagdýr** .................. 49
Rottan ................. 49

Músin ................. 50
Haran ................. 52

**Flogkykt heima við hús** ..... 55
Flugan ................. 55
Skinflugan ............. 56
Køstaflugan ............ 57
Húsvættið morreyða ..... 57
Húsvættið gráa .......... 57
Húsvættið svarta ........ 58
Mjølhúsvættið .......... 58
Blaðlúsin .............. 58
Frostspannarin .......... 59
Kálspannarin ........... 59
Kálmølurin ............. 59
Tvístertan .............. 59
Veggjasmiðurin ......... 61
Veggjalúsin ............. 61
Høvuðlúsin ............. 61
Kropslúsin ............. 62
Fuglaloppan ............ 62
Loppan ................ 63
Skrubbmottan .......... 64
Gatiklukkan ............ 64

**Eiturkoppar og torvatrøll** ... 66
Eiturkoppurin .......... 66
Torvatrøllið ........... 67

**Vakstrarhús** ............... 69
Inni í húsinum .......... 69
Moldin ................ 69
Ljósið ................. 69
Setkvistar og fræ ........ 70
Inniplantur og útiplantur . 70
Jólastjørna ............. 70
Tomatplanta ............ 71
Agurka ................ 71

## 2. PARTUR

**Bøurin** ................... 74
Gras .................. 74
Blómuplantur .......... 75

**Hagin** .................... 77
Graslíðin ............... 77
Fjallið ................. 77
Hamrar, gjáir, gil og urðar 78
Vøtn og tjarnir .......... 78
Vátlendi ............... 78
Á heiðini .............. 78
Áin ................... 79
Á ferð ................. 79
Leyvfall ................ 79

**Sáing og gitnaður** .......... 81
Sáðberar og sáðgong ..... 81
Flogkykt sáa ............ 81
Vindur sáar ............ 81
Gitnaður ............... 82

**Frukt- og fræspjaðing** ...... 83
Plantan spjaðir .......... 83
Vindur spjaðir .......... 83
Dýr og fólk spjaða ....... 83

**Dýralívið í svørðinum og í moldini** 85
Reyðmaðkurin .......... 85
Stóri flatmaðkurin ....... 86
Svarti snigilin ........... 87
Grái snigilin ............ 88
Iglasnigilin ............. 88
Glæri snigilin ........... 89
Kvíslaeiturkoppurin ..... 89
Ránseiturkoppurin ...... 90
Svartaklukkan .......... 91

Bláklukkan ............ 91
Trantklukkan ........... 91
Grátt undir steini ........ 92
Túsundbeinið ........... 93
Skolopendarin .......... 93

**Flogkykt í bøi og haga** ...... 95
Heygsmaðurin .......... 95
Admirálurin ........... 95
Huldan ............... 96
Veingjagulin ........... 97
Porfýrfuglurin .......... 97
Gammafirvaldurin ...... 97
Ormafirvaldurin ........ 98
Mýggjabitin ........... 98
Blómuflugan ........... 98
Froðusprettan .......... 99
Grindalokkurin ......... 99

**Fuglur í bøi og haga** ........ 100
Tjaldrið ............... 100
Spógvin ............... 102
Mýrisnípan ............ 103
Lógvin ................ 104
Kvørkveggjan .......... 105
Óðinshanin ............ 106
Títlingurin ............ 106
Jarðarkonan ........... 107
Akurskrittið ........... 108
Krákan ............... 108
Ravnurin ............. 110
Bládúgvan ............ 111

**Dýr í áum og vøtnum** ....... 113
Dafnian ............... 113
Vatnloppan ............ 113
Bivormurin ............ 113
Ertnaskelin ............ 114
Hundaiglan ........... 114
Mýggjabitaormveran .... 114
Heygsmannaormveran ... 115
Vatnkálvurin .......... 116

**Fiskur í áum og vøtnum** ..... 118
Állurin ............... 118
Sjósílið ............... 120
Sílið .................. 120
Bleikjan .............. 121
Laksurin .............. 122

**Aling** .................... 123
Klekistøð ............. 123
Smoltstøðirnar .......... 124
Alistøðirnar ............ 126

## 3. PARTUR

**Fram við strondini** ......... 132
Strandgróðurin ......... 133
Landgróðurin .......... 134
Mølheygagróðurin ...... 134
Klettagróðurin og bakka-
gróðurin ............ 135
Oyrargróðurin ......... 136

**Dýr á fjørukletti og fjørusandi** 137
Klettasprettan .......... 137
Kongadýrið ............ 137
Hoppstertan ........... 137
Vatnflugan ............ 138
Taraflugan ............ 138
Fjøruflugan ........... 138
Fjørutekan ............ 139
Fjørutúsundbeinið ...... 139

**Dýr í støðuhyljum ovarlaga í fjøruni** . . . . . . . . . . . . . . . . . . 140
Marflugan . . . . . . . . . . . . . . 140
Trøllasílið . . . . . . . . . . . . . . 141

**Dýr á klettinum millum flóð og fjøru** . . . . . . . . . . . . . . . . . . 143
Fjørukúvingurin . . . . . . . . 143
Rundbølluti fjørukúvingurin 144
Kræklingurin . . . . . . . . . . . 144
Øðan . . . . . . . . . . . . . . . . . . 145

**Taravøksturin** . . . . . . . . . . . . . 146
Taravøksturin . . . . . . . . . . . 146
Grøntarin . . . . . . . . . . . . . . 147
Slýleggurin . . . . . . . . . . . . . 147
Slýblaðið . . . . . . . . . . . . . . . 147
Slýtráðurin . . . . . . . . . . . . . 147
Mortarin . . . . . . . . . . . . . . . 148
Reyðtarin . . . . . . . . . . . . . . 149

**Dýr í taraskónum** . . . . . . . . . . 150
Fjørukrabbin . . . . . . . . . . . 150
Lúsakrabbin . . . . . . . . . . . . 152
Taralúsin . . . . . . . . . . . . . . . 152
Trøllaneglin . . . . . . . . . . . . 153
Tarabrosman . . . . . . . . . . . 153
Strentingurin . . . . . . . . . . . 153
Ulkan . . . . . . . . . . . . . . . . . 154
Yngul . . . . . . . . . . . . . . . . . 155
Rognkelsið . . . . . . . . . . . . . 155

**Krossfiskur og igulker** . . . . . . 157
Krossfiskurin . . . . . . . . . . . 157
Slangustjørnan . . . . . . . . . . 158
Igulkerið . . . . . . . . . . . . . . . 159

**Dýr á mórubotni** . . . . . . . . . . . 161
Jomfrúhummarin . . . . . . . . 161
Kúpuskelin . . . . . . . . . . . . . 162

**Dýr á sandbotninum** . . . . . . . 163
Fjørumaðkurin . . . . . . . . . 163
Sjógvormurin . . . . . . . . . . . 164
Skegggággan . . . . . . . . . . . 164
Gággukrabbin . . . . . . . . . . 165
Toppkúvingurin . . . . . . . . . 166
Agngággan . . . . . . . . . . . . . 166
Jákupsskelin . . . . . . . . . . . . 168
Rípuskelin . . . . . . . . . . . . . 169
Smyrslingurin . . . . . . . . . . . 169
Langskelin . . . . . . . . . . . . . 170

**Fjøru- og strandarfuglur** . . . . 171
Fiskimásin . . . . . . . . . . . . . 171
Æðan . . . . . . . . . . . . . . . . . 173
Svartbakurin . . . . . . . . . . . 175
Skarvurin . . . . . . . . . . . . . . 176
Teistin . . . . . . . . . . . . . . . . . 177
Skatumásin . . . . . . . . . . . . . 177
Fransaternan . . . . . . . . . . . 178
Ternan . . . . . . . . . . . . . . . . . 178
Lómurin . . . . . . . . . . . . . . . 179
Villdunnan . . . . . . . . . . . . . 180
Grágrælingurin . . . . . . . . . 182
Tjaldursgrælingurin . . . . . . 182

**Sjófuglurin** . . . . . . . . . . . . . . . . 184
Sjófuglurin . . . . . . . . . . . . . 184
Hvussu sjófuglur veiðir . . . 185
Hvussu sjófuglur flýgur . . 186
Sjófuglur og skip . . . . . . . . 186

**Landgrunsfuglur** . . . . . . . . . . 187
Lomvigin . . . . . . . . . . . . . . 187
Lundin . . . . . . . . . . . . . . . . 188

Álkan ................ 189
Súlan ................ 190
Likkan ................ 191

**Bjørgini** ................ 193
Bergið og fuglurin ....... 193

**Havfuglur** ................ 194
Havhesturin ............ 194
Drunnhvítarnir ......... 195
Rytan ................ 196
Kjógvin ................ 197
Skrápurin ............. 198
Skúgvurin ............. 198
Helsareyðin ............ 199

**Úti í sjónum** ............ 201
Úti í sjónum ............ 201
Ovveiða og dálkan ...... 203

**Fiskakroppurin** ............ 205
Skræðan .............. 205
Beinagrindin ........... 205
Vøddarnir ............. 206
Innvølurin ............ 207
Blóðið og andingin ...... 207
Nøringin .............. 208
Sansarnir ............. 209

**Dýr uppi í sjónum** ......... 211
Toskurin .............. 211
Hýsan ................ 213
Seiðurin .............. 214
Hvítingurin ............ 215
Longan ................ 216
Royðurin .............. 216
Hávurin .............. 218
Hvalspýggjan ........... 220
Høgguslokkurin ......... 221

Vatnloppan ............. 222
Ljóskrabbin ............ 223
Brislingurin ............ 223
Sildin ................ 223
Svartkjafturin ........... 225
Hvítingsbróðirin ........ 225
Grindahvalurin ......... 226

**Botnfiskur** ............... 229
Kalvin ................ 229
Tungan ................ 230
Reyðsprøkan ........... 230
Skrubban .............. 231
Brosman ............... 231
Steinbíturin ............ 232
Havtaskan ............. 232
Gulllaksurin ............ 233

**Sníkar í sjógvi** ............ 235
Viðarmaðkurin ......... 235
Sandmaðkurin .......... 236
Táknatrøllið ............ 236
Fiskalúsin ............. 237

**Á látrinum** ............... 238
Láturkópurin ........... 238

**Fuglakroppurin** ........... 241
Fjaðurbúnin ............ 241
Beinagrindin ........... 242
Sansarnir ............. 242
Sodningarleiðin ......... 243
Andarleiðin ............ 243
Nøringin .............. 244

**Soppar** .................. 245
Skónir ................ 246

**Leitorð** .................. 247

# Formæli

„Náttúrusøga. Dýr og plantur" er ætlað sum ein hent bók hjá lærarum og næmingum, men eisini øðrum, sum vilja vita meira um tey einstøku dýrini og tær einstøku planturnar í Føroyum.

Bókin byggir á tær tríggjar gomlu dýralærurnar, ið ætlaðar vóru til fjórða, fimta og sætta flokk, men í hesari bókini er gjølligari skrivað um tey einstøku dýrini, og so eru plantur eisini tiknar við. Henda bókin er eisini skipað í tríggjar partar, tann lættasti parturin fyrst.

Greitt verður frá, hvussu dýr og plantur liva, og hvar tey eru. Størri dentur verður lagdur á at lýsa tey einstøku dýrini og tær einstøku planturnar, heldur enn vistfrøðina.

Um tað mundið, tá ið hetta handritið var skrivað, vórðu lærugreinir sum lívfrøði grundleggjandi broyttar og gjørdust partur av nýggjari lærugrein, ið fekk navnið Náttúra og tøkni. Sum ein avleiðing av hesum fór Føroya Skúlabókagrunnur so við støði í nýggjari lesiætlan at skipa fyri útgávu av undirvísingarmiðlum til hesa lærugreinina.

Av tí at lærugreinin er ræ ttiliga víðfevnd, gevur Skúlabókagrunnurin - umframt høvuðsbøkurnar „Náttúra og tøkni" 1, 2 og 3 – eisini hópin av øðrum fjølbroyttum ískoytistilfari út til lærarar og næmingar. Nýggir undirvísingarhættir eggja til, at næmingar sjálvir læra at finna sær tilfar fram í ymsum bókum at nýta í sambandi við t.d. egnar eygleiðingar og kanningar í náttúruni og verkevnir. „Náttúrusøga" er ein bók, ið kann verða góð at taka til í tílíkum førum.

Bókin hevur eitt greitt og væl skipað innihaldsyvirlit. Aftast er eitt sera drúgt leitorðayvirlit, sum ger bókina ógvuliga henta. Okkum vantar enn tilfar um føroysku náttúruna, eisini á ymsum torleikastigi. Vónandi kann henda bókin vera eitt íkast.

Høvundurin og Føroya Skúlabókagrunnur vilja veita Svenningi Tausen stóra tøkk fyri hollan stuðul og ábøtur.

*Føroya Skúlabókagrunnur*

# FYRSTI PARTUR

# Plantur við hús

Tað, sum í bókini eitur *við hús*, kann vera so ymist. Tað veldst um, hvar vit eru – á bygd ella í býi. Men allastaðni sæst kortini grønur blettur húsanna millum. Urtagarðar eru víða um landið. Summir gamlir, aðrir yngri. Okkurt vakstrarhús er eisini.

## Mold

Tað leysa tilfarið, sum liggur oman á helluni í jørðini, er komið av gróti, deyðum plantum og dýrum.

Luft, hiti, kuldi og vatn loysa so við og við grót sundur. Vit siga, at grót molnar. Burtur úr molnaðum gróti koma steinar, eyrur, sandur og leir.

Tá ið plantur og dýr eru fúnað, nevna vit tað mylding. Á turrum lendi verður myldingur til mold.

So langt niður í jørðina, sum vit velta, eitur svørður. Í svørðinum eru flestar planturøtur. Maðkar og onnur smá dýr eru eisini í svørðinum.

Svørður er bæði molnað grót og myldingur, og tey eru blandað saman og eita mold.

Í mold eru smáar poknur og holur. Dýrini í moldini grava holur. Luft og vatn eru í poknum og holum. Tá ið regnar, setur vatn niðurí. Men tá ið regnar illa, fyllist alt við vatni, og vatnið fær luftina at seta úr poknunum og holunum.

Tá ið so aftur er íslitið, søkkur vatnið djúpari niður, og luft kemur í aftur.

Planturøtur og dýr í moldini fáa ikki so væl andað, tá ið ov lítil luft er í moldini.

## Vatn

Plantur, dýr og fólk mugu fáa bæði vatn og luft, tí annars liva tey ikki. Planturnar súgva vatnið úr jørðini. Hava vit urtapottar í vindeyganum, síggja vit, hvussu verður, tá ið plantan fær ikki vatn.

Hon følnar.

Koyra vit vatn á urtapott, síggja vit, hvussu skjótt plantan sýgur

vatn. Sum plantan í urtapottinum eru allar plantur í bøi, haga og viðarlund.

Planturnar súgva vatn við rótunum.

Tó fáa planturnar úti í náttúruni ikki sogið vatn úr jørðini alt árið, tí tær hvíla seg um veturin.

Um veturin missa flestar plantur bløðini. Summar plantur liva bara í eitt ár. Tær doyggja um veturin. Hesar plantur hava kastað fræini í moldina. Um várið næla fræini og verða til nýggja plantu.

Aðrar plantur liva í tvey ár. Tær følna um veturin; men rótin stendur livandi í moldini. Upp aftur aðrar plantur liva í fleiri ár.

Vit kunnu tí siga, at bæði fræ og røtur liggja í moldini og bíða eftir vári.

Nálatrø eru grøn alt árið. Tey missa ikki nálirnar um veturin. Nálatrø standa og hvíla seg um veturin. Tey fáa heldur ikki sogið vatn, tá ið kalt er, og tí vaksa tey ikki um veturin.

**Vatn og salt**

Sølt eru í vatninum, sum plantan sýgur úr jørðini. Vatnið úr køkskrananum smakkar ikki salt. Men koyra vit vatn í ein kopp og koyra eina skeið av salti í, so smakkar tað salt.

Hyggja vit niður í vatnið, sæst einki salt, tí saltið er upployst.

Í jørðini eru fleiri sløg av salti í vatninum.

Vatnið – regnvatnið – seyrar niður í moldina, og tað hevur loyst upp saltið. Smakka vit á jarðvatn, smakkar tað ikki salt, tí so lítið av salti er kortini í tí.

Soleiðis er vatnið í áum, vøtnum og vatnbrunnum.

Ein planta má fáa sølt, tí annars trívst hon ikki.

Sølt eru í jørðini, men ikki altíð nóg mikið. Tí má jørðin fáa sølt aftrat. Tøð eru sølt. Í tøðum eru somu sølt, sum plantan fær úr moldini.

Skulu vit vera vís í, at ein planta skal trívast væl og frukta, mugu vit antin taða við tøðum ella handilstøðum.

# Várið kemur

Veturin er viðhvørt lýggjur og viðhvørt kaldur og harður. Summi ár nógvur kavi. Onnur ár næstan tátt. Onkuntíð er ikki kavabitin fyri jól; men so kann nógvur kavi leggjast, og kuldi og kavi kunnu vera út í mai.

Sagt plagar at vera, at fyrsti várdagur er 22. februar og fyrsti summardagur 14. apríl. Men torført er at siga, nær tað er vetur, vár ella summar.

Men ein dagin kemur várið. Ein dagin kom lývæta, og mjørkin liggur tjúkkur. Úti er stilt og heitt. Kavin tiðnar, men uppi í fjøllunum liggja enn nakrar fannir og treiskast.

Avfallið er ikki longur hvast og kalt. Lýregnið vermir moldina. Vatnið í moldini má verða vermt, áðrenn røturnar fáa sogið tað.

Dagarnir eru longri.

Sólin stendur hægri á luftini, og hon vermir betur.

Planturøtur og fræ fara at súgva sær vatn. Úr frænum veksur fyrst ein lítil rót niður í moldina, og so fær fræið meiri vatn.

So nælir alt. Foldin grønkast. Tær fyrstu nálirnar eru tó bleikar. Men tá ið tær koma upp í ljósið, grønkast tær.

Alt gleðir seg til várið og summarið. Øllum hevur longst eftir sólini og at síggja, hvussu náttúran livnar aftur. Um várið eru kortini ikki so nógvar plantur at síggja. Vit skulu nú fara at kanna eitt fræ, og hvussu tað nælir.

Skal planta vaksa, má hon fáa vatn, hita, luft og ljós.

# Fræ

Legg ertrar í eitt ílat. Síðan verður vatn koyrt í ílátið. Tá ið eitt samdøgur er farið, súgva ertrarnar ikki meiri vatn. Nú sært tú, at ertrarnar eru bólgnaðar.

Hent hevði verið at havt eina vekt og vigað ertrarnar, áðrenn tær vórðu lagdar í vatn. So høvdu vit fingið at vitað, hvussu nógv tær viga meira, tá ið tær hava sogið vatn.

Ein ertur er eitt fræ. Tá ið hinnan uttan um fræið er flust av, er kjarnin eftir. Í gróðrarkjarnanum eru tvey gróðrarbløð, sum tú fært tikið sundur. Gróðrarbløðini sita á einum stuttum gróðrarleggi. Ovast á gróðrarlegginum er gróðrarknappur. Niðast er lítil gróðrarrót.

Gróðrarkjarnin er eitt plantubarn. Tað liggur í dvala. Gróðrarkjarnin er bleikur, tí at hann liggur í myrkri.

**Fræ nælir**

Tá ið velturnar eru settar niður og kálið sáað, ganga fólk spent og hyggja, nær ið tær fyrstu nálirnar koma. Eisini eru fólk spent, og teimum leingist eftir, nær nálir kaga upp úr moldini í urtagarðinum.

Nú skulu vit fara at kanna, hvussu fræ (ertur og korn) næla.

Vit fáa okkum urtapottar og koyra saguspønir í teir. Saguspønirnar mugu vera leysar og vátar. So kunnu vit sáa ertrar, bønir, karsa ella korn.

Urtapottarnir skulu standa, har heitt og ljóst er, og vit skulu minnast til at geva teimum vatn hesa tíðina.

Skjótt koma smáar, grønar nálir. Nú nælir.

Tak ertnaplantuna upp úr urtapottinum. Tú sært, at gróðrarleggurin er blivin longri. Úr gróðrarknappinum eru grøn bløð um at breiða seg út.

Gróðrarrótin er eisini blivin størri. Men gróðrarbløðini eru nógv tynri, tí føðin í teimum er nýtt at vaksa av.

Skulu fræ næla og vaksa, mugu tey fáa vatn, luft, hita og ljós.

Úti í náttúruni er sum við urtapottunum. Tá ið kál, blómur ella korn verða sáað, má jørðin vera væl loyst, tí tá sleppur luftin væl niður í hana. Ikki skal verða sáað, uttan moldin er hóskandi vátlig og heit.

# Hvussu planta er bygd

Fólk hava heila, hjarta, armar og bein og nógv onnur gøgn. Øll gøgnini arbeiða saman, og vit tola illa at missa nakað av teimum.

Planta hevur eisini nógv gøgn, sum arbeiða saman, so hon livir og nørist.

Planta hevur rót, legg, bløð og blómur.

## Rótin

Taka vit ertnaplantuna og kornplantuna upp úr urtapottunum, síggja vit, at røturnar eru ólíkar.

Rótin á ertnaplantuni er vaksin til stóra rót, og rótgreinar vaksa út úr rótini. Henda rótin eitur stólparót.

Rótin á kornplantuni er vaksin til nakrar líka stórar røtur, og tær vaksa úr legsendanum. Henda rótin eitur trevjarót.

Tá ið fræið (ertur og korn) nældi, var nógv føði í gróðrarbløðunum. Plantan nýtti alla føðina at vaksa av.

Men so má rótin taka við og fáa plantuni føði.

Rótin heldur plantuni fastari, og hon sýgur føði úr jørðini. Føðin er vatn og sølt.

## Leggurin

Leggurin heldur plantuni uppi, so at flogkyktini skulu síggja hana. Leggurin ber bløð og blómu.

Av tí at leggur skal bera bløð og blómur, má hann vera stinnur. Leggurin á vanligari plantu, t.d. sóleyu, er grønur og bleytur. Trø hava eisini legg, men hann eitur bulur.

Leggurin á træi er brúnur og harður, tí viður er innan í honum.

Allir leggir eru styrktir innan. So fáa teir borið bløð og blómu. Inni í legginum eru fín ræsi (rør). Tey koma upp úr rótini.

Summir leggir eru oman á jørðini. Aðrir liggja í moldini. Teir leggir, sum liggja í moldini, eita jarðleggir. Teir leggir, ið vaksa oman á jørðini, følna vanliga um veturin.

Jarðleggur liggur livandi í moldini um veturin. Hann er fullur av føði. Tá ið nýggir leggir vaksa úr jarðlegginum, brúka teir føðina.

**Blaðið**

Eitt blað hevur oftast fót, legg og bløðku. Summi bløð hava heila rond. Onnur bløð eru tent ella djúpari skorin í rondina.

Í bløðkuni eru æðrar, og tú sært æðrarnar best, tá ið tú heldur blaðið upp ímóti ljósi.

**Blaðið ger sukur**

Øll evni, sum ein planta ger, verða gjørd í bløðunum. Plantan ger serliga sukur. Hon nýtir sukrið at fáa orku úr. So orkar plantan at súgva vatn úr jørðini. Eisini at fáa nýggj bløð og blómur.

Tey bløðini, sum standa í ljósi, eru grøn.

Grøn bløð eru ein verksmiðja, og bløðini gera sukrið. Æðrar í blaði eru rør.

So eru rør í rót og leggi og blaði.

Upp úr rørunum í rótini kemur vatn út í bløðini. Gjøgnum smá hol í bløðunum kemur luft ($CO_2$).

Verksmiðjan ger sukur úr vatni og luft og ljósi. Sólin gevur blaði orku, so tað fær gjørt sukur. Men burturúr kemur eisini súrevni ($O_2$), og tað fer út gjøgnum tey smáu holini á blaðnum.

Plantan sjálv nýtir nakað av sukrinum at fáa orku úr. Ein partur av sukrinum fer niður í rótina ella í jarðleggin. Har verður sukrið goymt til aftur um várið, tá ið plantan aftur fer at vaksa.

# Blóman

Summar blómur eru stórar og vakrar, so flogkyktini síggja tær væl. Ofta sita blómur tætt saman. Soleiðis sum blómur sita á blómuleggi, tað nevna vit eina blómuskipan. Tekna nakrar blómuskipanir.

Blóman ber frukt og fræ.

Vanliga hevur blóma grøn bikarbløð. Tey verja blómuna, tá ið hon bara er ein blómuknappur. Krúnubløðini eru ofta litføgur. Hunangur kann vera niðast á krúnubløðum, og hunang dámar flogkyktum væl.

Blóman hevur sáðberar. Sáðberi hevur tráð og knapp. Í knappinum er fínt blómusáð.

Innan fyri sáðberarnar stendur sáðgongin. Hon er í 3 pørtum: sáðfang, teinur og egglega.

**Sáing**

Smá egg eru í eggleguni. Tá ið sáðknappur er búgvin, brestur hann. Tað fína, lætta sáðið dettur niður á sáðfangið og liggur fast har, tí sáðfangið er kleimið.

Síðan veksur sáðið niður í eggleguna og kemur at eggjunum. Egg og sáð vaksa saman til eitt fræ (t.d. ertur). Nú siga vit, at eggið er gitið. Egglegan eitur nú frukt (t.d. ber).

Flogkykt kunnu koma í blómuna og rumsast so í henni, at tey fáa sáðknappar at bresta. Tá fáa tey blómusáð niður yvir seg og kunnu bera tað í eina aðra blómu av sama slagi.

Nógvar blómur eru smáar og síggjast ikki langt. Tær hava ongan hunang. Tí koma flogkykt ikki í tær. Men blómusáðið í teimum er heilt lætt og fínt. Vindurin blæsur tað lættliga langt burtur í aðrar blómur av sama slagi.

# Plantur húsanna millum

Fyrr í tíðini nevndu tey lendið húsanna millum heimrust, rustari ella almenning. Heimrust var hvørki bøur ella hagi.

Eingin átti heimrustina. Øll bygdin var um hana og nýtti hana. Onkur setti kálv í tjóður. Onkur annar ross og triði kanska kúgv.

Í gomlum døgum hava hjallar, fjós og gróthús staðið her. Sumt er hampað um. Annað er dottið niður, so tú sært bara grundarsteinar.

Høsn, dunnur og gæs gingu eisini á heimrustini, so tøð trutu ikki.

Fyrr vóru nógvir hvanngarðir við húsini. Nú á døgum eru fáir. Hvonnin kundi sløðast út úr hvanngarðinum, og hon vaks millum annan vøkstur húsanna millum.

Nú eru heimrustirnar býttar ímillum eigararnar.

Fram við húsaveggjum vaksa hjartaarvi, høsnagras, summardái og svínasólja. Húsanna millum vaksa hømilia, sýra, nota, gras og kollut baldursbrá.

Í veitum millum býlingar veksur bládepla, og eru veitirnar breiðar og bleytar, eru tær fullar av mýrisóleyu.

# Plantur fram við vegjaðara

Á vegjaðara vaksa serligar plantur í tí leysa eyrinum og ymsum ruski, sum fólk og kríatúr bera við sær.

Á vegjaðaranum húsanna millum veksur serliga húsagras. Eisini vaksa fínagras og legugras har.

Tú finnur eisini smæru, høsnagras, hagasólju og jóansøkugras.

**Sóleya**

Ein vakran várdag, tú kemur gangandi fram við eini veit, sært tú nøkur bløð vera komin undan. Bløðini eru smá enn. Tey eita sóljukoppar.

Tá veitst tú, at várið er komið.

Tað var ikki langt síðan, at tú gekst henda vegin. Tá var vetur, og tá var bara runa í veitini. Tú hugsaði kanska ikki, at nakað lív var har. Men kortini var sóleyan har. Hon lá bara niðri í rununi og bíðaði eftir vári.

Sóleya er vøkur, tá ið hon við vakra gula liti sínum krógvar run-una.

Fyrsta, vit síggja, eru nakrir smáir sóljukoppar. Millum sóljukopparnar eru nøkur grøngul bløð ballað saman. Hesi bløðini eru tað ytsta á blómuni, bikarbløðini.

Nakrar dagar seinni eru stórar sóleyur í veitini. Kríatúrini eta ikki sóleyu, tí hon er eitrandi. Tí sleppa tær at standa í friði og prýða veitina. Alt kann vera gult av sóleyum.

Sóleya má fáa nógv vatn. Hentar tú hana, følnar hon skjótt.

Vanliga blómar sóleya í mai-juni. Summi ár blómar hon longu í apríl. Tey grøngulu bløðini uttan um sóleyukoppin gulna, tá ið blóman sprettur. 5 gul bløð eru. Í botninum í blómuni gerst hunangur. Flogkyktum dámar hann væl.

Leggurin er opin innan, og tað er gott, tí at ov lítil luft kann vera í veitini. Luftin fer tá niður ígjøgnum leggin og niður í rótina. So fær rótin luft eisini.

Í sóleyuni eru nógvir sáðberar og nógvar sáðgongir. Hvør sáðgong verður til eina frukt. Tá ið so fræini eru búgvin, bresta fruktirnar.

Vanliga bresta nógvar fruktir í turrveðri; men fruktirnar í sóleyu bresta í vátveðri. Regnið kemur niður í tær opnu fruktirnar og skolar fræini úr.

**Hvonn**

Hvanngarður skal liggja hægri enn lendið uttanum. Seyður skal ikki sleppa at bíta hvannrøturnar, og tí má høgur garður vera uttan um hvanngarðin. Hvonn veksur ikki væl, tá ið vátt er um, og hon smakkar heldur ikki væl tá.

Fyrr á døgum plagdu tey um veturin at koyra fliðuskeljar og flidnasoð á hvannirnar. Um várið koyrdu tey neytamykju ella seyðatøð uttan um tær fyrstu nálirnar.

Í summum bygdum plagdu tey at breiða tara á hvannrøturnar. Tá ið fyrstu nálirnar komu undan um várið, varð tarin lyftur upp í heilum líki. Børnini plagdu at raka við, tá ið hetta var. Tey gleddust, tí nú vistu tey, at várið var komið.

Ofta plagdi køsturin at vera undir hvanngarðinum. Tá datt hvannfræið niður í køstin. Tøðini vórðu borin á bøin, og hvannfræini fylgdu við. So vuksu hvannir eisini í bønum.

Tá ið vit hava sáað hvannfræ, eru bara bløð í tvey ella trý ár. Bløðini nevna vit hvonn. Kanska triðja árið kemur leggur á hvonnina. Leggurin verður nevndur hvannjólur. Um jóansøku og nakað úti í juli eru blómur á hvannjólinum.

Seinni er fræ á hvannjólinum.

Hvonnin, sum veksur við hús, eitur heimahvonn. Men hvonn veksur eisini í bakka ella í bjørgum. Tá eitur hon bjargahvonn ella bakkahvonn. Tær hvannirnar eru størri, og hvannjólurin kann gerast tveir metrar høgur.

Hvonn varð etin, og vanligt var fyrr á døgum at borðreiða við hvonn og rómastampi. Hvonn verður flust við knívi og síðan trevsað. Tað eru blaðleggurin og ungir hvannjólir, sum verða etnir aftur við sukri.

Um ólavsøkuna plagdu teir at síga niður í bergið eftir hvonnum. Bjargahvonn ber orð at vera søtari enn heimahvonn.

Úr søguni vita vit, at víkingarnir høvdu hvonnina við sær á ferðum sínum. Teir hava helst havt fræ við sær og sáað tey, har teir reistu búgv. Men Rasmus Rasmussen, sum skrivað hevur Føroya Floru, heldur, at hvonnin hevur vaksið vill í Føroyum, áðrenn víkingar komu higar.

# Prýðisplantur

Fyrr á døgum vóru bara hvanngarðar við høgum grótgarði uttanum. Tá gekk seyðurin, sum hann vildi allastaðni. Ikki eru meira enn o.u. 140 ár síðan, at fólk fóru at fáa sær urtagarðar, har tey plantaðu útlendskar prýðisplantur og gagnplantur.

Fólk í Tórshavn mundu vera uppi í teimum fyrstu, sum fóru at girða væl, drena jørðina og seta niður bæði plantur og trø. Húsini stóðu tøtt, og tá ið trø og runnar so fóru at vaksa, so var góð lívd. Tá ið tú spákar tær í gomlu Havnini, sært tú hesi vøkru, gomlu trøini, t.d. ahorn, álmtræ, roynitræ og kanska bókartræ.

Veðurlagið er ikki so lagaligt til trø. Tey trøini, ið trívast hjá okkum, halda tíðliga uppat at vaksa, og sprotar og knappar eru tíðliga búgvin at fara undir ein vetur.

Í Tórshavn varð longu í 1883 roynt at planta eina viðarlund í sama staði, har viðarlundin nú er. Men ov illa var girt uttan um viðarlundina, og seyðurin oyðilegði alt.

Í 1904 fóru menn av álvara at girða væl fyri seyði. Teir plantaðu granntrø, furutrø, roynitrø, loynitrø og álmtrø t.d. Nú bar betur til, viðarlundin kom fyri seg.

Og so fóru teir at planta viðarlundir aðrastaðni, og nógvar vaksa væl.

### Trø

Tá ið vit fáa okkum trø í urtagarðin, seta vit bara eina grein niður. Hon festir rót og kann verða høgt træ.

Trø eru størstu plantur. Trø koma upprunaliga úr einum lítlum fræi. Fræið datt niður á jørðina um heystið, og tá ið sólin aftur fór at verma jørðina, fór fræið at næla. Træið gjørdist hægri og hægri og fekk fleiri og fleiri bløð. Síðan fær træið bul. Uttan á bulinum er børkur, og hann forðar fyri, at ov nógv vatn setur út úr trænum.

Bulurin fær fleiri og fleiri greinar. Stendur træ einsamalt, breiðir tað seg í allar ættir. Men stendur træið ímillum onnur trø, vaksa greinarnar tann vegin, har mest ljós sleppur at.

Innan í træi er viður. Tá ið bulur ella grein eru sagað av, síggjast árringar. Men árringarnir eru ójavnir til tjúkdar. Tað sigur okkum, at sumrini hava verið góð ella ikki góð.

Trø kunnu hava smøl, nálvaksin bløð ella breið bløð. Eftir hesum nevna vit trøini nálatrø og leyvtrø.

Granntrø og furutrø t.d. hava reklar. Blómuskipanin eitur rekil, sum er av hørðum bløðum. Innan fyri tey hørðu bløðini er ein blóma, men hon hevur hvørki krúnubløð ella bikarbløð.

Undir blaðnum kunnu liggja tvey fræ.

Fræið hevur hinnur. Dettur fræið niður úr trænum, melur tað í klingur, og so fær vindurin stundir at bera tað langt burtur. Tá ið rekil er búgvin, dettur hann niður á jørðina.

Skjótt sært tú mun á granntræi og furutræi. Nálirnar á granntræ sita einsæris. Á furutræi 2 og 2 saman.

Bløðini á leyvtrøum eru so ymisk, bæði hvussu tey eru skapað og æðrað. Ahorn, roynitræ, loynitræ og pílatræ eru leyvtrø.

Um veturin eru trøini í dvala. Nálatrøini eru tó grøn um veturin. Leyvtrøini missa bløðini, tí so setur nógv minni vatn út úr teimum. Mesta vatnið setur út gjøgnum bløðini.

Men á teimum klønu greinunum á leyvtrøunum sita knappar, og inni í knøppunum liggja bløðini, sum spretta, tá ið várið kemur.

### Urtagarður

Urtagarður fríðkar um húsini og grannalagið. Fólk kunnu nýta frí-løtur í urtagarðinum. Tey kunnu planta mangar vakrar plantur og síggja, hvussu tær vaksa. Garðurin má verða væl røktur, og góð lívd má vera. Urtagarður er tí eitt gott ítriv. Bæði ung og gomul fáa ans fyri náttúruni, síggja og kenna á sær, hvussu árstíðir skifta.

Flestu urtagarðar standa á lágum lendi millum hús og bø. Ikki øll høvdu urtagarð fyrr á døgum. Húsini stóðu tætt, og har húsanna millum vóru lýggir krókar, og kundu fólk eisini sita og njóta sólina. Tey kundu sita og gleðast um vakran bø, ánna og kanska fjøruna.

Nú á døgum hava fólk flest urtagarð, har tey góðar summardagar sita og njóta sólina. Men mangt er øðrvísi. Nógv hús standa nú á høgum lendi. Har er ábært og kanska lítil ella eingin mold. Torført er at fáa lívd. Har eru bara breiðir vegir. Klettur kann bera upp fyri sólina. Høgt ben oman fyri húsini og nógvur skuggi. Tá mugu fólk gera eitt stórt arbeiði, skulu tey fáa ein góðan urtagarð.

Í urtagørðum okkara vaksa vanliga fá plantusløg. Summarið er stutt, og tí standa planturnar bara nakrar fáar mánaðir. Einar 6-9 mánaðir av árinum er berligt í flestu urtagørðum.

Grøs og lyngur gera urtagarðin grønari um veturin. Væl røktur grasvøllur kann vera grønur alt árið. Nógv nálatrø og leyvtrø standa

grøn allan veturin. Men hesi sløgini eru lágvaksin. Tey breiða seg um garðin og liggja væl niður yvir moldina og verja hana, so hon fýkur ikki burtur.

Eisini køva tey ymsar lokplantur, tí tey leggja skugga á garðin. Tey kunnu skugga so nógv, at eingin onnur planta veksur.

Hava fólk vetrargrønar plantur, so eiga tey greinar at pynta við eisini um veturin. Skulu fólk eiga vetrargrønan vøkstur, mugu tey fáa vøkstrinum góða lívd og røkta hann væl, tí vetrargrønur vøkstur tolir ikki gjóstur og turran vind.

Nógv grót er í Føroyum, og grótgarður er góð lívd. Ofta laða tey sær grótgarðar ella steinseta í urtagarðinum. Grót heldur eisini væl sólarhitanum, og tí grør væl uttan um grót.

Millum steinarnar plaga tey at seta bæði føroyskar og útlendskar plantur. Nógvar av hesum plantum eru tiknar á høgum fjøllum. Ofta eru tær lágar á vøkstri. Tær standa nógvar í túgvum og bera fagrastu litir.

Um várið seta hesar plantur dám á urtagarðin: snjóklokka, krokus, blálilja. Hesar planturnar eru tær fyrstu, sum spretta um várið. Síðan koma páskalilja, hvítusunnulilja og tulipánur. Hesar plantur hava leyk. Leykur verður settur niður um heystið.

Fólki dámar væl góðan anga, og serliga børnum. Sum dømi um anga nevna vit hoyggjanga og taraanga niðri í fjøruni; men torvangin er sjáldsamur nú á døgum.

Urtagarður angar. Lýggj várkvøld og summarkvøld, tá ið tað hevur regnað og er slitið í, liggur góður angi á urtagarðinum. Nálatrø, ylliniviður, rósa, reinfan, lupin, brobber, smæra, hýasint, kongalilja og hvítusunnulilja anga væl.

## Tulipánur

Tulipánur er ein av teimum fyrstu blómunum, sum tú sært í urtagarðinum um várið. Tulipánur veksur úr leyki.

Tak ein vanligan leyk og kanna, hvussu hann er. Ytst er turr, brúnlig hinna. Innanfyri eru tjúkk bløð við nógvari sevju. Bløðini eru full av føði, sum tulipánurin gjørdi sær í fjør. Síðan sært tú ein stuttan legg, og úr honum vaksa klænar røtur.

Úr leykinum ovast á toppinum spretta grøn bløð.

Leykplantur standa stutt í blóma. Tá ið frukt er komin í blómuna, følnar plantan skjótt. Hon følnar, tí at øll føðin í leykinum er nýtt.

Men plantan hevur gjørt nýggjar leykir. Teir eru fullir av føði, og aftur um várið vaksa teir til nýggjar tulipánar.

Nú skalt tú kanna plantuna. Bløðini hava ongan legg. Tey eru blágrøn, tí vaks liggur uttan á teimum. Tá ið regnar, rínur vatn ikki við tey, men perlar av.

Bløðini taka soleiðis tvørtur um leggin, at vatnið stendur í teimum, og haðani seyrar tað niður í jørðina til røturnar.

Men bara ein blóma er á legginum ovast. Blóman hevur 6 litføgur bløð, og tey síggja flogkyktini væl. Hyggur tú niður í blómuna, sært tú 6 sáðberar. Teir eru fullir av blómudusti, sum flogkyktum dámar væl. Flogkyktini rumsast so í blómuni, at tey nema við sáðfangið og koyra dust á tað. Dustið hava tey fingið úr einum øðrum tulipáni.

Tá ið tulipánur hevur felt blómuna, sært tú væl, hvussu fruktin er. Fruktin er turr, er hon búgvin. Í fruktini, sum eitur hylki, eru nógv fræ.

# Gagnplantur

Fyrr á døgum varð kanska bara hvonn dyrkað sum kryddurt. Nú er vanligari, at fólk eta væl kryddaðan mat. Flestu kryddurtir verða fluttar inn úr útlondum.

Kanska hugsa vit ikki altíð so nógv um, at vit fáa dyrkað fleiri kryddurtir. Tær taka ikki nógv pláss í urtagarði okkara.

Kryddurtir mugu fáa góða lívd. Tær skulu vaksa, har góður sólargangur er. Fær kryddurt lívd og nógva sól, smakkar hon nógv betur.

Í urtagarði fáa vit dyrkað grønleyk, persillu, piparrót, vatnkarsa, hvonn, urtagarðs-brobber og myntu.

Nógvar aðrar gagnplantur fáa vit dyrkað í urtagarði, t.d. rabarbur, røtur, grønkál, reyðrøtur, gularøtur, epli, radisur, jarðber, hindber, bromber, stikkulsber og sólber.

### Rabarbur

Vanligt er at síggja smáar rabarbugarðar um alt landið. Rabarbur vaksa væl. Rabarbur hava langar og tjúkkar røtur. Tíðliga um várið koma rabarburnar fram. Bløðini eru stór. Nógv sevja er í blaðlegginum. Summi sløg hava grønan legg, og onnur sløg reyðan legg.

Seinni um várið koma rabarbujólar. Teir eru um ein metur høgir. Men jólarnir mugu verða skornir av, skulu rabarburnar verða góðar árið eftir.

Tá ið heystið kemur, følna bløðini. Tá fer plantan í dvala. Um nakrar vikur kann plantan fáast at vaksa aftur.

Rabarba tolir væl kuldan um veturin; men kemur frost um várið, svíður hon nógv av. Hon veksur, um ikki so nógv ljós er. Tó veksur hon eisini í nógvari sól.

Sum so mangar aðrar plantur í urtagarði má rabarba fáa góða lívd.

Rabarbur krevja ikki so nógv av jørðini. Um veturin skal jørðin ikki vera ov vát, tí tá kunnu røturnar rotna. Ta tíðina, hon veksur, tolir hon ikki turk, tí hon má fáa nógv vatn.

Tað ber til at sáa rabarbur, men tá verða planturnar so ójavnar. Betri er at skera rabarburót í 4-6 petti, og tá skal blaðknappur vera á. Best er at seta pettini niður tíðliga um várið og taða væl.

Vit kunnu taka rabarbur av somu plantu í eini 8 ár. Sum plantan

eldist, verður rótin størri og størri, og samstundis verða leggirnir klænri og klænri. Best er tí á hvørjum ári at skera nakrar røtur sundur og planta. Fyrsta árið skal ikki verða heystað, tí annars vikna planturnar og verða ikki so góðar.

Góðar plantur eru hentar at eiga. Tú kanst taka rabarbur av teimum fleiri ferðir um árið. Men ikki meira enn $^{3}/_{4}$ í senn. Leggirnir skulu verða lagaliga togaðir upp. Hjartasprotin má ikki verða skaddur. Tú skalt taka teir ytstu leggirnar fyrst, tí teir eru elstir.

Rabarba líkist nógv sýru og hømliu. Hildið verður, at rabarbur koma úr Ásia, og hon hevur verið vanlig í urtagørðum í Norðurlondum í eini 100 ár.

**Jarðber**

Jarðberjaplantan stendur í fleiri ár. Plantan hevur legg, sum liggur í moldini, og úr legginum vaksa røtur. Leggin nevna vit jarðlegg.

Jarðleggurin breiðir seg nógv.

Oman á jørðini vaksa sprotar. Teir liggja fram eftir jørðini, og røtur koma á teir. Síðan slitna petti av legginum frá og verða nýggjar plantur.

Eitt jarðber er nógvar smáar fruktir, sum vaksa saman. Jarðber er tí nógvar smáar fruktir, sum sita á trútnaðum blómubotni. Fruktin er nøt.

Plantan hevur nógvar sáðberar og nógvar sáðgongir.

Flogkykt sáa plantuna.

Tá ið plantan er væl sáað, og hon fær ikki frost ella ov nógvan vind og nógv regn, tá verða berini góð.

6 vikur eftir, at plantan er sáað, fara jarðberini at búnast. Tá ið berini síðan eru búgvin, kanst tú heysta í 6 vikur. Best verða berini, tá ið summarið er gott.

Eisini er gott, at heystið árið fyri er gott, tí at blómuknapparnir vórðu til árið fyri, tá ið dagarnir aftur fóru at styttast.

Besta tíð at planta jarðberjaplantu er á miðjum sumri. Men plantan fruktar ikki fyrr enn árið eftir.

Jarðberini her hjá okkum skulu vera tíðliga búgvin, tí okkara summar er stutt. Tvey sløg eru vanlig: berini ljósareyð og søt. Tey vaksa skjótari. Ella berini dimmareyð og súrlig og vaksa seinni.

## Grønkál

Grønkál veksur væl og kann standa úti alt árið. Grønkál er í somu ætt sum kálrøtur, radisur og piparrót; men grønkál tolir mest av øllum.

Grønkál er tvíáraplanta. Fyrra árið fær plantan bløð. Annað árið blómu, er hon ikki longu tá tikin.

Bløðini eru heilt rukkut og sita niðri við jørðina. Blómurnar eru gular. Plantan kann tó blóma fyrsta árið. Grønkál tolir væl vetrarkulda. Tá ið øll bløðini eru tikin, stendur rótin eftir í jørðini. Um várið spretta aftur nýggj bløð, og tey eru broyskin og góð. Men síðan fer plantan upp í slokk og má verða tikin upp.

Væl ber til at lata onkra plantu standa annað árið. So kunnu vit taka fræ úr henni og sáa tað, og skjótt nælir.

Av tí at plantan kann standa úti alt árið, so kanst tú taka bløð, tá ið tú skalt nýta tey. Best er at taka niðastu bløðini fyrst, tí tey eru elst.

Summstaðni er ikki veðurgott, og tá mugu bløðini verða tikin, áðrenn veturin av álvara kemur. Stormurin skræðir tá í bløðini og slítur burtur av teimum; tí er best at hava grønkál, sum er lágvaksið, og tað tekur minni vind á seg.

## Epli

Uttan um epli er flus, og flusið er tundur. Flusið verjir eplið, so at tað tornar ikki upp. Tak tvey gomul epli og viga tey. Flys annað eplið og legg bæði, har turt er. Viga so bæði aftur um eina viku og rokna, hvussu nógv tey eru lætnað.

Tað mesta í eplinum er vatn, o.u. 3/4. Epli verða etin, tí í teimum er gott føðsluevni, sum eitur stívilsi.

Sker ein dála av einum epli. Koyr so jod á hann. Dálin verður bláur, tí jod ger stívilsi blátt.

Á epli eru munnar, og í munnunum er ein spíri. Um várið, tá ið tíð er at seta epli niður, er nál komin í munnarnar.

Tá ið seteplið er niðursett, vaksa fleiri nálir úr tí, og so við og við vaksa røtur niður í jørðina. Nálirnar fáa føði úr eplinum og røturnar eisini.

Sum várið og summarið líða, minkar seteplið og verður bleytt og rukkut. Røturnar eru nú so stórar, at tær fáa sogið føði úr jørðini.

Vanligt man vera at fáa nýggj epli um hálvan august. Úr leggin-

um, sum liggur í jørðini, eru komnir sprotar. Endarnir á sprotunum eru trútnaðir upp til epli. Eplaplantan hevur hesa tíðina, hon hevur vaksið, gjørt føði. Plantan hevur brúkt føði sjálv, men nakað av føðini er farið í eplini.

Um heystið taka vit upp epli. Summi epli skilja vit til set. Tað eru tey bestu eplini, og tey skulu vera passaliga stór. Seteplini verða goymd til næsta vár at seta niður.

Eplablomstur kunnu vera blálig ella hvít. Krúnubløðini eru vaksin saman. Fruktin er grønt ber, sum er eitrandi. Tubbaksplantan líkist eplaplantuni.

Eplaplantan er av fyrstan tíð komin til Evropa úr Suðuramerika.

# Dýr, sum fylgja menniskjum

### Kettan

Ketta er smidliga vaksin. Kroppurin er langvaksin, høvdið runt og halin langur. Afturbeinini eru longri enn frambeinini. Á framløbbunum eru 5 tær og á afturløbbunum 4 tær.

Eyguni eru gulmorreyð. Um kjaftin eru kampar.

Í miðjuni á eyganum er svartur blettur, sum eitur sjónopna. Sjónopnan er stór í myrkri, og tí sær ketta væl í myrkri.

Um dagin er sjónopnan lítil, tí tá tola eyguni ikki so nógv ljós. Ketta trilvar seg fram í myrkri við kampunum.

Ketta hevur bleytar fótbøllar undir løbbunum. Hon gongur á tá. Kløirnar eru stórar og hvassar og bendar niðurá. Hon fær fjalt tær í húðarfaldi, tá ið hon nýtir tær ikki, og tí slítast kløirnar ikki so illa.

Ketta er stuttlig at síggja, tá ið hon lúrir seg fram á okkurt. Ikki hoyrist eitt kis, tá ið hon setur teir bleytu fótbøllarnar niðurat. Av tí at afturbeinini eru longri enn frambeinini, er hon knøpp at taka rottur og mýs. Ofta sníkir hon seg fram á ungar og smáfuglar og tekur teir.

Tøkutenninar eru langar og spískar, og hon drepur við teimum. Jakslirnir eru hvassir og skørðutir í rondini. Sovorðnar tenn eita sagtenn, og tær eru óførar at skera sundur kjøt við.

Aftasti jakslur er størstur og eitur ránstonnin. So eru 6 framtenn í yvirkjaftinum og 6 í undirkjaftinum. Ketta gnagar kjøt uttan av beini við framtonnunum. Eisini sleikir hon uttan av beini, tí á tunguni eru hvassir horntindar.

Summar kettur vilja helst vera inni, og tær fáa mat og mjólk úr skál hvønn dag. Aðrar kettur eru úti, í fjósi og úthúsi og veiða sær sjálvar mat. Tær taka tá mýs og rottur og stundum smáfuglar.

Útiløgukattar eru lagstir út úr húsum, kanska tí teir eiga ongan góðan. Teir kunnu gera bart í haga og fjøllum.

Einar tvær ferðir um árið leggur løðan; men frensurin er ikki altíð so góður við kettlingarnar. Løðan er kviðin í um leið 9 vikur. Hon leggur 3-9 kettlingar hvørja ferð. Kettlingarnir síggja einki, tá ið teir eru lagdir. Eina góða viku gamlir fáa teir eygu.

Ketta er ránsdýr. Men hon er alskin. Eru vit góð við hana, er hon

góð við okkum. Best er hon við húsið, har hon er uppvaksin. Flyta húsfólkini burtur, verður kettan ofta verandi eftir.

Tann tama kettan er skyld við eitt vilt kettuslag í Norðurafrika.

**Hundurin**

Hundar kunnu vera so smáir sum rotta og stórir sum kálvur. Summir eru snøggir og aðrir lodnir.

Hundur sær ikki so væl, men snoddið er frálíka gott. Tí lítur hann meira á snoddið enn á sjónina. Men hann hoyrir væl.

Hundur etur allan mat, men serliga væl dámar honum kjøt og bein. Hann tekur við tøkutonnunum. Tenninar eru góðar, so hann bítur lættliga bein. Beinið leggur hann undir aftastu jakslirnar og brýtur. Kjøt bryður hann sundur við sagtonnunum.

Hundur fær ikki fjalt klørnar í húðarfaldi sum ketta, og tí slítast klørnar av vanligari gongd. Hann gongur á tá. Undir løbbunum eru fótbøllar við snøggum skinni á, og tí verður hann ikki sárføttur.

Tíkin er kviðin í góðar 9 vikur, og hon leggur 6-8 hvølpar hvørja ferð. Hvølpur eigur at verða væl vandur, skulu vit fáa ein góðan hund.

Hildið verður, at hundur er fyrsta húsdýr, sum menniskjað hevur tamt. Teir fyrstu hundarnir hava verið veiðihundar. Teir stóru og sterku hundarnir eru burðarhundar og sleðuhundar.

Summir hundar hava framúr góðan tev, so at teir tevja, hvar fólk ella fæ hevur gingið. Aðrir eru góðir varðhundar, tí teir duga at halda vakt og verja. Hesir hundarnir verða eisini nýttir at akta seyð við. Seyðahundar eru væl kendir. Teir hjálpa seyðamanninum at reka seyð og taka seyð.

Summir hundar verða vandir at fylgja blindum fólki, tá ið tey ganga úti, og teir hjálpa teimum yvir um vegin eisini.

Tá ið hundur er væl vandur, er hann bæði til gagns og stuttleika. Men hann er ránsdýr. Kortini er hann meinaleysur vanliga við fólk og fæ. Summir kunnu vera mannbítar, leggjast á fólk og bíta illa. Sleppa teir at ganga ov nógv leysir úti, kunnu teir viðhvørt leggjast á seyð í haganum og bíta hann til avlívis.

Er hundur óður og skal vísa tað, murrar hann; men tá ið hann meiðir seg ella verður píndur, hvínur hann.

Vit skulu fara væl við hundi og vera góð við hann, tí trúfastur er hann og heldur seg nær húsfólki sínum.

# Alidýr

## Neyt

Neyt hava førligan og beinstóran kropp. Vanliga hava tey horn, sum sita á ennibeininum. Summi neyt eru kollut.

Neytahorn er í tveimum. Ytst liggur hornjaður. Millum hornjaðrið og slóina liggja blóðæðrar, og tær gera, at hornið veksur. Fer hornjaðrið av, veksur nýtt aftur. Men brotnar slóin, so veksur hon ikki aftur.

Neyt hava fýra tær á hvørjum fóti. Tvær sita hægri uppi og koma ikki niður á jørðina. Á tónum er hornskógvur, sum eitur kleyv. Tærnar, sum sita hægri uppi, eita lagkleyvar. Tær koma væl við, tá ið neyt ganga á bleytum lendi.

Halin er stuttur og hevur stutt tagl.

Neyt síggja ikki væl, men tey hava gott snodd og hoyra væl.

Ongar framtenn eru í yvirkjaftinum, men bróskgarður. Í undirkjaftinum eru 6 framtenn. Jakslirnir eru breiðir og flatir. Gleringin á jøkslunum er harðari enn tannbeinið. Tí slítst tannbeinið meira enn gleringin, og gleringin fer at standa uppúr sum hvassar raðir. Vit siga, at jakslirnir eru røðutir.

Kúgvin tekur um grasið við tunguni, trýstir tað ímóti bróskgarðinum og roytir tað av. Tá ið so kúgvin tyggur, verður grasið rivið sundur um tær hvøssu raðirnar á jøkslunum.

Grasið verður svølgt ótugt. Men gras er harðvunnin føði. Tí mugu neyt eta so nógv, og tey hava so stóran maga.

Magin er í fýra. Fyrst fer maturin í vombina, og síðani fer hann í keppin. Tá ið kúgvin liggur og hvílir seg, klíggjar hon matin upp aftur í kjaftin og tyggur hann. Tá siga vit, at kúgvin liggur og jótrar. Maturin verður blandaður við spýtti og verður sum vellingur.

Hesin væl tugdi maturin fer so niður í rukkulakkan og út í vinstrina og haðani í vilini. Úr vilunum fer tann sodnaði maturin í blóðið. Dýr, ið eta plantuføði, hava vanliga long vil.

Maturin gagnar ikki øllum neytum á sama hátt. Summi neyt verða stór og feit. Í teimum er gott slátur. Onnur neyt eru minni og mjólka meira.

Kúgv kálvar eina ferð um árið. Hon má kálva, skal hon mjólka.

Kúgv er 1 $^1/_2$ ára gomul, tá ið hon fer til tarvs fyrstu ferð. Hon er kviðin í góðar 40 vikur. So kálvar hon. Kálvurin vigar um 30 kg.

Kúgv hevur 4 boppur á júgrinum. Fyrsta málið undan kúnni, tá ið hon hevur kálvað, eitur rámjólk, summi siga oskamjólk. Fyrstu tíðina fær kálvurin mjólk at drekka. Tá ið kúgvin skal verða mjólkað, verður farið reinliga um, og meðan mjólkað verður, má hon ikki verða órógvað.

Kúgvin verður mjólkað um morgunin og kvøldið. Nógvar kýr mjólka 25-30 l um dagin. Mjólkað verður antin við hond ella maskinu.

Mjólk er góð, tí í henni er feitt, eggjahvítaevni, sukur, sølt og vitamin, og nógv verður gjørt burtur úr mjólk bæði heima og á mjólkarvirki.

Fyrr á døgum var kúgv næstan í hvørjum húsi. Nú er øðrvísi, nú eru færri, sum hava kúgv, men størri fjós við nógvum kúm. Fyrr fóru neytini út ein góðan dag í mai. Ta fyrstu tíðina vórðu tey rikin inn aftur, men so lógu tey úti, og neytakonur fóru í hagan um morgunin og kvøldið at mjólka teimum.

Í oktober vórðu neytini tikin inn. Heystið var komið, og øll vóru liðug at hoyggja.

Seinni í tíðini vórðu neytini rikin út og inn og mjólkað inni. Nú er vanligt, at neytini flest øll standa inni alt árið í góðum fjósi og fáa nógv at eta. Neytini nú mjólka meira enn neytini fyrr, tí tey fáa hoyggj, kraftfóður og ymsan heilivág.

Neytini, sum nú eru, eru nógv blandað við útlendsk neytasløg, serliga norsk.

**Seyðurin**

Kroppurin á seyði er rundvaksin. Ullin er síð, og ytst á ullini er hvassur broddur og innast mjúk rót. Beinini eru kløn og long og halin stuttur.

Vanliga eru veðurlomb og veðrar hornut og ærnar og gimburlombini kollut. Summar ær og gimburlomb kunnu hava smá og kløn horn, knavar. Sært tú ær við stórum, fløtum hornum, so er hon nógv blandað við íslendskan og skotskan seyð. Hornini á gomlum veðri eru stór og hava lop.

Ofta vaksa hornini á veðrum inn at kjálkanum. Tá fær hann illa etið. Tá verða hol borað í stiklini og klemma sett í. Klemman

spennir hornini útfrá, so tey pína ikki seyðin. Eisini verður sagað undan hornunum.

Seyður jótrar sum neyt. Tenninar eru vaksnar sum neytatenn. Seyður hevur heldur ikki framtenn í yvirmunninum. Í undirmunninum eru 8 framtenn. Seyður missir 2 framtenn um árið, og stutt eftir koma 2 nýggjar framtenn, sum eru størri enn hinar. 5 ára gamal seyður hevur fingið allar tenninar.

Seyður bítur grasið snøgt av, og hann fer ikki so illa við grasrótum sum kúgv.

Hagin er býttur í hagapartar, og ymist kann vera í hvørjum hagaparti. Í summum høgum er alt feli og í øðrum bæði kenning og feli. Kenningaseyðurin plagar at verða tikin inn í januar og stendur kanska inni til í mai. Men fellur stórkavi, og veturin verður beiskur og harður, kann bera á, at allur seyðurin verður tikin inn. Tá fær seyðurin ikki so frægt sum skavað sær niður á vøksturin. Hann kavar undir og doyr.

Tá hevur seyðamaður nógv at gera. Summir hava so góðan seyðahund, at hann snoddar seg fram á seyð, ið er kavaður undir.

Er veðrið so frægt, geva teir seyðinum úti. Krubbur verða settar upp í bønum ella við hús. So geva teir hoyggj og kanska kraftfóður. Um veturin liggur seyður húsanna millum og krokar.

Seyður er vanabundin. Hann kennir væl eigarmannin. Nú ið vegur liggur gjøgnum summar hagar, fer seyðamaðurin við bili, og seyðurin bæði kennir bilin og floytuna. Fær seyður at eta ávísa tíð, kemur hann hvønn dag á staðin um tað mundið.

Um várið, tá ið seyðurin er veikur, legst hann oman í fjøruna at eta tara bæði á nátt og degi, og tað løgna er, at hann veit, nær fjøra er.

Stendur seyður og trampar við øðrum frambeininum og snýsir, kennir hann órógv á sær. Leggur ein seyður á garðin, fylgja hinir honum. Seyður er tolið kríatúr og tolir nógv av. Dettur hann og brýtur lim, so jarmar hann ikki; men jarmar hann í rakstri, so er tað tí, at hann hevur mist onkran burtur, lamb ella seyð, hann er saman við í einum fylgi.

Ærnar lemba í apríl-mai, og tað ræður um, at tær eru væl fyri. Allir gjólingar lemba ikki. Ærin er kviðin í 142 dagar. Summar lemba eitt, aðrar eru tvílemba. Onkuntíð lembir ær trý. Lombini viga nýlembd 3-4 kg.

Ærnar lemba fyrstu ferð ársgamlar, tvævetur. Eru tær illa fyri, tá

ið tær lemba, føða tær ikki altíð. Lombini kunnu tá doyggja 8-14 daga gomul í armóð. Vanliga eru lombini røsk, tá ið tey eru lembd, og ikki bilar heldur, um ærnar lemba í vánaligum veðri, tá ið tær eru raskar.

Gamalt er, at seyðurin verður rikin av bønum 14. mai; men veður valdast. Farið verður á áseyðaroyting um mánaðaskiftið juni/juli. Seyður kastar ullina eina ferð um árið, so fjallið má verða gingið, áðrenn hann kastar ullina. Ullin vermir seyðin, og verður hann ikki kliptur um summarið, verður hann ov heitur. Verður hann kliptur um heystið, troystar hann sær ikki væl um veturin.

Í ullini er nógv fiti, og fitin heldur vatnið frá skinninum.

Í áseyðaroyting verða lombini borin á marking. Tað plagdi børnunum at dáma væl. Seyðurin verður vaskaður fyri lýs. Hann hevur tvey lúsasløg: førilús og eina, sum er væl minni, og skrubb kann hann hava eisini. So fær hann eisini ymsan heilivág fyri fleiri sjúkur.

Um summarið liggur seyðurin ovarlaga í haganum. Í illveðri kemur hann beinan vegin á undirhagan. Best dámar monnum fjallaseyðin, tí hann er treystari enn seyðurin á láglendi. Á vátum haga tekur seyður ofta vatn og verður iglasjúkur og fær eisini orm.

Seyðaslagið er tað sama í øllum landinum. Kanska er seyðurin summstaðni størri. Har seyðurin er minni, kemst av, at ov nógvur seyður er í – skipanin er ov stór. Tí verður ov lítið at eta. Lombini um alt landið eru javnstór út til ólavsøku.

Hagar eru ójavnir. Summir eru rúmligari og sera góður fjallahagi. Í høgum, har ov nógv er í, tyngist seyðurin lítið eftir hálvan august, tí hann fær ov lítið at eta.

Høvdu menn givið seyðinum frá hálvum september og út til skurðfjallið, hevði seyður um alt landið verið javnari.

Skurðfjallið verður gingið eftir mikkjalsmessu og fram til veturnætur. Tá verða veðurlombini tikin og brundseyður gjørdur upp. Bestu veðurlombini verða gjørd upp til brundseyð. Klippingin verður gingin í november. Tá verða gimburlomb og onkur ær tikin. Teir sleppa upp gjólingar og snøgga doddin í pannuni, so at kavi og ísur ikki fara at hanga í doddinum.

Upprunaligi seyðurin í Føroyum var smáur. Teir seinastu vórðu tiknir av í Lítlu Dímun í 1866. Seyðurin nú líkist nógv norskum og íslendskum seyði. Seinni eru komin ymisk skotsk sløg aftrat.

**Rossið**

Ross hevur lítið høvd og langan, tunnan háls. Bakið er breitt og gumpurin breiður og slættur, men lítið sneiddur niður ímóti halafaksinum. Niður eftir hálsinum hevur rossið faks (mon) og á enninum dodd. Halin hevur sítt tagl.

Beinini eru long og røtt. Rossið er hábeint. Tað hevur bara eina tá á beininum og gongur á henni. Um ytsta táliðin liggur hornskógvur, sum eitur hógvur. Skal ross verða nýtt á hørðum lendi, má tað vera skógvað, tí annars verður tað sárføtt. Jarnskógvur verður lagdur upp undir hógvin og negldur í hornjaðrið.

Ross hevur stór oyru og hoyrir ógvuliga væl. Snoddið er eisini gott. Fyrsta tað hoyrir ljóð, fer tað at láta við oyrunum. Men ross sær ikki so væl.

Skuldi vandi verið á ferð, reisir rossið høvdið og fer tvísporandi av stað. Rossið tevjar dýr, sum eru nærindis. Tað verjir seg, tá ið tað er í vanda. Tá sparkar tað við bæði frambeinum og afturbeinum og bítur eisini.

Seta fuglar og onnur smádýr seg á rossið, kveistrar tað tey burtur við faksinum.

Ross etur plantur, gras og korn. Tað hevur 6 framtenn í yvirkjaftinum og 6 í undirkjaftinum. Framtenninar standa eitt sindur frameftir. Aftan fyri framtenninar er bogin kinntonn. Vanliga hevur hesturin hesa tonnina, ikki ryssan.

Aftan fyri kinntonnina eru 6 røðutir jakslir, sum slítast skjótt, men vaksa aftur so hvørt.

Ross tyggur sum kúgv, men tað jótrar ikki.

Ryssan er kviðin í um leið eitt ár. Hon folar eitt fyl.

Skal rossið trívast væl, má tað verða væl ambætað. Summi kunnu fara illa við rossi, men tá kann ilt koma í tað. Rossini eru ymisk av lyndi. Summi spøk og onnur stygg, og tey styggu lata ongan nærkast sær. Eingin skal leggja ov nógv fyri ross. Heldur ikki nýta ov vánalig týggi, tí so kann tað fáa sár. Heldur ikki toga ov nógv í teymarnar.

Føroyska rossið er uppi í teimum smæstu í heiminum. Tað var harðbalið og sterkt og hent í ringum veðri. Nú er tað langt síðan blandað við íslendsk og norsk ross, og hesi blandaðu rossini eru størri og sterkari.

Ross verður nýtt at reiða við og ríða á, og tað var mangan hent, áðrenn bilar og onnur akfør komu. Rossini, sum vóru nýtt at arbeiða

við, eru stór og sterk. Tey størstu um 3 alnir høg. Villross livir enn í Suðuramerika, Ásia og Afrika, og tama rossið er undan tí.

**Svínið**

Svín er tjúkkvaksið. Undir skinninum er tjúkt flesk. Svín hevur grov hár, sum eita bustir. Høvdið er stórt. Eyguni eru smá og oyruni stór. Frammi á trýninum er rennil.

Svín er lágføtt, beinini stutt og kløn. Um tærnar eru breiðar kleyvar. Tøkutenninar í gøltinum, bæði í yvirkjaftinum og undirkjaftinum, standa út úr kjaftinum og eru bendar uppeftir. Tá ið gølturin tyggur, brýna tøkutenninar hvør aðra, og tær vaksa so leingi, sum hann livir.

Svínið skræðir røtur upp úr jørðini við framtonnunum, sum standa frameftir. Við renlinum leitar svínið eftir onkrum etandi niðri í moldini.

Tað hevur filputar tenn og etur allan mat.

Maturin sodnast skjótari í svíni enn í kúgv. Tí má svín fáa fleiri ferðir at eta um dagin. Grísar fáa upp í 10 ferðir. Sum øll onnur dýr má svín verða ambætað væl. Altíð turt at liggja á. Mattrogið altíð reint.

Kemur tú inn í ein svínastíggj, sært tú kanska eina súgv við nógvum grísum. Súgvin leggur fyrstu ferð, tá ið hon er 10 mánaðir gomul. Hon er kviðin í 116 dagar. Vanliga leggur súgvin 10-14 grísar um árið. Súgvin hevur 12-14 boppur. Grísarnir viga 1200 gramm, tá ið teir eru lagdir.

Kanska raka vit við, at ikki allir grísarnir eru líka stórir. Teir størstu grísarnir taka sær tær fremstu boppurnar, tí mest mjólk er í teimum.

Hesir grísarnir eru alla tíðina størri enn hinir. Teir ússaligastu kunnu doyggja, áðrenn teir eru avvandir at súgva. Grísarnir súgva súnna 6-8 vikur. Tær fyrstu 3 vikurnar fáa teir bara mjólk, men seinni fáa teir okkurt aftrat.

Mjólkin undan súnni er tvær ferðir so feit sum neytamjólk. Vanligt er, at svínið stendur inni.

Tað tama svínið líkist villsvíni, sum enn er í Miðevropa. Fyrr á døgum hava tey hildið svín í Føroyum, men næstan eingi nú á døgum.

## Geitin

Geit líkist nógv seyði. Hornini eru rúðrut og bend afturá. Undir øsinum hevur geit sítt skegg.

Ullin er rísin og verður ikki nýtt.

Havurin hevur størri horn enn geitin sjálv. Geitini dámar best at klintrast, og hon trívst best á fjallalendi.

Geit mjólkar væl og er løtt at fóðra.

Fyrr høvdu tey geitir í Føroyum; men nú eru fáar.

# Alifuglar

## Høsn

Høsn hava reyðan reyk á høvdinum og síðar silpur niður undan kjálkunum. Á fótinum eru 3 framtær við sterkum klóm og lítil baktá, sum er hægri uppi. Veingirnir eru stuttir og kubbutir.

Høsn duga illa at flúgva. Tey fara bara á flog, tá ið tey eru í neyð. Men høsn eru ófør at ganga og at renna.

Høsnum dámar væl at liggja og skava í mold og øsku eftir onkrum etandi. Tey skava við klónum, tá ið tey leita eftir møðkum og flogkyktum. Tey síggja ógvuliga væl og raka við smæstu molar. Fólk plaga at geva høsnum korn, epli og rusk av ymsum slagi.

Yvirnevið gongur niður yvir undirnevið. Báðar raðirnar ganga hvør um aðra sum saksur. Tí er nevið gott at knasa korn og fræ við, áðrenn svølgt verður.

Maturin fer fyrst í kjósina. Maturin verður bloyttur í kjósini. So fer hann í kertilgørnina og síðan í fógvernið, og í fógverninum verður maturin malin sundur. Høsn eta smásteinar, sum verða liggjandi eina tíð í fógverninum. Smásteinarnir hjálpa til at mala matin sundur.

Vit hava høsn at fáa egg undan, og góð høna verpur alt árið. Áðrenn hønan leggur seg á eggini, verður hon fjaðursár í støðum undir búkinum. Tá koma eggini beinleiðis at holdinum, sum er heitt. Meðan hon bølir, vendir hon eggjunum fleiri ferðir.

Eru eggini troðin, kemur ungi úr. Vanligt er at leggja 10-12 egg undir hønuna. So liggur hon í 3 vikur.

Brýtur tú egg, sært tú hvíta og eggjareyða. Á eggjareyðanum er ljósur blettur, sum eitur troðin. Tá ið eggið er troðið, kemur ungin úr troðanum.

Meðan ungin er í egginum, etur hann hvítan og reyðan. Tá ið tær 3 vikurnar eru farnar, brestur fyri nev. Ungin hevur ein lítlan hornknykil á nevsoddinum, og við honum trýstir hann hol á eggjaskalið. So melur hann sær á inni í egginum, til eggið umsíðir fer í tvíningar.

So er hann útkomin. Ungin hevur bara dún, tá ið hann kemur út. Hann fer næstan beinan vegin út við mammuni at leita eftir føði. Kemur tá eitt æl, tekur mamman allar ungarnar undir veingirnar at sova.

Á høsnagørðum verða klekingartól nýtt.

Hanin hevur bæði størri reyk og størri silpur enn hønan. Hann hevur eisini størri vel. Á fótinum hevur hanin hvassa taggu, sum eitur hegl. Tá ið hanar berjast, nýta teir heglini.

Skulu vit fáa tað besta burtur úr høsnum, mugu vit føða tey væl. Høsnarhúsið skal vera reint og ljóst, tí so fáa høsnini ikki so nógvar lýs.

Tann tama hønan er undan villhønu, sum enn livir í kjarrskógi í Ásia. Okkurt minnir enn um villhønuna, sum situr á greinum. Tama hønan flýgur altíð upp at sita á vagli, tá ið náttin kemur.

**Dunnan**

Dunna hevur breiðan og flatan kropp við tættum fjaðrum. Bæði dunnan og steggin hava nakrar glitrandi fjaðrar á veingjunum. Fjaðrarnar eita spegilin, summi siga rúturin.

Beinini sita heldur aftarlaga á kroppinum, og millum tær tríggjar framtærnar eru fitjur. Baktáin er lítil og er hægri uppi enn hinar tærnar.

Av tí at beinini eru so aftarlaga, dugir dunna lítið til gongu. Tú hevur mangan sæð, tá ið hon kemur sjaggandi. Men í vatni er øðrvísi. Tær duga ógvuliga væl at svimja. Tá ið dunna svimur, tekur hon annað beinið fram og hitt aftur.

Fitjurnar verða tandar út, tá ið dunnan flytur beinið aftur gjøgnum vatnið, og tá ið hon flytur beinið fram, falla fitjurnar saman, og tá halda tær lítið eftir.

Vatn rínur ikki við dunnuna, tí nógv feitt er í fjaðrunum. Dunna kavar sjáldan djúpt, men leitar mest eftir føði, har grunt er. Ofta stendur hon á høvdinum og leitar niðri í vatninum bara við mintinum undan vatnskorpuni.

Nevið er klætt við húð. Dunna følir við húðini, hvar smádýr eru at finna. Oddurin á yvirnevinum er av hørðum horni. Fram við rondini á nevinum standa smáar taggur av horni.

Tá ið dunna sutlar, fær hon saman við vatninum smádýr og plantur inn í nevið. Men vatnið sílar hon út aftur millum taggurnar. Dunna etur allan mat, korn, gras, matleivdir, smádýr av ymsum slagi.

Tá ið dunnan liggur á reiðrinum, pilkar hon nógvar fjaðrar og dún av sær. Fer hon av, breiðir hon fjaðrar og dún út yvir eggini. Hon liggur í 4 vikur.

Ungarnir eru dúnutir, tá ið teir koma út. Teir fylgja mammuni beinan vegin og fara út at leita sær eftir føði.

Tann tama dunnan er ættað undan villdunnuni, sum vit síggja í Føroyum alt árið.

**Heimagásin**

Heimagás er ættað undan grágás. Grágæs eiga í Føroyum. Heimagás hevur bøllutan kropp og er tung á sær. Fjaðrarnar sita tættar á kroppinum.

Heimagás er vanliga grá, hvít ella bøkut. Nevið og beinini eru reyðgul.

Um veturin og várið er gásin við hús, men um summarið gongur hon í haganum. Um heystið kemur hon heim aftur úr haganum. Fyrsta kuldin kemur, leitar hon sær til hús.

Gás etur gras; men hon fær eisini matleivdir, mais og korn.

Í teimum bygdum, har nógvar gæs eru, hava tey gásarhús, sum líkist sátu og hevur langan dur. Gásin verpur í gásarhúsinum, og har inni koma ungarnir út.

Í mars mánaði verpur gásin vanliga 12 egg; tey eru hvít. Hon liggur í 4 vikur. Ungarnir eru gulir, tá ið teir koma út, men á bakinum eru teir altíð dimmir.

Fyrsta veðrið er gott, sleppa teir út við mammuni. Bøgan og steggin fara beinan vegin við teimum í hylin. Ungunum dámar væl at svambla í vatninum, og teir duga væl at kava.

Um 25. mai fara gæsnar í hagan við ungunum. Áðrenn ungarnir fara í hagan, verða teir markaðir í fitjurnar.

25. oktober koma gæsnar á bøin, og seinni um heystið verða ungarnir dripnir. Eru ungarnir ikki feitir, tá ið teir koma úr haganum, so verða teir gøddir. Gásarungi vigar vanliga um 20 merkur.

Gásarkjøt er góður matur, serliga tá ið tað er turt. Fjøðurin verður nýtt í dýnur og koddar.

Síðan 1985 hevur øshvít gás átt í Sandoynni. Øshvít gás er morreyð á bakinum, hálsur og høvd svørt. Aftan fyri eygað og niður undir øsið er hon hvít.

# Fuglar við hús

## Starin

Stari er dimmur og skyggir grønur og korkareyður. Ein gulmorreyður og ein hvítur prikkur er á hvørjari fjøður, og tí tykist, sum er hann prikkutur.

Stari hevur langt og spískt nev, sum er gult um summarið og svart um veturin. Veingirnir eru spískir og breiðari inni við kroppin. Stari flýgur títt og beint fram.

Fyrsta veturin er liðin, og sólin fer at skína, kemur lív í stararnar. Vit hoyra, hvussu teir láta av frøi: Tje-er! Nú er bøurin táur. Teir bora nevið niður í svørðin og draga ormar og maðkar upp úr moldini. Nevið er so sterkt, at starin fær latið tað upp í svørðinum.

Føðin hjá stara er maðkar, sniglar og ymis smádýr. Tá ið stórkavi liggur, fáa teir lítið at eta. Teir koma at húsum at pikka molar og flus, sum fólk kanska geva teimum. Síggja teir fiskagreipur og grindalykkjur, so pikka teir hugaliga í teimum.

Longu í apríl fara teir at gera sær reiður í bergi, flagtekjum og urðum. Vit plaga at seta upp starabúr á hús ella hjall, og skjótt koma stararnir at vita, hvussu búrið er. Í hesi tíðini láta teir lystiliga. Teir duga væl at herma eftir øðrum fugli.

Stari letur hvæsandi, men upp ímillum vøkur, bjørt bríksl.

Í apríl og mai verpa stararnir 4-7 grønblá egg. Steggin og bøgan skiftast um at bøla eggjunum. Starin verpur ofta tvær ferðir um árið. Tá ið 3 vikur eru farnar, koma ungarnir út. Eru ungarnir ikki farnir úr starabúrinum, tá ið starin skal verpa aðru ferð, so setur hann seg uttan fyri holið ella holuna, tá ið hann eigur aðrastaðni, við maðki í nevinum at lokka ungarnar út.

Bøgan og steggin mata ungarnar, eisini tá ið teir eru floygdir.

Í verpingartíðini er starin skyggjandi svartur, og hann skyggir vakurt grønur og korkalittur og tætt settur við ljósum prikkum. Seint um summarið fer hann at kasta fjaðrarnar og fær tá ljósar og hvítar blettir. Nevið verður dimt.

Starar eru nógv í flokki og síggjast sjaldan einsæris. Stari er støðufuglur her hjá okkum og er her allan veturin. Men stararnir í hinum Norðurlondunum eru flytifuglur. Stari okkara er størri enn hesir;

men tað kann bera á, at vit onkuntíð síggja hesar smærru stararnar í Føroyum.

### Steinstólpan

Steinstólpa sæst væl og er løtt at kenna á velinum, sum er svart og hvítt. Tað svarta á velinum er sum eitt øvugt T, og tað sæst væl, tá ið hon flýgur frá tær. Hon er eisini hvít fram á drunnin.

Steggin er blágráur á bakinum um summarið og hevur svartar vangafjaðrar. Bøgan er morgrá. Bæði eru reydlig um bringuna og undir búkinum. Um heystið eru allar steinstólpur meira ella minni morreyðar. Tær hava ljósan eygnadregil og ljósar morreyðar jaðarar á veingjarfjaðrunum.

Steinstólpa er flytifuglur. Hon er suðuri í Afrika um veturin, tí har er heitari enn í Føroyum. Til Føroya kemur hon á summarmála (14. apríl).

Vegurin til Føroya er bæði langur og strangur. Fyrsta tær eru komnar, hoyrist lítið til teirra. Men tá ið tær hava hvílt seg, láta tær lystiliga. Hon letur hart „tjakk“, sum tá ið tveir steinar verða slignir saman.

Steinstólpa heldur til á turrari, berari fjallaheiði, har hon mest tekur flogkykt. Henni dámar væl at sita á gørðum, vørðum og klettum. Hon eigur í veggjarholum og millum steinar í urðum. Reiðrið er gjørt úr grasi, ull ella fjaðrum.

Steinstólpa verpur 6-8 blá egg. Tá ið 14 dagar eru farnir, koma ungarnir út. Bøgan matar teir vanliga. Steggin situr bara stutt frá reiðrinum og letur fyri teimum.

Steinstólpur sunnan ífrá kunnu verða at síggja, men litirnir á teimum sita øðrvísi enn á okkara. Summar hava smalri jaðara um velið og aðrar breiðari.

Men longu í september rýma steinstólpurnar aftur til tey heitu londini í Afrika.

### Grátítlingurin

Grátítlingurin er dimmur fuglur. Á bakinum er hann gulgrønur. Um bringuna og undir búkinum gulgráur og ljósur, og hann er tætt settur við dimmum blettum.

Velrendurnar eru gráhvítar, og hann hevur heilan ella hálvan ring

um eyguni. Fjaðrarnar broytast ikki nógv á liti alt árið; men tá ið líður út á summarið, slítast og kámast tær.

Grátítlingur er í Føroyum alt árið, hann er búfuglur her hjá okkum. Hann sæst nógv niðri í fjøruni, men eisini aðrastaðni. Men honum dámar væl at vera, har grót er.

Teir fyrstu grátítlingarnir, sum fara at eiga, eiga við strendurnar. Teir seinnu mugu fara aðrastaðni. So eiga teir í bø og í haga langt frá strondini. Eisini høgt uppi í bjørgunum. Men um veturin eru teir mest við strondina.

Reiðrið finna vit mangan í garðsholum og undir bøkkum. Tað er gjørt av grovum stráum, mosa, ull ella fjaðrum. Hann verpur 4-5 grá egg við dimmum prikkum. Bøgan liggur á, og steggin flýgur uppi yvir reiðrinum og letur: dsi-dsi-dsi-dsi-dsi.

Tá ið 14 dagar eru farnir, koma ungarnir út. Teir eru naknir og orka ikki at bera høvdið í fyrstuni. Steggin ber øllum at eta, tí bøgan liggur næstan bara á og vermir ungarnar. Føðin er mest flogkykt, flugur og fluguormverur, men kann eisini vera smáir sniglar.

**Títlingurin**

Títlingurin er minni og klænri enn grátítlingur og hevur týðiligari rípur á bakinum og reinari blettir um bringu og liðir. Beinini eru ljósari og velrendurnar snjóhvítar.

Títlingurin er í heitum londum um veturin. Hann er flytifuglur. Hann kemur til Føroya fyrst í apríl og fram í mai, og skjótur er hann í hagan at leita sær eftir reiðurstaði. Best dámar honum haga, har fløtur og mýrar eru um vegir.

Reiðrið ger títlingur sær í bøkkum. Ofta fjalt undir grasi. Bæði bøgan og steggin gera reiðrið, og tað er mangan ringt at finna. Ytst um reiðrið eru turr grasstrá, og síðan er tað klætt við fínum rótum, stráum og næstan altíð hárum.

Bøgan verpur 5-7 egg, sum kunnu vera ymisk á liti, kanska morlitt við dimmum prikkum. Bøgan liggur á reiðrinum, og steggin matar hana. Tá ið 13-14 dagar eru farnir, eru eggini klakt. Ungarnir eru so í reiðrinum um 14 dagar, og bæði bøgan og steggin bera teimum mat, sum er mest flogkykt.

Títlingur er klænmæltari enn grátítlingur: sitt-sitt.

Tíðliga um heystið – í september – rýma títlingarnir aftur til tey heitu londini.

## Mortítlingurin

Mortítlingur, eisini nevndur músabróðir, er ein ógvuliga lítil fuglur. Hann er reyðmorreyður oman á bakinum og gráligur undir búkinum við svørtum rondum. Besta eyðkenni er ljósur dregil oman fyri eygað.

Velið er stutt, og viðhvørt setur hann tað upp í rógv.

Mortítlingur flýgur skjótt beint fram við surrandi veingjum. Aldri er hann í frið. Hann kann láta smellandi tekk-tekk.

Hesin lítli fuglurin er víða um í heiminum. Hann leitar sær eftir mati, skordýrum og smádýrum, í svørðinum ella á jørðini. Hann má fáa nógv at eta og lendi, har hann fær krógvað seg væl.

Mortítlingi dámar væl grótgarðar, og hann er eisini í fuglabjørgum. Hann eigur í veggjarholum og gloprum. Viðhvørt plagar hann at heingja reiðrið upp undir væðingina á húsum. Reiðrið er av grasi og mosa og klætt innan við mjúkari mosa og fjaðrum.

Bøgan verpur 6-8 pinkulítil hvít egg við reyðum prikkum. Tá ið 13 dagar eru farnir, kemur út.

Mortítlingur er støðufuglur. Um summarið trýtur ikki matur, grindalokkar, flugur og ormar. Men um veturin kann hann hungra og kemur tá inn í hjallar at pikka kjøt og mottu.

Í kavarokinum og kuldanum, tá ið allir fuglar kúra, flýgur og hoppar mortítlingurin líka kátur millum holurnar.

## Títlingskongur

Títlingskongur er minni enn mortítlingur. Hann er grønligur á bakinum og gráur um bringuna og undir búkinum. Tvørtur um veingirnar ganga tvær hvítar rendur.

Títlingskongur er gulur um skallan, og svart er uttan um tað gula.

Hann eigur víða um í Evropa og Ásia, og mest heldur hann seg í nálaskógi. Ógviliga fáir eiga í Føroyum. Títlingskongur er støðufuglur ella flytur stuttan veg. Reiðrið líkist nógv tí hjá mortítlingi, og hann tekur mest flogkykt og onnur smádýr.

Um okkara leiðir sæst hann um várið, onkuntíð í apríl og um heystið, seinast í august og út í november. Helst í oktober kunnu heilt nógvir vera at síggja.

Tá sita teir ofta í urtagørðum so lítlir og vakrir og láta, hart og snjalt srú-srú.

**Gráspurvurin**

Gráspurvur er gráur um bringuna og undir búkinum. Á bakinum er hann morreyður og svartur. Steggin kennist frá bøguni, tí hann er gráur um skallan, og upp at tí gráa er hann reyðmorreyður. Frá nevinum niður á bringuna er hann svartur.

Gráspurvur hevur stutt og tjúkt nev, sum er svart um summarið og morreytt um veturin. Beinini eru morreyð. Veingirnir stuttir.

Hann heldur seg tætt at húsum, har hann leitar sær eftir mati. Hann etur korn, fræ, ber og allar matleivdir. Fræ knasar hann léttliga við nevinum. Gráspurvur er mælskur fuglur: tjirp.

Gráspurvur eigur í veggjarholum, rivum og í húsum. Reiðrið er av fjaðrum, stráum og ymsum ruski. Bøgan og steggin eru bæði um at gera reiðrið. Bøgan verpur 2-3 ferðir um summarið, og 5-6 egg eru í urtini. Eggini eru ljós við gráum ella morreyðum blettum.

Ungarnir eru næstan naknir, tá ið teir koma út. Í fyrstuni geva foreldrini teimum flogkykt at eta, men seinni fáa teir fræ av ymsum slagi.

Fyri seinna kríggj kom gráspurvur til Suðuroyar, har hann nørdist skjótt. Haðani kom hann til Svínoyar og eigur nú í teimum størstu oyggjunum í Føroyum.

**Erla kongsdóttir**

Erla kongsdóttir er mjávaksin smáfuglur. Hon er grá, hvít og svørt, svørt um vangarnar og svørt undir øsinum og niður á kjósina. Og so er hon grá oman á bakinum og hvít undir búkinum.

Velið er langt. Tá ið hon rennur, slettir hon við velinum. Tá ið hon flýgur, loftar hon sær í bogar, og tá sæst væl, hvussu langt velið er. Á flogi letur hon ofta: tli-vitt.

Erla kongsdóttir kemur til Føroya fyrst í apríl; men skjótt fara tær til Íslands. Onkur verður tó eftir og eigur í Føroyum. Hon heldur seg millum hús og smýgur av stað næstan allan dagin. Væl dámar henni við køstar, tí har eru ormar og flogkykt at finna.

Ofta síggja vit hana í grunnum hyljum og í ánni, har hon baðar sær og leitar eftir føði.

Um hálvan august koma tær aftur higar úr Íslandi, men skjótt halda tær fram ferðini til Afrika at vera um veturin.

# Gnagdýr

## Rottan

Rotta hevur long bein, og halin er næstan líka langur sum kroppurin. Úr trýni og aftur til halan eru 24-30 cm og halin 18-20 cm langur. Rotta hevur labbar, tærnar eru stuttar og húð millum tærnar.

Hon hevur 2 framtenn í yvirkjaftinum og 2 í undirkjaftinum. Framtenninar eru langar og bogaðar. Á ytru síðu á framtonnunum er hørð glering, og hitt í tonnini er tannbein.

Tá ið rotta tyggur, gongur undirkjafturin aftur og fram. Tenninar í undirkjaftinum glíða upp við innaru síðu á tonnunum í yvirkjaftinum. Men gleringin er harðari enn tannbeinið, og tí verður innara síða á tonnunum brýnd, og tenninar verða hvassar. Tenninar vaksa, so leingi rottan livir. Jakslirnir eru filputir og tyggja næstan alla føði.

Rotta hoyrir væl, men sær ikki væl. Tí lítur hon á hoyrnina. Men so frægt sær hon, at hon fær komið sær undan, tá ið vandi er.

Kløarnar eru ikki hvassar; men tær eru góðar at grava við. Óføra fim er hon at klíva og fer lættliga upp eftir veggi, antin úr viði ella betong, men tá skal veggurin vera eitt sindur óslættur.

Rottan styðjar seg ikki við halanum sum músin, tá ið hon klívur. Mangan fara rottur upp og niður eftir endunum, tá ið skip liggur bundið við bryggju. Eisini dugir rotta at svimja og kava. Tá ið hon svimur, kemur bara trýnið uppúr. Onkuntíð sæst hon ganga eftir botni, men tá skal ikki vera ov djúpt.

Rotturnar halda saman í flokki, og hvør rotta kennir aðra, og víða um eru tær á ferð eftir onkrum etandi. Rottur eru at síggja við hús, í bø, haga, fjøru og bjørgum, har tær avoyða fuglin.

Sjaldsom sjón er at síggja rottu eta, tí hon heldur matinum við framløbbunum, meðan hon etur. Hon kann svølta í fleiri dagar, men tolir ikki at verða tyst. Skuldu umstøðurnar gjørst ringar, so flyta rottur burtur í hópatali. Í hungurstíðum, og tá ið rottan kemur í neyð, kann hon leypa lúkst á fólk og dýr. Rottan er tí bæði djørv og ágangandi og kann vera sonn plága, tí hon bæði er óiør at klíva og svimja, framtenninar eru sum hvassur meitil, og hon gnagar alt, sum er bleytari enn grót.

Rotta dálkar vøru, fóður, skaðar hús, bítur av ravmagns-leidningar, so eldur kann koma í. Smittuberi er hon eisini, tí bakteriur kunnu vera bæði í landi og skarni.

Rottan er eisini bæði vitug og varin. Mest síggjast tær um náttina, men tó eisini um dagin, fáa tær frið.

Tær størstu rotturnar ráða, og tær taka sær besta staðin og besta matin. So mugu hinar veikaru lata sær lynda; men tær sterkaru leggja flestar ungar.

Rotta er slúkin og gnagar alt, hon fær fatur á, deytt ella livandi. Best dámar henni tó korn. Á sumri tekur hon egg og ungar, og hon legst eisini í eplavelturnar. Leivdir eru nógvar at fáa við hús. Niðri í fjøruni eta tær marflugur, taralýs og kræklingar.

Rottuholurnar eru djúpar og greindar. Vanliga eru fleiri holumunnar. Summar munnar flýggjar rottan ígjøgnum, um vandi gerst á. Við hesar holumunnar sæst eingin mold. Teir eru neyðhol og væl fjaldir undir grasi, steinum ella træpettum.

Í støðum, har rottan fær ikki frið, kemur hon bara upp í skýmingini og um náttina. Fær hon frið, so kemur hon út á ljósum degi.

Og skjótt nørist rotta. Kynsbúgvin er hon 11 vikur gomul, og kviðin er hon 21-24 dagar. Rotta leggur vanliga 7-8 ungar hvørja ferð einar 5 ferðir um árið. Kvennrottan hevur 12 boppur, 6 á búkinum og 6 á bringuni, og ungarnir súgva hana í 3 vikur.

Rottan er av fyrstan tíð komin til Evropa úr Ásia og er nú spjadd um allan heimin. Áðrenn gráa rottan kom til Evropa, vóru svartar rottur har. Men gráa og svarta trívast ikki saman, tí gráa tekur tær svørtu.

Sagt verður, at gráa rottan kom við einum norskum skipi til Føroya í 1768, og nú er hon í flestum oyggjum.

Rottualdur er 1-3 ár.

**Músin**

Mús er allastaðni, bæði heima við hús, í bønum og haganum og í bjørgunum. Mús líkist nógv rottu, men er nógv minni. Hon er 7-9 cm long úr trýni aftur til halan, sum er líka langur sum músin sjálv. Músin styðjar seg við halanum, tá ið hon klívur.

Músin hevur stór oyru, og hon bæði sær og hoyrir væl. Hon er eitt ógvuliga kvikt dýr. Kløarnar eru hvassar. Tí klívur hon lættliga upp

eftir einum veggi, ið er eitt sindur ósléttur. Hon smýgur gjøgnum hol og rivur, sum vit høvdu ikki væntað, at hon kom ígjøgnum.

Lættliga fær músin grivið sær holur í træ; men tá hevur hon kanska fingið ferilin av mati. Mýs plaga eisini at eta seg gjøgnum kjøtið í hjallinum og gera sær reiður í tí.

Áðrenn músin leggur, ger hon sær gott reiður, og reiðrið ger hon, har myrkt er. Hon klæðir tað innan við onkrum mjúkum, ull, hoyggi ella pappíri. Hon leggur einar 5-6 ferðir um árið. Í hvørjari løguni eru 5-6 mýslingar, sum nýlagdir viga um eitt gramm.

Mýslingar hvørki hoyra ella síggja, tá ið teir eru nýlagdir, tí oyru og eygu liggja saman, og so eru teir eisini naknir.

Tá ið 14 dagar eru farnir, bæði hoyra og síggja teir. Mýslingur er kynsbúgvin 2 mánaðir gamal, og músin er kviðin 19-20 dagar, so vit skilja, at hon nørist ógvuliga skjótt.

Mýsnar krógva seg um dagin, men koma fram í myrkrinum at leita sær eftir mati. Spakuliga fara tær um; men kettan hoyrir tær væl og sær tær, tí hon sær so væl í myrkri. Kettan situr bara pinnastill og bíðar, og so tekur hon tær.

Vit plaga at hoyra mýsnar skavast onkustaðni ella hoyra tær gnaga. Tær eiga bæði holur og smogur at fara ígjøgnum. Mús etur allan mat, men henni dámar kanska best korn.

Músin er kanska komin til Føroya í víkingatíðini. Hon er nevnd fyrstu ferð í 1592. Músin er broytt síðani. Mýsnar í Nólsoy og Mykinesi líkjast heimamúsini á St. Kilda. Mús í Føroyum er størri, halin tjúkkari, liturin sterkari, og hon er reydligari á bakinum. Í Føroyum eru 6 músastovnar.

Ein av músastovnunum er lagstur í fuglabjørgini. Hesar mýsnar eru morreyðari enn hinar mýsnar og hava størri afturbein og tjúkkari hala. Bjargamýs grava sær holur í vallrøkur og rivur í berginum.

Bjargamýsnar fáa nóg mikið at eta um summarið. Tá taka tær ymist, sum fuglurin leivir. Um veturin gongst ikki so væl at vinna sær føði í bjørgunum. Tá eru bara røtur at gnaga.

Mús og rotta trívast vanliga ikki saman, tí rottan avoyðir músina. Músaaldur er 1 1/2 ár.

Meira er til av músum enn rottum. Fólk plaga at leggja eitur fyri mýs og rottur og at seta fellur. Summi hava kettu, og flestum kettum dámar væl at taka rottur og mýs.

## Haran

Hara heldur til á grýtutum lendi uppi í fjøllunum. Hon grevur sær ikki holu, men býr í gloprum millum steinarnar. Hara kemur oman á lágan haga og í bøin at leggja.

Haran hevur stór oyru og stór eygu. Frambeinini eru stutt og afturbeinini long. Halin er stuttur. Hon hevur ikki fótbøllar sum ketta, men tógvar.

Væl hoyrir hon. Hoyrir hon ljóð, stendur hon á afturbeinunum og slotar, og væl dugir hon at meta um, hvaðani ljóðið kemur. Kemur tá onkur, leggur hon oyruni niður og spennir av stað. Hara sær ikki so væl, men hon sær uttan um seg, tí at eyguni sita so langt úti á vangunum. Henni nýtist ikki at snara høvdinum, tí hon sær alt aftan fyri seg. Tó dugir hon ikki væl at meta um, hvussu langt burtur okkurt er. Men tað, sum rørist, sær hon væl.

Tá ið hara svevur í gloprinum, hevur hon afturbeinini inni undir sær, høvdið liggur fram á frambeinini, og oyruni hanga inn at skinninum. Soleiðis sum hon liggur, er hon til reiðar at støkka á føtur, skuldi hon verið órógvað.

Haruni dámar best at koma út um náttina og í skýming. Serliga um sólsetur og sólarris leitar hon sær eftir føði. Hon etur plantur, røtur, blómur og korn. Fær hon nú frið, hoppar hon í kring, snoddar dúgliga og skilur ímillum plantur, tí kræsin er hon. Ofta etur hon t.d. brobber og smæru. Sjaldan etur hon ræ. Um veturin kann hon eta børk.

Føðin er lagað eftir tonnunum. Hara hevur tvær stórar bogaðar framtenn í yvirkjaftinum og tvær í undirkjaftinum. Av tí at plantur eru seig og harðvunnin føði, slítast framtenninar nógv. Innara síða slítst mest, tí hon er bleytari. Framtenninar verða alla tíðina brýndar og tí ógvuliga hvassar. Tær vaksa aftur so hvørt og vaksa alt lívið. 6 jakslir eru í yvirkjafti og 5 í undirkjafti. Hvassar raðir standa upp úr jøkslunum tvørturum. Jakslirnir eru røðutir. Tá ið hara tyggur, fer undirkjafturin aftur og fram, og tá verða planturnar bruddar sundur millum raðirnar. Sum framtenninar vaksa jakslirnir alt lívið.

Hara hevur skarð í yvirvørrini, og tí kemur yvirvørrin ikki fyri, tá ið hon gnagar við framtonnunum.

Í stórkava koma harurnar oman at húsum at leita sær eftir føði, og tá sært tú mong haruspor.

Tá ið hara er mett, setur hon seg ofta á afturbeinini at hampa seg.

Hon gníggjar høvd og kropp við frambeinunum. Kemur hon so til aðra haru, fara tær at spæla. Serliga á morgni renna tær í kring.

Haran er staðføst. Hon kannar sær ávíst øki og merkir tað við vætu úr kertlum við kinnklovarnar. Á økinum leitar hon sær eftir føði, og henni dámar ikki, at aðrar harur koma inn um mark. Tá ið hon situr og hampar seg, ber hon framlabbarnar at kinnklovunum. Liðug at hampa seg hevur hon gníggjað allan kroppin við vætu, sum deymar. So rennur hon í kring, og deymvæta kemur í sporini. So gníggjar hon trýnið at plantum. Soleiðis merkir hon sær eitt øki.

Hara hevur gott tev. Ikki bara aðrar harur tevja sporini, men eisini onnur dýr. Tey fylgja so sporunum og koma at haruni. Hildið verður, at hon hevur eisini deymkertlar undir løbbunum. Tí roynir haran at villa, gongur umveg aftur og fram, áðrenn hon fer hagar, hon ætlar sær, og so missir fíggindin slóðina, ið hvussu so er eina stund.

Hara er tí ógvuliga varin, tá ið hon fer inn í holu sína, tí hundur kann snodda hana og fylgja sporunum til holuna. Í kava standa sporini sjónsk í haganum. Eisini tá melur hon í klingur og skákar ymsar vegir, áðrenn hon fer í holuna. Dømi eru um, at haran grevur seg niður í kavan.

Hon hevur eisini deymkertlar afturi við halan hvørjumegin. Tí situr hon við afturpartinum niðri í eini kullu, so deymurin skal ikki standa frá henni. Trýnið hevur hon upp ímóti vindinum. So tevjar hon, hvat er framman fyri hana. Skuldi so fíggindi komið móti vindinum, so er hon í stórum vanda, tó at hon sær væl aftur um seg.

Á slættlendi er haran mangan í vanda. Men liturin verjir hana, so hon fellur saman við lendið bæði summar og vetur, og so er hon kvik eisini. Hon rennur skjótari móti brekku enn undan brekku, tí afturbeinini eru longri enn frambeinini. Eitt stutt strekki rennur hon 80 km um tíman og enntá 50 km um tíman nakrar km.

Hoyrir hara skot tætt hjá sær ella sær hund, fær hon illa umrátt seg, men rennur beint í deyðan. Illa kann hon vera særd, tó letur ikki í henni; men verður hon handtikin, so venar hon seg og gnístir.

Tá ið hon rennur skjótt, setur hon afturbeinini fram um frambeinini. Tógvarnir undir løbbunum geva henni gott fótafesti, so hon glíður ikki. Hon kann royna at verja seg, stendur tá á afturbeinunum og slær við frambeinunum.

Er várið lýtt, og tíðliga tátt, síggja vit gráflekkutar harur seinast í apríl. Í mai eru tær flestu morreyðar, og um hálvan oktober sært tú

aftur hvítar harur. Tær gomlu hvítna fyrr. Ungarnir eru um hetta mundið hvítir fram á miðjuna. Í seinastu løguni eru ungarnir smærri, teir eru ikki hvítir fyrr enn í desember. So eru øll hvít; men ikki fyrr enn aftur fyrst í apríl skifta øll so líðandi lit og verða morgrá, tá ið summarið er komið.

Haran kemur oman á lágan haga ella í bøin at leggja. Tær finna sær turran stað, har tað lívir, kanska í kráarlagi, gróthústoft ella rennum og gryvjum. Tær leggja eisini uppi undir fjøllum nærindis urðargróti.

Harurnar semjast ikki altíð so væl. Harufressarnir plaga at berjast um harurnar. Teir bítast og klórast av grimd, so ullrokið stendur frá. So standa teir á afturbeinunum og deingja hvør annan í heysin við frambeinunum, og so sparka teir við afturbeinunum. Vanliga leggur hara 3 ferðir um árið. Vit siga, at 3 løgur eru, og 2-5 ungar í hvørjari. Ungarnir eru ikki størri enn mús, tá ið teir eru lagdir; men teir hava síða ull, so at teir tykjast væl størri. Haruungi sær beinan vegin, hann er lagdur, og rennur í kring.

Mamman kastar teir beinan vegin, men kemur aftur til teirra at geva teimum at súgva. Haruungi dugir beinan vegin at krógva seg sum tær vaksnu harurnar. Leikar á, flekir hann seg niður og liggur púra kúrrur. Tá ið tríggjar vikur eru farnar, eru ungarnir sjálvbjargnir, og 11 mánaðir gamlir eru teir kynsbúnir. Hara er kviðin í ein mánað.

Í 1831 ella 1832 sleptu teir suðurharu úr Danmørk, men einki spurdist burturúr. Men í 1855 sleptu teir tveimum pørum av snjóharu úr Suðurnoregi í Kirkjubøreyn. Longu 3 ár eftir spurdist, at ungar vóru at síggja um alla Streymoy. Snjóhara er hvít um veturin; men føroyska haran broyttist á liti, so at hon nú er blágrá um veturin.

Í 1860 vóru næstan allar hvítar. Tann seinasta hvíta haran varð sædd í 1916-1917. Føroyska haran er væl minni enn norska snjóharan, lágbeintari, og tenn og kjálkabein eru eisini øðrvísi.

Nú eru harur í flestum oyggjum í Føroyum. Nógvar verða skotnar, og harðir vetrar týna nógvar. Tí mugu harurnar verða friðaðar summi ár. Harutíðin – menn skjóta harur – er frá 2. november til 1. januar.

# Flogkykt heima við hús

### Flugan

Kroppurin á flugu er í trimum pørtum: høvd, bringa og afturkroppur. Á høvdinum eru tveir kampar, tvey stór eygu og nev.

Fluga hevur tveir glærar veingir, sum festir eru á bringuni. Flest flogkykt hava fýra veingir; men fluga hevur bara framveingir. Staðin fyri afturveingir hevur hon tvey skøft at halda sær beinari í luftini við. Flugan má sláa 200 ferðir í eitt sekund, skal hon halda sær uppi í luftini.

Fluga bæði følir og smakkar við hárunum á kroppinum. Hon tevjar við kampunum. Eisini følir hon við kampunum, hvussu nógvur vindur er. Áðrenn hon fer á flog, setur hon høvdið upp ímóti vindinum, og so ætlar hon um, um líkindi eru at fara á flog. Skinfluga tevjar kjøt ella deytt dýr, sum er fleiri kilometrar burturi.

Er fluga inni, setur hon seg mest á svart, men úti á gult. Fluga leitar at ljósi. Í myrkri sær hon ikki at flúgva, og tá setur hon seg høgt upp, tí so er hon tryggari, at onkur tekur hana ikki.

Fluga etur við nevinum. Úr maganum klíggjar hon ráka, sum so kemur út úr nevinum. Rákin loysir matin, so hon fær sogið hann. Flugur eta sukur, mjólk, kjøt, tøð og sveitta. Vandamikið kann vera at lata flugur sleppa at mati, vit skulu eta, tí tær kunnu bera smittu við sær.

Svong fluga flýgur og flýgur í kring. Kemur hon so at onkrum, sum hon heldur vera etandi, toyggir hon nevið niður at tí og kannar tað væl. Er hon heppin, sýgur hon skjótt kjósina fulla og rýmir at krógva seg væl. Viðhvørt rennur upp úr henni aftur, og tað eru blettirnir, sum hon setur. Blettirnir kunnu eisini vera skarn, og teir síggja vit á ljósakrúnum og lampuskermum.

Fluga hevur á beinunum tvær kløur og tveir bøllar, og úr bøllunum kemur kleimið evni, sum ger, at hon gongur undir loftinum og á rútum.

Á bringuni eru seks bein.

Á bringuni og afturkroppinum eru hol, sum hon andar ígjøgnum. Fluga hevur ikki reytt blóð. Tað sæst, tá ið hon er sligin móti vegginum og kroyst. Eisini sæst tað á bilrútum, tá ið tær renna seg ímóti, meðan bilurin koyrir.

Inni í húsum síggja vit tvey sløg av flugum. Hesar flugurnar eru smáar og dimmar á liti. Tær flúgva í heilum uttan um lampur og ljósakrúnur. Onnur teirra, lítla stovuflugan, verpur í vátt, rotnandi tilfar, t.d. í vát støð og uttan um, har vaskirennan rennur út.

**Skinflugan**

Skinflugan er størri enn stovuflugan. Hon er grønlig á liti og hevur antin svørt ella reydlig eygu.

Kvennflugan kemur at húsum at verpa eggini í kjøt, tvøst, fisk, okkurt rotnandi tilfar og skarn. Eggini eita víggj. Kallflugan situr mest á blómum. Sagt er, at skinflugan víggjast ikki yvir vatni.

Kvennfluguni nýtist ikki at koma at kjøtinum, tí hon hevur langa verpipípu, sum kemur niður úr kroppinum, tá ið hon skal verpa. Hon fær stungið verpipípuna gjøgnum heilt smáar meskar í fluguneti.

Tá ið um leið eitt samdøgur er farið, eru eggini klakt, um hitin er meira enn 6-7°. Matmaðkarnir bora seg beinan vegin inn í kjøtið. Teir hava hvørki bein ella eygu. Síðan eta teir kjøt.

Eftir 10-12 døgum eru matmaðkarnir fullvaksnir og leggja av at eta. So rýma teir úr kjøtinum og fara niður í jørðina. Húðin harðnar og verður til eitt reiv. Tá ið hann so hevur ligið 8-12 dagar í reivinum, rivnar tað, og úr kemur ein skinfluga. Hon strevar seg upp úr moldini og fer á flog.

Nú kann bera á, at ein deyður smáfuglur ella deyð mús liggur inni í húsum onkustaðni, skinflugan hevur vorpið í, og matmaðkar koma. Tá kunnu matmaðkarnir koma í neyð, tí teir sleppa ikki út at leggja seg í jørðina.

Tá skríða teir leingi og leita og leita. Undan ljósi rýma teir, og so kunnu teir enda í eini pløging undir gólvteppinum. Men tá kunnu teir hava gjørt gagn: teir hava etið deyða smáfuglin ella deyðu músina.

Skinfluga livir vanliga í ein mánað. Vit plaga at siga, at flestu flugur doyggja um heystið. Onkur hórar kanska veturin av.

Flugur eru skitligar og dálka bæði mat og hús. Tær kunnu eisini bera smittu, tí tær eru, har okkurt liggur og rotnar. Um summarið er tí umráðandi, at ruskspannir og ruskíløt verða tømd tíðugt.

**Køstaflugan**

Køstafluga líkist nógv vanligu fluguni. Hon kennist frá henni, tí hon er gulmorreyð og lodnari. Køstaflugan er størri og hevur eisini longri bein.

Køstafluga er mest á køstum, har hon situr og bíðar eftir øðrum flugum, sum hon leggur á og sýgur blóðið úr.

Eggini verpur hon í tøðini, og hitin í tøðunum klekir tey.

4 sløg av køstaflugu eru. Eitt slag er á køstum, eitt í bøi, eitt í haga og eitt í fjøruni í taranum.

**Húsvættið morreyða**

Húsvættið morreyða hevur morreyðar framveingir og ljósari afturveingir við skúvum. Undir sjóneyku sært tú, at svart flus liggur í støðum so tætt, at dimmir skuggar eru á tí morreyða.

Húsvættið flýgur frá apríl til september. Er flótt inni í húsum, sært tú húsvætti alt árið.

Mølurin er hvítur og hevur morreytt høvd. Hann etur klæði, fjaðrar, ull, turrar plantulutir og ymist annað. Burtur úr tí, hann etur, ger hann sær reiv at liggja í. Í reivinum liggur mølurin og búnast til húsvætti.

Reivið er torført at síggja, tí uttan er tað klætt við smáum pettum av tí, mølurin etur.

Um summarið finnur tú húsvættið morreyða deytt ella livandi í kjallaravindeyganum.

**Húsvættið gráa**

Húsvættið gráa hevur hvítt høvd og hvítan kraga. Tað er minni enn húsvættið morreyða og flýgur um somu tíð.

Húsvættið gráa er tað vanligasta húsvættið. Um summarið sæst tað í sethúsum, serliga í kjallara, fjósi og hoyggjhúsi. Eisini úti í garðinum og túnunum flýgur tað.

Mølurin líkist mølinum, sum vit hava sagt frá. Men reivið liggur klínt fast. Tað kann verða gjørt úr pappi, tá ið mølurin er í pappeskju við fjøður í. Og væl liggur reivið krógvað í hornum og skotum.

Umráðandi er at rudda væl og ikki lata ymist burturkast liggja og rekast, fjøður, ull, skinn, gomul klæði. So verða ikki nógv húsvætti.

**Húsvættið svarta**

Húsvættið svarta er ikki svart. Tað tykist bara at vera svart, tí tað heldur teimum dimmu veingjunum tætt inn at kroppinum sum eina tekju við møn.

Í posum og ymsum íløtum sært tú alt summarið svørt húsvætti. Tey sita tøtt uttan á posanum. Tú kanst venda posanum allar vegir, men húsvættini verða sitandi.

Men mølurin undan húsvættinum svarta liggur ikki í reivi, men hann liggur berur.

**Mjølhúsvættið**

Mjølhúsvættið er allastaðni, har mjøl og grýn eru um vegir. Tað er grátt og ikki ásýniligt. Ofta er tað í goymslum og bakihúsum. Mølurin etur mjøl og grýn og spinnur tey saman.

Bara kalldýrið flýgur, men kvenndýrið situr og krógvar seg. Best fyri møl er at heingja klæði út, tá ið frost og kuldi eru. So doyggja mølirnir í kulda.

**Blaðlúsin**

Blaðlýs gera nógv um seg í urtagørðum. Tær eru smáar og bleytar, beinini long, veingirnir stórir og glærir. Summar blaðlýs hava ongar veingir.

Blaðlýsnar kunnu liggja sum eitt tjúkt lag uttan á bløðum og leggjum á frukttrøum, grønmeti og blómum. Tær kunnu súgva so nógva sevju úr plantunum, at bløðini skrykkjast saman, og plantan trívst ikki.

Summar blaðlýs taka sær ávísa plantu, men aðrar fleiri plantur. Spýttið úr teimum er eitrandi. Skarnið undan teimum er kleimið og legst uttan um bløðini og typpir blaðopini.

Blaðlúsin nørist heilt skjótt, men hon hevur tó nógvar fíggindar, sum taka hana.

Nógv regn beinir fyri nógvum. Tá ið tað er turt og heitt um summarið, herja blaðlýsnar á, og tað kemur illa við, tí tá standa planturnar illa ímóti.

**Frostspannarin**

Frostspannari er ein miðalstórur firvaldur. Hann flýgur flagsandi og sæst mest um dagin. Í góðum veðri er hann styggur og fer oftast á flog, tá ið tú nærkast honum.

Kalldýrið hevur veingir; men kvenndýrið hevur bara smáar veingjastubbar og fær ikki flogið.

Í oktober fer kvenndýrið skríðandi upp eftir einum træi og verpur har. Tað klínir eggini føst úti á teimum smáu greinunum. Eggini tola nógv av. Nógv regn og hart frost um veturin skalir tey ikki.

Um várið, tá ið trø og runnar spretta, kemur pinkulítil ormvera úr eggjunum. Ormveran borar seg beinan vegin inn í blaðknappar og blómuknappar og etur teir. Alla tíðina etur ormveran og spinnur bløð saman, etur og spinnur.

Út á summarið er ormveran fullvaksin og sleppir sær niður á jørðina. Niðri í moldini verður hon til reivveru.

Um heystið verður reivveran til firvald – ein frostspannara.

**Kálspannarin**

Kálspannari er ein ljósagráur lítil firvaldur við dimmum litum. Kálspannari sæst við hús og heimrustir. Hann setur seg ofta á húsaveggir og portur.

Ormveran er á kálplantum og etur tær.

**Kálmølurin**

Kálmølur er lítil, ljósamorreyður ella gulligur firvaldur. Hann líkist nógv mýggjabita, tá ið hann flýgur.

Summi ár flúgva heilt nógvir í urtagørðum. Ormveran legst á kálplantur. Dømi eru um, at hann fullkomiliga hevur oytt rótarkálini.

**Tvístertan**

Tvísterta er morlitt. Hon hevur 4 veingir. Framveingirnir eru stuttir og harðir. Afturveingirnir eru stórir og glærir. Aftast á kroppinum eru tveir stertar, sum líkjast eini tong.

Afturveingirnir eru so stórir og breiðir, tá ið tvístertan hevur breitt teir út, at vit kundu undrast á, hvussu hon fær havt teir undir

framveingjunum. Men á jarkanum á framveinginum liggur ein sterk pláta. Um miðjuna á plátuni er ein liður. Afturvongurin verður lagdur saman um liðin, sum tá ið tú leggur felliknív saman.

Av tí at veingirnir bara liggja á framkroppinum, tarna teir ikki afturkroppinum at liða seg. Tekur tú um framkroppin á tvístertu, boyggir hon afturkroppin upp ímóti fingrinum og roynir at taka um fingurin við tongini.

Annars verjir tvísterta seg við tongini ella tekur fongin og heldur honum.

Tvísterta etur allan mat. Hon skaðar planturnar, tí hon etur tær. Tí er hon illa dámd t.d. í vakstrarhúsum, rótakálum og allastaðni, har sum gagnplantur verða dyrkaðar. Henni dámar væl at krógva seg innan í opnum plantuleggjum, og hon etur sáðberar og sáðgongir í blómum.

Tvístertan krógvar seg um dagin, men kemur fram um náttina at leita sær eftir føði. Sjaldan sært tú hana flúgva um dagin; men kemur hon á trongd um dagin, so fer hon á flog. Um dagin situr hon eisini í holum, rivum og undir steinum og krógvar seg.

Eina ferð um árið nørist tvísterta. Um heystið grevur kvenndýrið sær eina rúmliga holu á skák niður í svørðin. Holan er 5-8 cm long. Stríggið er at grava hjá henni. Hon má grava í 2-3 dagar, tí hon tekur moldina upp við kjálkunum.

Eitt sindur av leysari mold má hon hava eftir at leggja fyri holuna. So situr hon í holuni um veturin. Viðhvørt sleppur kalldýrið inn eisini. Seint um veturin verpur kvenndýrið og leggur øll eggini saman í ein klunk, sum hon verjir og huglar um. Men tá rennir hon kalldýrið út, og tað er at undrast á, at hon skal tora, tí kalldýrið er væl størri.

Síðan situr hon og sleikir eggini væl, at einki skaðiligt skal leggjast á tey. Tó rotna summi egg; men hon etur tey. Meðan hon situr og ansar eftir teimum, fær hon einki at eta. Tá ið 5-8 vikur eru farnar, klekjast eggini.

Og so ansar hon eftir ungunum. Um náttina fara ungarnir upp úr holuni at leita sær eftir mati; men stutt fara teir. Tá ið dagurin kemur, koma teir aftur.

Men mamman orkar ikki so leingi at røkta teir. Seint um summarið doyr hon, og so eta ungarnir hana.

## Veggjasmiðurin

Veggjasmiður er um leið 2 cm langur. Hann er gráligur og gulligur. Kamparnir ógvuliga langir og afturbeinini long og góð at leypa við.

Veggjasmiður loypur 10 ferðir so langt, sum hann er langur.

Hann hevur 4 veingir. Framveingirnir liggja inni undir afturveingjunum. Men afturveingirnir eru longri og koma útum sum tjúkkir, gráir træðrir.

Um summarið kann veggjasmiður vera úti, men er tó vanligari inni, har heitt er. Hann heldur seg at ovnum og heitum rørum.

Um dagin krógvar hann seg í rivum; men um náttina, tá ið kvirt er í húsinum, kemur hann fram. Tá hoyrast lát, næstan sum tá høsnarungi letur. Ljóðið kemur av, at kalldýrið gníggjar afturveingirnar saman.

Veggjasmiði dámar væl søta vætu, ymist rusk og petti av plantum og viðhvørt pappír. Mest etur hann tó flogkykt, sum hann tekur innanhýsis.

Veggjasmiður – summi siga veggjasmyril – er óskaðiligt flogkykt at hava innanhýsis. Tó kann hann fáa andvekur á fólk, tá ið hann letur.

## Veggjalúsin

Veggjalús er morlitt, 5-7 mm long og hevur ongar veingir. Hon sýgur blóð úr fólki. Um dagin situr hon og krógvar seg í rivum ella aftan fyri leyst tapet.

Tá ið myrkt er, kemur hon fram at stinga fólk, sum liggja og sova. So kunnu tey fáa reyðar blettir, og tað skríður í teimum.

Sjaldan sæst veggjalús; men eru tær í kamari, deyma tær, tí tær hava kertlar, sum lata úr sær eitt evni.

Fyrr á døgum var veggjalúsin vanlig, tí fólk fóru ikki so reinliga um. Tá ið fólk so lærdu at hava húsini rein, sást hon næstan ikki. Nú er veggjalúsin aftur vanlig, kanska tí húsini eru heit alt árið. Henni dámar væl hita, men ikki her hjá okkum.

## Høvuðlúsin

Høvuðlús situr á hárbotninum og elvir nógvan skriða. Hon stingur niður í hárbotnin, áðrenn hon sýgur blóð.

Høvuðlús verpur egg – nitrur – í hárið og klínir eggini føst í hárið nakrar mm upp frá hárbotninum.

Nitrurnar sita so fastar á hárunum, at tó at tú tekur tveir fingrar um hárið og skalt strúka tær av, so ært tú tær ikki.

Høvuðlús er 2-3 mm long, og hon trívst væl í síðum og skitnum hári. Ikki er heldur nóg mikið at vaska sær í høvdinum. Men mangt fæst tó fyri lýs.

Fær eitt barn í einum skúlaflokki lýs, kann tað smitta hini børnini. Skomm er eingin at hava lýs, men tað er umráðandi at sleppa sær frá teimum.

**Kropslúsin**

Kropslús og høvuðlús eru sama slag. Kropslúsin er heldur størri og dimmari. Hon sýgur eisini blóð nakrar ferðir um dagin.

Kvenndýrið verpur um leið 300 egg, sum tað klínir føst í kraga og undirklæði. Hon liggur í seymum í klæðunum.

Tí eru góð ráð fyri kropslús at skifta skjúrtu og undirklæði hvønn dag. So fáa eggini – nitrurnar – ikki tíð at klekjast.

Reinføri við sær sjálvum beinir ikki fyri lúsum, men minkar um tær. Tí má ein fáa sær evni fyri lýs.

**Fuglaloppan**

Fuglaloppa – staraloppa – fer at gera um seg í apríl-mai. Hon er í turrum reiðrum, ið eru høgt uppi, og í høsnarhúsum.

Eggini verða vorpin í reiðrið, og ormveran búnast bara har. Hon etur ymist rusk í reiðrinum og skarn undan staraloppuni. Vaksna staraloppan sýgur blóð úr fuglum, men eisini øðrum dýrum og fólkum.

Tær seinastu ormverurnar um heystið eru veturin av í reiðrinum. Tær verða bara liggjandi í reivinum, til várið kemur við lýkku. Tær verða klaktar, tá ið fuglurin fer at pilka við reiðrið, ella fólk kemur at vala um reiðrið ella starabúrið.

Skuldi eingin nomið reiðrið, verða tær kortini klaktar, men seinni. Tá sita allar staraloppurnar uttan um reiðrið sum svartar strikur.

Kemur eingin fuglur í reiðrið at seta seg á, so rýma tær úr reiðrinum, og altíð fara tær uppeftir. So sita tær kúrrar og bíða.

Staraloppurnar venda sær ímóti ljósinum. Kemur nú ein fuglur

ella eitt fólk og kastar skugga á tær, støkka tær niður. Er staraloppan heppin, rakar hon fuglin; men ofta detta tær niður á jørðina.

Men tær gevast ikki so. Har sita tær og bíða, til dýr ella fólk kemur framvið.

Tá ið fólk hava fingið staraloppur, hava tey gingið undir einum reiðri ella búri. Men hundur og ketta kunnu fáa tær og bera tær inn í hús. Kanska hava klæði hingið á snórinum, og eitt reiður er nærindis. Men vanligast er, at fólk fáa tær um várið, tá ið tey arbeiða í urtagarðinum.

Í einum starabúri kunnu vera fleiri hundrað staraloppur. Tekur onkur búrið inn um várið at væla um tað ella inn í hita um veturin, kann hann fáa tær. Tí er best at væla um búrið úti í kuldanum um veturin.

Staraloppur, ið koma inn, tær doyggja, tá ið nakrar vikur eru farnar. Tí inni fáa tær ov lítið vatn, ella tær finna ongan at súgva blóð úr.

Fleiri evni eru at fáa fyri staraloppu.

**Loppan**

Loppa er lítið veingjaleyst skordýr. Hon er 2-4 mm long og dimmmorreyð. Aftastu beinini eru ógvuliga long, og loppa loypur langt. Loppa er ikki vanlig nú á døgum.

Loppa livir av blóði, sum hon sýgur úr fólki. Fyrst stingur hon hol á húðina, og so sýgur hon. Hon stingur fleiri ferðir, áðrenn hon rýmir. Uttan um, har hon hevur stungið, rodnar og skríður illa í.

Loppa kennir á sær hitan frá fólki og tevjar, tá ið fólk eru í námd. Hon gongur altíð móti vindi, tí at vindur ber lukt.

Eggini – eini 8-10 í senn – verpur hon í dust og skitt í krókum, í rivur og sprungur, innanhýsis. Hon verpur alt árið.

Síðan ganga nakrir fáir dagar, so koma lítlar, hvítar ormverur úr eggjunum. 10 dagar seinni fær ormveran reiv uttan um seg, og so ganga aftur 10 dagar, men so koma loppur úr eggjunum.

Ormverurnar eta allan skitt, eisini skarn undan loppuni, tí í skarninum er eitt sindur av blóði eftir, og tað er góð føði hjá teimum.

Reinføri minkar nógv um loppuna. Tí er hon rár nú á døgum. Dustsúgvarin man súgva í seg allan skitt og dust, sum loppan skal liva av.

Hundur hevur loppur, sum kunnu koma upp á kettu og fólk. Hundaloppa stingur líka illa sum loppan.

**Skrubbmottan**

Skrubbmotta er 0,2-0,4 mm long og heldur minni enn kjøtmotta. Kvenndýrið grevur sær holur í húðina. Mottan verpur egg í holurnar. Tá ið 2-3 vikur eru farnar, eru eggini klakt og mottan búgvin.

Fólk fáa mottuna upp á seg, tá ið tey sova saman, ella tey sova í somu song, har skrubbsjúkt fólk hevur ligið. Eisini verður tú smittaður, tekur tú í hondina á fólki, sum hevur skrubb.

Frá tí, at fólk er smittað, til tað fær útslag, ganga vanliga 3 vikur. Skriðin er nógvur og serliga um kvøldið.

Smáir blettir koma fyrst. So verða blettirnir avlangir, og serliga eru teir millum fingrarnar og um skøvningarnar. Teir breiða seg so um næstan allan kroppin.

Tá ið fólk klóra sær illa, kemur hol á húðina, og bakteriur leggjast í. So tekur ilt fyri seg. Fólk kunnu verða skruvuskotin um allan kroppin.

Skjótt verða skrubbsjúk fólk lekt, fara tey til lækna. Ein má aldri dylja, at ein hevur skrubb, men fara alt fyri eitt at fáa sær fyri sjúkuna. Um ein í húsinum hevur skrubb, so verða øll somul viðgjørd.

Nógv dýr hava eisini mottu, sum kann koma upp á fólk. Sami heilivágur verður nýttur fyri tær.

**Gatiklukkan**

Gatiklukka sæst í nógvum gomlum húsum. Hon er morreyð og 3-5 mm long. Gatiklukka flýgur í mai-september, tá ið hon hevur borað seg út úr viðinum.

Í nakrar vikur hevur fullvaksna klukkan og eisini reivverur ligið úti undir viðinum, so at bara ein tunn skón er at bora seg út ígjøgnum. Tær bora eitt snøgt, runt hol og skríða út.

Mest klekist í juni – fyrst í juli.

Gatiklukka livir bara í nakrar vikur.

Gatiklukkurnar skríða á viðinum, har tær vórðu, men flúgva eisini, og tær líkjast smáum flugum. Nógvar eru í vindeygakarmum, ella flúgva tær út gjøgnum opin vindeygu og sveima uppi yvir húsum.

Gatiklukka er ikki bara í húsum, men eisini úti í ymsum viði; men viðurin skal ikki vera ov vátur.

Kvennklukkan verpur 20-60 egg í rivur í viðinum, og har liggja eggini væl vard. Ofta verða tey vorpin beint innan fyri flogholini. Tey liggja kleimd føst.

Um 3-4 vikur verður træormurin klaktur. Teir smáu træormarnir

bora seg inn í viðin. Sum teir bora, liggur viðurin sum mjøl aftan fyri teir.

Træormurin búnast til gatiklukku í 4-6 ár, men umráðandi er, hvussu hiti, væta og viður eru.

Træormur legst eisini á ymist flættað innbúgv, pappír og bøkur. Hann kann grava seg gjøgnum bøkur, sum eru ikki nýttar longur. Tá eitur hann bókaormur.

Fleiri sníkar týna bæði træorm og gatiklukku.

Gatiklukka trívst best, har passaliga vátligt er, og tí ikki í heitum, turrum húsum. Tó at gatiklukkurnar eru deyðar, ryður mjøl í heilum úr flogholunum. Einasta, sum gáað skal verða um, er, um fleiri floghol koma, tí tá er klukkan livandi. Men fá floghol verða gjørd um árið, so torført er at døma um.

Evni er at fáa at týna bæði gatiklukku og træorm. Gass verður nýtt, og hita tola tey ikki. Er hitin 60° í ein hálvan tíma, doyggja tey.

# Eiturkoppar og torvatrøll

## Eiturkoppurin

Eiturkoppar seta lokkanet í gryvjur og undir bakkar. Hyggur tú væl, sært tú eisini lokkanet millum grasstrá og aðrar plantur í bø og haga.

Tíðliga á morgni sært tú, hvussu døggin glitrar í lokkanetunum, tá ið sólin skínur.

Kroppurin á eiturkoppi er í tveimum: framkroppur og afturkroppur. Á framkroppinum eru 2 eiturkrókar, 8 smá eygu og 8 long bein. 6 spunavørtur eru á afturkroppinum.

Eiturkoppar eru allastaðni, í fjøruni, bønum, haganum, á fjøllunum og heima við hús. Í Føroyum eru teir flestu smáir.

Spunavørturnar hava innan nógv fín ræsi, sum munna út á teimum. Nógvir erfínir silkitræðrir koma úr teimum. Træðrirnir eru kleimnir og storkna, tá ið teir koma út í luftina. Eiturkoppurin tvinnar teir saman til ein tráð, sum hann spinnur sær nót við. Lokkanetið verður sett í ein krók inni. Eisini síggja vit lokkanetini millum planturnar.

Tað er ymist, hvussu teir ymissu eiturkopparnir bera seg at. Summir hava einki lokkanet. Teir sita bara og lúra, til okkurt flogkykt kemur. So renna teir eftir tí og taka tað.

Stendur lokkanetið í einum króki í stovuni, situr eiturkoppurin í eini silkipípu innast í krókinum og bíðar. Fyrsta ein fluga flýgur í lokkanetið, loypur hann inn í lokkanetið og drepur fluguna við eiturklónum.

So letur hann vætu inn í fluguna, og vætan loysir fluguna sundur. So sýgur hann úr henni. Men er eiturkoppurin svangur, sýgur hann beinan vegin blóðið úr henni; men er hann mettur, spinnur hann uttan um hana og goymir hana til eina aðra ferð.

Ójavnt er, hvussu væl eiturkoppar síggja. Teir, sum renna eftir fonginum, síggja væl. Allir hava góðan følisans og smakksans. Nógvir eiturkoppar eru heilt kræsnir. Dømi er um ein eiturkopp, sum gramliga rendi eiturkløurnar í eitt flogkykt, sum hann helt smakka illa.

Hann slepti flogkyktinum alt fyri eitt og gekk og sløðraði í

lokkanetinum. Hann spýði heilt illa, gekk og gníggjaði eiturkløurnar ímóti blaðnum. Tá ið ein løta var farin, sat hann aftur frískur í lokkanetinum.

Tá ið eiturkoppur flytur, hevur hann altíð ein silkitráð við sær. Missir hann fótafestið, hongur hann í tráðnum. Gongur hann upp eftir onkrum, tekur hann um við klónum á beinunum. Einaferð fangaði onkur ein veiðieiturkopp og vildi fáa at vita, hvussu skjótt hann rann. Hann rann 90 cm í 3 sekund, og tað er skjótt.

Kalldýrið er minni enn kvenndýrið, og hvørt hevur sína nót. Verða tey ósamd, so ber á, at kvenndýrið legst á kalldýrið, drepur tað og sýgur blóðið úr tí.

Misjavnt er, hvussu eiturkoppar bera seg at, tá ið teir verpa. Húseiturkoppur spinnur sær eitt hylki uttan um eggini og heingir tað antin í lokkanetið ella á veggin nærindis. So hongur hylkið har, til ungarnir koma út.

Krabbaeiturkoppur er morgulur og 6-7 mm langur. Húseiturkoppur 10 mm. Húseiturkoppur er allastaðni í húsum, kjallarum, á loftinum, men har skal vera friðarligt. Krabbaeiturkoppur er úti, har lágur vøkstur er.

Krabbaeiturkoppur rennur eftir fonginum og tekur hann. Hylkið við eggjunum leggur hann undir steinar ella plantur. Kvenndýrið situr so oman á hylkinum og ansar eftir tí, til ungarnir eru komnir út.

Vanligt er at siga, at kvenndýrið verpur, áðrenn tað doyr um heystið. Tá ið várlýkkan kemur, koma ungarnir út.

Eiturkoppar eta nógv smákykt, sum eru okkum ein plága.

## Torvatrøllið

Torvatrøll hevur lítlan kropp og 8 heilt long og kløn bein. Framkroppur og afturkroppur eru næstan í einum. Torvatrøll hevur 2 bitkløur.

Oman á kroppinum er ein vølur, og á honum sita 2 eygu; men eyguni hava ikki so stóran týdning sum følisansurin, sum er í beinunum.

Torvatrøll spinnur ikki. Eggini verða vorpin í rivur og holur í jørðini. Kvenndýrið hevur eina langa pípu at verpa ígjøgnum. Verpipípan kemur út úr dýrinum og verður sett niður í jørðina.

Ungarnir eru sjálvbjargnir beinan vegin.

Torvatrøll er ránakent dýr. Tó tekur tað bara ymiss deyð flogkykt og bleytar plantur. Sagt er, at tað tekur blaðlýs eisini.

Best dámar tí náttina, og tað sæst sjaldan um dagin. Tú sært torvatrøll úti, har góður vøkstur er, og serliga inni í sethúsum.

Kemur tað í vanda av øðrum flogkyktum, brýtur tað eitt ella tvey bein av sær. Beinini liggja leingi og spjálka. Men tá sleppur torvatrøllið sær til rýmingar.

Kjøtmotta líkist eiturkoppi og torvatrølli. Hon etur ikki kjøt, men etur hýggj av kjøtinum.

# Vakstrarhús

### Inni í húsinum

Vakstrarhús eru ofta stór hús. Tey eru mest úr glasi ella plastikki, og skrokkurin í teimum er úr aluminiumi. Inni sært tú nógv rør á veggjunum. Tað eru hitarør. Í summum rúmum eru svørt tjøld at draga fyri. So standa planturnar næstan í myrkri.

Eisini sært tú nógv borð, og á teimum standa urtapottar við plantum. Upp undir borðini ganga nógv vatnrør. Vatn og tøð verða koyrd í tangar. Vatnið rennur upp á borðini, og so súgva planturnar í urtapottunum vatn við tøðum í.

### Moldin

Moldin, sum nýtt verður, er ofta ein blandingur. Vanliga verður mýrimosi úr útlondum nýttur. Mýrimosin verður keyptur úr Danmørk, Finnlandi og Svøríki. Steinull kann verða blandað upp í mýrimosa, tí so verður hann upp aftur poknutari.

Onkuntíð verður føroysk mold nýtt; men hon má verða væl kókað fyrst, og tá doyggja øll kyktini í moldini.

### Ljósið

Ljósið kemur inn gjøgnum alt vakstrarhúsið. Ljósið er ymiskt eftir árstíðunum. Viðhvørt skulu plantur kanska eina tíð ikki fáa beinleiðis sólarljós. Tá fáa planturnar bjart el-ljós.

Ymist er, hvussu nógv ljós plantur skulu hava at blomstra. Summar skulu fáa ljós í styttri enn 12 tímar. Aðrar plantur longur enn 12 tímar, og so upp aftur aðrar, tá ið ljós kann vera bæði styttri og longur enn 12 tímar.

Tá ið fleiri vakstrarhús eru, so er ójavnt, hvørjar plantur urtagarðsmaðurin dyrkar.

Tað eru ikki allar skreytplantur, sum skulu fáa ljós í 12 tímar, at tær skulu blóma. Summar skreytplantur skulu hava ljós longur enn 12 tímar.

Urtagarðsmaðurin ger sjálvur av, nær hann vil hava planturnar at

blóma. Hann dregur tey svørtu tjøldini fyri ávísa tíð á degnum, so at planturnar fáa ljós styttri enn 12 tímar. Planturnar, sum skulu hava ljós longur enn 12 tímar, tá verða tey svørtu tjøldini ikki drigin fyri.

Soleiðis má urtagarðsmaðurin gera, tí hann fær ikki altíð selt allar planturnar í senn. Hann fær eisini forðað plantum at vaksa ov skjótt. Tá sproytar hann eitt evni á planturnar. Tær vaksa ikki so skjótt, verða tættari og vakrari.

### Setkvistar og fræ

Urtagarðsmaðurin keypir setkvistar og fræ úr Danmørk, men setkvistarnir og fræið kunnu koma úr ymsum londum til Danmarkar, t.d. Brasil, Hálandi og Japan.

Tá ið setkvistarnir verða settir í urtapottar, vaksa og festa rót, kann urtagarðsmaðurin síðan skera setkvistar av teimum aftur at seta niður. Setkvistar standa ofta í kølirúmi, áðrenn teir verða settir niður.

Fræ verður eisini nýtt.

### Inniplantur og útiplantur

Vakstrarhús kann leggja dent á plantur at hava inni ella at hava plantur úti í urtagarði. Vit nevna dømi um nakrar inniplantur: alpuviól, friðarlilja, húsfriður, betlehemsstjørna og hawaiiplanta.

Útiplantur eru: stjúpmóðurblóma, margarittur, nelikar, morgunfróa og tulipánur (leyk).

Urtagarðsmaðurin fer longu í januar at sáa útiplanturnar, og allar skulu blóma í mai, tí tá er summarið komið, og fólk fara at prýða um urtagarðin.

Tulipánur hevur leyk, og upprunaliga koma leykirnir úr Hálandi. Teir verða plantaðir í september í serligar kassar og settir í kølirúm. Leykirnir standa í køssunum inni í kølirúminum í tríggjar mánaðir.

Síðan verða leykirnir settir inn í vakstrarhúsið, so at teir fáa hita og ljós, og teir blomstra um 3 vikur.

### Jólastjørna

Fyrst í august verða smáar jólastjørnur settar í urtapottar. Plantan hevur tá fingið lítla rót. Síðan verða urtapottarnir settir undir hvítt plastikktjald, tí tað skal vera heitt og vátligt, men ikki beinleiðis sólarljós.

Staðin fyri sólarljós skulu tær smáu planturnar fáa ravmagnsljós. Tá ið 8-14 dagar eru farnir, er góð rót komin á jólastjørnurnar.

Í september dregur urtagarðsmaðurin tey svørtu tjøldini fyri, tí hann vil ikki hava, at allar jólastjørnurnar skulu blóma í senn. Nú kann hann skera toppin av jólastjørnunum.

Hesin avskorni toppurin kann verða settur í mold, og hann verður so til eina nýggja jólastjørnu. Tá ið urtagarðsmaðurin sker toppin av eini jólastjørnu, fær hon nógvar stjørnur.

Verður toppurin ikki skorin av, fær jólastjørnan bara eina stjørnu.

Onkur kann halda, at tann reyða stjørnan er blóma, men so er ikki. Stjørnan er bara bløð. Blómurnar eru heilt smáar og detta skjótt av.

Seinast í november eru jólastjørnurnar búnar at selja, og tær kunnu halda sær út á várið. Men so plaga fólk at koyra tær burtur.

Kortini ber til at skera tær í mai og lata tær vaksa. Frá september skulu tær standa 12 tímar í myrkri hvørja nátt í um leið ein mánað. Tá kunnu tær fáa tey hvítu ella reyðu bløðini og blómur aftur.

## Tomatplanta

Tomatplanta verður sáað fyrst í januar. Hon verður sett í ljós í eitt lítið rúm. Um 1. mars verður hvør einstøk planta sett í urtapott. Tá ið tveir mánaðir eru farnir, blómar tomatplantan. So ganga tveir mánaðir frá tí, at blóman er fallin av, til tomatir eru búnar.

Tomatplanta kann verða 6 m høg, tá ið vakstrartíðin er farin. Plantan má verða styðjað, tí hon stendur ikki uppi sjálv.

Urtagarðsmaðurin hentar góðar tomatir 3 ferðir um vikuna út í oktober, men tá eru dagarnir ov stuttir. Av hvørjari tomatplantu kunnu vera o.u. 7 kg av tomatum.

## Agurka

Agurka verður dyrkað sum tomat. Plantan verður líka høg, men veksur skjótari. Hon er búgvin at taka 2 mánaðir eftir tað, at hon er sáað. Agurka má verða tikin, tá ið hon er hóskandi stór, tí hon bara veksur og veksur.

Sagt verður, at t.d. tomat og agurka smakka betur og betur, longri norður vit koma. So skuldu tær smakkað væl í Føroyum.

Soleiðis varð arbeitt í einum vakstrarhúsi áður; men nú er arbeiðslagið nógv broytt.

# ANNAR PARTUR

# Bøurin

Av heimrustum í bygdini koma vit út í bøin. Mangastaðni sæst, hvar tann fyrsti bøgarðurin var. Einaferð í tíðini var bøurin ikki veltur. So hava menn velt bøin, grivið botnin upp, lagt rennur at fáa hann turran. Grótið hava teir sprongt og ruddað og nýtt tað til breytir og garðar. So lá bøstykkið slætt og vakurt.

Sum leið frá, løgdu teir meira inn av haganum og gjørdu nýggjan garð. Hesin bøgarðurin eitur kanska nú á døgum gamli garður. Men upp aftur løgdu teir inn, og nú stendur nýggi garður sum mark millum bø og haga.

Tá ið menn veltu bøin, so ætlaðu teir at velta korn, epli, røtur og gras.

Sum tíðin líður, og bøurin verður ikki røktur, søkkur hann niðuraftur. Sleppur hann at liggja leingi ótaðaður, fer ikki at vaksa so væl á honum. Gróðurin fer at broytast. Tá ið bøurin liggur fornur, hvørva tey góðu grassløgini, og tey vánaligastu standa eftir. Mosi og jarðarsipa fáa yvirvánir, tí at teimum nýtist ikki nógv tøð. Vit siga, at bøurin er mosagingin og fer aftur at nærkast haganum.

Bøurin er seyðafriðaður frá 14. mai til 25. oktober, meðan grasið og eplini vaksa. Vanligt hevur verið at bera út um hálvan august, og um hetta mundið fara vit at taka upp epli at kóka.

Lendið millum strond og fjall er hagi; men bøur og innlagdar traðir eru veltur hagi.

## Gras

Fyrr á døgum nevndu føroyingar næstan allan gróður, sum ikki var viður, gras. Hetta sæst best á øllum nøvnum á plantum: eygnagras, tálgargras og spógvagras. Vit hava eisini grasagarð, sum merkir urtagarður.

Tey sonnu grøsini hava langan legg, sum eitur grasstrá. Har sum bløðini liggja inn at grasstránum, er knæliður. Grasstrá er opið innan, men við knæliðin heilt innan.

Bløðini eru beinæðrað og spísk.

Blómurnar hava ofta bæði sáðgong og sáðberar. Tær hava hvørki bikarbløð ella krúnubløð, men staðin fyri smáar agnar. Sáðberarnir

eru 3. Sáðtráðurin er langur og klænur. Sáðknappurin er festur soleiðis, at hann lættliga fer at ristast, tá ið fer at lota, og so brestur hann.

Ein sáðgong er við 2 teinum. Sáðfangini eru sum fjøður. Blóman er soleiðis, at vindurin fær væl sáað hana.

Fræið eitur korn. Nógvur fræhvíti er í korni, og tí verður okkurt av grøsunum gagnplanta við lít: bygg, rugur, hveiti, havri og rís.

Grasættin er størsta plantuættin hjá okkum. Vit síggja, hvussu grøsini valla næstan alt landið og lata tað í vakran, grønan búna.

Hesi grassløg vaksa á væl veltum bøi: fínagras, roykgras, legugras og húsagras.

## Blómuplantur

Á góðum og væl veltum bøi eru hesar plantur vanligar: summardái, mýrisóleya, svínasólja, skriðsólja og reyðakkuleya.

Summardái blómar vanliga alt árið, men serliga á hásumri. Summardái er ein kurv við nógvum blómum. Tær ytstu blómurnar í kurvini eita randblómur og eru antin hvítar ella reyðar. Tær innaru eita diskblómur og eru gular.

Baldursbrá og oksaeyga líkjast summardáa.

Sóleyan veksur, har vátligt er í bønum, í veitum og mýrum. Fyrst í mai spretta bløð og blómur um somu tíð. Blómurnar vaksa skjótari enn bløðini, og ikki fyrr enn blóman er fallin av, tá eru bløðini fullvaksin.

Sóleya hevur eingi krúnubløð, men bara fagurgul bikarbløð. Í blómuni eru mangir sáðberar og mangar sáðgongir. Bløðini eru nýravaksin og kunnu verða um 20 cm breið.

Bæði svínasólja og skriðsólja hava bikarbløð og krúnubløð. Gul krúnubløð. Báðar sóljurnar hava 3-deild bløð, men blaðið í miðjuni á skriðsólju hevur langan legg. Skriðsóljan blómar í juni-juli, og hon veksur í vátum bøi.

Svínasólja er vanlig lokplanta í bønum og blómar í mai-juli. Mýrisóleya, skriðsólja og svínasólja eru í sóljuættini.

Reyðakkuleya hevur reyð, hvít ella ljósareyð krúnubløð. Bikarbløðini eru samanvaksin. Reyðakkuleya er í neliksættini.

Í fornum bøi er svørðurin so gjøgnumvovin við gomlum plantu-rótum, at lítið ber til hjá nýggjum rótum har. Summardáin er eisini vanligur har; men so vaksa eygnagras og snjallibjalla eisini har. Í

fornum bøi fáa opinekruarvi, línbinda og dái skjótt yvirvánir. Fræ úr dáa er lívseigt. Tað kann liggja leingi í jørðini og missir ikki evnini at næla. Fyrsta forni bøurin verður veltur, næla tey og verða til dáa. Dái er lokplanta, sum kann verða 30-80 cm høg. Krúnubløðini eru samanvaksin til eina reyða pípu.

Línbinda er vanlig lokplanta, hevur gul krúnubløð og blómar í juli-august. Vanliga følnar hon fyrsta árið, men kann liva veturin av sum rót. Árið eftir fær hon legg, bløð og blómu.

Men henda lokplanta er upphav til rótasløgini: turnips og føroyskar røtur. Okkurt annað línbinduslag, sum veksur ikki í Føroyum, er upphav til kálrabi, og so upp aftur eitt annað upphav til nógvar dyrkaðar kálplantur: grønkál, hvítkál, reyðkál og blómukál.

Opinekruarvi er ring lokplanta. Blómurnar eru hvítar og smáar. Arvi líkist nógv høsnagrasi.

# Hagin

Uttan fyri bøgarðarnar er hagin. Í haganum er vanliga ikki so nógvur gróður sum í bønum. Hagin er vanliga nýttur at hava seyð, neyt og ross á. Svørðurin er snøgt bitin og planturnar smávaksnari enn í bønum.

Undirhagin er frá bøgørðunum gjøgnum dalin og nakað niðan í fjallið, har fjallagróðurin tekur við.

## Graslíðin

Líðin er besta graslendi í haganum. Í líðini er summstaðni skor, sum er gott feitilendi til seyð. Ovarlaga í líð og skor er omanskruddur eyrur, og har vaksa plantur væl. Niðri í líðini er vátari.

Í grasinum vaksa summardái, smæra, høsnagras, blákolla, silkiband, børkuvísa og svínasólja.

Líðin er ofta snøgg, tí seyðurin hevur bitið hana. Men á hásumri er líðin grøn og litføgur.

## Fjallið

Uppi undir fjallinum eru eyrur og grót, grønir blettir ímillum. Uppi í fjallahaganum er lítil vøkstur. Hygg niður í berjalyngin, so sært tú seint á sumri krákuspýggju, og áðrenn teg varir, støkkur ein hara út úr eini holu millum klettarnar.

Á tindinum er mangan veðurhart. Har kann mosi vaksa, ella er har bara eyrur og grót. Kanska vaksa nøkur strá av húsagrasi ella seyðavingli. Á hægstu fjøllum sært tú snjósólju.

Onkuntíð kann stormurin loysa úti við tromina og skræða mosan omanav.

Í ovastu skriðunum undir tindinum vaksa dreymsólja, steinbrot, urtapílur, svínasólja, eirisgras, túvublóma, sjógras, skriðublóma og várperla.

Uppi í fjallahaganum koma vit fram á eina tjørn uppi á skarði ella hálsi. Uttan um tjørnina er vallað, og har vaksa mýrifípa og fjallamýrifípa.

### Hamrar, gjáir, gil og urðar

Í homrum og gjáum veksur væl, tí har sleppur seyður vanliga ikki. Í homrum er ikki so lættligt at fáa vatn. Tí mugu planturnar hava langar røtur, sum vaksa langan veg at leita eftir rivum at fáa vatn úr.

Undir homrunum er øðrvísi. Har er nógv omanskrutt tilfar og meiri vatn. Í rivum og gloprum veksur hjálpirót, skøra og gøtubrá, pílur.

Gróðurin í homrum, gjáum og giljum er eftir, hvussu sólargangurin er. Í gjáum fáa plantur meiri vatn, og tí vaksa tær væl og eru stórvaksnar.

Gilið líkist líðini, hvat gróðri viðvíkur. Gilini eru djúp, so har verður ein ljóssíða og ein skuggasíða. Oman gjøgnum gilið rennur lítil áarløkur, og fram við honum veksur ofta mýritistil.

Á skuggasíðuni vaksa ymissir trøllakampar. Seyður gongur í giljum, so har verða bara tær plantur, hann ikki etur, stórvaksnar.

Í urðum vaksa mest mosi og trøllakampar.

### Vøtn og tjarnir

Størstu vøtn í Føroyum eru Leitisvatn og Fjallavatn í Vágunum, Sandsvatn í Sandoy, Leynavatn í Streymoy, Eiðisvatn og Toftavatn í Eysturoy. Hini vøtnini eru smærri og eru um alt landið.

Tjarnir og smá vøtn eru eisini uppi millum fjalla.

Gróðurin í vatni er lagaður eftir tí. Í vøtnum er murtn, sum antin er smáar plantur ella smá dýr. Úti í vatninum sært tú tjarnaks og tindakoll. Við vøtn og tjarnir sært tú mækju og bukkabløð.

### Vátlendi

Í flotkeldum veksur mýrimosi, stjørnusteinbrot, iglasólja og eingjarkarsi. Í díki og mýri vaksa dúnurt, stjørnusteinbrot, mýrifípa og mýrihoylús. Rennur løkur gjøgnum mýrina, ber vatnið fræini omaneftir, so seint á sumri er øll mýrin blá. Í mýri kann eingjarkarsi eisini vaksa.

### Á heiðini

Einaferð varð nógv torv skorið á torvheiðini, og ikki altíð varð farið so væl um. Tí er vátligt har, díki, mýrar og vatnhol, men tó eisini turrir bakkar og heyggjar.

Har eru ikki góð vakstrarlíkindi, tí bara eitt sindur av mold er oman á mónum. Planturnar, tú finnur á torvheiði, eru kattarklógv, hagasólja, børkuvísa, silkiband, børkubóndi. Har vátligt er, finnur tú mýrimosa og undirløgugras.

Lyngheiðar eru turrari enn torvheiðar. Har vaksa heiðalyngur, klokkulyngur, bláberjalyngur, berjalyngur, brobber og børkuvísa.

**Áin**

Oman gjøgnum flestar bygdir rennur stór á. Tá ið áarføri er, tekur áin steinar, sand og mold út á sjógv. Áin máar lendið og botnin. Er lívd fyri brimi, gerast oyrar fram við strondini.

Ein á rennur antin møk ella stríð. Er áin stríð, fáa plantur illa fest seg í ánni. Í flestum áum vaksa tó mosi og túsundblað.

**Á ferð**

Gongur tú úti í náttúruni, sært tú nógv undursamt og vakurt. Tú sært nógvan fugl og hoyrir yndislig fuglalát. Vit skulu fara væl um náttúruna, ikki tveita rusk og órudd, heldur ikki ganga og leika í, tá ið seyðurin lembir, og fuglurin reiðrast, verpur og fær ungar. Vit skulu gleðast um náttúruna og fjálga um hana.

Smákyktini mást tú vita nakað um, skalt tú finna tey. Tey ymissu dýrini fáa sær tann bústað, teimum fellur best, og har vinna tey sær ta føði, ið teimum tørvar.

**Leyvfall**

Tá ið heystið er komið, hava planturnar borið frukt. Plantur, sum bara liva í eitt ár, kasta fræini í moldina, áðrenn tær følna. Tvíáraplantur hava eisini borið frukt og kastað fræini. Tær følna eisini, so bara rótin stendur eftir í moldini. Fleiráraplantur følna eisini, og jarðleggurin stendur eftir í moldini.

Bæði rót og jarðleggur eru livandi og full av føði til næsta vár, tá ið bløð og leggur fara at vaksa.

Tann vakri, grøni liturin, sum eyðkendi summarið, er vorðin sprøklutari, gulur, reyður og gráligur. Tá ið hesin liturin er komin, fellur leyvið skjótt.

Endin á blaðlegginum verður broyskin. Blaðið loysnar og dettur

av. Leyvið má falla, áðrenn veturin kemur, tí tá verður kalt hjá plantunum, og tær fáa ikki sogið vatn.

Tí følna tær urtakendu planturnar. Tær trækendu planturnar – trø – fella leyvið. Mest vatn guvar út gjøgnum bløðini, og eru eingi bløð, so guvar ikki so nógv burtur.

Træ við ongum bløðum stendur tryggari, tá ið vetrarstormurin kemur, og nógvur kavi legst á træið.

# Sáing og gitnaður

## Sáðberar og sáðgong

Í eini blómu eru sáðberar og sáðgong. Sáðberin hevur sáðtráð og sáðknapp. Sáðgongin hevur sáðfang, tein og egglegu. Í sáðknappinum er blómusáð, og í eggleguni eru egg.

Summar blómur hava bara sáðberar og eita kallblómur. Aðrar blómur hava bara sáðgong og eita kvennblómur. Men so hava upp aftur aðrar bæði sáðberar og sáðgong. Tær eru tvíkynjaðar.

Hevur blóma bæði sáðberar og sáðgong, sáar hon seg sjálv. Sáðknappurin brestur, og blómusáðið dettur niður á sáðfangið og liggur fast har, tí sáðfangið er kleimið. Men ein blóma kann fáa sáð úr einari aðrari blómu av sama slagi, og tað er vanligari.

## Flogkykt sáa

Blóma kann vera litføgur og hava hunang. Firvaldar og onnur flogkykt síggja hana tí væl, og tey koma eftir hunangi og blómusáði. Tá ið flogkykt kemur í blómuna, skakar tað sáðberunum. Teir bresta, eru teir búnir, og blómusáð fellur niður á flogkyktið, sum so flýgur í eina aðra blómu at súgva hunang.

Dagfirvaldar flúgva um dagin. Teir kunnu vera litfagrir, og teir verða drignir at teimum littu blómunum. Náttfirvaldar eru ikki litfagrir. Teir fara í tær hvítu blómurnar. Náttfirvaldar flúgva í skýmingini, og tær hvítu blómurnar fara upp tá og anga.

Nógvar flugur sáa blómur eisini.

## Vindur sáar

Grøs, nálatrø og pílatrø hava ikki litfagrar og angandi blómur og hava vanliga ongan hunang heldur. Blómurnar hava hvørki bikarbløð ella krúnubløð. Sáðberarnir eru langir og skakast tí lættliga av vindi og bresta.

Blómusáðið er smátt og turt og lætt og flýgur leingi í luftini.

Sáðgongin hevur stórt sáðfang, sum líkist fjøður, og tí loftar sáðfangið væl tí flúgvandi blómusáðinum.

## Gitnaður

Tá ið blómusáð er komið á sáðfangið, veksur tað niður gjøgnum teinin og niður í eggleguna. Sáð og egg renna saman til fræ. Egglegan verður síðan frukt við fræum í.

Blóman ber frukt og fræ.

# Frukt- og fræspjaðing

Tá ið fræini eru búgvin, er umráðandi, at tey koma í moldina, og nýggjar plantur vaksa úr teimum. Flestar plantur bera mong fræ, men ikki øll fræini verða til nýggja plantu. Fuglar eta nógv fræ. Onnur fræ falla í vánaliga jørð og trívast ikki.

Summi fræ næla, men sniglar og onnur dýr eta nálirnar. Umráðandi hjá plantum er, at tær fáa spjatt fruktir og fræ víða um.

**Plantan spjaðir**

Tá ið fruktin í blákollu er búgvin, sprotnar hon við so nógvari kraft, at fræini verða syft meira enn 3 metrar frá plantuni.

Sortugras hevur frukt, sum hevur 5 rúm, og eitt fræ er í hvørjum rúmi. Tá ið fræini eru búgvin, sprotnar fruktin í 5 partar við so nógvari kraft, at fræini verða syft 6-8 metrar frá plantuni.

**Vindur spjaðir**

Fræini í mongum fruktum eru hærd, og vindurin fær borið tey langt burtur. Tá ið fruktin sprotnar, fara fræini sveimandi við vindinum. Dømi um hetta eru dúnurt og pílur.

Fruktirnar í hagasólju hava flogamboð. Tá ið fruktirnar eru leysar, tekur vindurin tær. Eitt træ, sum eitur álmtræ, ber fruktir, ið hava á sær tunna hinnu. Tær búnu fruktirnar loysna og koma spakuliga niður.

Vindurin fær so stundir at taka tær.

Summar fruktir hava hvørki flogamboð ella hærd fræ. Vindurin bara skræðir í plantuna. Eitt lok fer av fruktini, fræini verða syft úr og fara so við vindinum.

**Dýr og fólk spjaða**

Hesar fruktirnar og hesi fræini hava pinnar ella krókar, sum krøkja seg upp í dýr ella fólk. Fræ úr plantum á vátum lendi hanga føst uppi í vaðfugli, og teir bera tey víða.

Fruktir og fræ verða borin millum lond uppi í hoyggi og hálmi og ymsum øðrum fræi.

Nógvir fuglar eta ber. Alt uttan fræini sodnar í fuglinum. Fræini koma líka heil úr aftur fuglinum og verða borin víða um.

# Dýralívið í svørðinum og í moldini

### Reyðmaðkurin

Reyðmaðkur livir í moldini, har hann grevur sær hol. Hann liggur allan dagin og krógvar seg niðri í moldini. Um náttina kemur hann upp á jørðina at draga sær bløð og plantuleivdir, sum hann setur niður í holini hjá sær.

Kanska hevur tú sæð, tá ið stari ella kvørkveggja kemur á grasvøll at bora eftir møðkum til ungarnar. Kvørkveggjan rennir nevið niður í svørðin ferð eftir ferð og dregur reyðmaðkin upp. Eygleiðir tú hana leingi, undrast tú kanska á, at so nógvir reyðmaðkar eru.

Reyðmaðkur er langvaksin. Hann er spískur framman og flatari aftan. Kroppurin er skiftur í lið. Reyðmaðkur er tannleysur og hevur bleytar varrar. Hann hevur hvørki eygu ella oyru. Húðin er tunn og hál, og blóðið skyggir reytt út ígjøgnum hana. Hann andar gjøgnum húðina.

Á hvørjum liði eru nakrar smáar bustir. Tekur tú ein reyðmaðk og setur hann á eina glarplátu, gongst honum illa at skríða. Men setur tú hann á okkurt óslættari, ber betur til, tí tá fær hann sett bustirnar fyri seg. Hann skríður líka væl aftureftir sum frameftir.

Tá ið reyðmaðkur flytur seg, strekkir hann fyrst framkroppin og heldur sær við bustunum á afturkroppinum. Síðan tekur hann afturkroppin fram og heldur sær við bustunum á framkroppinum.

Er moldin føst, má reyðmaðkur eta seg ígjøgnum hana. Máttur er í honum, og tað følir tú best, tá ið tú tekur reyðmaðkin í lógvan og knýtir nevan. Tú skalt kroysta fingrarnar fast saman, skalt tú forða honum at skríða út ímillum fingrarnar.

Burtur úr moldini fær reyðmaðkur føði, tí hann livir av fúnaðum plantuleivdum. Eisini etur hann bløð og smáar fruktir, sum rot er komið í. Áðrenn hann etur bløð, spýtir hann á tey. Mold og bløð fara næstan ósodnað gjøgnum tarmarnar í honum. So setur reyðmaðkurin afturkroppin upp úr moldini og út gjøgnum gotið, sum er á aftasta liði, kemur ein lítil dungi av fruktagóðari mold.

Reyðmaðkur dugir at skilja ímillum ljós og myrkur, tí vanliga

kemur hann upp á jørðina eftir føði um náttina. Hann er varin, og afturkroppurin stendur niðri í holinum, so hann fær skjótt farið niður í holið, um onkur skuldi komið.

Í grimdarregni noyðast reyðmaðkarnir at koma upp á jørðina, tí tá fyllast øll hol við vatni, so teir fáa ikki andað. Teir mugu fáa luft.

Sami reyðmaðkur er bæði kalldýr og kvenndýr. Hann verpur egg, og úr beltinum um framkroppin kemur slím, sum hann leggur uttan um eggini.

Hesir gulmorreyðu húsarnir eru vanligir at síggja í moldini. Í hvørjum húsa eru nøkur egg. Sólarhitin klekir eggini. Tann fyrsti ungin, ið út kemur, etur øll hini eggini í húsanum, so bara ein ungi kemur úr hvørjum húsanum.

Í frosti og turki eta reyðmaðkarnir seg langt niður í moldina, har teir gera sær eina lítla holu, sum teir klæða innan við smásteinum. Í tílíkari holu liggja fleiri reyðmaðkar í dvala.

Reyðmaðkar gera stóra nyttu. Teir grava hol í moldina, so vatn og luft sleppa skjótari at planturótunum. Eisini taka teir fúnaðar plantulutir og bløð og draga niður í holini hjá sær. Reyðmaðkur etur bløðini og plantulutirnar umframt mold.

Skarnið undan reyðmaðki er besta mold.

Fleiri sløg av reyðmaðki eru. Tann stóri reyðmaðkurin verður 20-25 cm langur. Hinir – tann blái, grái og ljósi – eru minni.

### Stóri flatmaðkurin

Hin stóri flatmaðkurin heldur til, har væl er taðað. Hann er oftast beint undir svørðinum, undir steinum og fløgum; men hann kann eisini liggja djúpari ringdur saman.

Flatmaðkinum fellur ikki, at moldin gerst ov turr, og hann doyr, verður hitin meiri enn 29 stig. Flagveltan tykist vera gott tilhald hjá honum. Skuldi onkur havt hug at vitað, um stóri flatmaðkurin er í garðinum ella stykkinum, kann hann leggja eina flamingoplátu á moldina. Undir plátuni er fjálgt og slavið, og tað fellur flatmaðkinum væl.

Stóri flatmaðkurin verður um leið 20 cm langur og 1,2 cm breiður. Hann er slættur og gulbrúnur á liti. Eftir kroppinum gongur ein ljósari rond. Hann glíður fram á eini slímhinnu, og ferðin er ein metur um tíman. Munnurin situr undir búkinum aftur frá endanum og líkist einum lítlum, rundum knappi við einum holi í miðjuni.

Stóri flatmaðkurin er tvíkynjaður – bæði kalldýr og kvenndýr í senn. Hann verpur eitt eggjahylki, ið er sum neglin á lítlafingri til støddar. Eggjaskalið er dimmgult og seigt, tá ið tað er vorpið. Sum fyrsta samdøgrið líður, gerst tað glitrandi svart.

Inni í eggjahylkinum er glær væta, sum er flótandi, tó at frost er úti. Í eggjahylkinum kunnu vera upp í ellivu hvítir, 1 cm langir flatmaðkar. Stóri flatmaðkurin er eitt einfalt dýr. Verður hann skaddur, verður hann aftur til eitt heilt dýr. Er bara afturkroppurin eftir av honum, kann ein nýggjur framkroppur vaksa úr afturkroppinum. Royndir eru gjørdar at skera ein frampart sundur í fleiri petti. Á endunum vaks eitt nýtt høvd.

Stóri flatmaðkurin er frammi um náttina. Tá etur hann reyðmaðkar. Av tí at hann hevur hvørki kjálkar ella tenn, fær hann hvørki bitið ella tugt reyðmaðkin. Tí ringir hann seg uttan um reyðmaðkin og spýtir slímkenda sodningarvætu niður yvir hann. Síðan loysist reyðmaðkurin upp. So sýgur flatmaðkurin hann niður í seg, og tá ið ein hálvur tími er liðin, er allur reyðmaðkurin etin.

Tá ið tíggju hitastig eru úti, etur ein flatmaðkur tríggjar reyðmaðkar eftir fjúrtan døgum. Tá ið allir reyðmaðkarnir eru etnir, legst hann í dvala og livir av sínum egnu holdum. So liggur hann og bíðar, til ein annar reyðmaðkur kemur framvið. Reyðmaðkur etur plantuleivdir og grevur holur í moldina, so at súrevnið sleppur væl niður í hana. Stóri flatmaðkurin kann fullkomuliga avoyða reyðmaðk í einum lendi.

Upprunaliga helt stóri flatmaðkurin bara til í Nýsælandi. Hildið verður, at hann er komin til Føroya úr Skotlandi, t.d. í urtapottum, sum keyptir eru til Føroya. Stóri flatmaðkurin varð fyrstu ferð sæddur her hjá okkum í 1982, og nú er hann farin víða um landið.

### Svarti snigilin

Svarti snigil er vanligur á graslendi í bø og haga, har skuggi er. Liggur hann leingi úti í sólskini, tornar hann upp og doyr, tí hann fær ov lítið vatn.

Tá ið eitt æl hevur verið, koma nógvir sniglar upp úr grasinum, og tú sært nógvar á gøtum og vegum.

Svarti snigil er svartur um kroppin. Húðin er rukkut og hál av slími. Kroppurin er avlangur og tjúkkastur um miðjuna.

Á høvdinum eru 4 liðilig horn. Tey tvey longstu hornini bera eyga á endanum. Snigilin tevjar við hinum báðum hornunum.

Um framkroppin liggur húðarfaldur, sum eitur kápan. Undir kápuni er ein hola, sum eitur kápuholan. Aftan fyri høvdið høgrumegin sært tú ein ljósan blett. Hetta er eitt hol, sum snigilin fær latið upp og aftur. Holið gongur inn í kápuholuna. Inni í kápuholuni liggja nógvar klænar blóðæðrar við tunnari húð á. Luftin setur inn ígjøgnum hesa tunnu húðina og inn í blóðið. Kápuholan er sum lunga.

Setur tú snigil á glarplátu, sært tú, at á undirsíðuni eru nógvir vøddar. Undirsíðan eitur fóturin. Snigil skríður á fótinum einar 5 metrar um tíman.

Millum rukkurnar á kroppinum eru smáir kertlar, og úr teimum kemur slím. Snigil kann torna upp; men slímið verjir hann fyri turk, og kemur mold og skittur á hann, so letur hann nógv slím úr húðini, so skitturin glíður uttan av honum. Roynir tú at taka í hornini á sniglinum, dregur hann øll inn í høvdið og stingur seg saman, so at kroppurin verður sum eitt noða.

Svarti snigil etur bleytar plantulutir og eisini soppar. Hann tolir eisini eitursoppar. Á tunguni eru smáar, hvassar tenn, so hon er góð at ríva matin sundur við. Við hesi hvøssu rívitungu skaðar snigilin plantur.

Svarti snigil verpur ljós egg, og hann verpur tey í eina holu í moldini ella í vátligt leyv. Áðrenn veturin kemur, doyggja teir gomlu sniglarnir. Eggini og ungarnir liggja í jørðini og liva veturin av.

Svarti snigil sæst bæði við hús, í bø og haga; men svørtu sniglarnir við hús eru morlittir ella reydligir. Svarti snigil verður 100-120 mm langur.

### Grái snigilin

Grái snigil sæst í bønum og urtagørðum. Tá ið summarið er vátligt, eru heilt nógvir, og teir gera nógv um seg serliga í urtagørðum, tí teir eta planturnar, serliga jarðber.

Grái snigil verður 30-40 mm langur.

### Iglasnigilin

Iglasnigil hevur tunna skel, sum er sera broyskin. Hon verður 8-10 mm long. Iglasnigil er í gryvjum, vátum upptornaðum hyljum og

mýrilendi. Hann skríður millum planturnar, sum hann etur, og verður hann órógvaður, fer hann í skelina. Fuglur er grammur eftir honum.

Í seyði kann ein flatormur vera í livrini. Livurin kann vera full av ormi, sum eitur igil. Igil er 2-3 cm langur og breiðvaksin. Iglarnir elva bruna og gera seyðin so sjúkan, at hann antin doyr ella verður ógviliga veikur.

Igil verpur egg. Tey fara út úr seyðinum við skarninum. Tá ið tey koma í vatn, klekjast tey. Ungarnir bora seg inn í iglasnigil og eru eitt skifti har og búnast.

Livurin í iglasniglinum ferst eisini, men gerst aftur so hvørt. Umsíðir verður hesin sjúki iglasnigilin væl størri enn teir frísku iglasniglarnir; men tann sjúki nørist ikki og livir styttri.

Iglasnigil kann vera kjokkfullur av ungum. Síðan bora ungarnir seg út. Nú eru teir nógv broyttir og hava fingið hala at svimja við. Teir leita sær eftir plantum í vátlendinum og seta seg fastar á strá og bløð.

Tá ið seyður so etur iglagras, fær hann iglar niður í seg, og teir seta seg í livrina í honum.

Umráðandi er tí at røkja væl hagan, skera hann upp, so tað slepst undan ov nógvum vátlendi.

### Glæri snigilin

Glæri snigil hevur breiða, kúputa, glæra skel, sum er 4-5 mm long. Snigilin sæst næstan bara vetrarhálvárið, tá ið veðrið er gott. Hann tolir hvørki hita ella turk; men kuldi skalir hann ikki.

Glæri snigil verpur um heystið og veturin. Ungarnir vaksa lítið ta lýggju árstíðina, men taka skjótt til í vøkstri um heystið og verða kynsbúnir.

Tá ið várið kemur, doyggja teir.

### Kvíslaeiturkoppurin

Kvíslaeiturkoppur sæst um summarið út á heystið í lokkaneti, sum líkist heingikoyggju. Lokkanetið stendur í ymsum plantuvøkstri, í runnum og trøum. Tað er vakurt at síggja upp ímóti ljósinum í skýmligum grannskógi.

Lokkanetið er eitt silkiteppi, sum liggur slætt millum greinar og

strá. Tað er tætt, hvítt silki og kleimið omaná, so flogkykt, ið dettur niður á tað, liggur fast og sleppur ikki úr stað.

Oman fyri silkiteppið eru tættir træðrir í allar ættir. Tá ið flogkyktini flúgva í henda vevnaðin, missa tey flogið og detta niður á silkiteppið.

Eiturkoppurin situr opin undir teppinum. Fyrsta netið fer at ristast, fer hann hagar, sum ristingin er mest, stingur fremstu beinini upp gjøgnum silkiteppið, tekur fongin og togar hann niður úr teppinum.

So situr eiturkoppurin í sama stað og sýgur burtur úr flogkyktinum. Tá ið hann er liðugur, sleppir hann haminum niður á jørðina.

Um summarið eru eyðkendu spunahylkini at síggja. Eiturkoppurin hevur spunnið tey at følnaðum bløðum ella niðurdotnum grannnálum. Spunahylkini eru tjúkkast á miðjuni og smalka til báðar endarnar.

Kvíslaeiturkoppur er slakar 7 mm langur og morreyður um framkroppin. Eftir framkroppinum gongur svørt miðrípa, sum er tvígreind fram ímóti eygunum.

### Ránseiturkoppurin

Við vatnsstrendur, í áarbøkkum og mýrum, har mýrimosin hongur út yvir vatnið, har situr ránseiturkoppur. Lítil er hann, um 6 mm langur.

Hann leggur á øll flogkykt, sum koma framvið, summi kanska at verpa á vatnið.

Sjaldan sæst hann, tá ið sólin sær. Hann situr mest í mýrimosa, tí har er altíð passaliga vátligt.

Áðrenn kvenneiturkoppurin verpur um summarið, spinnur hann sær eina silkipípu undir ein stein nær vatni ella millum leggir í mýrimosa. Niðari endi á pípuni er opin og stendur uppi yvir vatninum. Skuldi vandi gjørst á, loypur eiturkoppurin við spunahylkinum niður gjøgnum pípuna og beint á bláman.

Spunahylkini hjá ránseiturkoppum eru hvít, og eiturkoppurin hevur við eiturklóm og beinum gjørt tey rund. Spunahylkini eru at síggja sum hvítir blettir í mýrimosanum.

Kvenndýrið situr niðri í silkipípuni, har passaliga vátligt er, og heldur spunahylkið upp ímóti sólini. Sum eggini búnast, veksur tað um hylkið. Tá ið ungarnir eru klaktir, seta teir seg gleivandi innan um pípuna, og teir halda sær væl við smáum klóm.

So skifta teir ham og skríða upp á bakið á mammuni. Teir krøkja seg upp í hárini á bakinum á henni, ella spinna teir træðrir at festa við.

Árið eftir eru teir kynsbúnir.

### Svartaklukkan

Svartaklukka situr og krógvar seg undir steinum og í síðum mosa. Henni dámar best myrkur, og tí kemur hon fram um náttina at leita sær eftir føði.

Svartaklukka er morlitt ella svørt og skyggir í fleiri litum. Hon hevur stór samansett eygu og heldur langar kampar á høvdinum. Muðurin er sterkur bitmunnur, sum er í fleiri pørtum. Fyrst er yvirvørr og undirvørr, og millum varrarnar eru 2 yvirkjaftar at knasa matin sundur við, og so 2 undirkjaftar at halda matinum við.

Svartaklukka hevur 2 tjúkkar framveingir. Undir teimum liggja 2 glærir afturveingir. Hon flýgur við afturveingjunum. Flestu svartaklukkur fáa tó ikki flogið, tí bara ein slintra er eftir av afturveingjunum. Viðhvørt eru framveingirnir næstan vaksnir saman.

Svartaklukkur eru ránakendar. Tær taka flogkykt, reyðmaðkar og sniglar. Eisini leggjast tær á túsundbein, sum tær bíta sundur við bitmunninum. Aðrar skaða plantur.

Fleiri smærri sløg gera nógv um seg í húsum, har tey eru í matinum, gatiklukkan í viðinum og aðrar í urtagarðinum.

Tvær aðrar klukkur eru vanligar at síggja í bø og haga: bláklukka og trantklukka.

### Bláklukkan

Bláklukkur, ið eisini eru at síggja í húsum, eru 2-3 cm langar. Tær flestu fáa ikki flogið. Har sum tær eru, er ein súrligur deymur. Tá ið onkur roynir at taka tær, kemur væta úr endanum á afturkroppinum. Soleiðis verja tær seg.

Bláklukka er størsta klukkan her hjá okkum.

### Trantklukkan

16 sløg eru funnin. Trantklukka etur plantur. Svarta trantklukkan er vanlig at síggja. Fram úr høvdinum stendur langur trantur.

Oyrnatrantklukka hevur heldur stuttan, breiðan trant. Endin á trantinum er átøkur oyrum. Tvey sløg kunnu vera í húsum. Annað slagið er 9-11 mm langt, svart við gulari hæring í støðum á framveingjunum. Hitt slagið er 6-9 mm langt og er grámorreytt.

Oyrnatrantklukka etur plantur. Ormveran livir á plantum, serliga jarðberjaplantuni. Henda klukkan er serliga kend í vakstrarhúsum. Um dagin krógvar hon seg í moldini við planturnar, og um náttina koma tær upp í planturnar at eta tær.

Sermerkt er, at tær seta seg á blaðrond og eta smá, bogin innvik í blaðrondina.

## Grátt undir steini

Grátt undir steini – eisini nevnt grádýr – sært tú, tá ið tú lyftir einum steini ella træpetti, ið liggur í svørðinum ella í fjøruni. Dýrið er avlangt og heldur breiðvaksið og hevur nógv bein.

Kroppurin er skiftur í høvd, framkropp og afturkropp. Kroppurin er í liðum. Framkroppurin 7 lið og afturkroppurin 6 lið. Á høvdinum eru 2 eygu, 2 langir og 2 stuttir kampar at føla við.

Beinini á afturkroppinum eru vaksin sum pláta. Nøkur av hesum beinum virka sum lunga og nøkur sum táknur, og tí kann grátt undir steini vera bæði uppi á landi og í vatni.

Hetta kemur sera væl við, tí ofta fyllast holurnar, har tað er, við vatni. Gráum undir steini dámar best at vera, har vátligt er. Tí sæst tað eisini í síðum grasi og mosa, men aloftast undir steinum og tílíkum, sum verjir fyri sólskini.

Dýrið má altíð hava vatn uttan á kroppinum og beinunum, tí á beinunum, sum tað andar við, er heilt tunn húð.

Viðhvørt villast grá undir steini inn í hús; men er turt og heitt inni, torna tey upp um nakrar tímar.

Grátt undir steini etur blandaða føði og serliga plantuleivdir. Tó etur tað eisini smákykt, og onkuntíð eta tey hvørt annað. Dømi eru um, at dýrið gnagar frukt og grønmeti, sum goymd verða í vátligum kjallara.

Kvenndýrið verpur egg niður í ein posa, sum tað hevur undir framkroppinum, og í posanum verða ungarnir klaktir.

Grátt undir steini er eitt krabbadýr, sum heldur til uppi á landi.

## Túsundbeinið

Túsundbein er morreytt og langvaksið dýr, sum vit finna undir leysum steinum, í síðum mosa og í flaggørðum.

Kroppurin er skiftur í nógv lið, og 2 beinpør eru á hvørjum liði uttan tí fremsta og aftasta. Fremsta liðið er høvdið, og á høvdinum eru 2 stuttir og klænir kampar, nógv smá eygu hvørjumegin og veikur bitmuður.

Túsundbein hevur tó ikki so nógv bein, sum navnið sigur. Í mesta lagi 250 bein.

Hyggja vit gjølla at túsundbeini, so síggja vit ein dimman blett hvørjumegin á liðini. Bletturin er ein pokna, sum letur úr evni, ið deymar. Túsundbein verjir seg við hesum evni, tá ið tað er í vanda, og so fær tað frið. Álopsdýrið troystar sær ikki at koma nærri.

Túsundbein andar gjøgnum smá hol, sum eru á liðunum.

Tí dámar best at vera, har myrkt og vátligt er. Órógva vit dýrið, roynir tað at sleppa sær til rýmingar; men tað skríður seint. Av tí at túsundbein er so seinført og hevur ikki amboð at veiða við, fær tað ikki veitt sær onnur dýr at eta. Tað noyðist at eta plantulutir. Tað plagar at gnaga seg inn í epli.

Kvenndýrið ger sær fyrst kullu í svørðin og verpur so eggini niður í kulluna. So ger tað ein dunga av skarni og tí deymandi evninum niður yvir kulluna.

Ovast á dunganum ger kvenndýrið eitt lítið hol, átøkt skorsteini. Ungarnir verða klaktir í kulluni, og tá ið teir eru klaktir, liva teir av dunganum.

## Skolopendarin

Skolopendari líkist túsundbeini; men hann er flatari og hevur longri kampar. Bara tvey bein eru á hvørjum liði.

Skolopendari er 4-6 cm langur og gulmorreyður.

Hann er saman við túsundbeini undir steinum, niðurdotnum bløðum, leysum træbørki, í grótgørðum og í mold.

Skolopendari firnast ljós og kemur fram um náttina at veiða. Hann hevur sterkar, eitrandi bitkløur, sum hann drepur flogkykt, ormar og sniglar við.

Um várið verpur hann eggini í holur í jørðini.

Serliga um várið og heystið kunnu skolopendarar villast inn í hús

á nátt. Kanska, tá ið grimdarregn hevur noytt teir upp úr jørðini. Teir koma inn gjøgnum rivur ella frárenning.

Inni trívast teir ikki, tá ið har er turt og heitt. Teir doyggja skjótt. Men er vátligt inni, kunnu teir liva leingi og verða verandi.

Skolopendari ger ongan skaða inni og heldur seg frá fólki. Verður hann ørkymlaður í myrkri, er hann sum lýsandi tráður, tí tá kemur lýsandi væta úr honum.

# Flogkykt í bøi og haga

### Heygsmaðurin

Stendur tú eitt summarkvøld við vatn ella fjøru, sært tú ofta eitt morlitt flogkykt, ið líkist nógv firvaldi, fara flagsandi.

Heygsmaður hevur langar kampar og 4 stórar og glærar veingir. Veingirnir liggja aftureftir og fjala afturkroppin. Bæði á veingjunum og kroppinum eru smá, fín hár, sum eru gullig ella morlitt. Litirnir á heygsmonnum eru kámir, og teir falla væl saman við staðnum, har hann situr. Hann plagar at sita á følnaðum bløðum á eini plantu.

Framveingirnir eru smalri, afturveingirnir breiðari. Tá ið heygsmaður situr, heldur hann teimum sum eini møn.

Um dagin situr heygsmaður í onkrari plantu og hvílir seg; men um kvøldið fer hann á flog at leita sær eftir føði. Á vegnum steðgar hann á við blómur at vita, um nakar hunangur er. Annars sýgur hann døgg og sevju. Tá ið hann var ormvera í vatni, hevði hann sterkan bitmunn, men nú eru yvirvørr og undirvørr vaksnar til eitt nev, ella tungu, sum hann sleikir hunang við.

Heygsmaður livir stutt. Tí má hann skunda sær at verpa. Hann livir 3-4 dagar, eftir tað at hann er komin úr reivinum.

Summi kvenndýr fara niður í vatn at verpa. Onnur seta bara afturendan niður í vatnskorpuna og verpa, og upp aftur onnur verpa á landi. Eggini verða fest at steini ella plantu.

Um 14 dagar koma ormverur úr eggjunum. Tær fara beinan vegin at leita sær eftir tilfari til húsa. Skjótt er húsin gjørdur, og ormverurnar, nevndar áartrøll, skríða inn í húsan.

### Admirálurin

Ein vakran sólskinsdag í juli-september sært tú brádliga litfagran firvald koma flagsandi og seta seg á grótgarðin, har sólin sær á. Er eitt fleyr, og skýggj kemur fyri sólina, so er hesin vakri skapningurin komin.

Admirálurin er vakur firvaldur: hvítur, svartur og reyður.

Kroppurin er skiftur í tríggjar partar: høvd, bringu og afturkropp. Á høvdinum eru tveir langir kampar. Hann tevjar við teimum. Hann

hevur tvey stór eygu, sum eru sett saman av fleiri túsund ørsmáum eygum.

Muðurin er vaksin til langt nev. Admirálurin sýgur døgg og hunang við nevinum. Tá ið hann ikki sýgur, liggur nevið snúgvað saman uppi undir høvdinum. Firvaldar fáa sogið hunang úr djúpum blómum.

Admirálar eru ofta í stórum flokkum. Summi ár eru nógvir at síggja. Tá hevur sunnanstormur tikið teir av meginlandinum og borið teir um havið til Føroya.

Admirálurin livir ofta veturin av. Hann situr í skotum og úthúsum púra stillur, meðan veturin líður. Frost bítur ikki á hesum dúrandi dýri.

Ein vakran várdag vaknar admirálurin aftur, flýgur nakrar dagar í sólskininum og doyr.

Eina ferð á ævini verpur kvenndýrið fleiri hundrað egg og klínir tey at notu. Fyrsta ormverurnar eru klaktar, leggjast tær á notuna at eta. Ormveran skiftir ham fleiri ferðir. Røsk er hon at eta; men ta tíðina, hon skiftir ham, leskar hon ikki.

Tá ið ormveran er fullvaksin, verður hon til reivveru. Vanliga liggur reivveran still niðri í moldini, og hon etur einki. Næsta summar, tá ið sólin vermir, verður reivveran til firvald við samanballaðum veingjum. Tá ið 20 minuttir eru farnir, breiðast teir út, og admirálurin fer á flog.

Admirálur nørist í Føroyum, men slagið doyr helst út 1-2 ár seinni.

Admirálur er í ættini, sum eitur álvaættin. Trý onnur sløg í ættini eru funnin í Føroyum; men tey trívast ikki í veðurlagi okkara. Tey eita: tistilfirvaldur, notufirvaldur og páfirvaldur.

Hesi fýra sløgini flúgva bara um dagin og helst í góðveðri og sól. Teir eru tí ógviliga sjónskir summarfuglar; men fuglarnir geva teimum frið.

## Huldan

Fert tú tær eitt vakurt kvøld á hásumri út í bøin og niðan á undirhagan, fram í lýggjan dal, so ber á, at tú sært stóran, ljósan firvald sveima beint framman fyri tær.

Tú hyggur til viks og sært tveir aðrar morlittar firvaldar. Aftan fyri teg sært tú nakrar gular og gráar. Nú eru huldurnar komnar upp úr grasinum at dansa. Tær eru ikki ólíkar heygsmanni.

Kalldýrið er minni enn kvenndýrið. Tær fáu hvítu huldurnar, tú sært, eru kalldýr. Tey síggjast langan veg eina summarnátt, og er tí lættligt hjá fugli at taka tey.

Tað er bæði sjaldsamt og trølsligt at síggja nógvar huldur dansa eina summarnátt. Hvítar, morlittar, gular sveima tær aftur og fram og í kring í sama staði uppi yvir grasinum. Dansurin endar við, at tvær og tvær mala hvør um aðra, skjótari og skjótari, og sum eitt skot hvørva allar í grasinum.

Kvenndýrið verpur fleiri hundrað egg, sum eru smá og svørt. Ormveran er á ymsum planturótum um veturin.

### Veingjagulin

Veingjaguli hevur fagurgular afturveingir við myrkamorreyðari rond tvørturum. Framveingirnir eru morreyðir. Hann hevur heldur tjúkkan kropp, og veingirnir eru heldur smáir.

Veingjaguli flýgur títt og skjótt. Um dagin sæst hann serliga í fornum bøi.

### Porfýrfuglurin

Porfýrfuglur er reyðmorreyður ella morreyður við ljósum strikum og blettum. Hann sæst móti skýming í juni-juli, tá ið sólin hevur skinið heit um dagin.

Porfýrfuglur sæst, har lyngur veksur, tí ormveran er á heiðalyngi og klokkulyngi.

### Gammafirvaldurin

Gammafirvaldur hevur morreyðar og gráar framveingir við gull-skyggjandi bletti. Afturveingirnir eru ljósamorreyðir og dimmir um rondina.

Hann flýgur um dagin í juni-september. Ormveran er vanlig í urtagørðum. Hon er ljósagrøn við gulum rípum.

Um heystið leggjast ormverurnar á salat og aðrar sevjumiklar fruktir.

### Ormafirvaldurin

Ormafirvaldur kann vera morreyður, gulmorreyður ella reyðmorreyður, og hann er ringur at síggja á flogi í haganum.

Hann flýgur bæði um dagin og í skýming frá 15. juli til 15. september. Ormafirvaldur amast upp á hús, har ljós skínur út gjøgnum vindeygað.

Um heystið, áðrenn firvaldarnir doyggja, verpa teir eggini í jørðina. Longu sama heystið verða omverurnar klaktar. Tær eru morreyðar, gulligar ella grønligar og hava gular rípur aftur og fram og 3 cm langar.

Tær sita á grasrótunum frá heystinum til fyrst í mai; men tá leggjast tær á grasið og oyða tað. Tá kann verða so galið, at menn tala um sonn ormaár.

Ormveran verður nevnd grasormurin.

### Mýggjabitin

Í lýveðri um summarið og várið síggja vit stórar flokkar av mýggjabitum sveima við hús, uppi yvir vøtnum og vátlendi. Mýggjabitar eru ymiskir á liti, summir svartir, aðrir gráir ella grønligir.

Mýggjabiti líkist flugu. Hann hevur tveir smalar veingir og long, kløn bein. Eyðkent, tá ið hann situr, at hann heldur fremstu beinunum uppfrá. Kalldýrið kennist frá kvenndýrinum, tí tað hevur lodnar kampar.

Flestir mýggjabitar liva stutt. Teir eta kanska ongantíð. Fuglar eta nógvar mýggjabitar. Mýggjabitar verpa eggini á vatnskorpuna í áum, vøtnum og tjørnum.

Hesir mýggjabitarnir hvørki stinga ella súgva blóð, bara sveima og dansa. Men nær í ætt við teir eru mýggjabitar, sum bæði stinga og súgva blóð. Teir eru svartir og smáir og hava stórar, glærar veingir.

### Blómuflugan

Úti í sólini sært tú ofta svartar og gular flugur hanga stillar og surra í luftini, taka so brádliga dik á seg og flúgva burtur. Tær eru ofta at síggja í blómum í skjólurtaættini.

Blómufluga er stór fluga, hevur stórt høvd, og eyguni á kallfluguni fjala næstan høvdið. Kamparnir eru heldur langir og veingirnir stórir.

Blómuflugurnar liva av hunangi og blómusáði. Tær sáa tí nógvar blómur. Ormverurnar eru á bløðum, har tær serliga taka nógvar blaðlýs.

**Froðusprettan**

Froðuspretta kann vera ymisk á liti, grámorreyð ella sprøklut. Afturbeinini eru long lopbein, og loypur hon langt. Ikki er hon meira enn 1/2 cm long.

Froðusprettur eru vanligar í øllum gróðri um summarið.

Froðuspretta verpur á plantur, serliga undir børkin á trækendum plantum, og tá ið líður á várið eru ormverurnar á ymsum urtakendum plantum, har tær gera froðu uttan um seg. Froðan er úr skarni og vætu undan ormveruni.

Tá ið dropin er nóg stórur, blæsur hon hann upp í froðu. Meðan ormveran situr í froðuni, skiftir hon ham fleiri ferðir. Froðan verjir, so at ormveran tornar ikki upp, og eisini fyri øðrum dýrum.

Ormverurnar leggjast vanliga á ungar sprotar, og teir farast illa, tá ið tær súgva.

**Grindalokkurin**

Grindalokkur sæst bæði í bøi og haga flúgva lágt yvir svørðinum.

Hann hevur long, kløn bein og tveir smalar veingir.

Grindalokkur verpur eggini, har ið vátt er, ella í tjarnir og hyljar, har verða eggini klakt. Í Føroyum eru 11 sløg. Tað vanligasta slagið verpur, har ið vátt er, har verða eggini klakt. Ormveran er á grasrótum og kann viðhvørt skaða grasvøksturin. Ormveran er í jørðini allan veturin, og hon legst ikki á grasrøturnar fyrr enn um várið.

Ormveran eitur nigil. Í juli verður nigilin til reivveru og stutt eftir til morlittan grindalokk, sum neyvan etur ta stuttu tíð, hann livir.

# Fuglur í bøi og haga

## Tjaldrið

Tjaldur sært tú mangan vaða niðri í fjøruni, í áum og í bønum. Um kvøldið sita stórir flokkar í fjøruni og við vøtn. Tjaldrið er eisini vanligt á heiðunum, har tað ger sær reiður í eyr ella turran svørð.

Tjaldrið er svartbøkut. Tað hevur langt, beint, reytt nev. Beinini eru korkareyð. Tjaldrið er lívligur fuglur, sum ofta letur sítt vælkenda lát: Klipp! Klipp!

Tá ið tjaldrið kemur um grækarismessu, liggja ofta fannir í fjøllunum, og stórkavi kann falla. Kemur nógv brim eisini, fáa tjøldrini einki at eta. Kulda tola tey, men ikki hungur.

Fyrsta mánaðin síggja vit lítlar ella stórar flokkar í fjøruni og haganum. Tey standa og hvíla seg á steinum; men so vaða tey á sandinum at leita sær eftir føði. Hesa tíðina eru tey spøk, standa ofta still og skimast, og so leita tey aftur. Tjaldur leitar mest eftir skeljadýrum. Skeljadýr eru hørð. Tí má tjaldur, áðrenn tað fær matin úr, standa og høgga tey sundur við nevinum. Eru skeljarnar tunnar, gongst væl; men eru tær tjúkkar, so dugir tjaldur at høgga, har skeljarnar koma saman, tí har eru tær tynstar.

Meðan tjaldur vaðar, leitar tað eisini eftir krabbadýrum, kúvingum og fjørumaðki, sum liggur í sandinum. Tá ið tjaldur leitar eftir fjørumaðki, gongur tað spakuliga og stingur nevið eitt sindur niður í sandin. Fyrsta tað hevur varnast fjørumaðkin, rennir tað alt nevið niður í sandin, dregur hann upp og etur.

Í fjøruni eru eisini flogkykt og ormverur, serliga í taranum. Tá leitar tað dúgliga í tara og øðrum plantum og millum smásteinar. Flestu dýrini, sum tjaldrið etur, eru ikki so góð føði. Tí má tjaldrið eta so nógv. Vit vita um tjaldur, sum hevur etið um 200 fjørumaðkar í senn, og at tað í ein dag kann eta um 300 rípuskeljar.

Í haganum taka tjøldrini sær ormverur og maðkar.

Tá ið eitt sindur er liðið frá, ber á, at eitt tjaldur – kanska fleiri – toyggir høvdið fram úr sær og bendir nevið niðurá. Meðan tað stendur soleiðis, hoyrir tú langdrigin lát. Løtu seinni fer tað at renna í kring. Tá ið hini tjøldrini síggja henda løgna atburð, koma fleiri

rennandi til tjaldrið og fara eisini at gera soleiðis. Øll fara at renna og láta.

Viðhvørt endar hesin leikur líka brádliga, sum hann byrjaði. Tjøldrini spjaðast. Onkuntíð taka tey seg saman í ring, og øll standa við nevinum inn ímóti miðjuni. Meðan tey standa soleiðis, ber á, at bøga og steggi hvørva seg burtur. Nú eru tey komin saman. Seinni koma tey aftur upp í ringin og fara at láta sum øll hini.

Bøga og steggi halda bara saman í bútíðini. Á hvørjum ári koma tey aftur í bústaðin, har tey vóru árið fyri, og ofta koma bæði saman aftur í leikinum. Vanliga halda bøga og steggi saman í fleiri ár.

Tá ið bøgan og steggin eru komin saman, fer steggin at leita eftir bústaði, har tey skulu fara at byggja reiður. Um summarmála eru tjøldrini meira tigandi. Tá eru tey farin at reiðrast. Tá ið steggin hevur funnið reiðurstaðin, flýgur hann av og á uppiyvir og letur hart. Soleiðis sigur hann øðrum tjøldrum, at hann hevur kannað sær reiðurstað.

So ber á, at aðrir steggjar koma á reiðurstaðin hjá honum; men teir verða jagstraðir burtur. Við strektum hálsi og nevinum bendum niðurá kemur steggin rennandi ímóti honum. Men fremmandi steggin ger seg eisini øgiligan. Umsíðir hittast báðir. Tá plaga teir bara at renna lið um lið eina løtu. So snara teir sær á og renna hvør í sína ætt látandi hart. Hini tjøldrini nærindis hoyra hesi gellandi látini og øsast upp. Tey koma rennandi til báðar steggjarnar, men brátt endar alt í leiki.

Eisini kann bera á, tá ið tveir steggjar klandrast um reiðurstað, at annar so brádliga fer at pikka niður í lendið, sum leitar hann eftir føði. Men svangur er hann ikki. Hann bara letst so, tí hann veit ikki, um hann skal berjast ella fara undan.

Meðan tveir steggjar berjast, kann eisini bera á, at annar stingur nevið undir vongin og letst, sum hann svevur. Nei, tá veit hann ikki, hvat hann skal gera.

Steggin og bøgan leita bæði eftir hóskandi reiðurstaði. Meðan bæði ganga og leita, kann bera á, at annað brádliga flekir seg niður og setur velið upp í rógv. So snarar tað sær á og sparkar eyrin aftan undan sær. Soleiðis kemur kulla niður í svørðin ella eyrin.

Í flestum førum ger steggin kullurnar. Tey gera ofta nógvar kullur. So fær bøgan sær eina kullu til reiður. Á botninum í reiðrinum liggja smásteinar, og uttan um reiðrið smásteinar og kanska skeljar. Eggini og reiðrið falla væl saman við lendið.

Bøgan verpur vanliga 3, viðhvørt 4. Eggini eru morlitt við dimmum blettum. Bøgan og steggin skiftast um at bøla, men bøgan mest. Steggin situr tá stutt frá reiðrinum og skimast, um onkur skuldi komið. Bæði tvey verja væl egg og ungar, tá ið kráka ella kjógvi herjar á. Kemur fólk at reiðrinum, plaga bæði at látast at vera særd. Soleiðis lokka tey fólk burtur frá reiðinum.

Tá ið 2 1/2 vika er farin, koma ungarnir út. Teir eru grásprøklutir á bakinum við svørtum og morgulum strikum. Skjótt duga teir at renna í kring, men mugu javnan koma til foreldrini at verma seg, tí dúnið lívir ikki væl. Skuldu teir komið í vanda, flekja teir seg niður á heiðina og eru ringir at síggja.

Tá ið foreldrini bera ungunum t.d. ein orm, leggja tey ormin fyri pisuna, har hon stendur. So vísa tey á ormin við nevinum. Pisan pikkar á nevið á foreldrunum og verður so var við ormin.

Bøgan og steggin mata ungarnar í 3 vikur, men tá skulu teir vera sjálvbjargnir. Nakrar fáar vikur gamlir eru ungarnir floygdir. Tá fara øll av reiðurstaðnum oman í fjøruna. Ungarnir kennast frá foreldrunum, tí nevið á ungunum er dimmmorreytt fremst um, og beinini eru grá.

Um miðjan september síggja vit aftur tjaldursflokkar. Nú rýma tey gomlu tjøldrini. Ungarnir rýma seinni. Kortini verða nakrir ungar eftir um veturin, og summir komast undan vetrinum.

Einaferð vórðu tjaldursungar merktir í Føroyum. Teir vórðu fingnir aftur í Onglandi og Fraklandi.

### Spógvin

Spógvi hoyrist láta í bøi og haga seinast í apríl og í mai. Hann er ein tann vanligasti búfuglurin í haganum.

Spógvi sæst væl í haganum, tó at hann er morreyður á liti og hevur dimmar teinar eftir høvdinum. Nevið er dimt, langt og bogið niðurá og beinini long og blágrá. Látið er bæði neggjandi og bríkslandi og er eyðkent í haganum.

Spógvi eigur á heiði nærindis mýrilendi. Reiðrið ger hann sær í svørðin og klæðir tað innan við mosa ella deyðagrasi. Seint í mai verpur bøgan vanliga 4 egg, sum eru gulgrønliga morreyð við dimmum blettum. Eggini eru stór, og væl dugir spógvin at leggja tey saman.

Fyrst leggur hann trý egg tætt hvørt at øðrum við spíska endanum móti miðjuni, og so leggur hann tað fjórða eggið omaná.

Kemur fólk at reiðrinum, og bøgan bølir, sker steggin í lát, og bøgan skundar sær av. Hon antin rennur ella flýgur tætt yvir svørðinum. Bøgan og steggin skiftast um at bøla, og væl verja tey egg og ungar.

Liggur bøgan á, situr steggin á túgvu ella steini og skimast. Skuldi likka ella ravnur komið, verða tey harðliga álopin, og tey mugu lúta fyri steggjanum.

Ungarnir eru bleikgulir og hava myrkamorreyðar prikkar. Teir hava avlangan, svartan ring um høvdið. Ungarnir duga væl at krógva seg. Tá ið fólk kemur, láta foreldrini, og ungarnir flekja seg niður á jørðina og eru ringir at síggja.

Bæði taka sær av ungunum, til teir eru sjálvbjargnir um mánað gamlir. Meðan tey eru á bústaðnum, eta tey ber, plantur, flogkykt, ormar og sniglar. Tá ið ungarnir eru floygdir, koma teir í bøin við foreldrunum. Seinast í august rýma fyrst teir gomlu spógvarnir. Ungarnir eitt sindur seinni. Tó sæst onkur ungi eftir mikkjalsmessu. Spógvar flyta í lítlum flokkum, nakrir fáir saman, og ofta saman við tangspógva, suður til Vesturafrika at vera um veturin.

**Mýrisnípan**

Mýrisnípa heldur seg á mýrum og øðrum bleytlendi, har hon situr væl fjald í síðum grasi.

Hon er á støðd sum stari; men nevið er óvanliga langt. Beinini eru grønlig, førlig og stutt. Á bakinum er mýrisnípa morlitt og hevur fýra gular teinar eftir bakinum og ein gulan tein á høvdinum.

Mýrisnípa kemur til Føroya um summarmála.

Hon situr væl fjald í síðum grasi. Kemur tú tætt at henni, rýkur hon upp, flýgur høgt upp í loft, snittandi til viks. Tá sker hon í hás á málinum: rræsh!

Brádliga stoytir hon sær á høvdið. Við spílaðum veli og hálvkreptum veingjum fer hon í ein boga niðureftir. Tá hoyrist neggjandi ljóð úr velfjaðrunum.

Mýrisnípa tekur sær føði við nevinum, sum er langt og ógvuliga viðkvæmt. Hon verður var við ormar og onnur smákykt, tá ið hon stingur nevið niður í bleytlendið, og væl kemur tað henni við, at hon hevur stór eygu, sum sita so aftarlaga á høvdinum, at hon sær aftur um seg.

Mýrisnípan tekur sær bøkk ella túgvu í bleytlendinum við síðum

grasi á, og har ger hon reiðrið, sum er ringt at finna. Hon verpur 4 egg og viðhvørt 3. Bøgan liggur á og bølir. Tá ið um leið 3 vikur eru farnar, koma ungarnir út.

Ungarnir fara úr reiðrinum, fyrsta teir eru turrir. Bæði bøgan og steggin mata teir fyrstu tvær vikurnar. Ein mánað gamlir eru teir floygdir.

Móti heysti koma mýrisnípurnar í gravir í bønum, og hevur mangur verið skakkur, tá ið mýrisnípa brádliga støkkur undan fótinum.

Frá mikkjalsmessu og út um veturnætur fara mýrisnípurnar at fækkast. Tær flyta til Írlands og har á leið. Er veturin hampiliga lýggjur, verða nakrar eftir hjá okkum; men tú sært tær neyvan uttan í kava, tí at tær krógva seg.

**Lógvin**

Lógv heldur seg á lyngheiðum og snøggum graslendi. Stundum situr hon uppi á túgvu ella steini og skimast.

Lógv er kýpin fuglur við stuttum, svørtum nevi. Í bútíðini er hon gullglitrandi á bakinum, svørt undir búkinum upp eftir barkanum og út á vangarnar. Hvítur jaðari er uttan um tað svarta.

Lógvin kemur til Føroya um mariumessu.

Fyrsta láirnar eru komnar, flúgva tær í smáum flokkum nakrar dagar, áðrenn tær fara at leita sær eftir bústaði. Lógv er so kvik og kimilig. Hon flýgur harðliga, og hon hevur langar veingir.

Allan dagin titar hon aftur og fram eftir heiðunum og leitar sær eftir ormum og smákyktum. Viðhvørt etur hon ber.

Reiðrið er lítil kulla, sum er klætt innan við mosa og mjúkum grasi. Tíðliga í mai verpur bøgan 4 morlitt egg við dimmum blettum. Bøgan og steggin skiftast um at bøla. Kemur fólk at reiðrinum, flýgur lógvin av, áðrenn hon er sædd. Ofta fylgir hon fólkinum langt á veg eymliga látandi: Sø-dý ella bara dýh!

Tá ið stívliga 3 vikur eru farnar, eru eggini klakt. Ungarnir eru glitrandi gulir á bakinum við svørtum blettum og strikum. Vit síggja teir sjaldan, tí teir duga so væl at finna sær stað, har torført er at skilja teir frá lendinum. Mánað gamlir eru ungarnir floygdir.

Tá ið summarið fer at halla, taka láirnar seg saman í flokkar. Teimum fellur væl nýslignan bø. Leingi eru tær um at flyta, og tær seinastu fara í november. Vanliga eru tær í Írlandi og sunnarlaga í Vesturevropa um veturin.

Tó síggja vit nógvar láir uppi í fjøllunum enn, og vit hoyra tær láta. Hetta eru íslendskar láir, sum steðga á í Føroyum, áðrenn tær fara suðureftir.

## Kvørkveggjan

Kvørkveggja sæst mest um veturin og várið við garðaløg og í urtagørðum. Síðan grannskógur var niðursettur, er kvørkveggja farin at eiga har. Serliga um sólarris og sólsetur situr hon ofta uppi í trætoppunum og letur.

Kvørkveggja er heldur størri enn stari. Steggin er kolsvartur og hevur fagurgult nev. Bøgan er myrkamorreyð og ofta ljósari undir øsinum og um bringuna. Velið er langt og stendur uppeftir. Av tí at hon hevur longri vel enn stari, so bæði flýgur og situr hon øðrvísi enn stari. Ein munur teirra millum er eisini, at stari rennur, og kvørkveggja hoppar.

Áður var kvørkveggja ein styggur skógarfuglur, men er spakari nú og eigur eisini, har lítil skógarvøkstur er, og á víðum lendi. Kvørkveggja er varin fuglur, og henni dámar væl at krógva seg. Tó at tú hoyrir hana skavast, mást tú leita leingi, áðrenn tú finnur hana.

Kvørkveggja heldur til niðri á jørðini, har hon leitar sær eftir føði. Serliga í bútíðini sært tú hana hoppa millum runnarnar, hon stendur nógv framyvir við spílaðum veli. Brádliga kastar hon høvdið afturá og skøvir følnað bløð og strá til viks, og hon er knøpp at taka flogkyktini, hon kemur framá. Kvørkveggja tekur ymiss flogkykt, eiturkoppar, sniglar og reyðmaðkar úr svørðinum. Í urtagørðum nápar hon sær okkurt berið eisini.

Um veturin er mangan svangligt hjá teimum fuglum, sum flyta ikki frá okkum. Eisini kvørkveggjur leita sær at húsum í kava. Lívga vit tær eitt sindur tá, verða tær spakar.

Kvørkveggja eigur mest uppi í trøum í viðarlundum og urtagørðum. Hon eigur eisini á slættum lendi og í bergi. Vanliga liggur reiðrið ímillum greinarnar. Ofta byggir bøgan tað, men steggin ber henni onkuntíð tilfar. Reiðrið er stórt og gjørt úr greinapettum, bløðum og mold. Tað er klætt innan við fínum stráum ella turrum grasi.

Bøgan verpur 4-6 grágrøn egg, sum eru tætt sett við dimmum blettum. Bøgan bølir mest. Onkuntíð skiftast tó hon og steggin. Tá ið um leið tvær vikur eru farnar, koma ungarnir út, og teir eru næstan tvær vikur í reiðrinum. Ungarnir eru blindir teir fyrstu dagarnar.

Hesar dagarnar rætta teir nevið beint upp í loft, tá ið foreldrini koma við mati. Men tá ið ungarnir hava fingið eygu, rætta teir nevið upp ímóti foreldrunum.

Vit síggja flestar kvørkveggjur tíðliga um várið, seinast í mars og í apríl, og seint um heystið, í september, men flestar í november. Hetta eru fremmandar kvørkveggjur, sum flyta úr øðrum londum og steðga á í Føroyum. Nakrar teirra eru her hjá okkum um veturin saman við teimum, sum støðast her.

**Óðinshanin**

Óðinshani sæst í bønum seinast í mars mánaði. Mest sæst hann á nýtaðaðum bøi, tí at har eru flestu maðkarnir og ormarnir. Í fyrstuni eru teir fáir saman, men seinni í stórum flokkum. Óðinshana líkar væl stóran urtagarð, tí um summarið etur hann mest ber og fræ.

Óðinshani er heldur minni enn stari og er átøkur honum á flogi; men óðinshani hevur spískari veingir, heldur longri vel og flýgur tí øðrvísi. Á bakinum er hann dimmmorreyður, ljósur undir búkinum, bringan gullig, og so er hann reyður um liðirnar.

Kvørkveggja og óðinshani láta yndisliga. Vakrast láta tey, tá ið tey reiðrast, og tá ið ungarnir eru útkomnir.

Óðinshani tekur ymiss smádýr í svørðinum, men um veturin mest ber.

Reiðrið er vanliga uppi í trøum, men eisini í grasi á sløttum lendi. Bøgan verpur um miðjan apríl og fyrst í mai 5 grágrøn, morblettut egg. Óðinshani er skógarfuglur. Síðan viðarlundirnar her hjá okkum komu fyri seg, hava nøkur pør átt.

Óðinshanarnir, sum higar koma um heystið, eru bæði úr Íslandi og av meginlandinum. Hesir óðinshanarnir flyta í september og langt út í november.

Um várið koma teir norður aftur og steðga á í Føroyum, í mars og út í mai, men serliga í apríl.

**Títlingurin**

Títlingur er í haganum, har bleytar fløtur ella mýrar eru um vegir. Í mai koma stundum flokkar í bøin. Títlingi dámar væl at sita og skimast, har gott útsýni er.

Títlingur er minni og klænvaksnari enn grátítlingur. Hann er

ljósagráur á bakinum og skyggir grønligur. Um bringuna er hann gulhvítur. Hann er tætt settur við dimmum blettum, sum á kápuni renna saman í rípu.

Títlingur kemur fyrst í apríl, og skjótt fer hann at leita sær eftir bústaði. Ofta sæst hann sita á bakka ella steini. Hann flýgur látandi á skák upp í loft við veikum veingjarsløgum, dósar so spakuliga niður aftur við hevjaðum veingjum. Tær ytstu velfjaðrarnar eru hvítar, og tær síggjast væl, tá ið hann flýgur.

Føðin er mest smá flogkykt og onnur smádýr, og viðhvørt etur hann fræ.

Títlingurin eigur í ymsum lendi á víðilsi, serliga har, sum ikki er grýtut ella turrligt. Reiðrið ger hann sær undir bøkkum, og tað liggur væl fjalt undir síðum grasi, so tað sæst ikki, og heldur ikki regnar í tað. Seinnapartin í apríl hava summi pør longu vorpið.

Títlingurin fer ikki av reiðrinum, fyrr enn tú kemur tætt at tí. Eggini eru 5-7, og tey eru morlitt við dimmum blettum. Alt summarið eru ungarnir at síggja saman við foreldrunum, og tey mata ungarnar leingi, eftir tað at teir eru floygdir.

Tíðliga um heystið – í september – flúgva títlingarnir í flokkum til londini um Miðjarðarhav.

**Jarðarkonan**

Jarðarkona heldur til við áir og vøtn, har hon krógvar seg í síðum grasi.

Hon er á støðd sum kvørkveggja, smidliga vaksin, morflekkut á bakinum, gráblá um øsið og bringuna, men liðirnar rondutar, hvítar og svartar. Jarðarkona hevur heldur langt nev, sum er eitt sindur bogið. Nevið er reydligt og beinini morlitt og førlig.

Jarðarkona sæst ikki nógv um dagin. Kemur hon upp úr grasinum, so er hon ógvuliga varin. Hon er styggur fuglur, sum gongur væl fjald fram við áum og vøtnum. Tú sært hana bara nøkur sekund í senn, og so tekur hon til beins.

Sjaldan flýgur jarðarkona. Hon flýgur ikki væl, men fer flagsandi av stað við beinunum hangandi niður undan sær. Lágt og tungliga flýgur hon bara stutt strekki.

Jarðarkona dugir bæði at svimja og kava. Hon er eyðkend, tá ið hon svimur: nikkar við høvdinum og veipar við velinum, ið stendur upp í rógv.

Í skýming og myrkri fer hon at leita sær eftir føði. Hon tekur flogkykt, ormar, sniglar, fræ og plantulutir.

Jarðarkona sæst mest um heystið og veturin, september-november. Men tá ber ikki so væl til at krógva seg. Mangan hava fólk funnið jarðarkonu í kjallara og úthúsi, har tær smúgva sær inn, tá ið kuldin kemur.

Jarðarkona eigur ikki í Føroyum, men kemur bara higar í flytitíðini. Annars er reiðrið á vátlendi við áir og vøtn, og tað liggur krógvað í síðum grasi. Bøgan verpur 6-12 gullig egg við reydligum og gráligum blettum.

**Akurskrittið**

Akurskritt var ikki óvanligur fuglur fyrr á døgum á góðum bøi, men nú sæst tað sjaldan. Akurskritt er fuglur, tú oftari hoyrir enn sært. Tað letur, sum tá ið tú strýkur fingurin eftir einum kambi: skritt-skritt!

Akurskritt letur mest um náttina. Um dagin situr tað væl fjalt í gróðrinum í bøi og ong. Men skuldi tú sæð fuglin, so sært tú lítlan, morlittan fugl við illreyðum veingjum. Nevið er stutt og breitt og ljósagulmorreytt sum beinini. Framtærnar eru langar, men baktáin stutt.

Akurskritt er ikki á vátum lendi sum jarðarkona. Tað er eyðkent, tá ið tað fer rennandi í grasinum, høvdið bent niðurá og toygt frameftir. Akurskritt fer sjaldan á flog. Flogið er vinglandi og tungligt og lágt; men tað flýgur bara stutt strekki. Beinini hanga niður undan fuglinum.

Akurskritt er onkuntíð funnið á reiðri. Bøgan verpur 7-10 gulhvít egg við morreyðum og gráum blettum. Dúnungin er kolsvartur. Akurskritt sæst á bústaðnum frá miðjum apríl og út á heystið.

Tað flytur til tropiska Afrika og er har um veturin.

**Krákan**

Kráka sæst ofta í bønum, har hon rótar eftir møðkum, ormum og sniglum. Hon ger seg inn á aðrar fuglar, men ikki so nógv smáfuglar, tí at teir eiga í trongari holu. Flestir fuglar í haganum fáa rikið krákuna burtur.

Kráka er svørt um høvd, bringu, veingir og vel. Annars er hon grá. Nevið og beinini eru svørt.

Henni fellur væl at vera á víðum lendi, men dugir væl at laga seg eftir øðrum lendi. Krákur halda seg mest í flokkum, og væl semjast tær sínámillum. Hon er vitugur og varin fuglur, so hon er skjót at sleppa sær til rýmingar, tá ið fólk nærkast.

Kráka leitar allastaðni eftir føði. Onkustaðni finnur hon deyð dýr, kanska deyðseyða, ræstan ella feskan fisk, ymist rusk. Aðrastaðni ormar, maðkar og flogkykt. Beinini eru ófør at grópa ymiss smádýr upp úr jørðini. Nevið bæði stórt og sterkt. Meðan hon leitar eftir smádýrum, finnur hon korn, epli ella onkrar plantulutir. Kráka er kortini ikki nøgd við hetta, tí hon rænir bæði egg og ungar úr reiðrum.

Viðhvørt kunnu tvær krákur taka seg saman at veiða føði. Tá ið tær koma at haruholu, setur onnur seg at lokka haruna út, og so tekur hin ungarnar. So kunnu fleiri krákur leggjast á vaksna haru, sum má lúta fyri teimum. Men kráka drepur tó ikki frísk smálomb.

Niðri í fjøruni liggja krákurnar og róta í upplegginum, og har finna tær bæði skeljadýr, fisk og krabbadýr. Fær hon ikki brotið skeljarnar, flýgur hon upp í loft við skeljadýrinum og sleppir tí niður, har stórir steinar eru beint niðri undir. Soleiðis plagar hon eisini at gera við rottur og mýs. Tá ið berini í haganum eru búgvin, legst hon at eta tey. Skalið og fræið spýr hon uppaftur.

Í februar-mars leita krákur saman í pør og fara at leita eftir reiðurstaði. Teimum dámar ikki, at aðrar krákur eiga ov nær, og tær verða jagstraðar burtur. Kráka eigur í homrum og gjáum. Seinast í apríl er reiðrið liðugt. Tað er gjørt úr lyngi og grøsum og klætt innan við ull.

Eftir krossmessu verpur bøgan 5-6 grøn egg. Bøgan bølir einsamøll í 14 dagar. Nýklaktir ungar eru naknir og blindir, so teir mugu verða í reiðrinum í 4-5 vikur. Bæði bøgan og steggin mata ungarnar. Tá ið ungarnir eru smáir, fáa teir hálvsodnaðan mat. Foreldrini klíggja matin upp úr sær og geva ungunum. Men tá ið teir eru vorðnir størri og hava fingið bæði dún og fjaðrar, fáa teir eisini annan mat.

Mánað gamlir krákuungar eru so frægir, at teir kunnu fara úr reiðrinum. Fyrstu tíðina ansa foreldrini væl eftir teimum, og eisini at teir fáa nóg mikið at eta. Tá ið ungarnir eru sjálvbjargnir, kasta foreldrini teir.

Um heystið og veturin koma krákurnar saman aftur í flokkar. Næstan allan dagin leita tær eftir føði, og um kvøldið koma tær saman aftur og seta seg onkustaðni, og eyðkend, grovlig krráa hoyrast. Kráka er støðufuglur.

Um várið tynnast flokkarnir aftur, tí tá taka tær seg saman í pør – bøga og steggi.

**Ravnurin**

Ravnur leitar sær eftir føði í fjøru, bø og haga. Hann eigur í bergi og gjáum, har ringt er at sleppa at.

Ravnur er stórur, svartur fuglur. Svarti búnin skyggir bæði bláur og grønligur. Tá ið hann flýgur, sæst væl, at hann er størri enn kráka og hevur bæði størri nev og størri høvd enn hon. Velið er avrundað; men tær ytstu velfjaðrarnar eru 3-4 cm styttri enn tær í miðjum velinum. Nev og føtur eru svørt. Fjaðrarnar undir øsinum eru langar.

Ravnur hevur vakurt flog, men ikki so lætt flog sum kráka; men ravnur sveimar meira. Hann er styggur, vitugur og varin fuglur, sum altíð sleppir sær til rýmingar, tá ið fólk nærkast. Málið í honum er gorrandi: Krumm! Krumm! Men ravnur dugir ikki bara at krumma, tí hann dugir nógv onnur ljóð eisini. Summir ravnar duga eitt sindur at tosa.

Føðina vinnur hann sær allastaðni. Summstaðni er hann illa lýddur, tí hann kann vera naskur í høgum og bjørgum. Í bønum tekur hann epli, ormar, maðkar og sniglar, og í haganum rænir hann egg og ungar. Gott hevur hann snoddið, so hann tevjar deyðseyð langan veg. Hann kann leggjast á nýlembd, lívveik lomb ella hjálparleysan seyð og seta á hann. Skuldi hann lagt á smálomb, so eydnast tað sjaldan, tí ærnar verja lombini. Tvílemba er verst fyri, tí hon fær ikki so væl vart bæði lombini. Mýs og rottur og harur tekur hann eisini, og ofta liggja rottuhalar uttan um reiðrið hjá honum.

Ravnur fer eisini oman í fjøruna, og har finnur hann slógv og ymiss skeljadýr. Fær hann ikki høgt hol á skeljarnar, flýgur hann upp í loft við teimum og sleppir teimum niður, so at tær brotna. Ofta liggur hann og rótar í ymsum ruski úr húshaldi.

Lomvigi verður so ræddur, at hann rýmir av rókini, tá ið hann hoyrir ravnin krunka. So leggur ravnurin á eggini at drekka. Lundin rýmir eisini; men onkuntíð herjar lundin á hann, krøkir seg við klónum í bringuna á honum, og nevið um barkan á honum. Tá verður harður bardagi. Báðir detta á sjógvin; men tá ger lundin av við ravnin.

Reiðrið er á kletti í meitilbergi og í ógongdum gjáum langt burtur frá fólki. Stórt er reiðrið, gjørt úr hvannjólum, beinum, tonglum og

træsprekum, laðað upp sum ein túgva. Tað verður tett við lyngi og mosa. Innan er tað klætt við ull og fjaðrum.

Seint í februar og fyrst í mars verpur hann 4-5 grøn egg við morreyðum prikkum. Bøgan liggur á og bølir 3 ½ viku. Meðan hon bølir, matar steggin hana. Fyrstu tíðina eftir tað, at eggini eru klakt, liggur bøgan á og vermir ungarnar, tí kuldi og kavi kunnu vera.

Seinni mata bæði ungarnar. Um hetta mundið kann seyðurin vera illa fyri og lombini lívveik. Tá ið so 6 vikur eru farnar, fara ungarnir úr reiðrinum. Ravnapar heldur saman alt lívið og kemur aftur í sama reiður ár undan ári. Ungarnir eru saman við foreldrunum væl eftir tað, at teir eru floygdir.

Seinni um summarið sláa ungfuglarnir seg saman á staði, har nógv føði er, og krummini hoyrast langan veg. Ravnur er støðufuglur.

**Bládúgvan**

Bládúgva kemur í bøin um heystið og sæst í bønum út á várið. Sær hon nýsáað rótakál, legst hon í tað at pikka fræ.

Bládúgva er ljósagráblá á bakinum. Hálsurin skyggir av grønum og reyðum fjaðrum. Tvørtur um veingirnar ganga tvær svartar rendur. Velrondin er svørt, og beinini eru korkareyð.

Tama dúgvan og bládúgvan eru sama slag. Tama kann vera litt sum bládúgvan, men kann bera allar litir, ljós, sprøklut og heilt dimm, tí dúgvur eru so nógv blandaðar mangastaðni. Tama dúgvan kurrar sum bládúgva.

Nevið er klæntrasligt og bólgnað við rótina. Bara nevsoddurin sjálvur er horn. Dúgva orkar ikki at bróta fræ við nevinum, so hon má svølgja fræið niður í kjósina, har tað blotnar. Bládúgva drekkur nógv vatn. Hon setur nevið niður í vatnið, letur nasagluggarnar aftur og sýgur vatnið niður í seg. Bládúgva vinnur sær føði við mannabústað, korn og fræ.

Bládúgvu fellur væl at vera nær sjógvi. Hon eigur helst á rókum, í holum og urðum. Um mariumessu fer steggin at savna saman turr strá, sýruleggir, fjaðrar og ull. Men reiðrið ger bøgan. Hon verpur 2 hvít egg. Bøgan og steggin skiftast um at liggja á.

Um náttina situr steggin stutt frá reiðrinum til reiðar at verja, um skuldi verið neyðugt. Steggin tolir ikki, at aðrar dúgvur nærkast reiðrinum. Tá ið 16-18 dagar eru farnir, koma ungarnir út, og tá ið teir eru mánað gamlir, verpur bøgan aðru ferð.

Dúgva hevur breiðar, spískar veingir og flýgur skjótt. Hon kveistrar harðliga við veingjunum, tá ið hon fer á flog.

Frá fyrndartíð hava fólk havt tamar dúgvur, sum ættaðar eru undan bládúgvu. Best kendar eru brævdúgvurnar. Eingilskar brævdúgvur eru sæddar í Føroyum.

Fleiri aðrar dúgvur eru at síggja í Føroyum. Mánadúgva kann eiga og eisini turkadúgva; men holudúgva og turtildúgva eru bara sæddar.

# Dýr í áum og vøtnum

### Dafnian

Allastaðni í vatni, lítlum og stórum vøtnum og hyljum, eru nógvar dafniur. Summstaðni so nógvar, at vatnið litkast.

Uttan um kroppin er skel, sum aftan endar við hala, ið liggur upp undir kroppin. Dafnia í móru kemur fram á tann hátt, at hon skjýtur halan út og inn.

Á høvdinum er vanliga eitt stórt, liðiligt eyga og tvinnir kampar. Dafnia svimur við teimum stóru kampunum, og hon svimur eisini við beinunum.

Dafnia etur evarslítlar plantur og evarslítil dýr. Summar dafniur eru ránakendar. Tær hava stór og sterk bein at taka dýr við. Dafna er millum 1/4 og 5 mm langar.

### Vatnloppan

Vatnloppa er 1-10 mm long. Hon hevur eitt eyga og langar kampar at svimja við. Undir kroppinum eru 4-6 pør av beinum, sum eru tvígreind. Hon svimur eisini við beinunum.

Halin er tvígreindur á endanum og hevur bustir.

Okkurt slagið er grønligt og 1-2 mm langt. Hetta slagið sæst svimja millum vatnplantur ella bara í vatni. Aðrar eru í móruni og eru 1 mm langar.

### Bivormurin

Bivormur er hærdur um allan kroppin. Hann svimur við bivhárunum. Bivormur er bæði í rennandi vatni, í vøtnum, støðuhyljum og hyljum, sum torna upp um summarið. Bivormar kunnu koma í brunnar og síggjast í kranavatni.

Bivormar eru næstan altíð at síggja um várið og tíðliga um summarið. Um heystið og veturin hava teir gjørt ein húsa uttan um seg og liggja antin í móru ella frystari jørð.

Bivormar hava altíð eina slímrípu við sær, teir glíða í slími í vatninum. Slímið hjálpir teimum væl, tá ið teir skulu fara niður eftir eini

plantu niður á botn. Slímið verjir hann fyri øðrum dýrum. Tey fáa vaml av tí. Serliga iglaormverur, sum royna at bora seg inn í bivorm, verða eitraðar og doyvast av slíminum.

Verða nógvir bivormar koyrdir í eina skál, savnast teir tímegin, har mest ljós er, tí teir hava eygnablettir, sum skilja millum ljós og myrkur.

Bivormar eta smádýr, og grammir eru teir; men teir tola at svølta fleiri vikur. Munn hava teir, men einki got, so ósodnaður matur fer útaftur gjøgnum munnin.

**Ertnaskelin**

Ertnaskel er á botni í móruni, har einki veksur. Hon er vanliga ljós og 2-3 mm. Sera nógv er til av henni á grunnum vatni.

Er ov lítið súrevni, kemur hon upp av botni og skríður upp eftir vatnplantum, ella skríða tær uppi undir vatnskorpuni.

**Hundaiglan**

Hundaigla hevur súgskál framman og aftan á kroppinum. Hon dugir væl at svimja og svimur skjótt.

Hundaigla spannar eisini á botni. Hon festir súgskálina aftan, strekkir kroppin nógv, festir súgskálina framman og sleppir so aftan.

Hon er ránakend og tekur mýggjabitaormverur, vatnloppur og onnur smádýr.

Ofta sært tú tær sita í hópi undir steini í áum, hyljum og vøtnum.

Hundaigla sýgur ikki blóð sum nógvar iglur. Bróskigla sýgur blóð. Hon borar nevið í dýr og sýgur.

**Mýggjabitaormveran**

Í støðuhyljum, tjørnum og vøtnum sært tú eina reyða ormveru, 1-1½ cm long, millum vatnplanturnar. Summar grava seg inn í plant-urnar. Ormveran sæst eisini í áum, har hon situr niðri á botni í húsa.

Hyggur tú gjølla at ormveruni, so sært tú, at hon er skift í 12 lið og hevur morlitt høvd.

Ormveran ger sær húsan sjálv, og har inni situr hon og letur við kroppinum, so at vatnið alsamt streymar gjøgnum húsan. Úr vatn-inum fær hon luft og føði, sum er smádýr og fúnaðar plantur.

Um várið og tíðliga um summarið verður ormveran til reivveru. Stutt eftir svimur reivveran úr húsanum og flotnar upp á vatnskorpuna, har reivið rivnar, og mýggjabiti kemur burturúr.

Vanliga verða allar reivverurnar í sama vatni ella somu tjørn klaktar sama dag, og tá síggja vit mýggjabitaflokkar kykna upp úr vatninum.

Eftir á tjørnini og vatninum flóta bara tey tómu reivini, ið seinni reka á land.

Ormverurnar hjá mýggjabita eru týdningarmikil føði hjá fiskum, sum liva í vatni.

**Heygsmannaormveran**

Liggur tú og hyggur niður í eina grunna tjørn, ein hyl í ánni, so ber á, at tú brádliga sært nøkur strápetti, sum fara til gongu eftir botninum ella fara klívandi upp í eina vatnplantu. Bæði høvur og bein eru á strápettunum.

Hetta er ein húsi, og í honum býr ormveran hjá heygsmanni, sum nevnd verður áartrøll. Húsin er gjørdur úr ymsum tilfari, steinpirrum og strápettum til dømis.

Ormveran heftir húsan saman við silkitræðrum, sum koma úr kertlum á undirvørrini. Húsan ger hon við beinunum.

Lítið hol er á afturendanum á húsanum. Tekur tú eitt strá og stingur tað inn í hetta holið, so fært tú ormveruna at koma út. Men tekur tú húsan upp úr vatninum, smýgur ormveran sær skjótt niður í húsan.

Eina løtu seinni kagar hon varliga uppaftur.

Tak sjóneyku og kanna ormveruna. Høvdið er bent niður og hevur sterkar kjálkar, og við kjálkunum bítur hon plantulutir sundur at eta. Hon etur eisini smádýr.

Ormveran hevur krókar á afturkroppinum at halda sær við inni í húsanum. Á afturkroppinum eru glitrandi træðrir. Hetta eru táknur at anda við.

Áðrenn ormvera verður til reivveru, festir hon húsan at einum steini ella einari plantu. So spinnur hon eitt lok fyri tann opna endan á húsanum, men ger sær smá hol í lokið, tí annars fær hon ikki andað.

Tá ið nakrir dagar eru farnir, verður hon til reivveru og fær sterkari kjálkar. Nú fara 14 dagar. So bítur reivveran hol á húsan og fer

upp í vatnskorpuna, har hon svimur við beinunum, til hon finnur okkurt at seta seg á.

Síðan rivnar reivið: ein heygsmaður smoyggir seg burtur úr reivinum, veingirnir breiðast út, og heygsmaðurin flýgur inn á land.

**Vatnkálvurin**

Vatnkálvur er í torveygum, støðuhyljum og tjørnum. Har jagstrar hann ymiss smádýr millum vatnplanturnar. Vatnkálvur svimur skjótt, so torført er hjá smádýrum at sleppa undan honum. Um kvøldið flúgva vatnkálvar úr einum hyli í annan.

Vatnkálvur er dimmur, stórur og tungur. Men kimiligur er hann í vatninum, tí kroppurin er vaksin sum bátur. Kroppurin er slættur og húðin bæði smegin og hál, tí feitt liggur uttan á henni.

Sum onnur skordýr hevur hann 6 bein. Fremstu beinini eru heldur stutt, og tey eru góð at taka fongin við. Miðbeinini eru eisini heldur stutt. Við teimum stýrir hann. Aftastu beinini eru long og fløt, og hár eru hvørjumegin á fótinum. Vatnkálvur rør við teimum.

Tó at vatnkálvur næstan altíð er í vatni, so hevur hann veingir, tveir tjúkkar, dimmar framveingir. Inni undir teimum eru 2 tunnir, glærir afturveingir samanlagdir. Í holuni millum afturkroppin og framveingirnar stendur luft, sum vatnkálvur tekur, tá ið hann skal anda. Á øllum liðum á afturkroppinum eru smá hol at anda ígjøgnum. Andiholini ganga inn á nógvar luftpípur, sum liggja í kroppinum.

Vatnkálvur tekur afturkroppin aftur og fram, og soleiðis verður luftin pumpað inn og út gjøgnum andiholini.

Ofta heldur vatnkálvur uppat at svimja, og tá flotnar hann upp í vatnskorpuna. Meðan hann hongur í vatnskorpuni, lyftir hann afturveingirnar eitt sindur upp. Nú stendur endin á afturkroppinum uppúr eisini. Luftin kemur so í holuna oman fyri andiholini.

Tá ið hann hevur fingið nýggja luft inn í allar luftpípurnar, fer hann aftur at svimja. Onkuntíð gongst illa at sleppa niður, tí hann hevur tikið ov nógva luft inn undir afturveingirnar. So má hann trýsta nakrar luftbløðrur úr sær.

Um summarið liggur væl fyri at fáa luft. Legst ísur um veturin, kann verða torførari. Áðrenn veturin kemur, flýgur hann og leitar sær eftir tjørn ella hyli, har nógvar plantur vaksa.

Vatnkálvur fær ikki farið á flog av vatninum. Tí má hann fara upp í plantur ella upp á stein, og so fer hann á flog haðani.

Eru nógvar plantur í tjørnini, úrskilja tær $O_2$ alla tíðina. Luftbløðrur fara upp undir ísin. Vatnkálvurin fer upp undir ísin eftir luftbløðrunum og fær sær nýggja luft undir afturveingirnar.

Bæði summar og vetur veiðir hann sær føði, ormverur, flogkykt og onnur smádýr. Hann tevjar seg at fonginum við kampunum. Hann tekur fongin við fremstu beinunum, ber hann at munninum og klippir hann sundur við kjálkunum, sum eru sterkir og hvassir.

Kvenndýrið verpur um várið. Tað krøkir seg upp í eina vatnplantu, sker smá hol í plantuna við verpibroddinum, sum er á afturkroppinum. So verpur hon eitt egg í hvørt holið. Um 2-3 mánaðir verða ormverurnar klaktar.

Í mai kemur ormvera úr egginum. Hon svimur beinan vegin, men ikki so skjótt. Viðhvørt slær hon við afturkroppinum, og tá fýkur hon av stað. Ormveran má javnan koma upp á vatnskorpuna at anda.

Tá ið ormveran er komin upp, heftir hon seg at vatnskorpuni við tveimum smáum finnum, sum sita á afturkroppinum. Millum finnurnar eru nøkur andihol. Meðan hon hongur í vatnskorpuni, sýgur hon nýggja luft inn í kroppin og blæsur ta gomlu luftina út.

Uppi undir vatnskorpuni eru smádýrini, hon veiðir til matna. Tá ið hon rakar við eitt dýr, slær hon nakrar ferðir við afturkroppinum og fýkur av stað. Kanska er tað ein maðkapirra. Hon rennir kjálkarnar í hana og pumpar eiturvætu í hana gjøgnum kjálkarnar. Skjótt dovnar maðkapirran av eitrinum.

Men hon fær ikki skorið fongin sundur og heldur ikki etið hann við munninum, tí munnin fær hon ikki upp.

So sprænir hon vætu í fiskin, so hann loysist upp. Tá ið allur fiskurin uttan skræðan er sum súpan, sýgur ormveran súpanina gjøgnum kjálkarnar. Ormveran er ógvuliga ránakend og leggur á øll dýr í vatni, og matarlysturin er góður eisini.

Ormveran veksur skjótt. Í juli er hon fullvaksin og fer upp á land. Hon leitar sær eftir leysari mold, grevur seg niður og ger sær eina holu, áðrenn hon verður til reivveru. Tá ið nakrar vikur eru farnar, rivnar reivið, og vatnkálvurin kemur úr. Í fyrstuni er hann ljósur á liti, men skjótt verður hann dimmur sum aðrir fullvaksnir vatnkálvar.

Brátt fer vatnkálvurin á flog, flýgur í tjørn, hyl ella vatn og verður verandi har.

# Fiskur í áum og vøtnum

## Állurin

Állur kemur av langari ferð inn at strondini. Summir støðast har, men flestir fara niðan í áir, tjarnir og vøtn.

Állur er langur og klænur fiskur. Ryggfjøður, stertur og gotfjøður eru samanvaksin. Hann hevur ikki búkfjaðrar, hann hevur ógvuliga smáa roðslu og hála skræðu. Állur livir leingi eftir tað, at hann er tikin upp úr vatninum, tí nógv slipa liggur uttan á skræðuni, og slipan verjir fyri turki. So hevur hann eisini so smáar táknarivur, at táknurnar torna ikki.

Állur gýtir yviri í Sargassohavinum á 500 metra dýpi. Stutt eftir doyggja teir vaksnu állarnir. Hetta er um heystið. Ungarnir verða síðan klaktir um várið. Fyrsta summarið halda teir til á staðnum, har teir eru klaktir. Síðan reka ungarnir við Golfstreyminum eystur ímóti Evropa strondum. Henda ferðin varir í 2-3 ár.

Á ferðini verða ungarnir longri og klænri og klárir sum glar. Nú eita teir glarállar, og tað sæst ígjøgnum teir. Tá ið teir eru komnir inn at strondini, fara teir niður á botn; har svimja teir í taranum og leita sær eftir føði, har góðar føðivánir eru og sjógvurin ikki so saltur.

Summir állar finna sær fjørð ella vík, har á rennur út, og liggja so har í ósavatninum. Aðrir fara niðan í áir, tjarnir og vøtn. Ferðin niðan gjøgnum áir er møðsom, tí mangt kann forða álli. Tá ið teir koma at stórum fossum, fara teir bara upp á land og liða seg so niðan um fossin; men hetta er um náttina, tá ið døgg er fallin á grasið.

Út á summarið verður glarállur gulmorreyður fram við bakinum og um liðirnar og ljósur undir búkinum. Nú er hann ikki longur glærur, nú líkist hann vaksnum álli. Hann eitur nú gulállur. Hesa tíðina etur hann nógv, serliga ormverur undan flogkyktum, smá krabbadýr, men eisini ormar og iglur. Finnur gulállur leið í ánni, har góðar føðivánir eru, verður hann har. Aðrir állar halda á at svimja, til teir koma í tjørn ella vatn.

Tá ið gulállur umsíðir hevur funnið sær leið, livir hann sum teir vaksnu állarnir. Tá ið eitt ár er farið, er hann um 18 cm langur. Litirnir verða sjónskari. Hann verður grámorreyður á bakinum, men um liðirnar og undir búkinum er hann enn gulligur. Enn hevur hann

ikki havt roðslu, men nú fer hon at vaksa. Í húðini hevur hann nógvar smáar kertlar, sum slipa kemur úr. Slipan verjir hann, so sníkar ikki fáa lagt seg uttan um hann. Hon ger eisini, at hann hálur smýgur sær betur eftir botninum.

Tá ið állur er í vatni, etur og svevur hann næstan alla tíðina. Um dagin krógvar hann seg í móruni ella millum tættar vatnplantur; men um náttina veiðir hann. Állur svimur ikki sum aðrir fiskar, tí fjaðrarnar eru samanvaksnar. Hann buktar seg fram við kroppinum.

Alla tíðina kannar hann, um okkurt etandi er at fáa. Framman fyri eyguni hevur hann sum aðrir fiskar tevgluggar, sum hann tevjar við. Hann tevjar, hvat er í vatninum, bæði føði ella onnur dýr.

Bara um summarið eru állar grammir at leita sær eftir føði. Um heystið, tá ið vatnið kólnar, veiðir hann ikki longur, men fer at leita sær eftir staði, har hann fær krógvað seg um veturin. Ofta grevur hann seg niður í móru á botninum, og har liggur hann, til várið kemur.

Tá ið gulállur hevur verið í vatni 6-10 ár, broytist hann á útsjónd. Høvdið verður smalri og spískari, og samstundis vaksa eyguni. Á bakinum verður hann dimmari og silvurblankur um liðirnar og undir búkinum. Nú eitur hann blankállur og er fullvaksin. Rognállurin er 50-100 cm langur, men silállurin ikki meira enn 50 cm.

Øll árini, állurin hevur verið í vatni, hevur hann veitt um náttina, men nú gevst hann. Eina myrka nátt í september-oktober kemur ferðahugur í blankállin. Hann fer at svimja oman aftur á sjógvin. Um dagin grevur hann seg niður ella liggur millum plantur, men um náttina heldur hann fram ferðini oman á sjógvin. Sum hann svam niðan, svimur hann oman.

Á ferðini oman kemur hann fram við dýrum, sum hann plagdi at veiða, men nú skeitir hann ikki at teimum. Hann bara tevjar tey, men nemur tey ikki, tí nú fær hann ikki etið. Tarmarnir eru so við og við svunnir burtur. Nú livir hann bara av fitini í kroppinum.

Onkuntíð um heystið er hann komin oman á sjógvin. Ferðin yvir í Sargassohavið er byrjað, og henda ferðin er enn ein gáta. Kanska kemur hann vegin fram í mars, tá ið hann skal gýta. Ella kemur hann seinni, og so gýtir hann árið eftir. Tá ið hann so hevur gýtt, doyr hann – kanska.

## Sjósílið

Sjósíl kemur niðan í áirnar at gýta. Tað er tó meginpartin av lívinum í sjógvi, men eggini verða ikki klakt uttan í vatni.

Sjósíl og áarsíl og vatnasíl eru sama slagið, men tey eru tríggjar greinir. Tá ið sjósíl er í sjógvi, er tað silvurblankt við dimmum prikkum.

Um heystið, í august-oktober, er gýtingartíðin. Í hesi tíðini er rognsílið gráligt og silsílið morlitt. Tey stóru sílini fáa føran krók á undirkjaftin.

Rognsílið gýtir eggini á botnin, har eyrur, sandur og smásteinar eru. So verða eyrur og sandur kveistrað niður yvir eggini. Eggini eru 1000-2000 fyri hvørt kilo, ið sjósílið vigar. Um várið verða tey klakt.

Tey sjósílini, ið hava gýtt, eru flekkutari enn tey, sum hava ikki gýtt. Sjósílið gýtir fleiri ferðir á ævi síni.

Ynglið nevna vit maðkapirra, og tær eru í ánni í upp í 5 ár. Maðkapirrurnar vaksa seinni í ánni enn í sjónum, tí í sjónum er meiri æti.

Tá ið sjósílið er komið oman á sjógvin, heldur tað seg stutt frá strondini. Størstu sjósíl viga um 10 kg og verða um ein metur long.

## Sílið

Síl eru í áum, løkum og vøtnum. Áarsíl fara ikki úr ánni, har tey eru klakt. Vatnasíl fara úr ánni oman í vatnið, men koma niðan aftur í ánna at gýta.

Síl er smidliga vaksið og hevur eina ryggfjøður og eina gotfjøður. Sporlið er vøddamikið og sterturin stórur. Millum ryggfjøður og stert er lítil feittfjøður. Búkfjaðrarnar sita undir ryggfjøðurini.

Áarsíl er gráligt og hevur reyðar prikkar við hvítum ringi uttanum. Tað verður ikki silvurblankt. Skal áarsíl trívast í lítlum áum og løkjum, má gott vatn alsamt renna í hylin og úr hylinum, har sílið er. Annars fær sílið ikki andað og doyr.

Í størri áum liggur áarsílið undir bøkkum og steinum, har tað tekur ta føði, sum streymurin ber við sær. Ofta sæst áarsíl springa upp úr vatninum eftir flogkyktum, sum flúgva lágt ella detta niður á vatnskorpuna.

Áarsíl verður sjaldan størri enn 15-20 cm, og tá er tað ført fyri at gýta. Áarsílið gýtir í juli-august. Tað gýtir færri og smærri egg enn vatnasílið. Tey smæstu áarsílini gýta ikki fleiri enn 10 egg.

Vatnasíl verða størri enn áarsíl. Ójavnt er, nær tey gýta, tí vøtn og hiti valdast. Vanliga gýta tey í oktober-november. Í vøtnum á lágum haga eru sílini 2-3 ára gomul, tá ið tey gýta; men í vøtnum á høgum haga eru tey 8-10 ára gomul. Sílini í vøtnum á høgum haga verða bæði størri og eldri, tí tey eru færri, og har eru tí betri føðivánir. Hesi sílini gýta 100-300 egg í senn.

Í høgum vøtnum eru ofta verri møguleikar at gýta. Smásteinar og eyrur skulu vera, tí sílini gýta niður á botnin. Fyrst gera tey foyrur í eyrin og kveistra burtur. Tá ið eggini eru gýtt, verður eyrur kveistraður niðuryvir. Uppi millum fjalla í vøtnum er eisini nógvur fuglur, sum veiðir síl. Tí komast fá síl undan, og færri verða tey um føðina í vatninum.

Áðrenn vatnasíl gýta, skifta tey lit. Nógv fara niðan í ánna, sum rennur í vatnið, at gýta. Men ikki øll fara. Summi gýta við vatnstrondina.

Síl eta flogkykt, ormverur, smá krabbadýr, sniglar, ormar og rogn bæði hjá sær sjálvum og øðrum. Stór síl kunnu eta smærri síl, og tey vaksa skjótari enn tey, sum bara eta smádýr. Føðivánirnar eru umráðandi, hvussu stór sílini verða.

Í summum vøtnum eru nógv og smá síl, tí har er ikki nóg mikið av føði. Hesi sílini vaksa seint eisini. Í øðrum vøtnum eru færri og størri síl. Vatnasíl viga vanliga um $^1/_2$ kg. Sum dømi skulu vit nevna, at síl, sum fingið varð í Leitisvatni, var 37 cm og var 10 ára gamalt; men síl úr Fjallavatni 37 cm var bara 8 ára gamalt.

Síl í Mjáuvøtnum verða bæði størri og vaksa skjótari enn í Leynavatni.

## Bleikjan

Bleikja var upprunaliga bara í Leynavatni. Hildið verður, at bleikjan í fyrndartíð helt til um føroysku strendurnar og kom niðan í áir at gýta, soleiðis sum hon ger í artiskum londum.

Bleikjan í Leynavatni fer ikki á sjógv nú.

Hon gýtir um mánaðarskiftið oktober mest við vatnstrondina og vanliga, har áin rennur út í vatnið. Eggini eru fá og stór, og tey eru klakt um 10 vikur, tá ið hitin er hóskandi.

Bleikjan í Leynavatni verður 17-20 cm, tí føðivánirnar har eru ikki so góðar. Bleikja er slept í vøtn í Vestmanna og Kaldbak, og har verður hon 38 cm.

**Laksurin**

Laksur líkist sjósíli, men er smidligari vaksin og er klænri um stertin. Tekur tú laks og eyrriðu upp eftir stertinum, kennir tú munin. Tú fært betur lyft laksi upp eftir stertinum.

Ta tíðina, laksur er í sjónum, er hann silvurblankur.

Laksur kemur inn at strondini tíðliga um summarið. Hann kemur uttan av havi niðan í áirnar at gýta, serliga í Saksun, Leynum, Skálafirði og á Sandi. Hann gýtir seinast í oktober og tíðliga í november.

Tá ið gýtingartíðin kemur, skiftir laksurin lit og verður gulligur og morreyður og dimmflekkutur. Undirkjafturin á sillaksi fær vanliga krók. Laksur gýtir á botnin, har eyrur og sandur eru.

Rognlaksurin ger foyru niður í eyrin og kveistrar eyr og sand og smásteinar burtur. Hann grevur við gronini og kveistrar burtur við sporlinum. So gýtir rognlaksurin eggini niður í foyruna. Hann gýtir 1200 egg fyri hvørt kilo, hann vigar. So kemur sillaksurin at gýta sil niður á eggini, og rognlaksurin kveistrar sand niðuryvir.

Eggini verða klakt um várið. Ta fyrstu tíðina eta ungarnir eggjareyðan, sum teir hava í einum posa undir búkinum. Tá ið eggjareyðin er etin, koma maðkapirrurnar upp at svimja og veiða sær føði úr vatninum. Maðkapirrurnar eru vanliga 3 ár í vatni, áðrenn tær fara á sjógvin.

Næstan allur laksur kemur aftur í sama stað, har hann er klaktur, annað árið eftir. Tá ið laksur hevur gýtt, er hann illa fyri, og nógvir doyggja. Teir eru so ússaligir, at teir reka við streyminum í ánni við stertinum fyri; men tá ið teir eru komnir út á hav, fitna teir aftur.

Fyrr var ikki laksur í Føroyum. Um 1950 fóru teir at sleppa nýklaktum laksayngli úr Íslandi í áir og vøtn, og hetta eydnaðist væl. Laksur verður um 1½ m langur og vigar tá um 40 kg.

# Aling

## Klekistøð

Við Áir verður gjørt eitt arbeiði, sum miðar eftir at fáa gott tilfar til alingina í Føroyum. Hetta arbeiðið verður nevnt kynbótararbeiði.

Støðin við Áir fær lívfisk úr Skopun, og úr lívfiskinum fær støðin rogn. Lívfiskur er ymiskur, og tí er umráðandi at halda tær ymsu ættirnar fyri seg.

Burtur úr lívfiskinum verða t.d. 700 ymisk búgv løgd í serligar rogneindir, sum eisini verða nevndar rognabúgv. Lagdar verða so nógvar rogneindir, tí at tað verður lagt upp fyri, um óhapp skuldu verið ella sjúkur leggjast á.

Í okkara dømi verða 700 rogneindir nýttar til kynbótararbeiðið. Hesar 700 rogneindir liggja so inni, til tær eru klaktar, og so verður farið at geva ynglinum at eta. Yngulin úr teimum bestu rognunum verður – um 400 búgv – fluttur í eina høll, ið innrættað er soleiðis, at hvørt búgvið gongur fyri seg í einum kari.

Tá ið fiskurin verður sleptur í kør, og farið verður at geva honum at eta, eru um leið ein millión yngul. Tá ið yngulin hevur gingið í hesum kørum og enn atskildur einar 2-3 mánaðir, verður farið at merkja hann við serligum merkjum, sum lisin kunnu verða aftaná.

Nú er fiskurin veruliga skrásettur, og hvørt einstakt búgv kenst aftur. Eftir tað at fiskurin er merktur, verður hann blandaður saman.

Á Fiskaaling við Áir verða um leið 15.000 fiskar merktir, og teir eru ætlaðir at fara til Skopunar. Men eisini aðrir 15.000 fiskar verða merktir. Teir eru ætlaðir at fara út á vanligar alistøðir á sjónum.

Teir fiskarnir, sum fara til Skopunar, verða gangandi á støðini har, til teir verða til lívfisk.

Hinir 15.000 fiskarnir, sum merktir eru og ætlaðir at fara út á alistøðirnar, verða sleptir út á 3 alistøðir, tá ið teir eru vorðnir til smolt várið eftir. 5000 fiskar til hvørja. Á hesum alistøðum verða teir havdir, til teir eru um leið 1$^1/_2$ ára gamlir og viga 4-5 kg í miðal.

Tá ið fiskarnir hava gingið í sjógvi frá mai og fram til august-september árið eftir, verða teir tiknir. Tá koma fólk av Fiskaaling við Áir at skráseta teir, og tey nýta serlig tól og serliga tøkni, soleiðis at tey vita, hvørjir teir ymsu fiskarnir eru.

Nú verður eisini skrásett, hvussu fiskurin er skapaður, hvussu litt skræðan er, hvussu stórur hann er, um fiskurin er kynsførur, og hvussu feitur hann er. Umframt hesar eginleikar verður enn ein eginleiki skrásettur: mótstøðuførið.

Mótstøðuførið merkir, hvussu væl búgvini standa seg fyri sjúkum. Greiði verða fingið á hesum á tann hátt, at yngul verða beinan vegin merkt um várið og flogin til Noregs, har tey verða slept saman við fiski, sum hevur tvær ymiskar sjúkur: eina sjúku, sum bakteria hevur elvt, og eina sjúku, ið virus hevur elvt.

Síðan verður skrásett í Noregi, hvussu tey ymisku búgvini standa seg fyri hesum sjúkum. Eftir hesi skráseting fæst at vita um hvørt einstakt búgvið, og hvussu tað stendur seg.

Fiskurin av sama uppruna sum hesin er fluttur til Skopunar á alistøðina har. Burtur úr hesum fiskum verða lívfiskarnir tiknir. Um leið 3000 rognfiskar fáast av støðini í Skopun og eisini fjølmangir silfiskar; men bara umleið 1000 silfiskar verða nýttir.

Av hesum 3000 rognfiskunum, sum Fiskaaling við Áir fær, verða um leið 700 av teimum allarbestu rognfiskunum nýttir í kynbótararbeiðinum. Tí kunnu vit siga, at tað eru teir 700, sum skulu fjølga ættina og verða nýttir í kynbótararbeiðinum, og at gera hesi rognini gitin verða um leið 300 silfiskar nýttir.

Úrslitið verður tí, at Fiskaaling við Áir hevur liggjandi hini allarbestu rognini úr fiskinum, sum lá sum rogn við Áir fyri 4 árum síðan. Frá tí, at rogn vóru liggjandi við Áir, og til alistøðin við Áir aftur fær rogn undan hesum fiskum, ganga 4 ár.

**Smoltstøðirnar**

Tá ið lívfiskarnir verða stroknir, verða rognini tikin. Lívfiskarnir verða vanliga stroknir um leið 25. oktober. Sum áður sagt frá, so verða burtur úr 3000 lívfiskum, sum ganga á støðini í Skopun, skildir um leið 700 rognfiskar og um leið 300 silfiskar til kynbótararbeiðið.

Men allir hinir lívfiskarnir (3000 ÷ 700 = 2300) eru eisini góðir lívfiskar. Hesir lívfiskarnir verða ikki nýttir í kynbótararbeiðinum, men at fáa rogn undan.

Rognini verða nýtt til smoltstøðirnar, tí at tær flestu smoltstøðirnar keypa rogn frá 2-3 støðum í Føroyum, sum taka rogn. Rognini undan teimum lívfiskunum, sum ikki verða nýttir í kynbótararbeið-

inum, og sum seld verða smoltstøðunum, tey eru dygdargóð rogn; men tey verða ald eftir eini aðrari skipan enn tey, sum nýtt verða til kynbótararbeiðið.

Tá ið rognini eru gitin, verða tey løgd í stórar eindir, og hvør eindin er um leið 25 litrar. Hitin skal vera um 8 stig. Hesa tíðina — frá tí at rognini eru gitin, til tey koma í eyga – mugu tey ikki verða rørd, tí at minsta røring kann elva til, at tey doyggja. Um leið 25 litrar av rognum verða løgd inn í klekistrokkar, og har liggja tey, til tey eru komin í eyga.

Tá eru rognini komin upp í 250 samdøgurstig. Vit taka eitt dømi: hava rognini ligið í 3 dagar, og miðalhitin hvønn dagin er 8 - 8 - 7 stig, so hava rognini fingið 23 samdøgurstig.

Vanliga verður ikki farið at pilka rognini, fyrr enn tey hava fingið um leið 300 samdøgurstig, tí at tá tola tey betur at verða handfarin. Tá ið rognini verða pilkað, skulu tey fáa ein stoyt – í roynd og veru ein skelk – og tey rognini, ið veik eru ella deyð, gerast tá hvít. Men rognini við livandi yngli tola at verða handfarin soleiðis og hava sama litin.

Rognini verða latin gjøgnum pilkimaskinur, sum skilja tey deyðu rognini frá teimum livandi. Tey livandi rognini, sum nú eru eygnarogn, verða seld smoltstøðunum. Rognini verða løgd í klekibakkar, um leið 2 litrar í hvønn bakkan. Í hvørjum litri eru um leið 6000 rognkorn.

Í klekibakkunum liggja tindutar mottur hvør ímóti aðrari, og smá rúm eru ímillum tindarnar. Rognkornini verða løgd oman á motturnar.

Um jóltíðir klekjast tey fyrstu rognini. Yngulin fer niður gjøgnum smá hol í mottunum. Yngulin hevur ein stóran posa av eggjareyða undir búkinum, og ta fyrstu tíðina livir hann av posanum. Í teimum smáu gloppunum ímillum tindarnar í mottunum hevur yngulin lítið rásarúm.

Yngulin liggur enn eina tíð í klekibakkanum, sum hann var lagdur inn í. Tá ið hann er komin upp á 300 samdøgurstig, síðan teir klaktust, verður farið at geva teimum at eta. Væl verður hugt eftir, nær meginparturin av eggjareyðanum er uppi. Tá verður yngulin sleptur út í kør, sum standa inni. Ikki fyrr enn yngulin kemur í kørini, fær hann at eta. Uppi yvir kørunum brennur altíð ravmagnsljós, so at yngulin skal síggja at eta alt samdøgurið.

Meðan yngulin lá í klekibakkanum, var hitin 8 stig; men í kørunum eru 13 stig. Hitin í kørunum skal líðandi verða vaksin úr 8

upp í 13 stig. Sum treingist í kørunum, verður yngulin sleptur í onnur kør.

Í juni, juli, august og september vaksa maðkapirrurnar skjótt, heitari tað er, meiri eta tær. Hesa tíðina er longur ljóst, so at tíðin at eta er longri. Maðkapirrurnar fáa at eta við einum sjálvvirkandi tóli, sum gevur í ávís sekund og stendur so stilt í nakrar minuttir.

Úti eru eisini sjálvvirkandi tól at geva við. Eitt ógvuliga ljóskvæmt ljóseyga sigur frá, nær ið tað er myrkt ella ljóst. Er ov myrkt, steðgar tólið.

Fiskur verður aldur við høgum hita, og skapar hetta góð gróðrarlíkindi hjá soppi. Tá kann soppur leggjast á táknurnar. Yngulin verður tí viðgjørdur við kloramini 1-2 ferðir um vikuna.

Vanliga viga tær størstu maðkapirrurnar 6 gramm, tá ið komið er út í mai mánað. Miðaltyngdin er nakað minni. Hesar maðkapirrurnar, ið viga 6 gramm, fáa regluliga at eta við serligum tóli.

Maðkapirrurnar í teimum ymsu kørunum eru javnstórar. Tey, sum arbeiða á smoltstøðini, skilja maðkapirrurnar regluliga fram til november. Einaferð út á várið verður skilt aftur, so at keyparin, sum hevur alistøð á sjónum, skal fáa javnstórt smolt at sleppa út í aliringarnar. Tá er smoltið um leið 20 cm langt. Áðrenn smoltið verður latið, verður tað koppsett fyri ymsar sjúkur.

Á smoltstøðini ganga tólini við ravmagni. Slitnar streymurin frá SEV, hevur støðin sjálv ein motor, sum tá fer í gongd og gevur støðini streym.

Nógvur fiskur er á smoltstøðini, og tí er neyðugt at lata súrevni í vatnið. Tí má støðin eisini hava tól at gera súrevni við. Trupult kann verða um summarið, tá ið lítið vatn er í áunum.

Ógvuliga ymist er, hvussu nógv smolt verða ald á hvørjari smoltstøð um árið, vanliga 1-2 milliónir smolt. Summar støðir meiri, aðrar minni. Tær størstu ala 3-4 milliónir smolt.

Vit hava greitt frá eini vanligari smoltstøð, sum alir eftir tí gamla háttinum; men nú eru smoltstøðir, ið hava fingið sær nýggja tøkni, t.d. verður vatnið nýtt aftur.

### Alistøðirnar

Áður hava vit greitt frá, at rognini vanliga verða strokin úr laksinum um mánaðarskiftið oktober-november. Hesi rognini liggja inni eina tíð og klekjast so um jóltíðir. Yngulin fær at eta í januar mánaði. So

ganga aftur 12-14 mánaðir frá tí, at yngulin fær at eta, og til maðkapirran búnast til smolt.

At maðkapirran búnast til smolt, merkir, at hon ger seg til at skifta frá lívinum í vatni til at fara í sjógv. Hesa broytingina kalla vit vanliga *smolting*, og í fiskinum fara tá fram stórar broytingar.

Tá ið fiskur er í vatni, setur vatn inn í fiskin. Skal javnvág verða viðvíkjandi vatni, so má fiskurin úrskilja vatn, og tað úrskilir hann gjøgnum nýruni. Fiskurin úrskilir tá nógv tunt land.

Tá ið fiskurin er komin í sjógv, setur vatn úr fiskinum. Skal fiskurin fáa javnvág í aftur, má hann drekka nógvan sjógv. Men tá fær hann nógv salt í seg. Saltið úrskilir hann gjøgnum kyknur í táknunum, sum búnaðust, tá ið hann gjørdist til smolt, meðan hann enn var í vatni.

Hesi evni at úrskilja salt fara at virka, tá ið fiskurin er vorðin smolt. Men verður fiskurin sleptur í sjógv, áðrenn hann er vorðin smolt, so doyr hann eftir 1-5 døgum; men í hesum føri valdast, hvussu stórur hann er.

Tá ið fiskurin skal verða til smolt, broytist hann á liti. Fingrastavirnir fara burtur, hann verður silvurblankur, bakið ber á blágrønt, og stertur og fjaðrar fáa eina svarta rond. Tá situr roðslan leys, og hann tolir illa at verða handfarin. Samstundis kemur ein ferðalongsul á hann.

Serliga ljósið stýrir broytingini til smolt, soleiðis at henda búningin byrjar, tá ið dagurin fer at leingjast um várið. Fiskurin er vanliga búgvin at sleppa í sjógv í apríl-mai – tað eru um leið 16 mánaðir eftir tað, at rognini vórðu strokin úr fiskinum. Tá ið fiskurin verður sleptur í sjógv, verður hann koyrdur í nótir við meskavídd, sum hóskar til fisk á hesi støðd. Fiskurin vigar tá um 50 g – sumt smærri og sumt størri.

Tá ið fiskurin er komin í sjógv, verður honum givið at eta í smáum. Fiskurin fær at eta eftir, hvussu nógvur fiskur er í alinótini, hvussu stórur fiskurin er, og hvussu heitur sjógvurin er. Er heitari, fær fiskurin meiri, er kaldari, fær hann minni.

Tøknin at geva laksinum er nógv ment, síðan menn fóru at ala á fyrsta sinni í Føroyum. Alibrúkini eru nú vorðin stór, og nógv fóður verður givið. Tí hava alarar fingið sær nútíðartøkni, sum stýrir, hvussu givið verður. Alarin nýtir tólmenni at geva við. Tólmennið gevur fiskinum eftir eini skipan, sum lagar seg eftir, hvussu nógvur fiskur er í ringinum, og hvussu heitur sjógvurin er.

At geva fiskinum at eta verður stýrt regluliga. Hvønn dag verður skipanin dagførd, soleiðis at lagt verður uppfyri, hvussu nógvur fiskur er í alinótini. Á henda hátt fær fiskurin altíð tað rætta at eta. Men henda skipanin krevur, at væl verður ansað eftir, hvussu givið verður, tí at fóður er dýrt at keypa. Skal alarin hava eitt fíggjarliga væl rikið alibrúk, so krevst ein góð skipan, og hann má ansa væl eftir, hvussu hann gevur.

Fiskurin kann eisini fáa at eta á annan hátt, t.d. verður givið úr báti. Tá fylgja menn væl við, hvussu fiskurin etur, og so verður fóðrið blást við luft út í alinótirnar. Tann tíðin, tá ið menn oystu fóður út í alinótirnar við eyskari, er farin, tí at nú á døgum dugir hesin háttur ikki, tí at so nógvur fiskur er í ringunum. Hetta verður kanska bara gjørt ta fyrstu tíðina, tá ið smoltið fer í sjógv; men tá ið fiskurin av álvara er farin at eta og komin fyri seg, má onnur skipan verða nýtt.

Fiskurin er smolt bara stutta tíð. Tá ið hann er komin í sjógv og rættiliga komin fyri seg, verður hann róptur *legu-smolt*.

Tá ið fiskurin er vaksin nakað á sjónum, verða nótirnar skiftar, soleiðis at tær hóska seg til fiskastøddina. Tað er ógvuliga ymist, hvussu nógvur laksur, ella hvussu mong smolt verða latin í hvørja alinótina. 20.000 - 50.000 er vanligt, men summir alarar lata 100.000 - 200.000 fiskar í tær størstu alinótirnar.

Tað mesta arbeiðið, ið er av fiskinum á sjónum, er at geva honum. Men hann kann gerast fongdur við lús. So má hann verða viðgjørdur við serligum evnum. Fleiri vandamiklar sjúkur kunnu leggjast í fiskin, og hann má verða viðgjørdur fyri tær. Djóralæknar hava regluligt eftirlit við alibrúkunum á sjónum, og teir skipa fyri øllum tiltøkunum. Teir geva ráð og geva boð um, hvørjar viðgerðir skulu verða. Sjálvsagt í samráði við alararnar.

Fiskurin, sum sleptur verður í sjógv um várið og fær at eta, veksur skjótt í tí hita, sum er í føroyskum sjógvi. Um jóltíðir vigar fiskurin um leið eitt kilo í miðal – summir 12-1300 g. Tað eru um leið 7-8 mánaðir eftir, at teir vórðu sleptir í sjógv.

Ein partur av fiskinum kann longu eftir 1½ ári í sjónum gerast kynsførur. Verður tað, so gevst fiskurin at eta, og tá verður hann verri sum søluvøra, av tí at hann missir rætta skræðulitin, og heldur ikki verður *fiskurin* (holdið) so reyður, sum keyparin vil hava hann at vera.

At sleppa undan hesum, verður í flestum førum ljós tendrað á

alistøðunum onkuntíð um jóltíðir. Hetta verður gjørt (sum vit eisini hava nevnt, so stýrir ljósið, tá ið maðkapirrurnar skulu gerast til smolt), tí at ljósið stýrir eisini tí búningini, sum ger, at fiskurin gerst kynsførur ímóti heysti. Tá ið ljós verður sett á fiskin, lumpa vit hann, so at hann verður ikki kynsførur.

Verður ljós ikki tendrað á alistøðunum, so verða 20% ella $^{1}/_{3}$ av fiskinum kynsfør longu eftir $1^{1}/_{2}$ ári.

Verður fiskurin ljósstýrdur, verða vanliga ikki meira enn 0-5% kynsfør.

Tá ið komið er út í august-september mánað, eru 15-16 mánaðir síðan, at fiskurin varð sleptur í sjógv. Nú er fiskurin so stórur, at hann er tøkuførur, vigar kanska eini 4 kg í miðal, og tann størsti fiskurin meiri.

Fiskurin veksur ymist, og ymist er eisini, hvussu stórt smoltið er. Koma tey størru smoltini væl fyri seg og vaksa skjótt, so verða eisini tey tað fyrsta, ið tikið verður. Tað fyrsta verður tikið í august-september mánaði. Síðan verður meginparturin tikin fyri jól, knappliga 2 ár eftir tað, at hann varð sleptur í sjógv.

Tá ið gjørt er av, hvør laksur tikin skal verða, verður givist at geva teimum at eta í eina viku til fjúrtan dagar. Í flestum førum kemur brunnbátur at taka fiskin, og førir brunnbáturin hann so til tøkuvirkið, har fiskurin verður blóðgaður, kruvdur, lagdur í kassar og ísaður. Meginparturin av laksinum verður seldur av landinum sum heilur, feskur fiskur.

# TRIĐI PARTUR

# Fram við strondini

Strondin er mark millum land og sjógv. Hvussu strondin er, veldst um, hvussu nógv aldan gongur á strondina, ella um har er grót ella møl, sum aldan berjir strondina við.

Eystanfyri og sunnanfyri er aloftast bakki ella klettur út ímóti sjónum, tí har er strondin betur vard. Norðanfyri og vestanfyri eru bjørgini, tí vesturaldan er meira áhaldandi enn eysturaldan, og fláirnar í berginum halla upp ímóti alduni. Eystanfyri halla fláirnar niður ímóti alduni, og ger aldan tí minni um seg har.

Innansyndis er nógvastaðni fjøruslætt; men úti við fjarðarmunnarnar er ofta bakki og mangastaðni vallað heilt oman at sjónum. Eysturstrendurnar eru ikki so brattar sum vesturstrendurnar, og eystureftir eru firðirnir, víkirnar og vágirnar.

Tey høgu bergini norðanfyri og vestanfyri eru antin meitilberg ella vallberg. Meitilberg er næstan steyrrætt og bert og lítil gróður. Har eru røkur, eygu og stallar. Røkur og eygu eru foyrur og hol, sum vindborin eyrur, sandur og dust hava matað inn í bleytari tilfar í basaltinum. Stallar eru kneysar, sum standa eftir, tá ið bergið loypur.

Landið marvast og týnist alsamt. Dømi um hetta eru gjáir, látur og skriður, og fram við strondini drangar, stakkar, hólmar, urðar, flesjar, boðar og sker.

Vallberg eru ikki so brøtt sum meitilberg, og í vallbergi er eisini meiri gróður. Har eru vallingar, skorar, vallrøkur, torvur og flingrur.

Oman gjøgnum flestar dalir rennur á, og nógvastaðni stoyta tær sær út av upsini. Eisini spretta keldur í berginum. Oman gjøgnum flestar bygdir rennur áin. Hon ber við sær leir, sand og eyr, og í áarføri tekur hon eisini stórt grót við sær. Er lívd fyri brimi, har áin rennur út, verður sandurin liggjandi. Soleiðis er á firðum og víkum. Har gerast stórar oyrar, sum vanliga enda í marbakka.

Áarósin er skiftandi, tí at áin skiftir legu og snýr sær ymsan veg gjøgnum sandin. Tá gerast stundum hólmar og tjarnir. Sjógvur fløðir niðan í ósan, og tá verða sjógvur og vatn blandað saman til ósavatn.

Summstaðni rennur áin eftir klettinum. Grótið melur og matar kullur niður í klettin. Grótið verður brýnt næstan runt og verður tá nevnt malargrót. Tað, sum nevnt verður møl, er malargrót og grovur sandur.

Havið og áin skipa eyr, sand og grót á serligan hátt. Ovast liggja teir stóru steinarnir. So fínkast tilfarið, sum oman kemur at sjónum. Á sandinum leggur nógv upp, og uppleggið lýsir lívið har um vegir: ymsar skeljar, gággur, kúvingar, krossfiskar, krabbar, fuglaræ, hvalageislar og tari; men uppi í upplegginum er eisini nógv annað, sum fellur frá ídnaði og húsarhaldi.

Klettastrondin ber dám av ymislittum plantum, og har eru nógvir stórir og smáir hyljar – støðuhyljar og hyljar, sum koma undan, tá ið fjøra er. Nógv umskiftist á strondini á flóð og fjøru.

Á meginfjøru turkar langt út. Taraskógvurin kemur undan grønur, reyður og morreyður. Hyljar, ið vóru ikki at síggja á flóð, eru nú at síggja. Kletturin í flóðarmálanum og flóðarsteinar bera dám av ymsum dýrum, ið á sita, og alt kemur til sjóndar á fjøru og meginfjøru.

Á dimma fjørusandinum umskiftist eisini nógv á meginfjøru, tá ið tú fært gingið langt út frá landi. Tá flykkjast vaðfuglur og sjófuglur á sandinum og hava úr at gera. Summir leita við nevinum undir leysum steinum og tara, aðrir stinga nevið niður í sandin eftir teimum dýrum, sandurin unnir livilíkindi.

### Strandgróðurin

Fram við strondini er ymist, hvussu nógv brim gongur á. Strond er antin kyrr ella kyrruvond. Tí skulu tær plantur, sum trívast skulu har, tola væl sjóraman.

Er kyrruvont, bróta óløgini langt niðan og skræða fyri sær. Planturnar, sum vaksa skulu har, mugu antin fáa fest rót ella jarðlegg í rivur í klettinum, ella hava fingið fræ, ið liggja og skola aftur og fram í briminum, og so tá ið várið kemur, og nógv er tikið úr sjónum, liggur fræið á turrum lendi og fer at næla.

Planturnar, sum fáa staðið fastar í rivum, verða allan veturin undirdíktar í søltum brimi; men tær tola salt. Um várið spretta so bløð og blómur antin úr jarðleggi ella rót.

Lendið fram við strondini er ikki altíð so væl taðað; men har rekatarin liggur, er øðrvísi. Tari einsamallur er heldur ikki so gott taðfall. Kálk trýtur ikki, tí so nógv skel er uppií.

## Landgróðurin

Í skelsandi eru nógvar skeljar, t.d. skeljar av kúvingi, gággu, fliðu, øðu, kræklingi, gjari. Har sum sandur ella fín møl er blandað við skelsandi, vaksa sanddunnuber, rímbløðka og mura. Einki veksur, har sjógvurin alsamt liggur og skolar oman og niðan. Men ovari, har sjógvurin á flóð hevur borið fyri sær ymist rusk, vaksa plantur. Har veksur fjørurímbløðka. Hon følnar fyrsta árið. Hon er ársplanta. Fræini liggja og skola aftur og fram allan veturin.

Ovari veksur dunnuber. Mura veksur helst, har lendið er fastari. Hon veksur sjaldan fyrr enn á oyrini oman fyri sandin.

Fjørurímbløðka hevur nógv greindan legg. Greinarnar liggja niður ímóti sandinum og eru bendar upp. Bløðini eru tjúkk og blágrøn. Rím kundi ligið uttan á teimum ungu bløðunum. Blómurnar standa á ótættum aksi og eru ljósareydligar. Plantan verður 15-40 cm høg.

Sanddunnuber hevur tjúkk, dimmagrøn og glinsandi bløð. Blómurnar eru hvítar og sita einstakar ella saman í skúvum. Niðri við sáðberarnar liggur hunangur, og tí áttu flogkykt at sáað, men heldur fær sandfok, tá ið lot er, sáðknapparnar at bresta, og sáðið kemur á sáðfangið.

Sanddunnuber hevur nógv greindan jarðlegg, og plantan lagar seg væl eftir viðurskiftunum á sandinum. Vanliga er plantan 10-30 cm høg, men kann vera stórvaksnari, summstaðni 50-80 cm. Fruktin, sum er hylki, er knattrund og líkist beri.

Gásamura hevur gul krúnubløð við brandgulum bletti. Bløðini eru grøn omaná og hvít niðriundir, tí har sita silvurskyggjandi hár. Blómurnar sita einstakar á longum blómuleggi.

Gásamura krýpur fram eftir lendinum, við tað at nógvir sprotar vaksa úr legginum, og sprotarnir festa rót.

## Mølheygagróðurin

Mølheyggjur er samanfokin roksandur. Veruliga eru mølheyggjar bara á Sandi, men tó smáir í Hvalba. Teir kunnu verða upp í 8 metrar høgir. Vanligasti gróðurin er sandmarhálmur og sævarkorn. Hesar báðar planturnar hava langar og sterkar tægrur, sum krúpa langan veg gjøgnum sandin og binda hann.

Har vaksa eisini aðrar plantur, sum vanligar eru í sandjørð, t.d. sandfjørukál og dunnuber.

Sandmarhálmur er bara funnin á Sandi, men breitt sævarkorn veksur nógvastaðni í sandi fram við strondini.

Sandfjørukál er vanlig í sandoyrum. Røturnar ganga langt niður í sandin. Øll plantan er blágrøn og sevjumikil. Leggurin er nógv buktaður.

Krúnubløðini eru ljósareyð ella hvít og anga. Sandfjørukál verður 6-30 cm høgt.

**Klettagróðurin og bakkagróðurin**

Fyri eystan og sunnan og nógv innansyndis er klettur og lágur bakki út ímóti sjónum. Á hesum støðum er ikki so gróðrarmikið, og har er nógvur sjórami. Planturnar, sum vaksa har, krevja ikki so nógv taðfall, og tær hava annaðhvørt røtur, ið festa seg í rivur í klettinum, ella tær eru vaksnar fastar í klettin.

Skónir sita fastar á klettinum. Tær klæða klett og stein í skørvutan búna. Korki, steinamosi og greinaskón eru grá. Á klettinum vaksa eisini gulaskón og svartaskón.

Har so frægt av sandi ella eyri er ímillum klettar og leysar steinar, har veksur meistaraurt og gøtubrá. Eirisgras og sjógras vaksa eisini har; men tey vaksa longri oman á sjóvarklettin og festa seg í rivum.

Har ið bakkin er væl høgur, veksur hjálpirót í rivum og gloprum. Sløkja veksur eisini í bakkanum.

Skotsk meistaraurt hevur greindan legg. Blaðslíðrarnir eru reydligir. Bløðini glinsa. Tey eru samansett av trimum smábløðum. Krúnubløðini eru hvít, og blómuskipanin er skjól.

Bakkasløkja líkist skotskari meistaraurt; men sløkjan verður um metur høg. Rótin er tjúkk og smakkar søt, og hon hevur verið etin fyrr á døgum. Krúnubløðini eru hvít ella ljósareydlig. Rótina plagdu tey eisini at nýta fyri skrubb.

Sævargøtubrá hevur mjá og næstan rund bløð. Blómurnar eru morlittar og sita í aksi.

Læknaeirisgras er sevjumikil planta. Bæði bløð og leggir smakka beisk. Krúnubløðini eru hvít. Fram við strondini, har ikki so nógvur sjógvur gongur á, er hon ársplanta; men niðari á strondini, har sjógvurin gongur á, nælir fræið í rivum um heystið, fær bløð og festir rót, sum stendur og anir veturin av. Fyrr í tíðini ótu tey læknaeirisgras fyri skyrbjóg.

Mjátt sjógras stendur sum ein túgva. Bløðini eru smøl og rund.

Bløðini standa niðast við klettin, og upp úr teimum vaksa leggir, har blómuskipanin stendur á. Krúnubløðini eru ljósakorkareyð ella hvít.

Rósuhjálpirót er sevjumikil planta. Bløðini eru tjúkk og blágrøn og blómurnar gular ella gulgrønar. Fyrr skóru tey rótina sundur og koyrdu hana í ósaltað smør og smurdu tað upp á brunasár. Eisini plagdu tey at skera smátt sundur bløð, legg, blómu og rót og kóka saman við einum sindri av smøri. So sílaðu tey løgin frá og nýttu hann fyri hárvøkstur.

**Oyrargróðurin**

Oyrar eru við strondina inni í fjarðarbotnunum. Tær kunnu vera harðvallaðar og eisini bleytar av vatni, sum sjógvur er uppií. Gróðurin er eftir, hvussu oyrin er til vætu.

Ikki ber so væl til at siga, hvørjar plantur vaksa á teimum ymissu oyrunum; men nakrar av teimum, vit áður hava skrivað um, vaksa eisini har, t.d. sjógras, gøtubrá, mura og reyðakkuleya.

# Dýr á fjørukletti og fjørusandi

### Klettasprettan

Gongur tú eitt summarkvøld niðri í fjøruni, ber á, at tú sært mong smá, lívlig dýr á kletti og steini, har sjórok viðhvørt stendur á. Tey eru so mong í tali, at torført er at síggja, hvørji dýrini eru. Fyrsta tú ert komin nærri, hvørva tey hoppandi niður í rivur og holur.

Klettaspretta er myrkagrá og 9-14 mm long. Hon hevur 6 bein sum fluga, men ongar veingir. Á høvdinum eru 2 langir kampar, eygu og bitmuður. Á afturendanum eru 3 nokkar. Verða kampar og nokkar lagdir aftur at kroppinum, er dýrið um 3 cm langt.

Tá ið klettaspretta sprettur uppfrá ella frameftir, spennir hon í bæði við bløkum, nokkum og beinum, uppfrá 4-5 cm og frameftir 10 cm.

Tær eru tó mest frammi um náttina; men tær, tú sært um dagin, eru ikki kynsbúnar. Skuldi brim tikið klettasprettu út, so dugir hon at svimja inn aftur.

Klettaspretta verpur stór egg í rivur í klettinum. Hildið verður, at hon etur næstan bara grøntara av klettinum.

### Kongadýrið

Kongadýr er reytt og sæst á kletti í fjøruni. Tað er eitt 2 mm langt mottuslag, sum líkist eiturkoppi og hevur 8 bein.

Kongadýr hevur eygu og langt nev. Tað er ránakent og tekur onnur smádýr.

### Hoppstertan

Hoppsterta heldur til í flóðarmálanum fram við klettastrond og eisini í upplegginum á fjørusandi. Hon fær verið fleiri tímar undir kavi, tí at hon leggur eitt luftlag uttan um seg.

Hoppsterta er ring at fáa fatur á. Áðrenn teg varir, er hon burtur. Hon loypur 100 ferðir so langt, sum hon er long. Sjálv er hon um 6 mm long.

Uppi undir búkinum hevur hon tvígreindan nokka. Á hvørjari

grein er lítil bølla, sum er gott festi, tá ið hon hoppar. Nokkin liggur uppspentur og heftur í lítlan krók. Verður dýrið órógvað, glíður krókurin ímillum greinarnar av. Nokkin gleppur út ímillum báðar stertarnar á afturendanum. Hoppstertan fýkur upp.

Tá ið hon kemur niður aftur, liggur nokkin aftur uppspentur og festur uppi undir búkinum. Hoppstertan hoppar sjáldan meira enn eina ferð, men hon bæði skríður og rennur. Hon sæst á alljósum degi og krógvar seg ikki sum klettaspretta.

Eins og klettaspretta hevur hon eygu, langar kampar, bitmunn og 6 bein, men ongar veingir.

Eggini verpur hoppsterta í klunkar í holur í jørðini ella undir plantur, t.d. tara. Eggini mugu fáa nógva vætu, skulu tey verða klakt. Eisini má vátligt vera uttan um ungarnar, sum fáar minuttir eftir tað, at teir eru klaktir, eru til dystin fús. Teir skifta ham fleiri ferðir, áðrenn teir eru fullvaksnir, og teir eta ofta gamla hamin. Klettaspretta skiftir tó ham alt lívið.

Hoppstertan drekkur vatn. Tá ið hevur regnað, ganga tær og leppa grammliga. Tær eta bæði dýr og plantur, men mest plantur. Niðri í fjøruni eta tær bæði fuglaræ, fiskaræ, tara og uppifjaraðar hvalspýggjur.

**Vatnflugan**

Í kullum í sandinum, har grønligt er av algugróðri, síggjast mynstur í allar ættir. Mynstrini eru komin av vatnflugum, sum hava pilkað sær algur við nevinum. Á vátligum bletti kunnu vera fleiri túsund.

Vatnfluga er dimm á liti, hevur langt nev og blett á báðum veingjunum. Hon er 3 mm long.

Ormverurnar liva niðri í sandinum. Tær eta smáalgur. Tóm reiv, sum tær koma úr, liggja í dunga á sandinum.

**Taraflugan**

Tarafluga er reydlig, alloðin, miðalstór fluga, sum líkist køstaflugu. Hon verpur í rekatarabrúnna.

**Fjøruflugan**

Fjørufluga sæst í hópatali í tarabrúnni í fjøruni. Hon er kvikt, lívligt dýr.

**Fjørutekan**

Fjøruteka krógvar seg í rekataranum. Í sólskini kemur hon fram og flýgur lívliga. Er veðrið vánaligt, flekja tær seg niður á lendið. Tær eru dimmar og flekkutar, so tær falla væl saman við lendið og eru ringar at síggja.

Fjøruteka er 6 mm long. Kroppurin er flatvaksin og gylthærdur. Hon hevur 6 bein. Á høvdinum eru tvey stór eygu, tveir langir kampar og súgmunnar, nev. So hevur hon 2 framveingir og 2 glærar afturveingir at flúgva við.

Tá ið fjørutekan flýgur ikki, liggja framveingirnir flatir niður yvir afturveingirnar, ið næstan fjala teir.

Fjøruteka sæst ofta hoppandi eftir lendinum, har hon tekur sær hálvdeyð ella sovandi smádýr til matna.

**Fjørutúsundbeinið**

Fjørutúsundbeinið heldur til yvir sjóvarmálanum, har gróðurin tekur við. Tað er lítið, smidliga vaksið og flekkut av teimum reyðu deymkertlunum, sum skína gjøgnum húðina.

# Dýr í støðuhyljum ovarlaga í fjøruni

**Marflugan**

Hyggur tú niður í støðuhyl í fjøruni, sært tú marflugur fara fúkandi av stað. Lyftir tú steini upp úr hylinum, so krykur undir honum. Marflugur eru eisini at síggja nær hyljum ella undir steinum, har vátt er um.

Fremst á høvdinum eru smá eygu og langir kampar. Tey fremstu beinini hava krók, og við teimum tekur marfluga fong. Trý pør av teimum aftaru beinunum eru breidlig og hærd. Marflugan svimur við teimum. Við miðbeinini eru tunnir lepar, ið virka sum táknur. Niður úr liðunum hanga plátur.

Marfluga verður upp í 2-3 cm long; men úti á djúpum í Atlantshavi verður hon 14 cm. Sløgini eru mong. Marflugur í vatni ella sjógvi hava amboð at svimja við; men marflugur á landi hava ikki hesi amboð. Tær hoppa á halanum. Marflugur í fjøruni krógva seg um dagin. Tær grava seg niður í sandin ella krógva seg í rektara.

Um náttina leita tær sær eftir føði. Summar taka livandi kykt, aðrar deyð.

Vísindamenn hava kannað marflugurnar í fjøruni. Tær eru skipaðar í stovnar, sum hava lagað seg eftir ávísum øki. Verða tær órógvaðar, sæst, hvussu tær bera seg at. Á hvørjum øki er atburðurin ymiskur. Tá ið tær verða órógvaðar, fara tær undan ávísan veg á hvørjum øki sær.

Tær miða seg eftir sólini. Verða tær fluttar á eitt annað øki, miða tær seg eftir sólini, sum vóru tær á upprunaliga økinum. Vóru tær vanar at fara í vestan, fara tær í vestan, tó at tær verða ikki vardar har.

Marfluga verður ikki meira enn ársgomul. Tær, ið liva veturin av, fara longu at gýta seinnapartin á vetri. Tær gýta 4-6 ferðir og doyggja um summarið. Tá eru ungarnir í fyrstu gýtingini longu gýtingarførir. Ungarnir gýta út á heystið, til sjógvurin kólnar. Sagt kann tí verða, at marfluga gýtir frá januar til oktober.

Kvenndýrið ber eggini í posa undir búkinum. Ungarnir verða klaktir í klekiposanum, og teir liggja har, til teir eru stórir og líkjast

foreldrunum. Meðan kvenndýrið ber egg ella ungar, skiftir tað ikki ham. Fyrsta ein gýting er farin úr klekiposanum, skiftir kvenndýrið ham, og beint aftaná makast marflugurnar.

Men longu fleiri dagar undan hamskiftinum hevur kalldýrið tikið kvenndýrið við gripklónum og situr uppi á bakinum á tí. Hetta sæst mangan í hyljum í fjøruni. Kalldýrið er tvífalt so stórt sum kvenndýrið.

Meðan kalldýrið situr á bakinum á kvenndýrinum, verjir tað kvenndýrið og gevur tí at eta. Síðani makast tey, og kalldýrið sleppir kvenndýrinum og hevur hvørki umsorgan fyri kvenndýri ella ungum. Marfluga gýtir 10-150 egg. Størri kvenndýrið er, fleiri eru eggini. Men av tí at tað gýtir 7 ferðir, og ungarnir eru skjótt gýtingarførir, verður avkomið stórt.

Marflugurnar fram við strondini og útiá hava stóran týdning sum fiskaføði.

**Trøllasílið**

Trøllasíl sæst í hyljum í fjøruni og í torvum um strendurnar. Tað er skjótt at styggja. Altíð eru tey á ferð eftir smádýrum og eggjum. Finnur eitt fong, kemur torva skundandi til. Summi royna at taka fongin av tí, onnur fara at leita í sama staði.

Trøllasíl er lætt at kenna á tí blágrøna litinum. Tað skyggir sum silvur. Á bakinum og undir búkinum eru tindar, sum kunnu verða reistir og lagdir niður. Beinplátur eru eisini eftir kroppinum.

Hóast trøllasíl er væl búgvið við stinnum tindum, so eta állur, laksur, toskur og sjófuglur tað.

Trøllasíl gongur í torvum meginpartin av árinum. Um várið rýmir silfiskurin úr torvunum. Silfiskurin hevur ikki um veturin verið eyðsýndur. Nú verður hann blálittur á bakinum og reyður undir búkinum. Eyguni verða so klár og blá.

Fyrst má hann leita sær eftir reiðurstaði, og tá ið hann er funnin, byggir hann reiður á botninum. Fyrst grevur hann eina kullu. Sandin ella móruna tekur hann í kjaftin og svimur burtur við tí. Síðan tekur hann sær tara og leggur í kulluna. Í hesi tíðini kemur slipa úr nýrunum, og við slipuni kleimir hann saman reiðrið.

Tá ið nakrir dagar eru farnir, er alt tilfarið til reiðrið komið. Silfiskurin stútar alt saman í eina túgvu, og so borar hann seg gjøgnum túgvuna, og ein hola kemur í reiðrið.

Meðan hann bygdi reiðrið, rak hann burtur aðrar silfiskar. Hann ger seg øgiligan, svimur ímóti teimum við gapandi kjafti, og hann reisir tindar. Batar hetta ikki, stendur hann á skák, gronina niður og stertin upp, vísir reyða búkin og reistar tindar.

Tá ið reiðrið er liðugt, rodnar silfiskurin meira undir búkinum, og teir vøkru krystallirnir í húðini á bakinum gera hann meira glógvandi ljósabláan.

Rognfiskurin hevur higartil bara svomið aftur og fram, og eingin áhugi hevur enn verið fyri honum. Rognfiskurin er nú eisini vakrari littur, silvurglógvandi bláur. Búkurin er uppbólgnaður, tí at hann er fullur av rogni.

Nú nærkast silfiskurin rognfiskinum, svimur ímóti honum við reistum tindum, hvørvur eitt bil, kemur so aftur og sveimar uttan um rognfiskin. Viðhvørt vísir silfiskurin reyða búkin. Rognfiskurin letur seg tøla, og silfiskurin lokkar rognfiskin at reiðrinum, stingur gronina inn í munnan, hagar hann vil hava rognfiskin at fara.

Umsíðir fer rognfiskurin í reiðrið at gýta. Silfiskurin lifrar fyri rognfiskinum, stútar hann við gronini av berum blíðskapi. Skjótt er gýtingini um, og so rýmir rognfiskurin. Silfiskurin skundar sær at gýta sil.

Brádliga hevur silfiskurin ikki áhuga fyri rognfiskinum longur, men fer einsamallur at verja reiðrið og jagstra burtur onnur trøllasíl ella aðrar fiskar. Hann liggur úti fyri munnanum og tyrlar nýggjan sjógv inn til eggini við uggafjaðrunum. Í fyrstuni nakrar minuttir, men beint áðrenn eggini eru klakt, næstan alla tíðina.

Rekur eitt egg út, so ber hann tað beinan vegin inn aftur í kjaftinum. Nýklaktir ungar eru nakrar dagar í reiðrinum. So fara teir út og standa í torvu á reiðurstaðnum. Men silfiskurin ansar eftir øllum ungunum hjá sær. Fer ein ungi burtur úr torvuni, tekur silfiskurin hann í kjaftin og spýtir hann aftur í torvuna.

Tá ið nakrar vikur eru farnar, fáa ungarnir víðari ræsur. Nú verða teir kastaðir. Silfiskurin fer aftur upp í torvuna saman við øðrum javngomlum trøllasílum. Ungarnir fara av reiðurstaðnum upp í torvu saman við teimum ungum, sum teir eru javngamlir við.

Trøllasíl hevur eisini onnur nøvn: kombikk, beinmurtur, horngeil, hvasssíl og eldmurtur.

# Dýr á klettinum millum flóð og fjøru

### Fjørukúvingurin

Fjørukúvingur situr á kletti og steinum í flóðarmálanum, har hann etur tað fína ábreiði av smátara, ið legst har. Eisini sæst hann á tara, har grunt er.

Fjørukúvingurin kann vera 5-10 mm høgur, gulligur, reydligur ella morgráur. Kvennkúvingurin er størri og bøllutari enn kallkúvingurin. Hann rívur smátara av klettinum. Á tunguni eru smáar tenn. Tungan er hvøss og verður nevnd rívitunga.

Tá ið fjørukúvingur rívur tara av klettinum, so slítast tenninar á tunguni; men tungan verður endurnýggjað so hvørt, tí undir tunguni liggur samanringd tunguál, sum er fleiri cm long. Á tunguálini eru hvassar tenn.

Fjørukúvingur andar við táknum; men hann fær eisini andað við táknunum, tá ið hann er uppi á turrum.

Væl liggur fyri at kanna fjørukúving, tí hann nørist alt árið. Skalt tú kanna rívitunguna, brót fyrst skelina, tak so eina nál við lítlum króki á og pilka tunguna út. So kann tungan verða løgd undir sjóneyku, og tú sært tenninar á tunguni. Fjørukúving fært tú havt í alikeri, tí at hann lagar seg væl eftir ymsum broytingum, t.d. hita, salti og vætu. Men lok má vera á alikerinum. Annars skríður hann uppúr.

Fjørukúvingur er lívseigur og tolir at sita uppi á turrum næstan ein mánað, og hann livir eisini leingi, hóast hann fær einki at eta. Hann er funnin 30-40 m uppi í bergi, har sjórok bara viðhvørt stendur á.

Hann gýtir livandi ungar. Inni í honum er ein byrða – eitt klekirúm. Kvennkúvingurin ber eggini í byrðuni. Veruliga ber kvennkúvingurin 3 støddir í byrðuni: ung egg, ungar við ørtunnari skel og stórar, búnar, reyðmorreyðar ungar, sum líkjast vaksna kúvinginum, tá ið teir verða gýttir.

**Rundbølluti fjørukúvingurin**

Rundbølluti fjørukúvingurin kemur ikki upp í flóðarmálan, men situr á blaðtara og sagtara. Hann sæst ofta í uppleggi.

Hesin fjørukúvingurin er 10-12 mm høgur, hevur tjúkka skel, sum er gul ella reyðgul við reyðum, morreyðum, gráum ella svørtum tvørrípum.

Eggini verða gýtt um summarið í nýraskapað, hørð hylki, sum fest verða á blaðtaran. Ungarnir svimja ikki uppi í sjónum, men festa seg beinan vegin.

**Kræklingurin**

Kræklingur situr fastur í rivum og skørrum í flóðarmálanum. Hann er eisini vanligur inni á firðum á mórubotni, í áarósum, á steinum, tonglum og førum, sum liggja fyri teymi.

Kræklingur er myrkabláur, mjáur framman og verður tjúkkari, sum aftur kemur. Skeljarnar eru tunnar og bygdar úr trimum jaðurum.Ytsta jaðurið er morreytt og líkist horni. Tað verjir skelina. Miðjaðurið er úr smáum, fínum krystallum, ið liggja tætt saman. Innasta jaðurið eitur perlumóðir og skyggir í vøkrum litum. Í perlumóðurini eru viðhvørt perlur, men ikki virðismiklar.

Perla verður til, við tað at eitt sandskorn kemur millum kroppin og skelina. Kræklingurin fær tá ilt. At sleppa undan pínuni leggur hann perlumóður uttan um sandskornið og festir tað at skelini.

Kræklingur festir seg á staðin við festitræðrum, sum gjørdir verða innan í honum. Fyrsta træðrirnir koma í sjógvin, storkna teir og eru so sterkir, at nógv má verða sett á, skalt tú fáa kræklingin leysan.

Tá ið fyrsti tráðurin er festur á staðin, setur kræklingurin sandnalvan, ið er korkareyður, á staðin, tekur seg eitt sindur fram og ger næsta tráð fastan. Soleiðis heldur kræklingur fram, til hann er nóg væl festur. Men skal hann úr staði, má hann skræða teir aftastu træðrirnar leysar og gera nýggjar frammanfyri.

Kræklingur gýtir um summarið. Miðalstórt kvenndýr gýtir 5-12 milliónir egg út í sjógvin. Longu 1-2 samdøgur eftir er klakt. Ungin hevur tvær skeljar, stóran sundvong at svimja við og bara eitt svart eyga. Ungarnir taka sær føði, sum er smákykt.

Tá ið 3-4 vikur eru farnar, eru ungarnir nógv vaksnir og fara niður á botn. Fyrst skríða teir eftir botninum, áðrenn teir hava funnið

sær hóskandi stað at festa seg á. Summir seta seg á stein, klett ella okkurt annað. Um veturin eta teir einki og vaksa heldur einki. Men tá ið summarið kemur, eru livikorini góð, og tá vaksa teir skjótt.

Ársgamlir eru teir gýtingarførir og um 50 mm langir. Tá ið teir eru fullvaksnir, eru teir sjáldan meira enn 80 mm.

Kræklingur tolir væl at vera uppi á turrum. Tá letur hann skelina fast aftur. Eisini tolir hann at vera, har sjógvurin er ikki so saltur. Í áarósa er ofta mest til av honum. Kræklingur tekur lættliga eitur og bakteriur í livrina, og tá er hann vandamikil at eta. Kræklingur verður aldur til matna. Hann er eisini gott agn.

Fuglar, sum veiða í sjóvarmálanum, taka krækling. Eisini rotta, korkakúvingur og krossfiskur taka krækling.

**Øðan**

Øða er fram við allari strondini og langt inn á firðirnar. Hon tolir ikki at liggja turr, og tí er hon ikki í sjálvari fjøruni. Hon sæst tó í klettarivum á meginfjøru.

Øðuskeljarnar eru tjúkkar, langvaksnar, dimmabrúnar ella næstan svartar. Vanliga eru tær 12-14 cm langar, men kunnu gerast 20 cm langar.

Torført kann vera at skilja ímillum smáar øður og kræklingar. Eitt gott eyðkenni er, at bøbburin á øðuni situr eitt sindur aftan fyri sjálvan trantin á skelini – ikki úti á sjálvum trantinum sum á kræklinginum.

Kalløða kennist frá kvennøðu. Kápan og kynsgøgnini í kalløðu eru gul, men reyð í kvennøðu.

Øða er besta agn, og hon er eisini góð til matna.

# Taravøksturin

### Taravøksturin

Tari festir seg á klett, steinar, skeljar, annan tara, skip og bátar, liggur leysur á botni ella rekur í sjónum.

Tari verður ikki sum plantur uppi á landi skipaður í rót, legg og blað. Øll plantan eitur bara leyv, og røturnar eita rótfestur. Tari er ymissur á stødd, summur sæst ikki við berum eygum, annar er bara nakrar cm, og upp aftur annar 4-5 m langur.

Taravøkstur lagar seg eftir ljósi, hita, salti, vætu, turki, kyrru og ókyrru. Ljósið skínur ikki meira enn um leið 40 m niður í sjógvin. Djúpari niðri í sjónum er myrkt. Men tari má fáa ljós, skal hann vaksa. Tí er eingin taravøkstur, har djúpari er enn 40 m.

Tari, ið djúpast veksur, er reyðtari. Hann veksur tí har, sum myrkast er. Onkur reyðtari veksur tó uppi á landi í fullum dagslýsi. Í miðjuni – um flóðarmálan – veksur serliga mortari. Ovast veksur grøntari. Tari veksur best um summarið, tí tá er ljósast.

Hitin í føroyskum sjógvi er rættiliga javnur, og hitin treytar, hvørji tarasløg vaksa við strendurnar. Mortari og reyðtari mugu fáa saltan sjógv, men grøntari veksur, um sjógvurin er ikki so saltur.

Flestu tarasløg vaksa í flóðarmálanum. Hesi tarasløgini tola at liggja turr á fjøru og undir kavi á flóð. Summi tarasløg vaksa langt oman fyri flóðarmálan. Tey fáa onkran sjóslett av og á og sjórok. Onnur mugu altíð vera undir kavi.

Eisini veldst um, hvussu strondin er til kyrru. Tang og tonglatari t.d. tola væl brim, tí hesi bæði tarasløgini eru sterk og væl fest á klettin. Tey sleingjast tí aftur og fram í briminum, men verður uppgangur, verða tey rivin leys. Onnur tarasløg, t.d. bløðrutari og bótatari, tola ikki væl brim, tí at tey eru klænstrasligari og veikari.

Fyrr á døgum varð tari nýttur til matna, tá ið svangligt var. Eisini varð tari nýttur til taðfall.

Fert tú oman í fjøruna, sært tú í upplegginum, hvørji tarasløg vaksa har á leið.

### Grøntarin

Grøntari veksur í vatni, sjógvi og uppi á turrum. Kanska hevur tú gáað eftir, hvussu ómálaðir hjallar og húsaklædningar gerast grønir. Tá er tað eitt grøntaraslag, ið legst sum eitt ábreiði á viðin. Ella hált, grønt slýggj í keldum og áum, og hvussu hellur og steinar grønkast um várið og gerast hál sum kalvabak. Um heystið rekur grøntari og annar tari á land og legst kanska í brúgv.

Trý grøntarasløg verða nevnd: slýleggur, slýblað og slýtráður.

Slýleggur er eyðkendur í hyljum í fjøruni, har fløðir niðan í av og á. Hann veksur allastaðni í fjøruni, har fløðir niðan á meginflóð, og eitt sindur oman, har ið sjógvurin dregur út á meginfjøru.

### Slýleggurin

Slýleggur veksur serliga, har kyrrupláss er og sjógvurin lítið saltur. Hann er festur á klett, stein, annan tara, skip og bátar. Slýleggur er opin innan og fullur av luft. Hann stendur flótandi í sjónum.

Í leyvrondini loysna smáar kyknur við tveimum sveiptræðrum at svimja við. Tvær kyknur renna saman og verða til eina kyknu. Hon setur seg fasta og verður til slýlegg. Eisini kunnu kyknur við 4 sveiptræðrum loysna úr leyvrondini; men hvør teirra verður til nýggjan slýlegg.

### Slýblaðið

Slýblað hevur flatt leyv. Leyvið situr fast á stuttum leggi, men loysnar ofta og rekur í sjónum ella legst upp. Slýblað veksur ofta, har kyrt er, og vatn rennur út, frá meginflóð og út á 2-3 metra dýpi.

### Slýtráðurin

Leyvið er greindir og heilt klænir træðrir. Slýtráður veksur bæði í vøtnum og áum, í fjøruni og í sjónum. Øll trý grøntarasløgini eru 5-30 cm long.

**Mortarin**

Mortari veksur mest í sjónum. Nógv mortarasløg eru smávaksin og sita á kletti, steini ella øðrum tarasløgum. Men summi eru so stórvaksin, at tey byggja stóran taraskóg fram við strondini. Í taraskóginum fáa mong smádýr og fiskasløg livilíkindi og lívd, tí at mangan er harðligt við strendur okkara.

Hesi mortarasløg verða nevnd: bólatari, tang, reipatari, bløðrutari, tarablað, sukurtari og tonglatari.

Bólatari er ofta nógv greindur. Á greinunum sita luftbløðrur (bólur). Nýggjar luftbløðrur koma á greinendarnar um veturin. Bólatari er vanligur niðarlaga í fjøruni, og hann tolir ikki brim. Longd $^1/_2$-$1^1/_2$ m.

Tang hevur greinda rótfestu. Rótfestan og tann rundi leggurin úr henni eitur tangbjøllan. Leggurin ber blað við miðstreingi, sum eitur mirkjallin, og mirkjallin er søtur og er etandi.

Millum blaðið og leggin er vakstrarjaður, haðani veksur nýtt blað hvønn vetur. Tað gamla blaðið fer út av legginum, sum tarin veksur, og situr at enda sum ein kloddi á nýggja blaðendanum.

Tang veksur frá lægstu fjøru og út á 10 metra dýpi. Tang krevur reinan, saltan sjógv og tolir eitt sindur av brimi. Longd 1-3 m.

Reipatari veksur helst, har brim er. Longd $^1/_3$-3 m.

Bløðrutari er fleiri ferðir greindur. Upp eftir greinunum sita bløðrur tvær og tvær. Í bløðrunum er luft, og tær halda taranum uppi. Nakrir greinendar bólgna upp. Í teimum eru eggkyknur og sáðkyknur, sum fara í sjógvin og renna saman í eina kyknu. Hon setur seg skjótt fasta á steinar og verður til nýggjan bløðrutara. Bløðrutari veksur um flóðarmálan og tolir ikki brim. Longd 20-75 cm.

Tarablað kann hava langan legg, sum er linur, tí hann er bara um ein cm tjúkkur. Leggurin veksur út í eitt breitt, deilt blað. Tarablað trívst best í streymasjógvi og í brimi. Tað veksur niðast í flóðarmálanum og út á 10-15 m. Longd 1-5 m.

Sukurtari hevur nógv greinda rótfestu. Leggurin er um 20-50 cm langur og 1 cm tjúkkur. Á legginum er smalt, rukkut blað.

Tá ið sukurtari tornar upp, legst hvítt sukurlag á. Sukurtari veksur langt inn á firðirnar. Hann veksur niðast í flóðarmálanum og út á 10-15 m dýpi; men sukurtari veksur helst, har kyrt er. Longd 1-4 m.

Tonglatari er stórvaksin og hevur sterkar, greindar rótfestur.

Leggurin er tjúkkur og stinnur. Verður skorið í leggin, rennur slímkent evni úr. Blaðið verður um ein metur langt. Tonglatari veksur, har bæði er djúpt, og nógv brim er. Longd 4 m.

**Reyðtarin**

Reyðtari kann vera ójavnur til støddar. Hann veksur antin á botni ella stórtara. Vanligt er at fáa reyðtara upp á húkin úti á fiskileið. Summi reyðtarasløg hava breið bløð við miðæðr. Tá ið gomlu bløðini doyggja, spretta nýggj bløð úr miðæðrini.

Korkahinna er fest á klettin við stuttum leggi. Øðrumegin á leyvinum er rondin gullig, og har verða sáðkyknur gjørdar. Rondin hinumegin er korkareyð. Har verða eggkyknur gjørdar. Tann gitna eggkyknan fer í sjógvin og býtir seg sundur nakrar ferðir.

So borar gitna eggkyknan seg inn í skeljadýr og gjar o.a. á botni á djúpum vatni, og hon verður til træðrir. Um veturin doyr korkahinna; men træðrirnir liva í fleiri ár. Í træðrunum verða grókorn gjørd, og úr grókornunum sprettur nýggj korkahinna.

Korkahinna kann vaksa langt oman fyri flóðarmálan. Tí kann hon onkuntíð gerast skróvturr, men fær hon vætu aftur, blotnar hon og fer at vaksa. Vanlig stødd sum eitt handarbak.

Vørtutari er nógv greindur. Á greinunum øðrumegin eru vørtur. Vørtutari veksur niðarlaga í flóðarmálanum og út á 3-4 metra dýpi. Hann tolir eitt sindur av brimi. Veksur oftast í túgvum, sum eru 5-10 cm høgar.

Koralltari er nógv greindur og harður, tí nógv kálk er í honum. Hann veksur frá lægstu fjøru og eitt sindur út. Hædd 5-20 cm.

Søl hevur niðast stuttan legg, og upp úr legginum koma nógvar flatar greinar. Úr rondini á greinunum vaksa nýggjar greinar. Søl veksur á kletti og stórtara niðarlaga í flóðarmálanum og út á 15 metra dýpi.

Søl hevur verið etið í Føroyum. Fjøruseyðurin leggur altíð fyrst eftir søli, har tað er at fáa. Stødd 10-30 cm.

Rivblað líkist nógv fjaðuræðraðum bløðum. Bløð slítast burtur um heystið, og út úr blaðstreinginum vaksa nýggj bløð um várið. Veksur á 10-40 metra dýpi. Stødd 5-15 cm.

Reyðblað veksur á steinum og skeljum á djúpum vatni ella á øðrum tarasløgum. Stødd 5-10 cm.

# Dýr í taraskónum

### Fjørukrabbin

Fjørukrabbi er nógvur um flóðarmálan fram við strondini, har ikki so nógv brim gongur á. Hann heldur til í mortaranum, men kann fara úr taraskónum upp í flóðarmálan. Onkuntíð sæst hann uppi á teimum stóru tarunum, har hann situr og pilkar smádýr burturav.

Fjørukrabbi hevur eyðkenda 5-hyrnta skel, sum framman er sagtent. Hann hevur 5 beinpør. Fremsta beinparið hevur bitklógv. Á høvdinum eru 2 eygu á stelkum og 4 stuttir kampar. Verður krabbin lagdur opin, síggja vit, at ein lítil og stuttur afturkroppur liggur upp undir framkroppin.

Fjørukrabbi kann vera morlittur ella grønligur og 5-6 cm tvørtur um skelina. Teir ungu krabbarnir eru serliga í taranum, og teir eldru fara út á djúpari sjógv um veturin. Um dagin sita krabbarnir og krógva seg undir steinum. Um náttina kemur lív í teir, og tá fara teir úr taraskógnum og upp í flóðarmálan at leita sær eftir føði.

Hann gongur við veipandi klóm og leitar, sum fjøra ella flóð er. Hann er heilt ránakendur, mikil átari, skjótur og fimur. Ferilin fær hann av dýri, sum er langt burtur. Best tevjar hann dýr, tá ið streymurin gongur aftanífrá fram við táknum og kjaftlimum. Tí tevjar hann ikki so væl dýr, sum eru framman fyri hann. Fjørukrabbi tekur ymsar sniglar, krækling, rípuskel, marflugu, taralús, og enntá so skjót dýr sum rækju, stubba og trøllasíl tekur hann.

Fisk legst hann snarliga á við bitklónum og tekur hann, knasar og holar væl tjúkkar gággur og skeljadýr. Fólk hava undrast á, hvussu hann fær tikið smyrsling, sum grevur seg niður í sandin. Nýggjar kanningar vísa, at fjørukrabbi ger sær spaka, við tað at hann leggur tvey av fremstu beinunum aftrat aðrari bitklónni, vappar so eftir lið aftur og fram, til smyrslingurin er grivin upp úr sandinum.

Teir smáu fjørukrabbarnir skifta lit. Dimmir í dagsljósi og bleikir um náttina. Verður sjónin tikin frá krabbanum, ella verður ljós sett á hann um náttina, skiftir hann ikki lit. Royndir vísa, at hann er ljóskvæmur og vendir sær altíð ímóti ljósgeisla. Í myrkum rúmi nemur hann minsta ljós. Bara ljós kemur út gjøgnum eitt lyklahol, so nemur hann tað.

Royndir vísa eisini, at verður fjørukrabbi, sum er fjaraður uppi, tikin av staðnum og borin langt niðan frá sjónum, fer hann beina kós oman aftur móti sjónum, um tað er undan brekku ella móti brekku. Tó at sjónin er tikin frá honum, ger hann soleiðis.

Fjørukrabbi er kynsførur ársgamal. Hann er tá 2-3 cm breiður. Vanliga verða teir ikki meira enn 3 ára gamlir. Fyrstu tvey árini skiftir hann ham 14-17 ferðir; men tá ið hann er kynsførur, bara eina ferð um árið. Tá ið hann skal skifta ham, má hann krógva seg væl, har myrkt er. Ofta setur hann beinini føst á føstum staði. So rivnar skelin aftur, og varliga skríður bleytur krabbi úr haminum. Eftir hamskiftið fjalir hann seg í 4-5 samdøgur, til nýggi hamurin er so frægt harður, at hann kemur fram. Sást tú gamla hamin og krabban, hevði tú undrast á, at so stórt dýr hevur ligið í so lítlum hami.

Kallkrabbin hevur smidligari afturkropp enn kvennkrabbin. Kvennkrabbin ber eggini uppi undir afturkroppinum, sum liggur upp undir framkroppin. Eggini liggja kleimd at teimum smáu afturkropsfótunum. Makingin er stutt eftir, at kvennkrabbin hevur skift ham. Hetta er í juli-september.

Síðan fara 1½-4½ mánaðir, áðrenn kvennkrabbin gýtir um 200.000 egg, og tað er serliga í november-desember; men kortini eru fjørukrabbar við eggjum at síggja alt árið. 7-9 mánaðir eftir er klakt. Frammanundan hevur kvennkrabbin røkt eggini væl, reinskað tey væl, reisir seg upp og stendur og tyrlar nýggjan sjógv á tey. Skuldi kvenndýrið verið órógvað, tekur tað øll beinini tvørtur um eggini og hóttir við bitklónum.

Flestu eggini eru klakt seint um várið. Ungarnir – kelvið – síggjast uppi í sjónum í juli-oktober. Kelvið hevur langar tindar á kroppinum og sveimar á teimum. Ungin skiftir ham, tindarnir minka, og hann fær bein í afturkroppin at svimja við. Brátt líkist hann vaksna fjørukrabbanum og fer á botn.

Krabbarnir semjast illa. Liggur fjørukrabbi og etur fongin hjá sær, og ein annar kemur at tí, so verður bardagi. Hann hevur bitkløur at verja seg við, men eisini aðra verju. Tá ið hann er í vanda, brýtur hann bein av sær. Álopsdýrið tekur síðan beinini sum fong.

Fleiri dýr taka fjørukrabba. Állur er grammastur eftir honum. Ulkur og stubbi taka nógvar ungar krabbar. Fleiri kaventur taka hann, og tá ið hann kemur í flóðarmálan, koma likkurnar. Tí er tað fyrimunur hjá fjørukrabba, at hann krógvar seg í ljósum, men kemur bara fram um náttina, og tá gera likkurnar honum ikki ónáðir.

**Lúsakrabbin**

Lúsakrabbi er á størri dýpi enn fjørukrabbi. Honum fellur best hellubotn ella sandbotn.

Skelin á lúsakrabba kann gerast 6-7 cm breið og 10 cm long. Beinini eru heldur stutt og før. Skelin er vaksin fram í ein tind og er tríhyrnt.

Lúsakrabbi leggur sjálvur nógvan tara upp á skelina. Hann tekur leys tarapetti við bitklónum og setur tey upp á skelina, sum hevur smáar bustir við króki á, og so sita tarapettini føst ímillum bustirnar. Men tarin fer at vaksa og festir seg.

Soleiðis hylur lúsakrabbi seg. Hann er neyvan í so stórum vanda, tí í fiskamaga er ikki so nógvur lúsakrabbi sum fjørukrabbi.

Nógvur krossfiskur er, har ið lúsakrabbi heldur til. Lúsakrabbin setur bara á ein krossfiskaarm, meðan hann heldur honum við bitklónum. Tá brýtur krossfiskurin beinið av sær og rýmir. Eftir liggur lúsakrabbin og etur beinið.

**Taralúsin**

Taralús sæst í taranum, har strondin liggur fyri ágangi, og grunt er.

Trý sløg eru vanlig. Taralýsnar eru ymiskar á liti, og tær eru littar eftir staðnum, har tær halda til, grønar, morreyðar, reydligar og hava rípur eftir longdini ella eru flekkutar.

Ein teirra er reyðgrøn og hvítflekkut á bakinum. Hon er førlig, kroppurin 3 ferðir so langur sum breiður. Kalldýrið er størri enn kvenndýrið.

Taralúsin etur bæði plantur og dýr, men mest tara. Hon er ránakend og kann taka dýr, sum bara er helvtina minni enn hon. Tá ið hon hevur skift ham, tá taka tær hvør aðra.

Taralús nørist ikki so skjótt. Stórur partur av avkominum frá heystinum doyr um veturin. Tær, sum liva veturin av, gýta egg í teir tómu klekiposarnar, tær hava undir búkinum. Ein partur av teimum fær avkom aftur í september-november, so tað vanliga er bara tvær ferðir um árið. Kalldýrini eru vanliga deyð, áðrenn seinna avkomið er klakt.

Men stovnurin stendur kortini við, av tí at fiskur veruliga leggur minni í hana enn marfluguna. Ofta sæst fiskur slúka taralús, men hann spýtir hana út aftur.

## Trøllaneglin

Trøllaneglin situr á brúntara, sum hon rívur burturav.

Hon er brúnlig við nógvum blágrønligum rípum úr toppinum og niður á skeljarondina. Hon er 10-15 mm long og líkist fliðu.

Trøllanegl situr ofta á sukurtara. Í tjúkka stelkin á sukurtaranum hevur hon rivið sær eina kullu, og har situr hon væl fjald. Um tað mundið, tá ið leyvið dettur av taranum, fara trøllaneglirnar skríðandi niður úr gamla leyvinum í nýggja leyvið og stelkin. So fara tær ikki rekandi til havs við gamla leyvinum; men kortini verða tær ikki meira enn ársgamlar.

Kalldýrið og kvenndýrið sita um summarið lið um lið og gýta sáð og egg út í sjógvin, har tey renna saman. Ungin svimur helst stutta tíð uppi í sjónum, áðrenn hann fer á mortaran.

## Tarabrosman

Tarabrosma heldur til í taranum niðast í fjøruni. Ofta liggur hon undir steinum ella tómum skeljum. Viðhvørt fjarar hon uppi; men hon livir fleiri tímar uppi á turrum, sleppur hon at liggja undir vátum tara.

Tarabrosma er langvaksin og mjá, høvdið lítið, ein long ryggfjøður og gotfjøður, men búkfjaðrarnar sera smáar. Á liti er hon gullig ella morlitt við dimmum flekkum. Niður úr tí lágu ryggfjøðurini ganga vanliga 10 dimmir blettir við ljósum ringi uttanum. Hon verður um 20 cm long.

Rognfiskurin gýtir um veturin. Tá ið tarabrosman er liðug at gýta, ringir hon seg uttan um eggini og rekur tey saman í klunk. Silfiskurin hjálpir til. Síðan skiftast báðir fiskarnir um at ringja seg um eggklunkin og ansa eftir honum, til klakt er.

Tarabrosman kemur spakuliga glíðandi millum taraleyvið. Ofta liggur hon still og hevur vundið seg uttan um legg ella leyv. Tá ið hon lúrir eftir fongi, liggur hon samanringd undir steinum ella í tómum skeljum. Føðin er smákrabbar.

Sum mannaføði hevur hon ongan týdning.

## Strentingurin

Strentingur er í taravaksnum botni, har grunt er, og hann smýgur millum taraleyvið eftir føði.

Strentingur er veruliga eitt 20 cm langt trøllasíl, ógvuliga mjávaksin og sporlið klænt. Á liðunum hevur hann beinplátur. Framman fyri ryggfjøðurina eru 15 tindar, hann fær reist og lagt niður, framman fyri gotfjøðurina tveir tindar. Á bakinum er hann morlittur og gulligur undir búkinum. Á liðunum eru nógvir gulgrønir blettir.

Strentingur gongur ikki í torvum.

Tá ið gýtingartíðin kemur, koma rognfiskurin og silfiskurin saman. Silfiskurin ger reiður eitt sindur upp frá botni. Reiðrið verður gjørt í ein tararunn. Silfiskurin leitar sær eftir leysum tara, og hann rimpar reiðrið saman við slipu, sum kemur úr nýrunum. Tá ið slipan kemur í sjógv, storknar hon til tráð.

Silfiskurin er sjálvur nál, svimur aftur og fram gjøgnum reiðrið og festir tað saman. Síðan rekur hann rognfiskin í reiðrið, men lagaliga, gníggjar seg upp at rognfiskinum, bítur mjúkliga í stertin á honum. Umsíðir skorar rognfiskurin seg inn í reiðrið og fer at gýta. Í mai-juni gýtir rognfiskurin 150-200 egg.

Tá ið gýtingin er komin væl áleiðis, kemur silfiskurin inn í reiðrið at gýta sil niður yvir eggini. Síðan fer rognfiskurin úr reiðrinum. Men silfiskurin verður eftir og ansar eftir eggjunum. Hann røkir tey væl, tyrlar alsamt nýggjan sjógv á eggini, so at tey skulu fáa nóg mikið súrevni. Um 2-3 vikur er klakt, og tá ið ungarnir eru sjálvbjargnir, rýmir silfiskurin úr reiðrinum.

Reiðrið er sum nevi til støddar. Nakað eftir, at ungarnir eru fyri seg komnir, doyggja rognfiskurin og silfiskurin. Ungarnir vaksa skjótt. Summarið eftir tað, at teir eru gýttir, eru teir longu gýtingarførir.

Strentingur tekur smádýr, serliga marflugu. Gagnfiskur er hann ikki.

**Ulkan**

Ulka er fram við strondini millum steinar og tara, har grunt er.

Hon er morlitt á bakinum og ljós undir búkinum. Silfiskurin, sum er minni enn rognfiskurin, er litfagrari. Í gýtingartíðini verður silfiskurin fagurreyður undir búkinum og hevur stórar, hvítar blettir. Høvdið er stórt. Á høvdinum eru tindar og beinknútar; men á kápuni eru størri tindar. Skuldi onkur stungið seg av tindi í ryggfjøður ella á kápu, tekur ofta ilt fyri seg.

Ulka er á botni. Hon er ikki góður svimjari, døsin, men glúpsk og

ránakend. Ulka etur næstan alt livandi, hon kemur framat. Ivaleyst er eingin fiskur so matfróur og slúkin sum ulka. Tú hevur kanska sitið á seiðabergi og sæð, hvussu ulkurnar tysja undan skørr og steini til agnið. Tær gloypa beinan vegin. Allar verða sleptar av stað aftur, tí eingin etur tær. Men beinan vegin taka tær aftur.

Rognfiskurin og silfiskurin makast úti á djúpari sjógvi, og um veturin koma teir inn á grynri sjógv at gýta. Tá ið rognfiskurin hevur gýtt, eru longu væl búnir ungar í eggjunum. Tey verða gýtt í stórar klunkar á botnin, har silfiskurin ansar eftir teimum, til tey eru klakt. Ungarnir eru uppi í sjónum. Teir eru at síggja tíðliga um várið.

Ulkan er gýtingarfør tvey ára gomul.

**Yngul**

Tá ið toskamurtar eru um 3 mánaðir gamlir og 4-5 cm langir, koma teir inn á grynri sjógv og fara á botn. Teir eru at síggja alt summarið, 5-10 cm langir. Út á heystið fara teir út aftur á djúpari sjógv og verða verandi har.

Smáir og væl stórir toskar kunnu eisini koma inn í taraskógin. Tá kalla vit teir berggyltur ella reyðfiskar, tá ið teir eru eitt sindur stórir.

Skrubbumurtar eru fyrsta summarið á heilt grunnum sjógvi. Í mongum førum eisini annað summarið. Skrubbumurtar eru á bleytari botni.

Reyðsprøkumurtar eru á reinum sandbotni, ofta í sandeygum inni í taranum. Ofta eru eisini nógvir í ósanum.

Seiðamurtar eru at síggja tætt inni við land. Summarið eftir kalla vit teir summarseið.

**Rognkelsið**

Í hyljum í sjóvarmálanum sært tú stuttar, bøllutar fiskaungar, ljósabláligar ella grønar, sita fastar á taranum. Teir eru um ein cm langir. Hetta eru ungar hjá rognkelsi.

Rognkelsi er høgur, bøllutur fiskur. Høvd og gron eru stutt, muður og eygu lítil. Fremra ryggfjøður er vaksin sum kambur. Búkfjaðrarnar eru samanvaksnar til eina súgskál. Uggafjaðrarnar eru breiðar og koma saman um búkin. Á bakinum og liðunum eru beinknútar. Skræðan er tjúkk, og staðin fyri roðslu eru smáir beinknøttar.

Munur er á silfiskinum og rognfiskinum. Silfiskurin verður 30 cm langur, er mjávaksnari og høvuðstørri. Hann er grámorreyður á bakinum, hvítur undir búkinum, men í gýtingartíðini fagurreyður ella reyðgulur undir búkinum. Um liðirnar grønligur, og allar fjaðrarnar eru størri enn á rognfiskinum.

Rognfiskurin verður 50 cm langur, er nógv førari og kúlutari. Hann er dimmari, grønbláur á bakinum og um liðirnar, men ljósagrønbláur undir búkinum.

Gýtingartíðin er í mars. Silfiskurin og rognfiskurin fylgjast inn á grunnan sjógv at gýta. Um brimligt er, fáa tey sogið seg føst á klettin. Rognfiskurin gýtir um 10.000 egg í ein klunk, sum verður kleimdur at klettinum. Síðan rýmir rognfiskurin, og silfiskurin ansar eftir eggjunum. Væl ansar hann eftir, liggur ofta og heldur eggjaklunkinum við høvdinum. Klunkurin er so stórur sum mansnevi.

Eggjaklunkurin kann liggja so ovarlaga, at hann fjarar uppi. Kortini heldur silfiskurin vakt og endar mangan sum krákumatur. 7-8 vikur líða, og so eru eggini klakt. Tá rýmir silfiskurin eisini.

Tá ið so 4 dagar eru farnir, hava ungarnir fingið búna súgskál og fáa sogið seg fastar á taran. Ungarnir eru grønir og halda til inni í taranum um summarið, ofta á heilt grunnum sjógvi. Tá ið ungarnir eru 5 cm langir, líkjast teir vaksna rognkelsinum, og nú fara teir út á djúpari sjógv. Hetta er um veturin.

Í nógv ár var tað ein gáta, hvar rognkelsið var um veturin. Merkingar hava sýnt, at rognkelsið var flytifiskur heldur enn støðufiskur. Eftir vakstrarlagnum kundi tað verið sannur støðufiskur. Um veturin fer rognkelsið langt frá landi út á djúpan sjógv. Sum dømi skal verða nevnt, at skip hava fingið rognkelsi á laksalínu norðan fyri Føroyar, so tað gongur eisini uppi í sjónum.

Rognkelsi situr og lúrir eftir fongi: krabbadýrum, ormum, smáum fiski og smáum holadýrum. Rognkelsi verður aðrastaðni nýtt til mannaføði. Rognið verður gjørt til kaviar.

# Krossfiskur og igulker

## Krossfiskurin

er vanligur bæði innansyndis og uttansyndis, úr flóðarmálanum og út á 50 metra dýpi. Hetta bláreyða, gulliga ella korkalitta dýrið skríður upp fyri steinar ella sjóvarklettin og fjarar tí ofta uppi.

Krossfiskur er harður at taka í, tí at í húðini eru smáar kálkplátur við knútum á. Dýrið verður skift í fimm partar, vit nevna armar. Armarnir ganga út úr miðstykkinum sum snældur úr rokkahjarta. Ytst á ørmunum er reyður eygnablettur.

Undir hvørjum armi er foyra, og í foyruni eru 4 røð av hvítum súgfótum, sum altíð bylgjast. Á endanum á súgfótinum er súgskál, og á teirri bleytu húðini eru tunnar bløðrur at anda við. Gotið er miðskeiðis á bakinum. Á bakinum eru eisini nógvar smáar griptengur. Tekur tú krossfisk og leggur hann opnan niður á armin á tær, tekur hann um hárini á arminum við griptongunum og hongur fastur.

Krossfiskur skríður spakuliga og seint, ikki meira enn 3-5 metrar um tíman. Hann dregur seg fram, toyggir súgføturnar fram, setur teir fastar og loysir teir aftur. Seint skríður hann, av tí at hann alla tíðina má súgva seg fastan og loysa aftur.

Serliga ungir krossfiskar eru ránakendir og átufrekir. Teir tevja dýr langt burturi, tá ið sjógvurin rekur ímóti teimum. Tey smærru dýrini verða etin beinleiðis, men tey stóru skeljadýrini, tá má hann nýta snildir, skal hann fáa etið tey. Krossfiskur tekur alskyns skeljadýr og sniglar, gjar, krabbadýr, bustormar, slangustjørnur, igulker, minni krossfiskar og fisk á línu ella í garni.

Sum so mong onnur ránakend dýr ger hann sær dælt, tá ið nógv er at eta; men tá ið púra sørt er, kann hann liva meira enn eitt ár og ikki fáa matartugguna. Vanliga verður krossfiskur 3-4 ára gamalur.

Krossfiskur er gýtingarførur 12-14 mánaðir gamalur. Hann gýtir í mai-juni. Egg og sáð verða gýtt í sjógvin og renna saman. Stórt kvenndýr gýtir í einar tveir tímar 2 ½ milliónir egg. Longu í juni-juli eru ungarnir uppi í sjónum í hópatali. Tá ið ungin er tveir mánaðir gamal, er hann lítil krossfiskur. Tá er ungin 2 mm langur.

Skjótt sveima allir ungarnir niður á tara, stein ella skeljar, og tá ið ungin hevur fingið 3 pør av súgfótum, sýgur hann seg fastan. Nú er hann í krossfiskalíki, og tað, eftir er av unganum, fer til grundar.

Hesir ungu krossfiskarnir amast upp á ljósið og skríða upp av staðnum, t.d. hægri upp á stein og tara. Teir taka smágjar og smákrækling, sum nýliga eru komin á botn, eru umstøðurnar góðar, hóskiligur hiti og nóg mikið at eta.

Krossfiskur er mangan í stórum vanda. Tá ið hann kemur upp í flóðarmálan og liggur næstan turrur á fjøru, taka másafuglarnir hann. Kanningar vísa, at í maganum á másafugli var 1/6 av matinum krossfiskur. Heldur ikki undir kavi er friður. Kaventur – serliga æða – taka hann. Í æðumaga kann vera 1/5 av matinum krossfiskur. Tó at fjørukrabbi og krossfiskur ganga lið um lið, so fær hann so hampiliga frið fyri fjørukrabbanum; men úti á størri dýpi taka lúsakrabbi og trøllakrabbi nógvan krossfisk.

Sjósól líkist krossfiski, men hevur vanliga fleiri armar. Ein lítil sjósól kann krøkja seg upp í endan á krossfiskaarmi. Ræðsla kemur á krossfiskin. Hann roynir at gníggja sjósólina av sær millum steinarnar á botninum, men einki batar. At enda brýtur krossfiskurin beinið av sær og rýmir. So er sloppið!

Er miðstykkið sjálvt óskatt, veksur nýggjur armur; men avbrotnir armar verða ikki til nýggjan krossfisk.

**Slangustjørnan**

Slangustjørnur kunnu vera á bleytum botni, har grunt er, og tær eru tá uppi í upplegginum á strondini. Men tær eru eisini á stórum dýpi.

Ein teirra, sum er á 10-20 metra dýpi, grevur seg niður í botnin. Hon grevur seg niður við súgfótunum. Nakrar cm niðri í botninum ger hon sær slímklædda holu til miðstykkið (kroppin); men beinini koma upp gjøgnum slímklædda ræsi og standa og veipa í sjónum. Tá ið smádýr og æti reka framvið, hanga tey føst í slíminum, sum er á súgfótunum. Síðan bera súgføturnar fongin at munninum.

Henda slangustjørnan er grámorreyð, kroppurin 1 cm og beinini 10 cm. Slangustjørnur líkjast krossfiski og hava eisini 5 armar. Men armarnir á slangustjørnu eru longri og klænri og ógvuliga liðiligir. Inni við tindarnar verður væta úrskild, tá ið slangustjørnan verður ørkymlað. Vætan lýsir.

Slangustjørnan skríður. Hon toyggir ein arm langt fram úr sær, dregur seg fram, við tað at armurin styttist. Men henda slangustjørnan sæst ikki uppi á botninum uttan í gýtingartíðini.

Slangustjørnur eru besta fiskaføði.

**Igulkerið**

Igulker er vanligt bæði í deyðavatni og streymasjógvi. Onkuntíð sært tú tey liggja væl niðan frá sjónum brotin. Tá hava fuglar borið tey og etið innan úr teimum.

Igulker er næstan sum ein knøttur. Tann flati parturin av kerinum vendir niður, og har er muðurin við 5 hørðum, hvítum kálktonnum, sum vaksa so hvørt, sum tær slítast. Ovast á kerinum er gotið. Skelin – kerið – er samansett av kálkplátum, og uttan á kálkplátunum er tunn, bivhærd húð.

Á berum keri sært tú dupultar poknur. Tá ið igulker nýtir súgføturnar, koma teir út ígjøgnum hesar poknurnar. Á øllum kálkplátunum eru liðiligir kálktindar. Kálktindarnir sita á smáum knútum á kerinum, og teir verða liðaðir við vøddum, sum eru á húðini.

Umframt nógvar súgføtur og kálktindar eru nógvar smáar tvígreindar griptengur. Summar griptengur lata úr sær eitur. Igulker verjir seg við griptongunum. Á livandi igulkeri líkjast tengurnar hýggi, sum bara liggur uttaná.

Kerið er ofta grønligt ella reyðmorreytt. Tindarnir grønligir ella reydligir og korkalittir á endanum. Uttan um munnin eru eingir tindar, men nógvar griptengur, og uttan fyri griptengurnar 10 rísnar táknur.

Igulker gnagar burtur av tara, tekur skarn undan fiski og krabbadýrum, gnagar burtur av gjari, sniglum og skeljadýrum. Tað brýtur hol á skeljarnar við tonnunum. So heldur tað fonginum við súgfótunum, snarar og vendir, sum best liggur fyri. Finnur igulker deyðan smáfisk, trýstir tað hann niður á havbotnin við tindunum, meðan tað gnagar burtur av honum.

Igulker skríður á súgfótunum, sum eru á flatara kerpartinum. Tú sært tað á tara ella fara upp fyri sjóvarklettin. Á sløttum havbotni fer tað stólpandi á tindunum um munnin, men bara fáar cm um minuttin. So plagar tað eisini at pynta seg við tarapettum og skeljum. Súgføturnir hava sogið taran og skeljarnar at sær. Kanska ger igulker soleiðis, av tí at tað skal verja seg fyri ljósi.

Á berum kletti á grunnum vatni plagar igulker at gnaga sær holu niður í klettin at sita í, har brim gongur á.

Igulker nørist sum krossfiskur. Ungin er gýtingarførur ársgamal og er tá 1-2 cm. Igulker verður um 6 ára gamalt.

# Dýr á mórubotni

## Jomfrúhummarin

Jomfrúhummari heldur til innansyndis á mórubotni, har heldur djúpt er. Hann grevur sær holur í mórubotnin.

Jomfrúhummari er reydligur. Kalldýrið verður 25 cm langt og kvenndýrið 16 cm. Kroppurin verður skiftur í framkropp og afturkropp. Á høvdinum eru samansett eygu, sum sita á stelkum, og tvey pør av kampum. Kjafturin hevur fleiri kjaftlimir. Summir verða nýttir at kanna føðina við, summir at halda føðini við og at tyggja við. Á framkroppinum eru 5 beinpør. Trý tey fremstu pørini hava bitklógv.

Um framkroppin og høvdið er hørð skel, sum fest er á bakið og hongur niður við báðum liðum. Undir skelini báðumegin eru táknur.

Afturkroppurin er í 7 liðum. Aftasti liður eitur sundbløkan. Hummarin svimur á tann hátt, at hann slær sundbløkuna upp undir seg; men tá svimur hann aftureftir.

Sum krabbi skiftir hummari ham. Tá ið hann er ungur, skiftir hann ham fleiri ferðir um árið. Seinni bara annaðhvørt ár. Fyrst rivnar skelin á bakinum, og dýrið krýpur úr haminum. Fyrstu tíðina eftir hamskiftið er jomfrúhummarin illa fyri.

Hann fær ikki staðið á beinunum og fær heldur ikki nýtt nakra klógv at verja seg við. Tí noyðist hann at krógva seg í móruni á havbotninum. Soleiðis má hann gera í 5-7 vikur. Tá ið hesar vikurnar eru umlidnar, hevur hann fingið nýggjan ham. Missir jomfrúhummarin lið ella lim, so vaksa teir aftur.

Jomfrúhummari fer dúgliga um havbotnin eftir føði. Serliga er hann frammi um náttina. Hann tekur helst slangustjørnur, men eisini krabbadýr, skeljadýr, ormar og ymiss ersmá botndýr. Deyðan fisk tevjar hann 5-6 metrar frá sær. Hann pettar fongin sundur við teimum stóru bitklónum. Stórur toskur er grammur eftir jomfrúhummarunum sjálvum.

Um miðjan juli hevur kallhummarin skift ham, og um hetta mundið er kvennhummarin í hamskifti, og gýtingin er byrjað. Eggini eru myrkagrøn, og kvennhummarin ber tey næstan eitt ár á

afturkropsfótunum. Hitin í sjónum er umráðandi, nær eggini verða klakt. Klekingartíðin er tí í apríl-august.

Ungarnir líkjast rækju og eru 6-7 mm langir. Teir svimja uppi í sjónum í 2-3 vikur, áðrenn teir fara niður á botn. Jomfrúhummari veksur seint, og hann verður gýtingarførur 9-10 ára gamal.

Jomfrúhummara-stovnurin er lítil. 1947 varð fyrstu ferð roynt eftir honum við troli; men skjótt vórðu menn sannførdir um, at stovnurin toldi ikki nógva roynd, og trolið varð bannað í 1980. Síðan hevur verið roynt eitt sindur við hummarafellu. Roynt verður serliga í Tangafirði og norður gjøgnum Sundalagið.

**Kúpuskelin**

Kúpuskel heldur til á mórubotni, har hon ofta grevur seg djúpt niður. Skelin er kúput og myrkamorreyð á liti. Tá ið kúpuskel er ung, vinna nógvir fiskar á henni og eta hana. Sum hon eldist, verða skeljarnar tjúkkar og sterkar, so kanska bara krossfiskur og steinbítur vinna á henni.

Kúpuskel verður um 130 mm og 12-14 ára gomul.

# Dýr á sandbotninum

## Fjørumaðkurin

Fjørumaðkur heldur til í sandbotni og mórubotni nærindis landi, líka inn í flóðarmálan. Á fjøru síggja vit smáar sandtúvur ella kullur í sandinum. Grava vit við túgvurnar, finna vit mestur fjørumaðkin.

Fjørumaðkur hevur hvørki eygu, kampar ella kjaftlimir. Um miðjan kroppin sita táknaskúvar við tunnari húð á, so at súrevni í sjónum setur inn ígjøgnum, og kolsýran setur út. Á kroppinum eru eisini smáar skeggbustir. Fjørumaðkur verður 15-20 cm langur.

Fjørumaðkurin fær ikki skriðið eftir botninum, men svimur við afturendanum fyri. Hann hevur 2-6 minuttir um at grava sær holu í sandin. Meiri sjógvur er í sandinum, lættari fellur honum at grava. Fyrst letur hann úr sær slím og borar framendan niður í sandin. So streymar væta úr kroppinum út í framendan, sum bólgnar upp og stendur fastur í sandinum. So draga vøddarnir hini liðini niður.

Holan er u-skapað, og hann liggur í holuni. Afturendin liggur uppeftir. Høvdið liggur 15-20 cm undir botninum. Har muðurin liggur, ryður sandur í heilum niður í holuna. Fjørumaðkurin liggur og rørir seg á tann hátt, at sjógvur skal koma niður í holuna og streymar fram við táknunum. Sjógvurin loysir sandin framman fyri munnin. Maðkurin etur tann leysa sandin og fær smádýr og smátarar úr honum.

Tá ið tarmurin er fullur, fer fjørumaðkurin upp gjøgnum holuna, setur afturendan uppundan og leggur skarnið upp á botnin í eina lítla túgvu.

Í holuni, sum innan er kløddd við herdum slími, kann hann sita upp í 8 mánaðir; men um veturin liggur hann djúpari í sandinum enn um summarið.

Kanningar vísa, at fjørumaðkur leggur túgvu upp á sandin 45. hvønn minutt. Tá ið umstøðurnar eru hóskiligar, ganga um 3 tímar frá tí, at hann hevur etið sandin, til sandurin kemur út aftur sum skarn.

Fjørumaðkur gýtir um miðjan november. Í gýtingartíðini fer hann á djúpari sjógv og grevur seg longri niður í sandin. Hann gýtir 40-60.000 egg. Ungarnir eru fyrstu tíðina uppi í sjónum, og nakrar vikur gamlir fara teir niður á botn.

Góður er fjørumaðkur til agns, og hann er góð fiskaføði og fuglaføði.

## Sjógvormurin

Sjógvormur heldur til nærindis landi í sandinum, har hann grevur seg niður.

Sjógvormur er langvaksin og í nógvum liðum. Fremsti partur verður nevndur høvuðbløkan, og á bløkuni eru 4 eygu, 2 tjúkkir og 2 klænir kampar. Aftan fyri høvuðbløkuna er munnliðurin. Á honum er kjafturin og 4 pør av kampum. Sjógvormur fær toygt svølgrúmið út. Tá koma tveir sterkir, bognir kjaftlimir til sjóndar.

Eftir liðunum eru húðarnabbar við bustum í. Sjógvormur hevur ikki táknur, men andar við húðini. Hann er 3-4 cm langur og situr í steyrrøttum slímrøri, ið kann ganga einar 40 cm niður í sandin. Sjógvormurin kann fara burtur úr rørinum, men fer stutt, og tá eru ofta stjørnuskapað spor, har hann hevur skriðið.

Sjógvormur etur alt, hann kemur fram á. Hann ger sær eisini slímtrakt oman á rørið, pumpar so sjógv niður ígjøgnum traktina. Smátari og smádýr hanga føst í traktini, og so etur hann bæði traktina og fongin. Størri dýr leggur hann á við teimum sterku kjaftlimunum.

Annars plagar hann eisini at toyggja seg upp úr rørinum, meðan hann sankar sær æti upp av botninum. Tá heldur hann sær við endanum á afturpartinum. Viðhvørt etur hann sand við ætinum í.

Sjógvormur gýtir um várið. Fleiri kvenndýr kunnu tá ringja seg tvørtur um eitt kalldýr, meðan øll kvenndýrini gýta. Tá eru bestu møguleikar fyri gitnaði. Egg og sáð verða gýtt í sjógvin. Ungarnir fara ikki upp í sjógvin at svimja, men beinan vegin á botn.

Rækja, fiskur og vaðfuglur taka nógvan sjógvorm.

## Skegggággan

Skegggágga bæði skríður á sandbotni og grevur seg niður har.

Hon er 4-5 cm høg og hevur mjáan, gulhvítan fót, sum hon fær lyft so høgt, at skelin liggur meira enn ein cm upp frá botni. Uppi yvir fótinum eru 2 rundir, klænir kampar. Frammantil er høvdið vaksið út í ein reyðan sevil. Seinasta vinding á skelini móti opinum gongur í eina breiða plátu – skeggið. Plátan er átøk fuglafóti við fitjum.

Skegggágga er sein á føti og kemur fram í støkkum. Hon roynir altíð at sleppa sær burtur úr ljósi. Liggur væl fyri, grevur hon seg skjótt á skák niður í sandin við skegginum fyri.

Tá ið hon hevur grivið seg niður í sandin, fer hon at lyfta sær á fótinum. Undir skegginum kemur nú ein hola nakrar cm uppfrá, og skal sandur ikki ryðja niður í holuna, má skegggággan klæða hana innan við slími. Dýrið fær nú flutt bæði høvur og sevil inni í holuni.

Fyrst stingur hon sevilin fram undan skelini, upp gjøgnum sandin og fær eina rennu tann vegin. Hon stingur so sevilin aftur undan skelini og ger eina aðra rennu. Báðar rennurnar verða eisini klæddar innan við slími. Við bivhárum fær skegggággan sjógv alsamt at reka niður gjøgnum aðra rennuna og so út aftur gjøgnum hina rennuna. Burtur úr sjónum taka táknurnar súrevni.

Skegggággan stingur sevilin upp á havbotnin gjøgnum rennurnar. So leitar hon dúgliga í sjónum eftir føði, sum hon fær á rívitunguna og etur, smátara og smádýr. Men ikki situr hon meira enn eitt samdøgur í sama staði. Fer so á annan stað at leita sær eftir føði.

Skegggágga gýtir eggini 2-3 saman. Ungarnir svimja leingi uppi í sjónum, áðrenn teir fara á botn.

Fullvaksin skegggágga fær væl lívbjargað sær millum ormar og slangustjørnur. Næstan eingin etur hana. Tí verður hildið, at hon verður væl gomul.

**Gággukrabbin**

Summstaðni á sandbotni ella mórubotni liggja tómar gággur og tómir kúvingar og sløðast. Í summum av hesum gággum og kúvingum býr gággukrabbin.

Framkroppurin á gággukrabba er sum á hummara. Um fremra partin av kroppinum liggur tunn skel. Afturkroppurin er bleytur og liggur altíð inni í gágguskelini, og har liggur innvølurin.

Trý tey fremstu beinpørini eru gongulimir; men fremsta beinparið hevur ójavnar bitkløur, sum gággukrabbin tekur føði við, verjir seg við og leggur fyri gágguopið, tá ið hann verður álopin.

Tvey tey aftastu beinpørini og aftasta parið av afturkropsfótunum bera bustir ella ríviamboð. Hesi beinpørini setur gággukrabbin ímóti gágguskelini innan, og torført er tí at fáa hann út úr skelini. Allir hinir afturkropsføturnir skorta; men tó hevur kvennkrabbin 4 smáar føtur vinstrumegin at hefta eggini uppí.

Sum krabbin veksur, verður gágguskelin ov lítil. So fer hann úr gágguskelini at leita sær eftir eini størri. Í hesi tíðini er krabbin í stórum vanda, tí mangur fiskur mungar eftir bleyta afturkroppi hansara.

Gággukrabbi býr saman við sjónotum, sum hann setur upp á gágguskelina. Sjónoturnar hylja gággukrabban og verja hann við notukyknunum. Afturfyri gevur gággukrabbin teimum ein bita frá sær, og nýggjur sjógvur streymar altíð fram við notukyknum, tá ið gággukrabbin gongur eftir botninum. Burtur úr sjónum taka sjónoturnar sær føði. Tá ið gággukrabbi hevur skift skel, setur hann sjónoturnar upp á aftur nýggju skelina.

Men inni í gágguskelini hava nógvir gággukrabbar ein meinan gest. Brýtur tú gágguskeljar, sum gággukrabbi liggur í, finnur tú ein stóran, reyðmorreyðan sjógvorm í aðru ella triðju hvørjari gágguskel. Meðan gággukrabbin pettar sær fongin sundur, glíður sjógvormurin fram eftir bakinum á honum og nápar sær ein góðan bita burturav, og ikki fær gággukrabbin forðað honum.

Gággukrabbin sópar eftir botninum við minnu bitklónni upp ímóti kjaftlimunum, sum so hvørt skilja burtur úr tað, ið etandi er.

**Toppkúvingurin**

Toppkúvingur heldur til á sandbotni ella tara á grunnum sjógvi. Hann er vanligur at síggja um summarið, tá ið sjógvurin er flógvari. Um veturin er sjógvurin kaldari, og tá grevur hann seg niður í sandin.

Toppkúvingur er breiðvaksin, men smalkar í ein topp, sum kann vera hægri ella lægri. Hann er ljósamorreyður við smáum, ljósum blettum ímillum og verður upp í 10 mm høgur.

Toppkúvingur rívur tað tunna taraábreiðið burtur av steinum og tara niðri á botni.

Kvenndýrið og kalldýrið sita lið um lið og gýta egg og sáð út í sjógvin, og tá eru møguleikarnir fyri gitnaði góðir. Ungarnir svimja ta fyrstu tíðina uppi í sjónum.

**Agngággan**

Agngágga er vanlig á sandbotni og hellubotni, har dýpið er um 10 metrar. Hon skríður eftir botninum eftir dýrum, sum sita still.

Agngágga liggur í ruflutari, vundnari gágguskel. Uttan um innvølin er poki, sum er vaksin eftir gágguskelini. Í niðara parti av pokanum er húðarfaldur, vit nevna kápan. Í rondini liggja kyknur, sum lata úr sær kálk. Hesar kyknur lata úr sær kálk alt lívið, so hvørt sum skelin veksur. Brotnar gágguskelin, so fær dýrið bøtt um hana aftur, tí kálk kemur úr kyknum í innvølispokanum.

Verður agngágga tikin upp úr sjónum, so fer dýrið inn í gágguskelina og leggur lok fyri opið. Lokið er úr kálki og klætt við evni, ið líkist horni. Agngágga dugir ikki at svimja; men hon skríður á fótinum, sum hevur sterkar vøddar.

Eisini tá ið agngágga verður órógvað, tekur hon seg inn í skelina og liggur væl vard har. Fyrsta vandin er av, kemur fóturin út aftur, og hon heldur á at skríða. Agngágga kann fjara uppi. Tá tekur hon seg inn í skelina, so at hon tornar ikki upp.

Beint oman fyri høvdið er skeljarondin vaksin út í tút. Long andingarpípa liggur út gjøgnum tútin. Andingarpípan gongur inn í kápuholuna, og har er kambvaksin tákn. Innan um kápuna eru mong bivhár, sum biva soleiðis, at sjógvur streymar inn gjøgnum andingarpípuna, fer fram við táknini, so blóðið fær tikið upp súrevni. So fer sjógvurin út aftur, har gotið er.

Tá ið agngágga fer skríðandi, snarar hon andingarpípuna ymsan veg. Umframt súrevni er eisini evni úr ymsum dýrum í sjónum. Tevjar agngágga hesi evni, veit hon, um dýr eru nærindis. Síðan snarar hon andingarpípuna dúgligari at fáa greiði á, hvaðani evnini koma, tí so fær hon lagt á dýrini.

Men agngágga er seinfør og hevur tí ongan møguleika at taka kvik dýr. Hon tekur heldur lívveik ella deyð dýr. Tá ið hon skal eta, toyggir hon sevilin út. Sevilin er ein partur av munninum. Inni í sevlinum liggur rívitungan, og á henni eru smáar, hvassar tenn. Agngágga rívur hol á fongin. Tá ið holið er nóg stórt, stingur hon sevilin inn og fer at ríva burtur úr dýrinum. Koma fleiri gággur á sama dýr, er hent at hava langan sevil. Úttoygdur er sevilin um 20 cm langur.

Agngágga tekur eisini skeljadýr, men fær tó ikki rivið hol á skeljarnar, tí leggur hon kantin á skelini millum skeljarnar. Tá ið skeljadýrið gapar, stingur hon sevilin inn í skeljadýrið og fer at eta.

Dømi er um reyðsprøkugarn, ið staðið hevði í 24 tímar. Tá høvdu gággurnar etið alla veiðina. 7-8 gággur sótu á hvørjari reyðsprøku. Soleiðis gera gággur eisini við fisk á línu. Annars etur toskur nógva gággu, og hon verður eisini tikin til agns.

Tekur tú sjógv upp í eina krukku, sleppir livandi gággu niðurí og letur hana standa eina løtu, ber á, at tú sært dýrið koma úr skelini. Fyrst sært tú fótin. Framman fyri fótin høvdið. Á høvdinum tvey smá eygu og tveir kampar. Leggur tú so feskan fisk niður í krukkuna, kemur dýrið til, toyggir sevilin út.

Agngágga gýtir eggini í smá hylki, hon sjálv hevur gjørt. 1000 egg eru í hvørjum hylki. Øll hylkini eru kleimd saman í klunkar, sum eita lættisoppar. Bara 30 ungar verða klaktir í hvørjum hylki. Teir eta øll hini eggini. Síðan eta teir sterku ungarnir teir veiku. Tá ið av tornar, koma bara 10 smáar gággur úr hvørjum hylki. Lættisoppar eru vanligir at síggja í fjøruni. Hyggur tú í hylkini, sært tú mestur smáar gággur.

Havgágga líkist agngággu, men hevur slætta gágguskel. Havgágga er eisini á størri dýpi enn agngágga.

### Jákupsskelin

Jákupsskel er uttansyndis í sandbotni, har dýpið er 60-200 m.

Jákupsskel er næstan rundvaksin og um leið 20 riv eftir skeljunum. Vinstra skel er kúputari enn høgra skel. Hon verður um 75 mm, máld frá bøbbinum og út á rondina. Verður jákupsskel løgd í aliker, liggur væl fyri at kanna hana. Fyrst verða vit var við mong dimm silvurglitrandi eygu, ið sita sum perluband eftir kápurondini.

Á kápurondini eru eisini nógvir erklænir kampar. Jákupsskel er sera viðkvæm. Vanliga liggur hon við opnum skeljum. Tendrar og sløkkir tú ljósið í alikerinum, og skuggi fellur á kápurondina, slær hon skeljarnar saman. Bara krossfiskur nærkast henni, toyggir hon kamparnar út og rættir teir ímóti krossfiskinum. So spílar hon skeljarnar upp og slær tær saman.

Jákupsskel etur plantuæti og dýraæti. Tá ið sjógvurin fer ígjøgnum táknurnar, síla táknurnar ætið frá.

Hon er tvíkynjað og gýtir fyrst í august. Kelvið – ungarnir – svimur 3-4 vikur uppi í sjónum, áðrenn tað festir seg við træðrum á tómar skeljar t.d., sum liggja á botni. Tá ið skeljarnar vaksa, gerast ringar í teimum. Ein ringur kemur um árið, og hann kemur í mars mánaði. Eftir ringunum ber til at siga, hvussu gomul jákupsskel er.

Fleiri dýr í sjónum veiða jákupsskel. Krossfiskur fær togað skeljarnar sundur. Men jákupsskel er eitt av teimum fáu skeljadýrunum,

sum svimur alt lívið. Hon tekur sjógv inn millum skeljarnar og slær tær fast saman. Sjógvurin verður trýstur út millum op, sum eru millum skeljarnar á bakinum. So fýkur hon ein góðan metur fram. Gággukrabbi, havtaska og steinbítur veiða eisini jákupsskel.

Jákupsskel fæst eystan fyri Nólsoynna, úti fyri Rytuvík, norðan og sunnan fyri Húsagrynnuna. Nakað fæst úti fyri Hvítanesi og millum Borðoynna og Eysturoynna. Jákupsskel verður veidd til matna.

**Rípuskelin**

Rípuskel grevur seg niður í sandin. Hon liggur turr á fjøru. Tekur tú hana upp úr sandinum, grevur hon seg skjótt niðuraftur.

Hygg at einari mynd, hvussu skeljadýr er innan. Kápubløðini eru vaksin saman í tút, sum er í tveimum pørtum. Sjógvurin kemur inn gjøgnum tútin øðrumegin, streymar so gjøgnum alla kápuholuna og fer so út aftur hinumegin. Úr sjónum fær dýrið ymiss smákykt, sum táknurnar síla frá, og súrevni. Sjógvurin, sum streymar út aftur, tekur skarnið við sær.

Rípuskel liggur næstan ongantíð á botni, men grevur seg niður, so at bara túturin kemur upp úr sandinum. Skal hon trívast væl, má hon vera undir sjógvi í okkurt um 5 tímar bæði sjóvarføllini, og best trívst hon á fínum, vátum sandbotni.

Verður rípuskel órógvað, tekur hon tútin inn undir skeljarnar, og eingin sær, hvar hon liggur. Eftir botninum kemur rípuskelin hoppandi á fótinum.

Fjørukrabbi grevur nógva rípuskel upp at eta. Vaðfuglur er eisini grammur eftir henni. Onkuntíð kann rípuskel klippa ytsta – ella fleiri – tálið av vaðfugli. Teir smáu vaðfuglarnir kunnu drukna, tá ið teir sita fastir í eini rípuskel, sum liggur føst í sandinum.

**Smyrslingurin**

Smyrslingur heldur til á sandbotni. Fert tú at leita í sandrúgvu, finnur tú smyrslingar.

Skeljarnar falla væl saman, men har túturin kemur út, eru tær brettar útá, og eitt op er ímillum teirra. Skeljarnar eru heldur tunnar, avlangar rundar, hvítar og 10-15 cm langar.

Smyrslingur grevur seg 15-30 cm niður í sandin, so bara andingarpípurnar koma upp á sandin. Pípurnar eru trevsutar um rondina,

og trevsurnar eru kampar. Ungur smyrslingur fær tikið andingarpípurnar inn í skelina, men ikki gamal smyrslingur.

Kamparnir um andingarpípurnar eru so viðkvæmir, at bara skuggi fer eftir teimum, skundar smyrslingurin sær at taka seg niður í sandin.

Nýklaktir ungar eru 1/2 mm langir. Teir úrskilja hornkendan festitráð, sum teir festa at steinum ella sandskornum á botni. Tá ið teir eru 5-6 mm langir, grava teir seg spakuliga niður í sandin, men tá ið teir eru 50 mm langir, hava teir mist evnini at grava.

Fullvaksin smyrslingur má tí vera í sama staði alt lívið. Hann verður 10-12 ára gamal. Smyrslingur trívst best, har fast er um, væl av streymi eftir botninum og ríkilig føði.

**Langskelin**

Langskel grevur seg niður í sandin.

Langskel er eyðkend á vakstrarlagnum. Hon er fleiri ferðir so long, sum hon er høg. Skeljarnar eru tunnar og veikar. Langskel veksur skjótt; men hon verður sjaldan meira enn 2 ára gomul, um ikki sandflundra ella annar fiskur hevur etið hana.

Tá ið langskel grevur seg niður, setur hon fótin fyrst fastan í sandin. Hon letur so blóð seta niður í fótin, so forendin bólgnar upp og stendur sum akker í sandinum.

Nú styttir langskelin fótin og dregur soleiðis kroppin niður í sandin, til hon stendur steyrrøtt.

# Fjøru- og strandarfuglur

### Fiskimásin

Fiskimási er allastaðni at síggja við strondina, inni á fjarðum og útiá. Hann eltir fiskatorvur og fiskifør, er við lendingar, í havnarløgum og at húsum einsæris ella í lítlum og stórum flokkum.

Fiskimási er hvítur um kropp, háls og høvur, men blágráur á bakinum og oman á veingjunum. Fiskimási líkist nógv likku, men hann er heldur størri og hevur breiðari veingir. Veingjarbroddarnir eru svartir við hvítum blettum; men sjálvur endin er hvítur, og tað er gott frámerki. Nevið er gult, stórt og førligt. Á undirnevinum er reyður blettur. Beinini eru ljósareyðgul.

Fiskimási strýkur víða um strendurnar. Viðhvørt kemur hann inn í fjøruna at leita, hvat har er at forvinna. Bæði á sumri og vetri finnur hann okkurt etandi í upplegginum, deyðan fisk, krabbadýr, ormar, sjúkan ella deyðan fugl. Tá ið hann er útiá, flýgur hann lágt yvir sjónum og kannar, hvat har er at fáa. Ikki liggur so væl fyri hjá honum at kava. Vanliga tekur hann fisk í vatnskorpuni.

Við reiðrið sæst, hvat hann etur, tí har liggja ymiss eggjaskøl av havhestaeggjum, lomvigaeggjum og lundaeggjum, so eggjatjóvur er hann av teimum verstu. Har sløðast eisini fiskarov, skeljabrot og krabbabein. Eisini tekur hann ymist burturkast við hús og slógv við lendingar og fiskavirki. Serliga tá ið lítið er at fáa, legst hann á egg og ungar, eisini hjá øðrum fiskimásum. Hann drepur nógvan sjófugl. Serliga fáa havhestur og ryta toyggið. Fiskimásin er nógv nørdur, síðan fiskiskapur og fiskiídnaður vundu nógv upp á seg.

Eftir summarmála kemur fiskimásin á bústaðin og fer at leita sær eftir reiðurstaði. Fiskimási tekur sær brattan haga, ofta røkur millum smáar hamrar; men hann eigur eisini á sløttum haga. Nógvir eru komnir saman í pør, áðrenn teir koma á bústaðin, og teir fara beinan vegin á bústaðin. Men hinir, sum ikki eru komnir saman í pør, fáa sær tilhaldsstað nærindis bústaðnum og verða verandi har, til teir hava funnið maka. Fiskimási eigur á einingi ella fá pør saman.

Steggin fer so at bera seg øðrvísi at og tolir ikki, at aðrir fiskimásar koma nær tilhaldsstaðnum hjá sær. Skuldi fiskimási komið,

fer hann ímóti honum, toyggir hálsin á skák uppeftir, men setur nevið niðureftir. Veingirnar tekur hann eitt sindur uppfrá. Soleiðis ger hann seg øgiligan.

Fremmandi fiskimásin plagar ofta at rýma. Men hann kann eisini verða standandi. So verður bardagi, og meðan teir berjast, halda teir hvør øðrum við nevinum. So berja teir hvør annan við veingjunum. Soleiðis ger steggin teir fyrstu dagarnar, hvørja ferð onkur fiskimási kemur nær tilhaldsstaðnum hjá sær.

Seinni er atburðurin øðrvísi. Tá ið friður er á tilhaldsstaðnum, stendur hann ofta og letur ymisliga, stutt, lág, langdrigin og gellandi lát. Nógv látini ræða og styggja aðrar steggjar burtur; men tey lokka eina bøgu ella fleiri bøgur á tilhaldsstaðin hjá steggjanum. Tá ið so komið er saman í par, verja bæði bøga og steggi reiðurstaðin hjá sær. Skuldi fremmandur fiskimási komið hagar, ber steggin seg at, sum hann plagdi, áðrenn hann hevði funnið maka. Rýmir fiskimásin ikki, letur steggin gellandi. Viðhvørt høggur hann við nevinum niður í svørðin og rívur plantur upp í loft. Bøgan plagar onkuntíð eisini at gera soleiðis. Batar ikki nú, so loypur steggin á.

Tá ið steggin hevur troðað bøguni, fara bæði at byggja reiður úr tara, mosa og turrum grasi og øðrum plantum. Reiðrið er vanliga stórt og 20-25 cm høgt. Í mai-juni verpur bøgan 3 grágrøn egg við myrkamorreyðum blettum. Torført er hjá øðrum fugli at ræna eggini, tí væl falla tey saman við lendið, og væl verður reiðurstaðurin vardur.

Skuldi fuglur komið í tílíkum ørindum, rýkur fiskimásin á flog og jagstrar hann burtur. Í millumbilinum kann tað kortini eydnast øðrum eggjatjóvi at nápa sær eitt egg frá honum.

Bøgan og steggin skiftast um at bøla í 26 dagar. Dúnungin er førur at fara úr reiðrinum, fyrsta dúnið er turt. Fyrstu tíðina bera foreldrini teimum føði. Hvørja ferð ungarnir eru svangir, renna teir nevið ímóti tí reyða blettinum, sum foreldrini hava á undirnevinum. Tá klíggja foreldrini hálvsodnaða føði upp úr sær, og ungarnir eta.

Meðan ungarnir eru smáir, eru teir um reiðurstaðin, og onkuntíð koma teir krúpandi undir veingirnar á foreldrunum at verma seg. Gerst vandi á, láta foreldrini varlát, ið hoyrist langan veg. Fyrsta ungarnir hoyra varlátið, flekja teir seg niður ímillum grót ella vøkstur. So liggja teir pinnastillir, og ringir eru teir at síggja, tí teir eru morlittir ella grágulir við nógvum blettum um høvdið og á bakinum.

Tá ið 5-6 vikur eru farnar, eru ungarnir floygdir. Í fyrstuni strúka ungarnir nærindis bústaðnum: men skjótt rýma teir. Enn líkjast teir ikki fulllittum fiskimása. Teir eru morsprøklutir og hava grátt nev. Ungfuglurin verður nevndur skuri. Tá ið skurarnir eru farnir av bústaðnum, fara foreldrini skjótt eisini.

Allan veturin eru fiskimásar at síggja við strendurnar, tí fiskimási er í Føroyum alt árið – hann er støðufuglur.

**Æðan**

Æða sæst allar ársins tíðir í flokkum fram við strondini. Stundum sæst hon á sjóvarklettinum; men aloftast flýtur hon. Gongulagið er tungligt og ruggandi. Flýgur hon, so flýgur hon so lágt, at beinini klamsa eftir vatnskorpuni.

Æða er kring í sjónum. Hon svimur skjótt og kavar djúpt. Tú hevur sæð, hvussu lættliga hon dandar á aldukambunum, og tá ið hon kavar lúkst gjøgnum brotini.

Æðan og æðublikurin eru ymiss á liti. Æðan er einlitt grá; men blikurin er svartur um knokkin, drunnin og velið, partar av veingjunum og undir búkinum og grønligur um vangarnar og aftur um nakkan. Annars er hann mest hvítur undir bringuni og á bakinum.

Um várið fer æðan at hugsa sær um reiður. Best dámar henni fram við strondini. Summar eiga tó uppi í haganum. Seint um kvøldið koma tær flúgvandi oman úr haganum og seta seg á sjógvin. Tá koma tær at leita sær eftir onkrum etandi. Æður verpa ofta fleiri saman – í æðuvørpum. Serliga í tveimum støðum verpa tær í meingi. Tað er í Kirkjubø og í Sumbiarhólmi. Onkuntíð verpur æðan saman við ternuni, kanska at verja eggini, tí terna verjir reiðurstaðin væl, skuldi ránsfuglur gjørst naskur.

Æðan verpur vanliga fyrst í juni 4-6 ljósagrøn egg; men eru fleiri enn 8 egg í reiðrinum, hevur onkur onnur vorpið í reiðrið eisini. Æðublikurin hevur so trúliga verið saman við æðuni síðan fyrst í oktober, men nú rýmir hann frá henni. So má æðan bøla sjálv tær 4 vikurnar, áðrenn brestur fyri nev.

Másar lúra eftir æðureiðrunum. Æðan roytir dún av sær at leggja oman yvir eggini, tá ið hon flýgur av. Fer hon av í skundi og hevur ikki breitt út yvir eggini, eru másarnir eftir eggjunum. Men eru eggini fjald, bjóðar másin ikki til at leita.

Í bútíðini er æðan spøk. Meðan hon bølir, fellur hon væl saman

við lendið og er ring at síggja. Flestar flúgva ikki av, fyrr enn tú ert nøkur fet frá reiðrinum. Summar eru so grammar at bøla, at tú fært kínt teimum, meðan tær liggja á. Men kemur tú brádliga fram á æðu í haganum og styggir hana av, drítur hon á eggini og flýgur av. Skvøttið deymar, men ránsfuglunum ger tað ikki mun. Er dúnið ikki breitt útyvir, taka teir eggini.

Tá ið 4 vikur eru farnar, koma ungarnir út. Fyrsta seinasti ungin er útkomin, fer æðan á sjógvin við teimum, og fermir eru ungarnir á føti. Teir leypa út av homrum, og ikki sæst á teimum, tí at teir eru so lættir. Æðurnar, sum eiga langt uppi í haganum, mugu ganga langan veg oman í fjøruna; men tær fara um náttina at sleppa undan ránsfugli. Á sjónum eru ungarnir bæði kringir at svimja og kava.

Æða sum dunna hevur lyndi at kradda sær ungar. Sært tú æðu fara við 12 ungum, so hevur hon mestur kraddað. Eisini kunnu fleiri æður taka seg saman at verja ungarnar, og tá koma fleiri ungar undan. Hevur mási tikið unga upp í luftina, fáa æðurnar einki gjørt uttan at savna sær hinar ungarnar saman.

Onkuntíð setur svangur mási seg á sjógvin at lúra, til ein ungi fer úr flokkinum. Er másin passaliga nær, rýkur æðan eftir honum. Á sjónum vinnur æðan, tí hon er tyngri enn másin.

Føðina tekur æða sær vanliga á um leið 5 favna dýpi, taralýs, smákrabbar, kræklingar og onnur smá skeljadýr. Æður og ungar liggja oftast tætt undir landi. Tá sutla ungarnir ymiss smákykt, sum eru í taranum. Tá ið ungarnir eru tveir mánaðir gamlir, eru teir floygdir og mugu vera sjálvbjargnir.

Æða kann gerast gomul, meira enn 15 ár. Tær flestu doyggja tíðliga. Miðalaldurin er stívliga 2 ár. Væl er hon lagað eftir at vera í sjónum, dugir væl at sæta sær í nógvum brimi. Men er liggjandi illveður, ørmaktast hon. Tá er hon vanlig at síggja inni á stórum fjørðum.

Síðan æðan varð friðað, hevur hon nørst nógv. Nú eru fólk góð við æðuna. Men nú er ein annar hættisligur vandi: oljudálkanin inni á firðunum. Æða eins og allur sjófuglur tolir illa oljudálkan.

Fuglavinurin Mikkjal á Ryggi, sáli, sigur soleiðis:

„Tað er hugnalig sjón at síggja smáflokkar av gomlum og ungum blikum og bøgum floytandi sær fram við landi og hoyra teirra blídliga ov ov og gogg goggg gogg í tí lýggja veðrinum – eitt av prýðum Føroyalands.“

**Svartbakurin**

Bakur er at síggja bæði á sjógvi og landi; men hann fer ikki so langt frá landi. Mangan flykkist hann uppi yvir útróðrarbátum, sum koma til lands.

Bakur er størsti másafuglur, sum eigur her hjá okkum, men hann er ikki so fjølmargur sum hini másasløgini. Hann er dimmgráur á bakinum og oman á veingjunum. Veingjarbroddarnir eru hvítir sum á likku, og hann verður eisini mistikin fyri likku. Bakur hevur breiðari veingir enn likka. Tann hvíti jaðarin um veingjarsvangan er breiðari enn á likkuni. Bakurin er bæði størri og førligari enn likka.

Bakur flýgur seigliga og tykist tungur og lorkutur á flogi. Á sjónum er hann lættfloyttur sum aðrir másar, og lættliga sleppur hann á flog av sjónum, tó at stilli er.

Hann er ránsfúsur fuglur. Hann flýgur uppi yvir antarfuglum, t.d. æðu. Tá ið æðan kavar og kemur upp aftur við fongi í nevinum, stoytir hann sær niður úr luftini og tekur fongin av henni. Síðan legst hann á annan másafugl á flogi og noyðir hann at sleppa fonginum, sum hann so loftar og etur. Um summarið, tá ið ungar eru á sjónum, heldur hann á at skjóta seg niður á teir, til teir maktast og noyðast at koma upp at anda, og so tekur hann teir.

Bakur er 10-20 metrar upp frá sjónum, tá ið hann skjýtur seg niður; men ikki fer hann meira enn ein metur niður í sjógvin. Soleiðis sæst hann mangan við lendingar, tá ið hann stoytir sær niður í sjógvin eftir deyðum fiski og slógvi. Tó veiðir hann eisini livandi fisk.

Rytan fær mangan toyggið frá honum, tí hann tekur bæði egg, pisur og vaksnar rytur. Í fjøruni leitar hann í upplegginum, í bjørgunum tekur hann bæði egg og ungar, á landi alskyns burturkast nærindis húsum, ymiss ræ, sjúk og lívveik lomb og harur. Tí hevur hann verið illa umtóktur her á landi.

Reiðrið er ofta í homrum ella á rókum millum hamrar og stundum á sløttum haga og helst ikki so langt frá fuglabjørgum. Reiðrið er stórt, meira enn ein metur í tvørmáli og ofta hálvan metur høgt; men tað er heldur ófantaliga gjørt úr mosa, tara og turrum grasi og liggur ofta fjalt undir steini. Uttan um reiðrið liggja leivdir av tí, hann hevur etið.

Bakur er styggur á reiðurstaðnum, men skjýtur seg sjaldan niður á fólk. Vanliga er langt ímillum reiðrini; men summstaðni kunnu upp í 100 pør eiga saman.

Um hálvan mai og fyrst í juni verpur bøgan 2-3 ljósagulmorreyð egg við nógvum dimmum blettum. Meðan bøgan liggur og bølir, situr steggin á varðhaldi, og so skifta tey um. Klekingartíðin er 28 dagar. Dúnungin líkist nógv dúnunganum hjá likku og fiskimása, men er eitt sindur ljósari enn teir. Um 7 vikur gamlir eru ungarnir floygdir.

Svartbakur er í Føroyum alt árið.

**Skarvurin**

Skarvur heldur seg fram við landi, har hann kavar eftir fiski. Tú sært hann á skerjum, steinum, hellum og í urðum. Er sólskin, situr hann við útbreiddum veingjum og turkar teir. Kletturin, har hann situr, er hvítur av skitti.

Skarvur er stórur fuglur við longum hálsi. Hann er svartur og skyggir grønligur. Nevið er langt og klænt og hevur krók úti á oddinum. Beinini eru svørt. Í bútíðini hevur hann topp á nakkanum.

Skarvur er tungfloyttur. Tá ið hann kavar, hoppar hann fyrst eitt sindur upp úr sjónum, leggur veingirnar saman, setur nevið frameftir og hirðir seg undir kav. Hann kann vera leingi undir. Ofta kemur hann upp aftur við seiði ella berggyltu, sum hann slettir við eina løtu, áðrenn hann svølgir. Skarvur etur næstan bara fisk.

Reiðrið er í grovum, gloprutum urðum ella eisini í berginum á pallum, men ikki oman fyri 50 metrar frá sjónum. Reiðrið liggur væl fjalt. Skarvsbøli deymar, skitturin liggur tjúkkur bæði á steinum og í gloprum, men reiðrið sjálvt er gullreint.

Í februar-mars leita skarvarnir til bølini. Fyrst væla teir um tað gamla reiðrið ella gera sær nýtt reiður av tara. Bøgan verpur í apríl mánaði 3-4 hvít egg vanliga. Eggini eru minni enn høsnaregg. Verpingartíðin er út á hásummarið, so vit síggja bæði egg, staputar ungar og floygdar ungar í somu urð.

Tá ið 3-4 vikur eru farnar, koma ungarnir út. Um 6 vikur gamlir eru teir floygdir. Ungarnir eru ójavnir á aldri. Teir yngstu og minstu formáa sær lítið, tá ið foreldrini koma við føði. Teir elstu og sterkastu fáa tí mest, og tí verða hinir sjúkir og doyggja. Ungfuglurin kennist frá teimum gomlu fuglunum; hann er morlittur.

Fyrr var skarvur tikin til matna. Tiltikið er at taka svøvnskarv. Um náttina sita skarvarnir í flokkum á sjóvarklettinum, og teir sova fast. Maðurin, ið varliga lúrir seg at teimum, fær tikið ein fyri og annan eftir.

**Teistin**

Teisti heldur seg tætt fram við landi og helst á grunnum vatni, og hann fer sjaldan útá.

Teisti er á stødd sum lundi. Um summarið er hann svartur við sjónskum hvítum liti á veingjunum. Um veturin er hann sprøklutur. Beinini eru blóðreyð, nevið svart og klænt.

Teista fellur væl at kava, og kimiligur er hann undir vatni. Tá ið hann flýgur, letur hann títt við veingjunum. Vanliga flýgur hann lágt yvir sjónum. Fer hann á flog av sjónum, fara beinini slettandi eftir vatnskorpuni, áðrenn hann sleppur á flog. Á landi gongur teisti upprættur, lútandi framyvir, ella liggur hann á búkinum.

Teisti eigur í djúpum urðargloprum og rivum og gjótum í berginum. Hann eigur á einingi, og nøkur pør sløðast um strendurnar. Lítið er til av teista. Teistin verpur seinast í mai - fyrst í juni 2 hvít egg við svørtum prikkum. Eggini liggja á smásteinum. Teisti hevur sama reiðurstað ár um ár. Við reiðrið er hvítt av skitti og deymur. Kemur fólk at reiðrinum, flýgur teistin á sjógvin, svimur látandi í kring, til vandin er av. Látið er mjúkt hvin. Tá ið ampi er á teista, drepur hann ofta nevið niður í sjógvin, meðan hann svimur.

Tá ið teistin hevur bølt í 21-24 dagar, koma ungarnir út. Í hesi tíðini leita teistarnir dúgliga eftir føði; men teir fara aldri langt frá reiðrinum. Føðin er serliga tarabrosmur, krabbadýr og skeljadýr, sum hann veiðir á grunnum vatni. Mangan sært tú teista við tarabrosmu í nevinum.

Ungarnir eru í reiðrinum, til teir 5 vikur gamlir eru floygdir. Tá fara teir á sjógvin og eru sjálvbjargnir. Teistin stendur seg væl ímillum teir stóru másarnar, tí eggini liggja væl fjald, og ungarnir eru í reiðrinum, til teir eru floygdir.

Um veturin sæst teisti onkuntíð úti á havi; men meginparturin er við strendurnar alt árið, so teistin er støðufuglur.

**Skatumásin**

Skatumásin flýgur í flokki sum onnur másasløg við lendingar, havnarløg, fiskavirki og flykkist uppi yvir útróðrarbátum.

Skatumási er heldur størri enn ryta og kann verða mistikin fyri rytu. Skatumási hevur stóran hvítan lit á svørtu veingjarbroddunum, ryta ongan. Skatumási hevur grønlig bein, ryta svørt. Nevið er grøngult og

klænri enn á øðrum másasløgum. Á bakinum og oman á veingjunum er skatumási grábláur og líkist tí fiskimása, sum er væl størri.

Skatumási eigur í haganum og helst við vøtn. Eggini líkjast rytueggi. Dúnungarnir eru gulgráir við svørtum prikkum. Ungfuglurin gráflekkutur.

Í atburði og livihátti líkist skatumási hinum másafuglunum. Reiðrini eru ofta langt frá sjónum, og tí veiðir hann sær ikki føði bara við strendurnar.

Skatumási er støðufuglur.

### Fransaternan

Fransaterna er minsti og smidligasti másafuglurin her hjá okkum. Hon eigur vanliga við vøtn og onkuntíð saman við ternu.

Fransaterna er minni enn ryta. Í bútíðini er hon blágrá á bakinum og oman á veingjunum og myrkamorreyð um høvdið. Alla aðra tíð á árinum er dimmi liturin á høvdinum bara ein lítil blettur aftan fyri eyguni. Nev og bein eru reyð.

Hon tekur mestu føðina á landi og er ongantíð til havs. Annars líkist hon øðrum másafugli í livihátti.

Um ár 1800 áttu fyrstu fransaternurnar í Føroyum. Summstaðni er væl til av henni, t.d. eiga 150 pør á hólmi á Starvatni í Eysturoy. Í fyrra helmingi av juni verpur bøgan 2 egg, sum á liti líkjast ternueggi, men eru tó størri. Eggini eru grámorreyð ella morlitt við dimmum blettum.

Fransaterna er bæði flytifuglur og støðufuglur í Føroyum.

### Ternan

Terna eigur á lágum nesjum og á hólmum í sjógvi ella vøtnum. Summi ár eigur hon eitt sindur oman fyri bøgarðarnar, onnur ár niðanfyri; men onnur ár sæst hon ikki har. Tú finnur ternureiður líka frá strondini og upp undir fjøllini út móti sjónum. Ternuni dámar best nærindis sjónum. Ikki er vítt um, har ternurnar eiga. Reiðrini liggja so tøtt, at tú mást ansa tær, at tú stígur ikki í tey.

Terna hevur lítið størri kropp enn smáfuglur. Teir longu, smølu veingirnir og tað langa, sýlda velið gera, at hon tykist størri. Hon er svørt um nakkan og skallan og hevur reytt nev. Beinini eru reyð og kløn.

Ternan kemur til Føroya um halvarðsøku. Seinast í mai og fyrst í juni verpur hon 2 egg, viðhvørt 3. Klekingartíðin er knappliga 3 vikur. Ternan verjir væl reiður sítt. Kemur onkur at reiðrinum, skjýtur hon seg við nógvari ferð niður úr luftini, og tú mást hava okkurt upp ímóti, skalt tú ikki fáa nevsoddin í skallan. Kemur ránsfuglur, flykkjast nógvar ternur uttan um hann og reka hann harðliga burtur. Tær bæði stinga seg og skvøtta hann undir.

Ternupisurnar eru skjótar at flekja seg niður ella krógva seg í grasinum, tá ið onkur nærkast. Tær falla væl saman við lendið og eru ringar at síggja. Ofta fara ternurnar langt burtur frá reiðrinum eftir føði til ungarnar. Tú hevur sæð tær hanga tætt við vatnskorpuna og kria, so stoyta tær seg niður í sjógvin og koma uppaftur við ternumurti ella nebbasild. Ternan fær ikki kavað, uttan hon stoytir sær høgt úr luftini.

Eisini ber á at síggja ternu leita í lundalandi eftir fiski, sum lundin hevur mist. Ein lundi situr í svørðinum við fullum nevi av sild. Áðrenn hann veit av, skjýtur ein terna seg niður á hann. Lundin verður skakkur, missir sildirnar og fer á flog. Síðan tekur ternan sildirnar.

Ternupisa er so viðbrekin, at hon tolir ikki kulda og nógv regn. Tá ið grimdarregn hevur verið, eru nógvar deyðar ternupisur at síggja. Regnsummur, sum vanlig eru í Føroyum, týna heilt nógvar pisur. Ofta verpur ternan uppaftur í tílíkum føri. 3-4 vikur gomul er pisan floygd.

Um miðjan juli eru flestar ternur rýmdar frá reiðrinum. Pisurnar fara við foreldrunum út á sjógvin at leita sær eftir føði. Fyrstu tíðina sært tú ternupisurnar sturta seg niður úr luftini eftir tarapettum ella onkrum øðrum, sum tær síggja í vatnskorpuni. Ikki fyrr enn pisan er 40 dagar gomul, er hon før fyri at føða seg sjálv.

Út ímóti mikkjalsmessu rýmir ternan frá okkum. Ferðin til høvini um Suðurpólin er byrjað. Eingin fuglur her hjá okkum flýgur so langt sum ternan. Hon er einasti fuglur, ið sær midnáttarsólina á báðum hálvum.

## Lómurin

Lómur er í bútíðini á vøtnum uppi millum fjalla, har hann eigur á smáum hólmum. Men hann veiðir á teimum stóru vøtnunum, firðum og sundum.

Lómur er næstan so stórur sum æða. Nevið á gamla fuglinum er klænt og eitt sindur upprent, og hann setur ofta nevið eitt sindur

uppeftir. Hálsurin er langur. Á nakkanum og aftan á hálsinum eru klænar, svartar og hvítar strikur. Niður eftir barkanum er lómur reyðmorreyður. Høvur og hálsur eru grá. Á bakinum er hann settur við hvítum blettum, og undir búkinum er hann hvítur. Beinini eru dimm og sita so aftarlaga, at lómur er ikki gonguførur.

Lómur er kringur bæði at svimja og kava. Undir vatni rør hann við fótunum og tekur so skjótan fisk sum síl. Hann er tungfloyttur. Styggur er hann, so torført er at koma nær at honum. Tá ið hann hevur fingið varhuga av fólki, svimur hann so djúpt, at bara skallin og eyguni koma uppundan. Lómur fær eisini verið einar átta minuttir undir kavi, so tá ið hann kemur uppaftur, er hann komin langt burtur frá staðnum, har okkurt kanska leikaði á.

Lómur etur næstan bara fisk, eisini eitt sindur av krabbadýrum, skeljadýrum, sniglum og ormum. Í bútíðini flýgur hann serliga oman at sjónum, har hann kavar eftir fiski á grunnum vatni.

Hann kemur á reiðurstaðin í apríl og ger sær reiður á hólmi ella nesjum úti á vatninum. Úr reiðrinum og á reiðrið ekur hann á búkinum, so ein slóð av niðurlegsaðum grasi liggur millum reiðrið og vatnið.

Lómur verpur 2 egg, tey líkjast likkueggjum bæði á liti og stødd, morlitt við svørtum blettum. Bøgan bølir í góðar 4 vikur, og næstan allan dagin liggur hon á. Um morgunin og kvøldið flúgva lómarnir á stór vøtn og út á sjógvin. Ungarnir eru myrkamorreyðir, og fyrsta teir eru útkomnir, svimja og kava teir.

Lómur hevur nógvur átt í Føroyum; men nú eru um leið 15 pør eftir. Flestu flyta um veturin í ein landsynning, og onkuntíð eru teir so norðarlaga sum úti fyri Vesturlandinum í Íslandi. Viðhvørt koma aðrir lómar henda vegin um veturin.

## Villdunnan

Villdunnan er eyðkend, tá ið hon, har grunt er, liggur og sutlar í vatnskorpuni ella stendur á høvdinum, hálv uppundan við velinum upp í rógv, so hon røkkur á botn at sutla.

Í bútíðini er steggin glitrandi grønur um hálsin, og niðast um hálsin hevur hann hvítan ring. Bringan er morlitt. Oman á bakinum er hann morskjómutur, um liðirnar og undir búkinum gráskjómutur. Miðskeiðis á veingjunum hevur hann glitrandi bláan ferhyrning, (spegil), svart og hvítt uttanum. Nevið er gult.

Seint um summarið líkist steggin dunnuni, men hevur bleikgulari nev. Dunnan hevur spegil eins og steggin; men hon er mest mor- og svartflekkut. Tá ið villdunnan flýgur, sæst, at hon er hvít upp undir veingirnar.

Um summarið er villdunna sjaldan at síggja á sjónum. Tá er hon á vøtnum. Um veturin er hon í flokkum á grunnum vatni í fjarðum og sundum, har fjøruslætt er.

Villdunna er lættfloytt sum aðrir antarfuglar. Men ofta svimur hon við bara nevinum og einum sindri av høvdinum uppundan. Væl sleppur hon á flog av vatni. Hon flýgur beint upp, og skjótt flýgur hon og letur títt við veingjunum.

Tó kavar hon sjaldan. Verður hon órógvað í teirri tíðini, tá ið hon hevur kastað flogfjaðrarnar, so kavar hon. Hon kavar eisini, er hon særd og komin á trongd.

Villdunna tekur sær føði bæði á landi og sjógvi. Hon etur fínt gras, ber, fræ, maðkar, flogkykt, tara, smákrabbar, sniglar og smáan fisk.

Villdunna eigur innangarðs og uttangarðs tætt við á og vøtn, ofta undir áarbakka og vatnsbakka. Hon verpur um hálvan apríl 8-10 egg, á stødd sum høsnaregg og glinsandi grágrøn. Bara dunnan bølir eggjunum. Meðan hon liggur á, fer hon av reiðrinum tíðliga um morgunin og seint um kvøldið at leita sær eftir føði. Hon breiðir ofta dún ella mosa út yvir eggini, áðrenn hon fer.

Bølingartíðin er 4 vikur. Áðrenn bølingartíðin er av, rýmir steggin og savnast saman við øðrum steggjum í flokk. Um 15. mai eru ungarnir klaktir. Teir eru gráir oman á bakinum og gulir um bringuna og undir búkinum. Fyrsta teir eru turrir eitt samdøgur gamlir, fara teir úr reiðinum aftan á dunnuni í áir ella vøtn, og kvikir eru hasir lítlu á føti.

Dunnan matar vanliga ikki ungarnar, men fer við teimum, har føði er at finna, í mýrimosa, á ella vatni. Tvær tær fyrstu vikurnar eru ungarnir ikki nóg kropsheitir, so teir mugu krúpa sær undir veingirnar á mammuni av og á at verma seg. Tá ið ungarnir eru tveir mánaðir gamlir, kastar mamman teir. Síðan fer hon at leita sær eftir staði, har hon liggur vard, tí hon skal kasta flogfjaðrarnar. Í oktober savnast dunnurnar eisini í flokk saman við steggjunum.

Nú eru villdunnurnar væl nørdar í Føroyum. Villdunna er bæði støðufuglur og flytifuglur, men oftast støðufuglur. Um veturin liggja einstakar í ánni saman við tomu dunnunum, sum eru ættaðar frá villdunnuni. Men um veturin er villdunna í flokkum við strendurnar,

har grunt er. Fremmandar villdunnur koma eisini henda vegin um veturin.

## Grágrælingurin

Grágræling sært tú um veturin, heystið og várið í stórum flokkum niðri í fjøruni. Meðan flóðin er, situr hann oman fyri flóðarmálan; men fyrsta fjarað er, fer hann titandi eftir helluni at leita sær eftir føði.

Grágrælingur er heldur minni enn stari. Um veturin er hann myrkagráur um høvur og háls og svartur á bakinum við ljósum, smølum smástrikum. Undir búkinum er hann hvítur og dimmblettutur. Um summarið er hann morflekkutur og svartflekkutur á bakinum. Beinini eru gullig og nevið gult við rótina.

Alt árið, bæði tá ið hann er uppi millum fjalla og við strondina, er hann spakur. Tú verður ikki varur við hann, tó at tú er tætt hjá honum. Ofta rakar tú ikki við hann, fyrr enn tú hoyrir eitt spakligt kneet! og hann fer á flog.

Grágrælingur tekur sær føði í gjarinum og taranum. Hann vaðar so langt út, sum hann grynnir; men skuldu smáaldurnar skvatlað upp undir búkin á honum, so rýkur hann á flog.

Um hálvan mai fer grágrælingurin úr fjøruni. Nakrir fara niðan í fjøllini at reiðrast. Hildið verður, at 20-30 pør eiga í Føroyum. Hann eigur á turrum, grýtutum haga, kanska høgt uppi millum fjalla. Fyrst í juni verpur bøgan 3-4 morgrá egg við dimmum blettum. Eggini falla væl saman við eyr og mosa. Dúnungin er dimmur við hvítum prikkum.

Í hoyna koma grágrælingarnir oman aftur í fjøruna. Um hetta mundið koma aðrir grágrælingar higar norðanífrá. So eru teir í stórum flokkum allan veturin. Grágrælingur er bæði flytifuglur og støðufuglur.

## Tjaldursgrælingurin

Tjaldursgrælingar tita á reyðum beinum niðri í fjøruni, hoppandi undan smáaldunum, brettandi upp smásteinar, skeljar og fara at vita, um okkurt etandi er at fáa.

Tjaldursgrælingur er vaðfuglur, ið er til støddar sum stari og líkist tjaldri á vakstrarlagi og í atburði. Bringan, hálsurin og tað mesta av

høvdinum eru stórflekkut, hvít og svørt. Á bakinum eisini stórflekkutur, myrkamorreyður og reyðmorreyður og hvítur undir búkinum. Soleiðis er búnin á steggjanum um summarið. Bøgan er ikki so fríðlitt.

Um veturin er tjaldursgrælingur myrkamorreyður á bakinum og um bringuna og undir búkinum hvítur.

Mest er hann í fjøruni saman við grágrælingi og sjógrælingi. Aldri er hann í friði, fer titandi, brettir upp skeljar og steinar, og har finnur hann marflugur og smá skeljadýr. Í fjøruni tekur hann eisini ymiss flogkykt. Onkuntíð fer hann niðan í bøin og hagan at bora eftir ormi.

Tjaldursgrælingur eigur ikki í Føroyum. Bæði summar og vetur koma teir henda vegin. Mestur er hann í apríl-mai og juli-oktober.

# Sjófuglurin

## Sjófuglurin

Teir fuglar, sum fáa lívbjargað sær leingi á sjónum, verða nevndir sjófuglar. Ymist er, hvørjir fuglar eru at síggja á víðum havi og inni við land. Tú sært færri fuglasløg á víðum havi enn inni við land. Sjófuglur er fuglur úr fleiri fuglasløgum, t.d. drunnhvítar, másafuglar, antarfuglar og vaðfuglar.

Nógvur sjófuglur er í føroyskum sjógvi, tí at føðimøguleikarnir eru góðir. Ovarlaga í sjónum er nógv plantuæti, sum dýraætið etur. Skal plantuætið vaksa væl, mugu salt, hiti og tøðevni vera hóskilig. Tøðevnini gerast, tá ið deyð dýr søkka á botn og verða loyst sundur. Síðan taka havstreymarnir tøðevnini upp í sjógvin, har ljósið vinnur niður. Tá veksur plantuætið væl.

Í mai mánaði fer plantuætið – smátari – rættiliga at vaksa og heldur á at vaksa út í august-september. Um veturin er bæði plantuæti og dýraæti, sum er smákrabbi og fiskayngul o.a., so djúpt niðri í sjónum, at sjófuglurin fær ikki fatur á tí.

Hvørt fuglaslagið er lagað eftir ávísari føði. Summi sløg veiða ætið, ið er uppi undir vatnskorpuni, onnur kava djúpari eftir fiski, og uppaftur onnur kava á botn eftir skeljadýrum, krabbadýrum og fiski.

Sjófuglurin kappast ikki so nógv um føðina.

Vit skulu leggja okkum í geyma, at tað er bara í bútíðini, at so nógvur sjófuglur flykkist í føroyskum sjógvi. Tá ið bútíðin er av, spjaðist sjófuglurin um øll høv líka suður at syðru hálvu, og økið, hann veiðir í, verður nógv størri. Tá er sjófuglurin í flyting.

Sjófuglarnir koma ikki allir aftur til Føroya í senn. Veruliga koma teir frá oktober-november til mai-juni. Tí verður kappingin um føðina ikki so stór. Sagt kann verða: sjófuglurin fjølgast, sum føðin í sjónum veksur. Føðin í sjónum er mest úr mai til august, og tá hava sjófuglarnir ungar.

Ungfuglur tekur vanliga ikki land tey fyrstu 2-3 árini. Vanliga strúka teir eini 2 ár úti á havi. Til dømis koma ungryta, unglomvigi og grásúla ikki á bústaðin, fyrr enn tey eru 2-3 ára gomul. Unglundin uppaftur eldri. Nógvur ungfuglur er tí úti á havi alt árið og ikki bara um veturin.

Tá ið plantuætið í september heldur uppat at vaksa, rýmir sjófuglurin av bústaðnum næstan allur samstundis. Tó fer svartfuglurin eitt sindur fyrr, tí um hetta mundið kastar hann fjaðrarnar.

Um veturin er tó so frægt av dýraæti, at teir báðir, havtyrðilin (drunnhvíti) og havhesturin, fáa lívbjargað sær í føroyskum sjógvi. Havtyrðil fækkast á sjónum um nýggjársmundið; men tá tekur havhestur við, tí tá er hann komin á bústaðin. Síðan er hann einsamallur, til súlan kemur á pálsmessu.

Havfuglur flýgur frælsur um alt landið. Ringmerkingar vísa, at hann kann fara yvir í amerikanskan sjógv. Havfuglur veiðir allur ovarlaga í sjónum. Føðin er fjølbroytt, frá evarsmáum æti til 20-30 cm langan fisk. Teir ymisku havfuglarnir veiða ymiska føði.

Havfuglur sæst næstan bara úti á heimshøvunum, og hann er ikki tengdur at landi.

Landgrunsfuglur heldur seg á leiðini, har teir stóru fiskigrunnarnir eru, og har skipini royna. Summir, t.d. lomvigi, súla, veiða í flokki í stórum fiskatorvum, tí tá raka teir betur við torvurnar. Aðrir, skúgvur, ryta og okkurt másaslag, taka fiskaslógv, skipini kasta fyri borð. Lundin er tann víðgongdasti av teimum. Hann sæst javnan í Miðatlantshavi. Terna sæst eisini í Miðatlantshavi, men tá flytur hon. Fleiri dømi eru um, at lundi hevur flogið tvørtur um Atlantshav.

Strandarfuglur veiðir so nær strondini, at hann sær altíð land. Um næturnar situr hann oftast á landi. Strandarfuglur veiðir bæði á botni og yvir botni, t.d. fisk. Fiskimási fer longst av teimum, men teistin heldur seg næst landi.

Sjófuglar kappast ikki nógv um føðina. Eisini á bústaðnum hava sjófuglarnir býtt lendið ímillum sín, so har verður heldur ikki stór ósemja.

**Hvussu sjófuglur veiðir**

Til dømis terna og súla stoyta sær niður úr luftini við nevinum fyri. Tær hvørva undir kav eina løtu. Ikki verður hildið, at tær leita eftir føði, meðan tær eru undir. Heldur miða tær væl á, áðrenn tær kavstoyta seg. Súla er serliga lagað eftir at stoyta sær høgt úr luftini, tí hon hevur posar undir húðini á hálsinum og á bringuni.

Skarvur, svartfuglur, kaventur og lómur t.d. kava eftir føði. Teir fara undir vatnskorpuna og svimja við beinum og veingjum. Ójavnt er, hvussu djúpt teir kava. Lomvigi kavar t.d. 72 metrar, lómur 60.

Tíðin, teir eru undir, er eisini ymisk, lómur 3 minuttir og skarvur 70 sekund.

Kjógvi, skúgvur og mási taka fongin av øðrum fugli. Teir jagstra harðliga og noyða teir at sleppa fonginum.

Summir sjófuglar veiða, meðan teir sita á sjónum. Teir renna bara høvdið niður í sjógvin. Soleiðis ger t.d. skrápur, tá ið hann veiðir høgguslokk, sum kemur upp undir vatnskorpuna um náttina. Másafuglar flúgva lágt yvir sjónum. Drunnhvítar flúgva eisini lágt yvir sjónum, og beinini hanga niður undan teimum. Við beinunum tyrla teir føðina upp. Sundgrælingur og helsareyði svimja í ring og tyrla soleiðis føðina upp.

## Hvussu sjófuglur flýgur

Teir stóru másafuglarnir sveima í fleiri tímar og røra næstan ikki veingirnar, flúgva niður í aldudal, upp fyri aldukamb, og eru teir eyðkendir langt burturfrá.

Smáu sjófuglarnir flúgva heilt lágt yvir sjónum, kanska tí, at har er minni vindur. Soleiðis gera drunnhvítar, helsareyði, fulkubbi og sundgrælingur. Drunnhvíti flýgur títt flákrandi, tá ið hann tekur seg upp fyri aldukamb og fer niður í aldudalin. Tá tykist, sum hann gongur á aldunum.

Svartfuglur og antarfuglur flúgva oftast beint fram nakrar metrar yvir sjónum. Teir láta títt við veingjunum og flúgva í flokki. Súlan flýgur øðrvísi. Hon flýgur seigliga, sveimar leingi og høgt yvir sjónum.

## Sjófuglur og skip

Tað er ymist, hvussu sjófuglur ber seg at, tá ið hann sær skip. Drunnhvíti (havtyrðil) eltir ongantíð skip; men sýldi drunnhvíti flýgur í kjalarvørrinum á skipi og tekur sær føði, sum skipið tyrlar upp úr sjónum.

Nógvir másafuglar og havhestur flykkjast uppi yvir fiskiskipi og taka slógv og annað burturkast, tveitt verður fyri borð.

Summir fuglar amast upp á skip, tí uttan um skipið stendst vindur, ið lættir teimum um flogið. Aðrir seta seg á skip at hvíla seg.

# Landgrunsfuglur

## Lomvigin

Lomvigi hevur tikið sær meitilberg móti norðri og vestri. Hann eigur á rókum og í eygum í berginum og kemur aftur á sama staðið, har hann átti árið fyri.

Lomvigi er svartur á bakinum og hvítur um bringuna og undir búkinum. Nevið er svart og spískt. Beinini eru svørt. Summir lomvigar hava ljósan ring um eygað.

Lomvigi kemur at landi í januar-februar. Gamalt er sagt, at lomvigi kemur at landi á pálsmessu – 25. jan. – og í bergið á leypársmessu. Seinast í mai og fyrst í juni verpur bøgan eitt egg á bera klettin. Eggið kann vera dimmgrønt, bleikgrønt ella hvítt og hevur í øllum trimum førum dimmar blettir og strikur. Eggið er 8 cm langt og smalkast javnt frá tí tjúkkara endanum út í tann spískara.

Fer eggið á rull á rókini, so ger vakstrarlagið, at tað melur í klingur. Hetta kemur væl við og hevur mangan bjargað tí, so at tað fer ikki út av rókini. Føroyingar hava altíð sagt, at aldri eru tvey meinlík lomvigaregg. Ivast hevur verið, um lomvigi kennir egg sítt aftur; men royndir hava prógvað, at hann kennir eggið.

Rullar eggið nakrar metrar eftir rókini, so antin rullar lomvigin tað aftur á staðin ella ber tað á fótunum. Lomvigi bølir aldri eggi, sum annar eigur.

Steggin og bøgan skiftast um at bøla. Tey bøla í um leið 5 vikur. Fyrst í juli kemur út. Pisan er morlitt á bakinum og ljós undir búkinum. Tá ið nakrir fáir dagar eru farnir, missir hon dúnið og fjaðrast.

Nú er stákan á rókini. Foreldrini síggjast í heilum við nebbasild og øðrum smáum fiski í nevinum. Lomvigi ber bara eina sild í senn í nevinum, og oftast sæst bara í stertin á henni. Tá ið lomvigi kemur á rókina við fongi, so gapa mong pisunev. Men lomvigi kennir sína pisu burtur úr øllum. Hann kennir hana á málinum.

Bæði egg og pisa eru í stórum vanda. Størsti vandin er at fara út av rókini. Ein annar vandi er, tá ið mási, skúgvur, ravnur og kráka koma at gera bart. Ikki er óvanligt, at onkur av hesum fuglum skjýtur seg niður á lomvigapisu og drepur hana. Foreldrini bjóða sær ikki til at verja – bara karra og karra.

Fyri ólavsøku eru pisurnar floygdar. Seinast í juli og fyrst í august fer lomvigin úr berginum. Pisurnar fara av rókini um kvøldið. Foreldrini seta seg ytst á rókini at lokka hana útav. Tey flúgva hvørt sínumegin pisuna niður á sjógvin, og so liggur leiðin út á hav.

Fyrstu tíðina halda øll trý saman. Onkuntíð missa foreldrini pisuna burtur. Tá er neyð á teimum. Í heilum karra tey gomlu, og pisan letur pi pi pi. Hesar báðar røddir eru mangan at hoyra innan úr havinum eitt stilt mjørkakvøld.

Um várið og summarið síggja vit lomvigar niðarlaga við sjógvin. Hesir lomvigarnir eru ov ungir at verpa. Vit nevna teir hellufugl.

Um veturin eru lomvigarnir úti á havi. Nakrir eru tó at síggja um Føroyar. Menn hava merkt føroyskan lomviga. Teir eru funnir aftur undir Suðurnoregi.

Lomvigin er nógv minkaður nú. Fyrr hevði hann stóran týdning. Fyrst í juni plaga menn at ræna; men sagt er, at lomvigin verpur uppaftur. Um hálvan juli plagdu menn at fara til bjarga.

**Lundin**

Lundi eigur í urðum ella vallbergi, har hann grevur sær holur í svørðin. Í lundalandinum veksur sítt, ovurgrønt gras, sum lundin sjálvur taðar. Í støðum veksur einki gras, tí skitturin hevur sviðið tað av. Svørðurin er útgataður við holum og er veikur at stíga á, og tá ið nógv regn hevur verið, er hált at ganga á tí avsvidna svørðinum.

Lundi er svartur á bakinum, um hálsin og upp á nakkan. Hann er hvítur um bringuna og undir búkinum og gráur um vangarnar. Nevið er høgt og hevur ljósar, bláar og reyðar rípur tvørturum. Beinini eru reyðgul.

Lundin kemur úr vetrarvist á bústaðin um summarmála. Teir fyrstu dagarnar er hann bara um náttina á bústaðnum, og um morgunin flýgur hann út aftur á hav. So við og við er hann longur á bústaðnum. Um gamla summarmála fer lundin at reinsa sær holuna, og síðan klæðir hann hana innan við grasstráum og fjaðrum.

Seinast í mai verpur bøgan eittans hvítt egg við kámum morlittum og reyðum blettum. Steggin og bøgan skiftast um at bøla. Tá ið um leið 6 vikur eru farnar, er eggið klakt. Pisan er svartdúnut. Nevið er dimt og smalt og líkist ikki nevinum á vaksna lundanum.

Nú er lívligt í lundalandinum. Allur svørðurin er avtakin við lunda, sum situr framman fyri holunum. Øll luftin livir av lunda, ið

flýgur til reiðrið og frá reiðrinum. Í urðunum sita teir so tættir og andbráir. Men ovarlaga í toppalandinum sita teir sum hvítir prikkar.

Pisan fær nebbasild, og lundi (sildberi) fær borið fleiri enn 20 nebbasildir í nevinum í senn. Ein lundaflokkur kemur innan úr havi. Tá ið flokkurin kemur at lundalandinum, spjaðist hann, og hvør lundi fer í sína holu við fonginum. So plagar lundin at sita framman fyri holuni og hvíla seg, áðrenn hann fer av stað aftur.

Í juni er nógvur lundi at síggja uttan um lundalondini. Hetta er unglundi, sum ikki verpur. Teir eru gráligir um vangarnar og verða nevndir teir vangagráu. Hugtakandi er at síggja teir koma inn ímóti landinum. Tílíkar dagar plaga vit at nevna landkomudagar.

Lundi er tigandi fuglur. Viðhvørt eru lundarnir ósamdir. Teir ota seg nærri og nærri, og so fara teir at skumpast, brenna nevini saman og bíta hvør annan í fjaðrarnar. Brádliga fara báðir rullandi – og murrini av teimum. Aðrir lundar leggja uppí, og so endar bardagin líka brádliga, sum hann byrjaði. Allur flokkurin tekur seg á flog út í havið.

Tá ið lundapisan er 6 vikur gomul, kasta foreldrini hana. Nú má pisan søkja sær føði sjálv. Eina viku seinni er pisan floygd. Á náttartíð í august mánaði fara pisurnar vappandi oman lundalondini og fara flagsandi og flúgvandi út á sjógvin. Nú eru tær sjálvbjargnar.

Ferðin liggur út á havið um Føroyar. Bæði unglundin og gamli lundin rýma um miðjan august. Einstakir eru at síggja undir Føroyum um veturin. Hinir strúka víða á Atlantshavi. Menn vita ikki so nógv um lundan, hvar hann er um veturin.

Fyrst í juni plaga menn at ræna, og lundin verður fleygaður frá fyrst í juli til hálvan august.

## Álkan

Álkan eigur mest í rivum og gjótum ella eygum, men bara hendingaferð á slættari rók. Helst eigur hon undir steini ella skorti, tí har liggur hon turr.

Álka er heldur minni enn lomvigi. Høvur, hálsur, bak og veingir eru svørt. Hvít rípa gongur tvørtur um veingirnar. Frá eygunum fram í nevið gongur hvít strika.

Nevið hevur krók og er høgt og svart við hvítum rípum tvørturum. Álka hevur longri vel enn lomvigi, og velið stendur ofta upp í rógv, tá ið hon svimur.

Álkan kemur eitt sindur seinni í bergið enn lomvigin. Men bæði verpa um somu tíð. Hon ger sær ikki reiður, men verpur sum lomvigi á bera klettin ella á eyr. Veður er umráðandi, nær hon verpur. Eggið er á stødd sum høsnaregg, hvítt við dimmum blettum.

Tá ið 5 vikur eru farnar, kemur ungin út. Um ólavsøkuleitið er ungin 14 dagar gamal. Tá fer hann saman við foreldrunum úr berginum. Tó dugir hann ikki at flúgva, men hann dugir væl at svimja og kava.

Álka hevur vánaligt gongulag, og eitt sindur stríggið gongst henni at sleppa á flog bæði á landi og sjógvi. Fer hon á flog av sjónum, fer hon fyrst lappandi eitt strekki eftir sjónum, áðrenn hon fær luft undir veingirnar og sleppur á flog. Álka kavar djúpt og er leingi undir. Hon veiðir somu føði sum lundin og fær sum lundin borið upp í 20 nebbasildir í senn í nevinum.

Hon er hás á málinum. Í berginum hoyrist hon ofta; men annars hoyrist lítið til hennara.

Stutt eftir, at pisan og foreldrini eru komin á sjógvin, missa tey gomlu veingjarfjaðrarnar og fáa ikki flogið. Síðan svimja øll út á hav. Móti vetri fara tær flestu suðureftir. Summar halda seg úti á havi, men aðrar við hálendsku og fronsku strendurnar. Álkur eru eisini sæddar um hetta mundið inni á fjarðum í Noregi. Nakrar eru at síggja í Føroyum um veturin.

**Súlan**

Súla sæst um summarið um oyggjarnar, men eigur bara í Mykinesi. Á norðursíðuni á Mykineshólmi er berg, og har eigur meginparturin av súlunum. Tær eiga eisini á Píkarsdrangi og Flatadrangi, sum standa vestan fyri Mykineshólm. Hesi seinastu árini hava nakrar átt vestarlaga í Mykinesi.

Súlan er størsti fuglur, ið byggir í Føroyum. Hon er hvít og hevur langar, spískar veingir, teir eru svartir úti á broddunum. Nevið er gulgrønt, langt og spískt. Súla er gullig á nakkanum og hálsinum, føturnir svartir við grønari striku oman eftir legginum og út í klørnar.

Súla er kimiligur fuglur á útsjónd, tá ið hon stillisliga kemur flúgvandi fram yvir sjónum, ella tá ið hon stoytir seg høgt úr luftini niður á sjógvin.

Hon kemur at landi um pálsmessu, men í Mykineshólm í mars-

apríl. Um grækarismessu fer hon at væla sær um reiðrið, sum hon hevði árið fyri. Reiðrið er av grasi, tara, træsprekum og hvannjólum. Tað er um ein metur í tvørmáli. Passaliga langt er ímillum reiðrini – so langt, at fuglurin, sum liggur á, røkkur ikki til næsta reiður. Bøgan og steggin verja reiðrið og tola ikki, at aðrar súlur koma ov nær.

Bøgan verpur eitt hvítt egg, sum hon vermir við fótunum. Fyrst í juli koma ungarnir út. Tá hevur bøgan bølt í 6 vikur. Ungin er nakin, men verður skjótt dúnutur. Dúnungin er nevndur ompil. Síðan verður ungin fjaðraður, dimmgráur við hvítum prikkum. Tá er hann nevndur grásúla. Grásúlan fær ikki hvíta litin, fyrr enn hon er 4-5 ára gomul, og tástani verpur hon.

Í juli-august er lívligt í Hólminum. Summar súlur fara, og summar koma við føði til ungarnar. Tær flúgva høgt yvir sjónum. Brádliga stoytir súlan seg niður, veingirnar heldur hon nakað út frá sær. Beint áðrenn hon nemur sjógvin, liggja veingirnir tætt inn at síðunum. Eitt stórt sprutt sæst. Súlan er horvin í sjónum. Eina løtu seinni kemur hon uppaftur við fiski. Viðhvørt hevur hon so nógva ferð, at hon støkkur leys upp úr sjónum.

Fyrstu vikuna mugu ungarnir verða bøldir. Teir verða mataðir 2-3 ferðir um dagin. Súlan stingur nevið niður í hálsin á unganum og spýr matin niður í hann.

Tá ið 6 vikur eru farnar, er ungin tyngri enn foreldrini. Unganum tørvar hesa fitina, tí tá ið 10-11 vikur eru farnar, kasta foreldrini teir. Síðan fær ungin einki at eta, fyrr enn hann er floygdur og sjálvur dugir at veiða sær føði.

Eftir mikkjalsmessu sæst ikki nógv til súlurnar. Hvítsúlurnar strúka úti á havi. Grásúlurnar eru flytifuglar tey fyrstu árini.

Um miðjan september taka Mykinesmenn grásúlu. Fyrr tóku teir eisini hvítsúlu; men teir løgdu hetta av, tí at súlan minkaði so nógv.

**Likkan**

Likka sæst allastaðni við strendurnar. Á sandi, hellu, í ósa og við hús leitar hon sær eftir onkrum etandi. Tá ið útróðrarbátar koma at landi, og tá ið fiskur verður kruvdur, flykkjast tær uppiyvir.

Likka er hvít um kroppin, hálsin og høvdið, men á bakinum og oman á veingjunum grásvørt. Nevið er stórt og førligt og gult. Beinini eru gul. Á undirnevinum er reyður blettur. Likka er vøkur á vakstrarlagi, veingirnir langir, og tá ið hon situr, koma teir aftur um

velið. Flogið er lætt, sveimar langan veg, men tú sært ikki veingirnar rørast. Hon flýgur bæði kimiligari og skjótari enn fiskimási og svartbakur.

Likka kann verða mistikin fyri svartbak. men svartbakur er væl størri og hevur breiðari veingir. Svartbakur er eisini dimmari á bakinum og oman á veingjunum, og so hevur hann ljósagrá bein.

Likkan sæst longri útiá enn svartbakur og fiskimási. Hon líkist teimum í livihátti, men er ikki so ránsfús sum teir. Likka veiðir meira sjálv. Føðina finnur hon við strondina, deyðan ella livandi fisk, ið legst upp, ymiss skeljadýr og krabbadýr. Um høvi býðst, smæðist hon heldur ikki at taka høsnarunga ella dunnuunga. Í áunum leitar hon eisini.

Við reiðrið sæst, hvat hon etur. Har sløðast skøl av rytueggjum, lomvigareggjum, leivdir av ymsum pisum, rytum og lomvigum; men hesir fuglar eru antin deyðir ella heilt ússaligir, tá ið likkan tekur teir. Væl taðar hon hagan.

Seint í mars og fyrst í apríl kemur likkan til Føroya. Seint í mai fer hon at reiðrast. Likku fellur best turrar og heldur slættar grasfløtur ella lágar brekkur í haganum, helst nær vatni ella tjørn. Ofta eiga fleiri hundrað pør saman.

Reiðrið ger hon úr grasi, mosa og tara. Tað liggur fjalt undir steinum. Ikki er tó tætt ímillum reiðrini.

Seint í mai og fyrst í juni verpur bøgan 3 grágrøn egg við myrkamorreyðum blettum. Tá ið 26-27 dagar eru farnir, eru eggini klakt. Ungarnir eru morgráir og líkjast ungunum hjá fiskimása og svartbaki, so torført er at skilja ímillum teirra. Føðin, sum ungarnir fáa, er hálvsodnað. Foreldrini svølgja fyrst matin, so spýggja tey hann niður í ungarnar, soleiðis sum másafuglar gera.

Likka er fjølmesti másafuglur her hjá okkum. Seinast í september og fyrst í oktober rýmir likkan. Hon er flytifuglur og er um veturin úr Norðurskotlandi og suður til útnyrðingspartin í Afrika. Nakrar eru tó at síggja um veturin í Føroyum.

# Bjørgini

## Bergið og fuglurin

Út móti víðum havi fyri norðan og vestan í Føroyum eru høg berg. Stundum standa tey steyrrøtt, og tá nevna vit tey meitilberg. Her gongur mest brim á og stendur mest veður á. Meitilberg eru komin á tann hátt, at hav og veður í felagi í øldir hava matað burtur av landinum.

Sjógvurin matar alsamt burtur undan berginum. Við hvørt loypur. Nógvar urðar, ið koma av hesum lopum, liggja ikki leingi. Brimið skolar tær burtur eftir fáum árum.

Í berginum síggjast grótfláir og royðulindir. Royðulindirnar molna skjótt burtur, og tá gerast fuglarøkur. Kletturin í berginum er ikki allastaðni líka harður og haldgóður.

Mangan matar brimið tað moyrara burtur. Soleiðis koma holur og gjáir í bergið. Ofta stendur tann harði kletturin eftir úti í sjónum sum drangar, stakkar, flesjar og sker.

Summi berg eru nógv vallað og verða nevnd vallberg.

Upp frá sjónum er bergið snøgt og bert. Kanska hvítt í støðum av fuglaskitti. Eitt sindur ovari ganga røkurnar sum rendur um bergið. Alt snjóhvítt av fuglaskitti, alt avtakið við fugli. Um 50 favnar úr sjónum fara grønir blettir at sløðast í gráliga berginum. Í støðum er grasið manshøgt, men liggur niðri. Grasið verður nevnt lundasina.

Í berginum er allur gróður stórvaksnari, tí at har taðar bjargafuglurin næstan alt summarið. Í berginum vaksa eisini bjargahvannir, bjargablomstur, eirisgras, baldursbrá og mýrisóleya. Í hesum ovurgrøna ger lundin sær holur.

Í meitilbergi vaksa bara skónir og mosar.

Rottur og mýs eru lagstar í bjørgini. Rotturnar ræna bæði egg og ungar. Summstaðni hava rotturnar verið fuglinum at meini.

Ein vakran summardag er sjónin undurføgur. Tá ið tú liggur á báti undir bjørgunum, sært tú, hvussu veður og brim hava snikkað klettarnar, so at teir líkjast vøkrum útskurðum. Ymissir litir kappast um at skyggja millum ljós og skugga. Túsundtals fuglarøddir glymja í berginum.

Bjørgini eru største prýði Føroyalands.

# Havfuglur

## Havhesturin

Havhestur byggir ovarlaga í berginum. Mestur havhestur er í bjørgunum vestanfyri og norðanfyri á flestum oyggjum í Føroyum. Sum liðið hevur frá, er havhesturin vorðin so nógvur, at hann er farin at byggja í homrum langt frá sjónum.

Havhestur, sum byggir her hjá okkum, er gráur á bakinum og um veingirnar og annars hvítur. Beinini eru blálig, nevið stutt, tjúkt og gult og hevur krók. Dimmari havhestar koma henda vegin av og á um veturin.

Havhestur er sannur sjófuglur. Hvør kennir ikki henda kimiliga, tigandi sjófuglin, tá ið hann hamast upp á bátin ella skipið – hækkar og lækkar fram eftir sjónum. Nøkur fá veingjasløg, og fuglurin flýgur eftir vágini í sjónum – sveimar ótroyttiligur og rørir ikki veingirnar. Ódnarveður tykist ikki nerva hann, altíð líka tryggur og kimiligur. Havhestur samtykkir við lívið á víðum havi.

Á slættlendi er havhestur hjálparleysur og sleppur ikki á flog. Men er hann sloppin á flog, so er hann kringur. Hann spýr eftir øðrum fugli, og nógv lýsi er í spýggjuni. Kemur spýggjan á fjaðrarnar á øðrum fugli, kloynast fjaðrarnar saman. Fjaðrabúnin verður ótættur, og sjógvur kemur at holdinum. Fuglurin doyr í kulda.

Í miðjum mai og fyrst í juni verpur bøgan eitt stórt, hvítt egg á bera klettin. Viðhvørt nøkur strá undir. Reiðrið er ofta á veikum kneysa. Havhestur bølir meira enn 6 vikur. Annar makin liggur altíð á. Tó ger hann onkuntíð eina stutta ferð út móti havinum. Tá ið hann kemur aftur, kann bera á, at ein másafuglur longu hevur verið og rænt eggið.

Ungin er grádúnutur. Foreldrini bera honum ta fyrstu tíðina føði. Vanliga eina ferð um dagin. Kemur onkur at reiðrinum, bæði tá ið havhestur bølir, og tá ið út er komið, verður hann sprændur út í lýsi. Tá ið ungin er 6 vikur gamal, kasta foreldrini hann. Nú er hann bæði størri og tyngri enn tey. Í august og fyrst í september fer ungin á sjógvin. Eitt skifti sleppur hann ikki á flog, tí veingirnir eru so veikir, og hann er so spikafeitur. Í hesi tíðini verða nógvir tiknir á sjónum. Menn plaga eisini at taka teir, meðan teir eru í reiðrinum.

Teir næstu mánaðirnar strýkur havhesturin á sjónum, men fer vanliga eitt sindur suðureftir. Longu fyrst í november kemur hann aftur, og um nýggjársmundið eru allir komnir aftur á bústaðin.

Havhestur veiðir serliga ovarlaga í sjónum krabbadýr og høggu-slokk, og ikki so nógv ryggleys smádýr. Í bútíðini tekur hann nógv slógv, bæði á landi og til havs.

Fyrst í 20. øld gjørdust serliga barnakonur, ið royttu havhestaung-ar, sjúkar. Fleiri fólk doyðu. Tó mátti drúgv tíð ganga, áðrenn R.K. Rasmussen, doktari sáli, rakti við, at fólk fingu sjúkuna av havhesta-ungunum. So varð bannað at taka havhestaungar. Men nú er aftur loyvt, tí heilivágur fæst fyri sjúkuna. Tó mugu øll ansa væl eftir teim-um treytum, læknar leggja á.

**Drunnhvítarnir**

Drunnhvítar eiga í holu í svørðinum ella millum grót í urðum og gørðum. Sýldur drunnhvíti eigur í lundalandi. Við holurnar hoyrast um náttina snurrandi lát.

Vit hava tveir drunnhvítar, og torført kann verða at kenna teir at. Drunnhvíti er heldur minni og hevur kubbutari veingir enn sýldi drunnhvíti. Av tí at munur er á veingjunum, so er eisini munur á flognum. Drunnhvíti flýgur javnari, sýldi drunnhvíti meira skiftandi.

Drunnhvíti er á støðd nakað sum grátítlingur. Báðir eru hvítir niður á drunnin. Drunnhvíti er svartur á bakinum og hevur hvíta rond undir veingjunum. Sýldi drunnhvíti er ljósari á bakinum og hevur ikki hvíta rond undir veingjunum; men hann hevur eyðkent sýlt vel.

Drunnhvítar taka bara land um náttina. Um dagin veiða teir langt úti á havi smá krabbadýr og lindýr, sum teir taka ovarlaga í sjónum.

Drunnhvíti eigur helst í vallaðari urð, har urðargrót liggur fjalt undir valling, og har grevur hann sær holur. Tað ber á, at hann eigur í trongum holum í klettinum, gomlum niðurdotnum grótgørðum ella í gróthúsveggjum, har fólk sjaldan kemur. Sýlda drunnhvíta fell-ur best at grava sær holur í lundalandi, har ikki er grýtut. Holurnar eru ringar at finna, tí sítt gras hongur niður fyri tær.

Drunnhvítarnir koma á reiðurstaðin í juni, verpa í juli ella seinni eittans egg, sum er hvítt við morlittum ringi um tjúkkara endan. Tá ið 5 vikur eru farnar, er eggið klakt. Viðhvørt eru dúnungar at síggja í holunum út í november-desember. Drunnhvítar eiga fleiri saman.

Drunnhvítar eru flytifuglur. Um veturin eru teir sunnarlaga í Atlantshavi. Nógvur drunnhvíti eigur í Føroyum. Sýldi drunnhvíti bara nøkur hundrað pør, og hann eigur vanliga í Mykinesi og Mykineshólmi. Men drunnhvíti eigur um alt landið. Sagt verður, at ongastaðni í heiminum eigur so nógvur drunnhvíti sum í Urðini í Nólsoy.

**Rytan**

Ryta eigur í meitilbergi á knallum, kneysum og smølum rókum. Stutt upp frá sjóvarmálanum liggja reiðrini sum bylgjutar rípur í berginum, og málanin er tiltikin í rytubergi.

Ryta er ljósablábøkut, og veingjarbroddarnir eru svartir. Annars er hon hvít, beinini svørt og stutt og nevið gult. Ryta tykist minni, enn hon veruliga er, tí hon flýgur so smidliga og lættliga. Flýgur hon í hvøssum vindi, tá sæst, at hon er sannur sjófuglur.

Í mars-apríl kemur hon í bergið, og hon fer beinan vegin at byggja sær reiður. Summi rytureiður eru so niðarlaga í berginum, at vetrarbrimið hevur skolað tey burtur. Rytan savnar sær fyrst gras, mosa og tara. Síðan blandar hon skitt undan sær sjálvari uppí. So klínir hon reiðrið niður á knall ella kneysa. Reiðrini, sum liggja hægri, verða nýtt ár um ár.

Á hvørjum ári byggir hon oman á tað gamla reiðrið á rók ella góðum kneysa; men reiður á knalli í berginum verður sjaldan so stórt, tí at tað verður ov tungt og fer útav.

Seinast í mai og fyrst í juni verpur bøgan 2-3 morgrá egg við dimmum blettum. Klekingartíðin er góðar 3 vikur. Dúnuta pisan er ljós, heldur grálig. Tá ið pisan hevur mist dúnið, hevur hon ein svartan lit aftast á hálsinum og eina breiða svarta rípu eftir veingjunum. Nevið er svart.

Rytupisurnar eru í reiðrinum, til tær eru floygdar. Tó at reiðrið er á breiðari rók, og onkur órógvar, so krógva pisurnar seg altíð niður í reiðrið. Mangan liggur rytureiður soleiðis fyri, at fara pisurnar úr reiðrinum, so fara tær útav.

Pisurnar fáa at eta fleiri ferðir um dagin. Foreldrini fara út á hav at leita eftir føði. Vit síggja stórar og smáar flokkar sveima lágt fram eftir sjónum. Skjótt rakar rytan við ætið. Hon melur í klingur uppiyvir, og brátt er hvítt av rytu uttanum. Ryta kavar djúpt. Hon sturtar seg niður úr luftini og hvørvur undir kav eftir føðini. Rytuflokkar á

ferð eftir føði, og hvussu tær flykkjast uppi yvir skipum eftir slógvi, eru eyðkendir bæði innansyndis og uttansyndis.

Í rytubergi er lívligt. Rytan tigur ikki. Altíð á flogi. Áðrenn teg varir, støkka fleiri túsund í senn av reiðrinum; men líka brádliga seta tær seg aftur.

Fyrst í august eru pisurnar floygdar, og tá eru tær 5 vikur gamlar. Nú fara øll úr berginum og eru at síggja eitt skifti á vøtnum í haganum og inni á fjarðum; men tó mest úti á havi.

Alt heystið sæst ryta við strendurnar. Um hávetur eru fáar at síggja, tí tá strúka tær gomlu ryturnar úti á víðum havi. Ungfuglurin fer longur burtur – til Nýfundlands, har hann heldur til alt næsta árið. Tá ið fuglurin er verpingarførur, er hann tvey ára gamal og kemur aftur í føroysku bergini.

**Kjógvin**

Kjógvi eigur ovarlaga í haganum á lyngfløtum og grasfløtum, helst á vátligum lendi. Mangan sæst hann flúgva lágt yvir sjónum nær landi ella úti á fiskileið.

Kjógvi er einlittur myrkamorreyður ella ljósur um bringuna og undir búkinum. Tá verður hann nevndur hvítkjógvi. Nevið er myrkamorreytt, svart á oddinum og hevur krók. Beinini eru svørt, og á tónum eru krókutar kløur. Kjógvi er sum ryta á stødd, men tykist størri, tí at hann hevur so langar veingir. Teir gomlu kjógvarnir hava tvær langar fjaðrar í velinum. Tær verða nevndar snældan. Á flogi er hann átøkur másafugli, men flýgur lættari og meira skiftandi.

Kjógvi er ræðuligur ránsfuglur. Hann flýgur bæði skjótt og snúiliga. Úti á sjónum jagstrar hann harðliga rytu og ternu og skjýtur seg niður á tær, til tær noyðast at sleppa fonginum, sum kjógvin síðan loftar. Eisini leggur hann á bæði lomviga, lunda og fiskimása, sum eru ávegis við sild í nevinum. Síðan rænir hann egg og ungar í reiðri; men kjógvin tekur eisini mýs og ymiss ræ niðri í fjøruni.

Kjógvi byggir nærindis øðrum fugli, so væl liggur fyri hjá honum at ræna reiðrini. Flestu hagafuglar mugu lúta fyri honum. Tó ikki spógvin, sum tuskar hann av. Reiðrið er ein kulla í svørðinum í tættum, síðum grasi. Kjógvi kemur á reiðurstaðin í apríl-mai og verpur seinast í mai og fyrst í juni. Eggini eru 2-3, morlitt ella grønlig við dimmum blettum. Hann bølir í góðar 3 vikur, og bæði bøgan og steggin skiftast um at bøla; men tó bølir bøgan mest.

Pisurnar eru morgráar, men floygdar morflekkutar. Tá ið 3 vikur eru farnar, eru pisurnar floygdar.

Kjógvin fer av bústaðnum í august-september. Hann er flytifuglur, sum er í vetrarvist úti á havi sunnarlaga í Afrika.

### Skrápurin

Skrápur sæst bara á landi í bútíðini, men sæst annars á flógvum, fjarðum og úti á víðum havi.

Skrápur er minni enn havhestur og smidligari vaksin. Hann er næstan svartur á bakinum og hvítur undir búkinum. Veingirnir eru langir, smalir og spískir, dimmir omaná og hvítir niðriundir. Tá ið skrápurin flýgur, letur hann títt við veingjunum, sveimar so; men hann kastar sær nógv á í flognum.

Skrápur flýgur í smáum flokkum, tá ið hann veiðir ofta langt úr landi. Føðin er ymissur murtur, smásild og smádýr.

Hann eigur í urðum ella holum, sum hann grevur sær í vøllin ovarlaga í bakkanum. Holurnar kunnu vera favn langar og greindar, so pisan – lírin – fær nógvar avkrókar at krógva seg í, so maður mátti gera sær byrgingar, áðrenn hann fann hann.

Skrápur er nógvur í flokki, tá ið hann flýgur at landi nakrar tímar eftir sólsetur. Men fleiri eru teir, tá ið teir tíðliga á kvøldi liggja úti fyri skrápsbølunum. Tá ið skráparnir um midnáttina sita við holurnar, hoyrast skríggini: Tak mær Jákup! Tak mær Jákup!

Vanliga verpur skrápur í mai eittans egg, og hann bølir í 4 vikur. Bøgan og steggin skiftast um at bøla. Pisan hevur sítt, grátt dún, og hon er ógvuliga feit. Menn plaga at draga líra. Tá ið foreldrini hava kastað pisuna, verður svangligt hjá henni fyrstu tíðina, hon er á veg út á sjógvin. Í hesi tíðini er hon ikki so stinn á flogi, og teir stóru másarnir taka hana.

Skrápurin er flytifuglur. Í Føroyum er hann ikki so nógvur, men eigur í nógvum oyggjum. Hann sæst í mars og út í oktober. Um veturin er skrápurin á havleiðini úti fyri Argentina.

### Skúgvurin

Skúgvur eigur á grýtutum, berligum lendi á høgum haga. Hann sæst um firðir og sund og úti á víðum havi.

Skúgvur er kjógvaslag á stødd sum fiskimási, einlittur morreyður

við týðiligum hvítum liti á veingjunum; men hann hevur ikki snældu. Hann er førligur fuglur, og veingirnir eru breiðir. Vanliga flýgur hann seigliga, flýgur skjótt og er bæði treystur og snúiligur.

Skúgvur veiðir innansyndis og úti á havi. Sjálvur veiðir hann seið og sild, tekur egg og ungar í bjørgunum, serliga í lundalandi. Hann etur næstan alt, sum at nevi rekur. Tekur rusk og ræ, smálomb, haru og fullvaksnan fugl.

Hann eltir másafuglar og serliga likku, snittandi og snarandi, til hann hevur fingið hana at spýggja fongin uppaftur. Skuldi tá rytuflokkur ella ternuflokkur komið eftir honum, so noyðist hann at flýggja. Men kjógvin tuskar hann av. So stóran fugl sum súlu noyðir hann eisini at spýggja fongin upp.

Skúgvur kemur á bústaðin um miðjan apríl-mai. Reiðurstaðurin er víðari enn vanligt, og ímillum reiðrini eru 50-75 metrar. Skúgvur verjir reiðurstaðin ágangandi og harðliga, skuldu skúgvar ella aðrir fuglar komið inn um mark. Reiðrið er kulla í jørðini og kanska klætt innan við nøkrum stráum.

Í mai verpur bøgan 2 grágrøn egg við morlittum blettum. Bølingartíðin er um 4 vikur. Dúnungarnir eru gulmorreyðir á bakinum og gráligir undir búkinum. Teir eru nærindis reiðrinum, til teir 6-7 vikur gamlir eru floygdir.

Fyrr á døgum var nógvur skúgvur; men síðan varð roynt at avoyða hann, tí hann gjørdi so stóran skaða. Tey tóku fullvaksnar pisur til matna, tí at tær vóru so feitar. Út ímóti 1900 vóru bara 4 pør eftir. So varð skúgvurin friðaður í 1897, og hann nørdist skjótt aftur. Men í 1972 varð lógin sett úr gildi, og skúgvurin minkaði aftur. Nú eiga um 250 pør her hjá okkum.

Sagt verður, at í teimum høgum, har hann átti mestur fyrr, skóru teir meiri seyð tá, enn teir skera nú, tí har fuglur, sum føðir seg av sjónum, eigur, har verður altíð nógv gras.

Skúgvurin fer hiðani um 1. oktober. Um veturin er hann úti fyri strondini í Evropa, Norðuramerika og Norðurafrika.

**Helsareyðin**

Helsareyði kann verða mistikin fyri sundgræling, sum er heldur størri og førligari. Nevið á helsareyða er heldur klænri og styttri. Báðir tveir eru á sjónum, tá ið bútíðin er av.

Helsareyði er klæntrasligur, lítil vaðfuglur. Hann er gráur upp á

høvdið og reyður um hálsin. Á bakinum er hann dimmgráur við stórum gulmorreyðum strikum og hvítur undir búkinum. Bøgan er fríðlittari enn steggin.

Helsareyði flýgur skjótt, men stákrandi og ótrygt. Annars svimur hann næstan altíð og er so lættfloyttur, at hann tykist bara nema við vatnskorpuna, nikkandi við høvdinum. Men ikki kavar hann. Helsareyði veiðir í vatnskorpuni. Eyðkendur er hann, tá ið hann bregður sær í kring og tyrlar smádýrini upp úr sjónum. Á landi tekur helsareyði flogkykt á flogi og eisini ormverur.

Helsareyði er havfuglur, sum bara kemur á land í bútíðini. Á bústaðin kemur hann í mai og fyrst í juni. Reiðrið er í síðum bøkkum í vátligum graslendi nærindis tjørnum og vøtnum, har góðir føðimøguleikar eru. Bøgan verpur 4 gulmorreyð egg við svørtum blettum, og tá ið vorpið er, rýmir hon.

Steggin vermir eggini og verjir ungarnar. Ungarnir svimja longu eitt samdøgur gamlir. Tá ið teir eru floygdir, eru teir svartbøkutir við morgulum strikum.

Seinni um summarið sæst helsareyði við strendurnar, áðrenn hann flytur. Í august er hann á veg aftur í vetrarvist í Arábiahav.

# Úti í sjónum

### Úti í sjónum

Sólarhiti, frost, vindur og flóð máa og bróta burtur av landinum, og alt leysa tilfarið verður tikið út í sjógvin. Men tilfarið støðast ikki við strond, har brim gongur á, og streymur fer framvið. Lívir fyri brimi, so legst tilfarið á botn nær landi.

Longri vit koma út frá strondini, fínari verður tilfarið á botninum. Tað fína tilfarið søkkur seinni enn tað grova. Úti á havi gera aldur og streymar ikki so nógv um seg sum inni við strondina, og tí legst ymist, t.d. leir og dýraleivdir, á botnin.

Koma vit uppaftur longri út á dýpini, er hvørki sandur ella leir har. Alt tilfarið har er lívrunnið – tað eru evursmáar plantur og evursmá dýr, sum ikki síggjast við berum eygum. Vit nevna hesar smáu, deyðu verur murtn: plantumurtn og dýramurtn.

Inni við land er tað lívrunna tilfarið mest tari, sum brim og streymur hava loyst. Tarin hópast inni á vágum, víkum og fjarðum. Rot kann koma í taran, og so verður allur botnurin ein evja. Nær landi er harðbotnur. Markið millum harðbotn og bleytbotn er úti á 100 metra dýpi. Tó er markið ikki regluligt. Eitt øki er ímillum, har botnurin er bæði harður og bleytur.

Føroyar liggja úti í Atlantshavi á Rygginum, sum gongur eftir botninum úr Skotlandi til Íslands. Á Rygginum er dýpið ongastaðni meir enn 500 m; men bæði norðan fyri og sunnan fyri Ryggin er nógv djúpari. Sjógvurin við botnin norðan fyri og sunnan fyri Ryggin er ikki líka heitur. Norðan fyri Ryggin er sjógvurin 0° og minni og saltíhavið 34,6-34,9 promillu. Sunnan fyri Ryggin 7-10° og saltíhavið 35,25 promillu.

Uttan um oyggjar okkara eru stórir grunnar og bankar, sum tú sært á einum havkorti. Í ein útsynning liggur Føroyabanki, har dýpið er um 100 m.

Tveir streymar hava alstóran týdning fyri plantulívið og dýralívið í sjónum. Úr útsynningi kemur tann flógvi Golfstreymurin. Nógv úr Golfstreyminum fer í ein landnyrðing millum Føroya og Hetlands. Tó fara streymálir í ein landnyrðing og norðan eftir Rygginum millum Føroya og Íslands.

Úr útnyrðingi kemur kaldi eysturíslendski pólstreymurin, og hann ger serliga um seg norðanfyri og í ein landnyrðing úr Føroyum.

So uttan um Føroyar ganga ein heitur og ein kaldur streymur. Hesir báðir streymarnir ganga bæði uttansyndis og innansyndis. Aftrat hesum báðum streymum skulu vit taka teir streymar, sum standast av flóð og fjøru.

Uttan um Føroyar – fram við hellingini – fara teir báðir streymarnir; men inni á landgrunninum eru teir streymar, ið standast av flóð og fjøru. Á landgrunninum eru tí sjóvarføll. Sjóvarfalsstreymar eru harðir í fjarðum og sundum oyggjanna millum.

Har ið kaldi sjógvurin norðanífrá og heiti sjógvurin sunnanífrá renna saman, verður sjógvur alsamt blandaður líka úr vatnskorpuni og niður at botni. Tí verða hitin í sjónum og saltið í sjónum næstan tað sama við vatnskorpuna og niðri við botnin. Miðalhitin heitasta mánað er 10,5° og kaldasta mánað 5,5°. Vit skulu leggja aftrat, at veður og vindur blanda eisini sjógvin væl og virðiliga.

Í sjógvi er nógv murtn. Sjógvur við lítlum murtni er fagurt bláur. Er sjógvurin grønligur, so er nógv murtn í honum. Nógv murtn er í sjónum um Føroyar. Hetta prógvar tann nógvi gagnfiskurin, ið fiskaður verður undir Føroyum.

Skal góður gróður vera í sjónum, mugu ljós, sølt og hiti vera hóskilig. Eisini er umráðandi, at streymarnir taka ikki plantumurtnið so djúpt niður í sjógvin, at ov lítið ljós verður til ljóssamrunan. Streymar ganga bæði uppeftir og niðureftir í sjónum. Murtnið verður tí alla tíðina tikið upp aftur í ljósið, og streymarnir taka alsamt søltini upp av botni og upp í sjógvin. Afturat hesum er sjógvurin eisini klárur, so ljósið vinnur væl niður.

Í mai mánaði kemur gróður í plantumurtnið, og gróðurin heldur á út á heystið.

Burtur úr $CO_2$ og søltum og ljósi ger plantumurtn lívrunnin evni.

Tað evursmáa dýramurtnið í sjónum etur plantumurtn. Streymarnir spjaða eisini dýramurtnið um allan sjógvin. Tó er munur á, tí dýramurtnið, sum t.d. er smá krabbadýr, svimur. Smákrabbarnir fara upp undir vatnskorpuna um náttina og niðuraftur í sjógvin um dagin. Upp í dýramurtnið koma eisini ungarnir hjá skeljadýrum, gágg-um, ormum og krabbum. Ungarnir eru uppi í sjónum fyrstu tíðina, men so fara teir niður á botn.

Ungarnir hjá flestum botnfiskum eru uppi í sjónum, og teir eta

dýramurtnið. Sild og seiður taka sær æti uppi í sjónum. Murtnið – ætið –, sum fellur á botn, taka hýsa og annar botnfiskur.

Um oyggjar okkara er satt fuglameingi. Sjófuglur etur nógv murtn úr sjónum. Teir eta eisini smásild, toskamurtar og seiðamurtar.

Havið í ódn og í logn, soleiðis síggja vit tað. Havið gevur, og havið tekur, soleiðis er lagna okkara. Nógv eru loyndarmálini, ið fjald liggja har, tó at vísindamenn hava granskað frá fyrndartíð, og fleiri eru trupulleikarnir: dálkan og ovfiskan.

**Ovveiða og dálkan**

Ikki er langt síðan, at vit kundu siga, at havið var vill náttúra; men soleiðis kundu vit ikki siga um landjørðina, tí har hevði mannahondin verið á. Landjørðin er so ólík havinum. Har síggja vit betur tað yðjandi lívið. Líta vit út á havið, tykist har so steinoyðið. Kanska flykkjast bara nakrir sjófuglar onkustaðni.

Men í sjónum yður lívið, bæði plantur og dýr. Fyrr á døgum ávirkaðu vit ikki so nógv hetta lívið. Øðrvísi var á landjørðini, tí har høvdu vit fest búgv. Altíð hevur bara lítil partur av fólkinum verið á sjónum; men sum tikið verður til: Føroyingurin hevur hjallin í sjónum.

Sum fólkatalið vaks, og fólkið fór at krevja meira, varð neyðugt at leggja meiri land undir seg. Men enn fingu dýr og plantur í sjónum betri frið. Einki hóttafall sást enn á lívinum í sjónum. Men á landjørðini høvdu landbúnaður og dýraaling tikið náttúruna av ræði.

Enn varð veitt í sjónum, sum forfedrar okkara veiddu. Veiðiamboðini vóru ikki so nógv broytt. Vit veiddu bara ein lítlan part av tí, sum í sjónum var. Ikki varð trároynt. Fiskastovnar stóðu við.

Burturkast var lítið. Tað sindrið, vit lótu fara á sjógvin eftir áunum, var sjógvurin førur fyri at bróta niður og umbroyta.

Soleiðis var lagið til nakað eftir miðjuna av 20. øld. Tann nýggja tíðin hevur mangan við ongum fyriliti tránýtt náttúruríkidømið á landjørðini og tí hótt lívið í sjónum uppaftur meira. Men so hevur meiri verið fiskað, amboðini gjørdust betri, og nú er hóttafall komið á fiskastovnarnar.

Samstundis vit hava trároynt sjógvin, hevur ídnaðurin á landi vaksið, og burturúr er komið meiri burturkast. Sjógvurin gjørdist

køstur. Áður var javnvág í sjónum. Meiri varð ikki tikið, enn av sær sjálvum gekk í aftur. Men í 1960-70-árunum kom broytingin: meiri varð veitt, enn gekk í aftur.

Fiskastovnar liva í samdrátti við aðrar partar í náttúruni, føðisølt, plantur og onnur dýr. Allir hesir partar til saman verða nevndir vistskipan.

Tá ið ein partur í vistskipanini verður ávirkaður, so verða aðrir partar eisini ávirkaðir. Hvussu murtngróðurin er í sjónum, tað lagar seg eftir føðisøltum og ljósi. Er ov nógvur røringur í sjónum, verður nógv plantumurtn tikið niður í sjógvin, har lítið ella einki ljós er. Góðar føðivánir, góðir fiskastovnar.

Hesi seinastu árini er fiskiveiðan nógv vaksin, og nýggj fiskasløg hava verið veidd. Minkaði veiðan í einum staði, varð bara meiri veitt aðrastaðni. Serliga fiskasløg uppi í sjónum tola illa trároynd.

Vit hava ásannað, at sjógvurin hvørki er ótømiligur ella kann verða nýttur til køst. Sjógvurin má verða umsitin við skynsemi.

Tikið verður til, at veður og vatn má sær ráða. Vit ráða ikki yvir streymi og vindi, men vit ráða fyri, hvat vit fiska, og hvussu vit fiska. Eisini ráða vit fyri, hvussu vit skulu fara um vatn og sjógv. Vit eiga tó ikki at gloyma, at har svimur fiskurin.

Sjálvandi skulu vit ávirka náttúruna, men við skynsemi og fyriliti. Á landjørðini veltu vit haga til góðan bø. Tey gomlu dugdu væl at liva og laga seg eftir tí, sum náttúran gav. Tey settu við, tá ið tey tóku úr. Seyðarøktin hevur verið fyrimyndarlig. Ella hvussu væl teir fóru um fuglabjørgini og oyðdrupu ikki fuglin.

Vit hava sama møguleika á sjógvi sum á landi. Torført hevur verið at ásanna, hvørjar vánaligar fylgjur bæði ovveiða og dálkan hava fingið. Menniskjað er einasti skapningur, sum fær broytt hesa hættisligu støðu.

# Fiskakroppurin

## Skræðan

Fiskur er sum aðrir skapningar bygdur av smáum lutum, sum vit nevna kyknur. Kyknurnar eru so smáar, at sjóneyka má verða nýtt, skalt tú síggja tær skilliga.

Ein kykna er ein lítil slímbitil, og í slíminum liggur ein kjarni. Vanliga liva kyknur stutt; men kroppurin ger nýggjar kyknur.

Í fiskaskræðu eru nógvar kyknur, sum slipa kemur úr. Slipan ger skræðuna hála, so fiskur smýgur betur gjøgnum sjógvin. Eisini verjir slipan fiskin, so at lýs og aðrir euroíkar sleppa ikki inn í skræðuna.

Í skræðuni eru eisini tunnar beinflísar, sum liggja hvør aftur á aðra. Beinflísarnar er roðslan. Tó hava ikki allir fiskar roðslu. Fiskar við smáari ella ongari roðslu hava serliga nógvar kyknur, ið gera slipu.

Sum fiskur veksur, veksur roðslan eisini. Tað pettið, roðslan veksur í eitt ár, nevna vit ein árring. Verður ein beinflís løgd undir sjóneyku, fáa vit talt árringarnar og síggja, hvussu gamal fiskurin er.

Kyknur, sum hava í sær litir, eru eisini í skræðuni. Í litkyknunum er antin svart, reytt, gult ella blátt evni. Summar kyknur hava í sær tinnur. Tá ið ljósið skínur á tinnurnar, glógva tær grønar og blankar. Fiskar uppi í sjónum hava serliga hesar tinnurnar.

Summir fiskar skifta lit eftir stuttari tíð. Fer toskur t.d. inn í taran, verður hann reyður (reyðfiskur). Nú er toskurin ringur at skilja frá taranum og tí vardur fyri fígginda. Litevnið í kyknunum gevur seg saman ella breiðist út. Gevur svarta litevnið seg saman í teimum svørtu litkyknunum, so verður fiskurin ljósur. Missir fiskur sjónina, skiftir hann ikki lit. Nógvir fiskar verða eisini litfagrir í gýtingartíðini.

## Beinagrindin

Fiskar verða skiftir í tvey: beinfiskar og bróskfiskar. Beinagrindin í fiskaunga er úr bróski. Sum ungin veksur, legst kálk í bróskið, sum verður hart og nevnt bein. Beinagrindin í summum fiskum (hávi) verður alla ævina brósk.

Ryggurin er bygdur upp av geislum. Fremsti geisli er høvdið.

Heilin liggur væl vardur inni í høvdinum. Úr heilanum gongur mønin aftur gjøgnum ryggin.

Fiskur hevur nógv bein í høvdinum, tí í kápuni eru so mong bein. Innan fyri kápuna er kápuholan, har fýra beinbogar liggja hvørjumegin. Beinbogarnir eita táknabogar. Á táknabogunum eru tunn bróskbløð, sum eita táknabløð. Millum táknabogarnar sita tættar tenn.

Beinini í uggafjaðrunum eru fest at høvdinum, og beinini í búkfjaðrunum eru fest í holdið. Í fjaðrunum eru gyrðnir træðrir, bróskteinar og beinteinar.

Fiskur, sum tekur annan fisk, hevur tenn at taka hann og halda honum við. Hann tyggur ikki, men svølgir heilt. Verður hugt, hvussu kjafturin er dánaður, fáa vit at vita, hvat fiskurin etur. Hvítingur hevur langan kjaft og fleiri tanngarðar við spískum tonnum. Hansara tenn eru góðar at halda við. Steinbítur hevur fáar, stórar og sterkar tenn at bróta skeljar við. Havtaska hevur undirbit, tí hon liggur á botni og tekur fisk, sum svimur uppi yvir henni. Hýsa hevur yvirbit, tí hon tekur føði á botni.

**Vøddarnir**

Vøddarnir eru festir í beinagrindina. Teir eru holdið í fiskinum. Fiskur hevur vanliga ljósar vøddar, tí lítið blóð er í teimum. Skjótir og treystir fiskar hava reydligar vøddar, t.d. hávur.

Sjósíl og laksur hava eisini reyðar vøddar. Tann reyði liturin í hesum føri kemur ikki av blóði, men reyðum evni, sum komið er úr føðini (krabbadýrum). Sporlvøddarnir eru ógvuliga sterkir.

Fiskur svimur, við tað at hann liðar kroppin frá síðu til síðu. Mong fiskasløg láta bara við sporlinum. Álakendur fiskur buktar seg fram við øllum kroppinum. Fiskur heldur seg beinan í sjónum og stýrir við fjaðrunum. Fjaðrarnar á summum fiskum, t.d. skøtu, bylgjast og geva fiskinum ferð.

Verður fiskur sleptur í eitt netabúr, og sjógvur streymar gjøgnum búrið, fæst at vita, hvussu skjótt hann svimur. Fyrst mugu vit vita, hvussu nógva ferð streymurin hevur. Fiskurin roynir at svimja ímóti streyminum. So verður streymurin gjørdur harðari og harðari, til fiskurin ikki fær strembað ímóti longur. Soleiðis hava vit fingið at vita, at sild eitt stutt strekki svimur upp í 6 km um tíman, toskur 8 km/t, makrelur 10 km/t og sjósíl 12 km/t.

## Innvølurin

Úr kjaftinum gongur stutt vælindi aftur í magan. Fremst í vælindinum verður føðin kroyst sundur. Væta kemur úr maganum upp í føðina, sum sodnar skjótt, um hon so er bleyt ella hørð.

Úr maganum ganga garnarnar aftur í gotið. Har ið garnarnar koma úr maganum, eru í mongum fiskum nógvar trevsur, sum eita skúvgarnar.

Tá ið føðin er sodnað, verður hon sogin inn í blóðæðrarnar. Blóðið ber síðan føðina út til allar kyknurnar í kroppinum.

Ikki allir fiskar hava líka stóra livur. Til dømis hava toskur, hávur og kalvi stóra livur. Fiskar, ið hava stóra livur, hava ikki feitan fisk. Sild og síl hava lítla livur og feitan fisk. Livurin hevur í sær sukur og fiti. Lýsi fæst úr livur, og í lýsi eru nógv A- og D-vitamin. Nýruni liggja undir rygginum, og tey eru reyð.

Sundmagin er fastur uppi undir rygginum. Tá ið fiskur fer niður á størri dýpi, fyllir hann luft í sundmagan, tí djúpari hann fer, størri verður trýstið uttan um hann. Tá ið fiskurin kemur uppaftur, sleppir hann luft úr sundmaganum.

Summir fiskar hava ikki sundmaga. Teir halda vanliga til við botnin (undantøk eru makrelur og hávur).

## Blóðið og andingin

Taka vit kápuna upp, síggja vit inn á táknurnar, sum eru reyðar, av tí at húðin uttan á táknabløðunum er so tunn, at blóðið skyggir út ígjøgnum. Fram við táknabogunum liggja blóðæðrar, sum greinast út í táknabløðini.

Fiskur tekur sjógv ella vatn inn gjøgnum kjaftin og sprænir hann út aftur gjøgnum táknarivurnar. Sjógvur (vatn) skolar alsamt fram við táknunum og kølir blóðið í æðrunum har. Skræðan lívir einki. Fiskur hevur misheitt blóð: so heitt sum sjógvurin, har fiskurin er. Úr sjónum, ið streymar inn í táknaholuna, fær fiskur smákykt og $O_2$. Tenninar á táknabogunum síla ætið frá. Táknabløðini taka $O_2$ í seg.

Hjartað hevur tvey rúm: upprúm og innrúm. Hjartað slær og pumpar blóðið um allan kroppin. Blóðið rennur bara ein veg, tí lokur forða tí at renna hin vegin. Blóðið ber $O_2$ út í kyknurnar í kroppinum. Kolið í føðini og $O_2$ renna saman, og so brennur. Soleiðis er

eisini, tá ið bál brennur; men tó eru hvørki eldur ella roykur at síggja í kyknunum.

Ein brenning kann vera, uttan at eldur og roykur eru at síggja. Úr brenningini koma vatn, $CO_2$ og orka. Í einum motori brennur oljan í sylindaranum. Orkan, sum kemur úr, tá ið oljan brennur, fær skrúvuna at mala, og báturin fær ferð. Tann orkan, sum kemur, tá ið føðin brennur í kyknunum, gevur fiski megi at svimja og at røra seg, og orkan hitar eisini blóðið.

$CO_2$ kemur fyrst inn í smáar æðrar. Smáæðrarnar taka seg saman í eina stóra æðr, sum gongur til hjartað. Blóðið við $CO_2$ kemur fyrst í upprúmið, síðan í innrúmið og haðani í eina stutta, tjúkka æðr, sum gongur út í táknurnar. Tá ið blóðið kemur í táknabløðini, letur tað $CO_2$ út í sjógvin í kápuholuni.

**Nøringin**

Um várið tekur fiskurin seg saman á ávísum støðum. Norðan fyri og vestan fyri Føroyar eru bestu gýtingargrunnarnir. Í hesi tíðini hevur rognfiskurin stórt rogn og silfiskurin nógv sil. Inni í rogninum eru upp í fleiri milliónir búgvin rognkorn (eggkyknur).

Fyrst gýtir (rygnir) rognfiskurin rognkornini í sjógvin. Summir fiskar gýta rognkornini á botnin ella á steinar og tara. Rognkornini í hesum føri eru tyngri enn sjógvurin og søkka tí. Fiskar, sum gýta uppi í sjónum, gýta upp í 10 milliónir rognkorn. Teir, ið gýta við botnin, gýta nógv færri og størri rognkorn.

Silfiskurin gýtir so sil (sáðkyknur) niður yvir rognkornini. Eggkyknur og sáðkyknur renna saman tvær og tvær, og nú er eggkyknan troðin. Í flestum førum sveima eggini uppi í sjónum og fara langan veg við streyminum.

Uttan um eggini er tunn, glær hinna. Fáa vit fatur á troddum eggi, leggja tað undir sjóneyku, so síggja vit, hvussu ungin liggur ringdur inni í egginum.

Tey troddu eggini búnast til unga. Nýklaktur ungi hevur ta fyrstu tíðina ein posa við eggjareyða undir búkinum. Ungin livir fyrstu tíðina av eggjareyðanum. Tá ið eggjareyðin er uppi, fer ungin sjálvur at leita sær eftir føði. Ungarnir sveima viðhvørt ein mánað uppi í sjónum og reka langan veg við streyminum. Ódnarveður kann elva, at teir reka í kaldan sjógv og komast ikki undan.

Nógv egg og nógvir ungar verða etin. Ungarnir eru viðbreknir og

tola ikki, at hitin í sjónum broytist. Sum tað líður út á veturin, verður minni føði, og tá doyggja nógvir ungar. Men náttúran tekur so ríviliga til, fiskurin gýtir so mong rognkorn, at altíð verður nøkulunda eftir til ein ígang.

Fiskur veksur skjótast tey fyrstu árini (sum onnur ryggdýr). Um tað mundið, hann verður gýtingarførur, veksur hann ikki so nógv. Smáur fiskur hevur nógvar fíggindar. Tí doyggja nógvir. Teir verða etnir. Tá ið fiskurin er 15-20 cm langur, eru tó ikki mong dýr, sum taka hann. Men tá kann hann doyggja av sjúkum og boyggja og sníkum. Tó doyggja flestir fiskar av fiskiskapi.

**Sansarnir**

Fiskaheili er lítil og illa búgvin. Fiskur dugir ikki at hugsa; men hann hevur tó minni og kann læra okkurt. Tá ið tú etur toskarhøvd, tak so og brót skrokkin varliga, so sært tú heilan.

Munur er at síggja í sjógvi og uppi á landi. Í sjónum sæst bara nakrar fáar metrar, men uppi á landi fleiri fjórðingar. Fiskur sær tí ikki so væl frá sær sum dýr uppi á landi. Fiskaeygað líkist mannaeyga. Eygnasteinur okkara broytir skap, tá ið vit hyggja burtur frá okkum ella tætt hjá; men hesa gávuna hevur eygnasteinurin í fiski ikki. At fiskaeyganum er tó festur vøddi, sum ger, at eygnasteinurin sjálvur verður fluttur eitt sindur út og inn, tá ið fiskur hyggur frá sær ella tætt hjá. Hildið verður, at fiskur sær ikki meira enn einar 20 m frá sær.

Vit kunnu ikki siga, at fiskur sær illa. Tað sæst bara so stutt í sjónum. Fiskur er útoygdur og sær tí uttan um seg. Tað hevur stóran týdning, tí hann fær ikki snarað høvdinum. Fiskur fær ikki latið eyguni aftur, tí hann hevur ikki eygnalok. Summir fiskar eru blindir. Teir eru á heilt djúpum vatni, har altíð er myrkt.

Fiskur á miðdýpi, t.d. út av hellingini á 4-800 m dýpi, hevur vanliga stór eygu, so hann fær nýtt eyguni, har bara veik ljósglæma sæst í erva. Dømi um hesi fiskasløg eru langasporl og gulllaksur.

Í gýtingartíðini verða serliga silfiskarnir vakurt littir, og rognfiskarnir gáa væl um litirnar, so vit kunnu siga, at fiskur skilir litir.

Fyrst skal verða sagt, at ljóðið gongur 4 ferðir so skjótt í sjógvi sum í luft. Dýrini uppi á landi hava vanliga bæði smakk og tev. Men í sjógvi eru øll evni upployst, so munur á tevi og smakki er lítil í sjónum.

Oyru síggjast ikki uttan á fiski. Tey eru inni í høvdinum. Kanningar hava prógvað, at fiskur hoyrir. Summir fiskar duga at gera ljóð. Teir gníggja ávís bein hvørt ímóti øðrum. Hesi ljóðini hjálpa fiski at finna hvør annan, ella eisini at ávara hvør annan.

Tevgluggarnir eru tvey hol frammi á gronini. Teir standa opnir út í sjógvin. Tevgluggarnir tevja ikki bara føði og fíggindar; men summir fiskar tevja eisini aðrar fiskar av sama slagi. Henda gáva ger tað, at fiskarnir koma saman í torvur.

Fiskur smakkar ikki bara við kjaftinum, men eisini við vørrum, grunnnøs og fjaðrum.

Strikan gongur úr høvdi í sporl. Hon er eitt sjaldsamt sansigagn. Ikki allir fiskar hava striku. Hyggja vit at strikuni í sjóneyku, síggja vit eitt rað av smáum holum. Hesi holini ganga inn í eitt slipufylt ræsi, sum liggur beint undir skræðuni. Á botni í ræsinum sita smá sansabundi, og úr sansabundunum ganga træðrir út í slipuna í ræsinum. Træðrirnir eru nervar, sum hava samband við heilan.

Fiskur sansar við strikuni streym og órógv í sjónum. Tá ið sjógvurin er myrkur og gruggutur, sansar fiskur við strikuni, tá ið hann nærkast steini ella kletti, ella onkur fiskur svimur ímóti honum. Røringarnar í sjónum raka tey smáu holini og trýsta á slipuna í ræsinum. Rørist slipan, so rørast eisini sansabundini, og boð fara til heilan.

Stuttligt er at síggja seið kastast. Allir koma upp sum eitt skot og hvørva líka brádliga. Hildið verður, at tá lítur hann á strikusansin.

# Dýr uppi í sjónum

## Toskurin

Toskur heldur til úr taranum og út í hellingina. Hann er nógv við botnin, men gongur eisini uppi í sjónum. Toskur er gráflekkutur á bakinum og um síðurnar, ljósari undir búkinum. Annars skiftir hann lit eftir botninum, har hann er, t.d. berggylta og reyðfiskur. Toskur, sum gongur nógv uppi í sjónum, er dimmari á bakinum. Strikan er ljós. Yvirkjafturin kemur fram um undirkjaftin.

Undir Føroyum eru, ið hvussu so er, tvær toskagreinir. Onnur er á landgrunninum og onnur á Føroyabanka. Toskurin á Føroyabanka er ljósari og hevur breiðari sporl; hann er nógv størri, tá ið hann er gýtingarførur.

Toskurin undir Føroyum er ein sergrein, sum hevur lítið samband við tosk aðrastaðni. Hetta prógva merkingar. Sum árini hava liðið, hava menn merkt um 20.000 toskar undir Føroyum. Bara nakrir fáir eru fingnir aftur aðrastaðni, t.d. 2 í Íslandi, 2 í Norðsjónum og nakrir undir Norðurnoregi og Bjarnoynni.

Skilt verður ímillum smáfisk og tosk. Hann verður nevndur toskur, tá ið hann er yvir 70 cm. Í gýtingartíðini tekur toskur seg saman í stórar torvur; men soleiðis ger smáfiskur ikki. Smáfiskur fer ikki so víða um oyggjarnar sum toskur. Tey fyrstu 2-3 árini er toskur væl støðufastur; men tá ið hann verður eldri, serliga tá ið hann er gýtingarførur, fer hann víða eftir føði ella á gýtingargrunnarnar.

Toskur er ránakendur fiskur. Altíð á ferð eftir føði. Smáfiskur tekur serliga krabbadýr, ormar, sniglar og skeljadýr á botni. Toskur – yvir 70 cm – tekur mest annan fisk, t.d. nebbasild, hvítingsbróður og sild. Um summarið hópast toskur ofta í sandeygum við strendurnar, tí um hetta mundið er nógv nebbasild har.

Toskurin á landgrunninum gýtir í februar-mai á 80-150 metra dýpi. Hann gýtir serliga á Norðhavinum og uttarlaga í Vágahavinum. Tó verður hildið, at hann gýtir aðrastaðni um oyggjarnar eisini. Bestu gýtingarmánaðirnir eru mars og apríl. Tá ið gýtingartíðin nærkast, leita rognfiskur og silfiskur saman á botninum. Síðan lokkar silfiskurin rognfiskin upp av botni, og báðir svimja búk ímóti

búki, meðan teir gýta. Tá ið teir svimja soleiðis, verða mest rogn gitin.

Rognkornini flotna upp í vatnskorpuna, og rákið ber tey um allan landgrunnin. Klekingartíðin lagar seg eftir, hvussu heitur sjógvurin er. Seinast í mars og fyrst í apríl er hitin í vatnskorpuni 6°. Tá verða rognkornini klakt um 2 ½ viku. Er sjógvurin heitari, er klakt um einar 14 dagar. Rognfiskurin gýtir ½-4 mill. rognkorn, alt eftir, hvussu stórur fiskurin er. Ungarnir eru um 4 mm langir. Ungarnir svimja ikki fyrstu tíðina, og hvørki muður ella sodningarlag eru opin. Ungin livir fyrstu 2-5 dagarnar av eggjareyðaposa, sum hann hevur undir búkinum. Tá ið hesir dagarnir eru farnir, eru bæði muður og sodningarleið opin; men enn eru svimjievnini ikki so góð.

Í hesi tíðini er sum harðast, at ungarnir fáa nógv at eta. Fáa teir nógv at eta, so kemur nógv undan. Av tí at ungarnir ikki enn hava so góð svimjievni, liggur væl fyri hjá øðrum dýrum at taka teir. Í mai fer ungin at vaksa skjótari, tí tá kemur gróður í plantumurtnið, og nógv verður eisini klakt hjá øðrum dýrum bæði á botni og uppi í sjónum.

Sum ungarnir vaksa, verða svimjievnini betri, og so liggur betur fyri hjá teimum at taka sær føði og eisini at svimja undan øðrum fiskum. Fáa ungarnir lítið at eta, so kann nakað doyggja í hungri. Svimjievnini eru tá vánaligari, og meiri verður tikið. Tá verður ikki góður ígangur.

Fyrst í juli er væl farið burtur av ungunum. Ungarnir eru um hetta mundið 4-5 cm langir. Nú hava teir sveimað einar tveir mánaðir uppi í sjónum, og nú fara teir niður á botn ella inn móti landi. Eftir hálvan juli eru fyrstu ungarnir at síggja inni í taranum. Nú verða teir nevndir toskamurtar. So minkar aftur burturav, tí fuglur og fiskur og onnur dýr taka nakað av toskamurti.

Rognkorn og ungar eru eisini at síggja inni á firðum. Teir hørðu streymarnir um oyggjarnar bera nakað av rognkornum og ungum inn á firðirnar. Hildið verður, at ein partur av toskinum gýtir inni á firðum og sundum.

Tá ið toskurin hevur gýtt, sveimar hann víða á stórum dýpi eftir føði. Ungarnir, sum fóru inn undir land, eru 2-3 ár í taranum og fram við landi; men so fara teir longri út og upp í vaksna toskastovnin. Toskur er vanliga gýtingarførur, tá ið hann er 4 ára gamal.

Toskur etur meira um summarið enn um veturin, tí um summarið er meiri føði. Hann veksur tí meira um summarið. Verða roðsla og

nytra løgd undir sjóneyku, síggjast vakstrarringar. Teir breiðaru ringarnir eru gjørdir um summarið og teir smalru um veturin. Eftir vakstrarringunum ber til at siga, hvussu gamal toskurin er.

Toskurin á Føroyabanka gýtir kanska eitt sindur fyrr enn toskurin á landgrunninum. Ungarnir hjá honum fara niður á botn á bankanum og ikki inn undir land.

Er nógv komið undan úr eini gýting, fer toskurin víðari um og er at fáa nærri landi, tá fiska smábátarnir meira. Stendur nebbasild tøtt í sandeygum, kemur toskurin inn í sandeyguni eftir henni, og viðhvørt gongur hann so tjúkkur sum á gýtingargrunni eftir nebbasildini. Undir Føroyum eru bæði várfiskiskapur og heystfiskiskapur. Várfiskiskapur er serliga á Norðhavinum og í Vágahavinum, tá ið toskur hópast har í gýtingartíðini. Heystfiskiskapur er serliga eystan og vestan fyri Suðuroynna.

**Hýsan**

Hýsa heldur til á bleytari botni enn toskur, og hon er bæði á landgrunninum og Føroyabanka. Hon kann eisini koma á harðan botn eftir føði.

Hýsa líkist toski á vakstrarlagi. Hon hevur dimman blett hvørjumegin undir fremstu ryggfjøður og dimma striku. Ljós er hon á liti og skyggir blálig á bakinum. Hýsa hevur yvirbit, so hon fær lættliga fatur á føðini, sum hon rótar upp úr botni.

Sum toskur er hýsan serstovnur og hevur ikki samband við hýsu aðrastaðni. Merkingar vísa, at hon fer ikki aðrastaðni; men dúgliga sveimar hon um oyggjarnar eftir føði. Hýsa etur serliga slangustjørnur, skeljadýr, sniglar, krabbadýr, bustormar og smáan fisk, t.d. nebbasild. Á bleytum botni kann hon standa á høvdinum og sutla, so móran stendur undan kápuni. Kemur hon á gýtingarleið hjá sild, liggur hon og sutlar sildarogn, sum liggja á botni.

Hýsan gýtir eitt sindur seinni enn toskurin; hon gýtir serliga í apríl. Hýsa gýtir á landgrunninum og bankunum á 50-200 metra dýpi, tó mest á 100-150 metra dýpi, og djúpari enn toskur. Eisini gýtir hon á summum fjarðum. Rognkornini flotna upp og fara við rákinum um landgrunnin og bankarnar.

Klekingartíðin er 13-17 dagar. Ungarnir eru uppi í sjónum, og teir fáa sær skjól undir hvalspýggjum. Tá ið ungarnir – hýsumurtarnir – eru nakrar mánaðir gamlir, fara teir niður á botn á 90-200 metra

dýpi, og tá eru teir um 3 cm langir. Tá ið hýsa er 3 ára gomul, er hon gýtingarfør. Hon gýtir 1/2-3 mill. rognkorn.

Hýsan veksur skjótari undir Føroyum enn aðrastaðni.

Skjótast veksur hon á Føroyabanka, og vanliga veksur hon skjótari vestanfyri enn eystanfyri. Smáhýsa (40 cm) er heldur á grunnum vatni, hin stóra á djúpari.

**Seiðurin**

Seiður er allastaðni um oyggjarnar og út á bankarnar. Hann hópast saman í torvur, har nógv rák er. Seiður verður nevndur upsi, tá ið hann er 60-65 cm langur.

Seiður er dimmgrønur á bakinum, gráur um liðirnar og hvítur undir búkinum. Strikan er ljós. Undirkjafturin kemur fram um yvirkjaftin. Teir ungu seiðirnir hava grunnnøs sum toskur.

Áður er sagt frá, at toskur og hýsa eru serføroyskir stovnar; men øðrvísi er við seiði. Menn hava merkt seið undir Føroyum, og hann er afturfingin undir Íslandi, serliga, men eisini undir Orknoyggjum, Hetlandi, í Norðsjónum og undir Noregi, so vit kunnu siga, at flyting er millum seiðastovnarnar.

Gýtingartíðin er frá januar til apríl/mai; men mesta gýtingin er í februar á 150-200 metra dýpi, mest eystanfyri og í ein landnyrðing. Rognkornini flotna, og rákið tekur tey um bankar og landgrunn. Klekingartíðin er um tvær vikur. Ungarnir eru uppi í sjónum til seinast í mai, tá ið teir fara inn at landi. Tá nevna vit teir seiðamurtar ella ternumurtar. Ternumurtarnir kunnu koma bæði fyrr og seinni at landi. Nú eru teir um 3 cm langir.

Seinnapartin í juni og fyrst í juli er næstan alt úr gýtingini komið inn á víkir og firðir, og har eru ternumurtarnir í taranum í eini 2 ár. Skjótt vaksa ternumurtar, tí longu í august eru teir í miðal 10 cm langir. Bæði fuglar og fiskar eru grammir eftir ternumurtum. Ternumurtar eru ofta at finna í maganum á stórum seiði, toski, eyrriða og sjófugli. Tí fer nógvur ternumurtur burturav. Longu í august er bara helvtin eftir, og út á veturin fer aftur ein fjórðingur burturav.

Inni í taraskónum tekur seiður taralús, marflugu, smákrabba, smásniglar og ymist kelv, t.d. kræklingakelv og gjarakelv. Upsi er nógv meira uppi í sjónum enn hýsa og toskur. Hann tekur serliga nebbasild, sild, hvítingsbróður, krabbadýr, serliga ljóskrabba, og

fiskaungar. Upsi hevur sum sild og makrelur stavir á táknabogunum, sum síla ætið frá, t.d. reyðæti.

Tað fyrsta árið seiðurin er inni við strendurnar, verður hann nevndur summarseiður. Sum seiður veksur, fer hann víðari um. Oftast gongur hann í stórum torvum uppi undir vatnskorpuni, har nógv rák er. Tá kastast hann dúgliga, og sjófuglar flykkjast uppiyvir, tí har er nógv æti. Seiður, vit fáa á dyrging, er vanliga ársgamal. Tó fáa vit eisini bæði tvæveturseið og træveturseið á dyrging.

Tá ið seiður hevur verið eini 2 ár undir landi, fer hann út á landgrunn og bankar, og er hann at síggja í troli 3-4 ára gamal. 4-6 ára gamal er hann gýtingarførur. Ikki fyrr enn hesi seinastu árini eru føroyingar farnir at fiska upsa á djúpum vatni.

## Hvítingurin

Hvítingur er mest á sjálvum landgrunninum. Honum fellur best bleytan botn og kemur sjaldan á harðbotn. Hvítingur er vanliga við botnin; men hann kann eisini vera uppi í sjónum.

Yvirkjafturin kemur fram um undirkjaftin. Fremra gotfjøður er, sammett við hýsu, long, og hann hevur ikki grunnnøs. Strikan er dimm. Dimmur blettur er hvørjumegin oman fyri uggafjaðrarnar.

Hvítingur gýtir seint um várið og um summarið 150.000-1.000.000 rognkorn á 25-100 metra dýpi. Fyrstu tíðina eru ungarnir nær botninum, men seinni koma teir upp í sjógvin. Ungar eru at síggja frá mai og út í august.

Ungar – hvítingsmurtar – plaga at halda til undir hvalspýggju, sum eitur gullbrandur. Løgið er, at murtarnir verða ikki brendir til deyða, tí gullbrandur skjýtur út træðrir, sum brenna illa.

Hvítingur er átufrekur og ránakendur fiskur. Hann etur ymiss krabbadýr og fisk. Sum hann eldist, etur hann meiri fisk, nebbasild, hvítingsbróður, sild og sítt egna avkom. Hvítingur jagstrar ofta sild.

Hvítingur er á ávísum leiðum, og lítið er til av honum. Nakrir sløðast uppií, tá ið hýsulína verður sett. Men um veturin kemur hann inn á firðirnar. Tá plaga teir at fáa væl um atventina.

Hesa seinastu tíðina hava útróðrarbátar roynt við línu um várið og summarið og hava fingið væl. Fiskiskapurin byrjar norðanfyri, og so flytur hann seg suðureftir eystan fyri Føroyar.

## Longan

Longa er vanligur fiskur á 100-400 metra dýpi; men hon fæst eisini bæði á djúpari og grynri vatni, t.d. á 10 metra dýpi.

Longa hevur tvær ryggfjaðrar, eina stutta framman og eina langa aftan, eina langa gotfjøður. Hon er morlitt á bakinum og ljós undir búkinum.

Hon er glúpskur og ránakendur fiskur við stórum kjafti og sterkum tonnum. Føðin er serliga fiskur, toskur, hýsa, sild, hvítingsbróðir, svartkjaftur, men tekur eisini krossfisk, krabbadýr, hummara og høgguslokk.

Longa er gýtingarfør 6-8 ára gomul. Hon gýtir á 60-200 metra dýpi. Í mai gýtir rognfiskurin 20-60 mill. rognkorn. Tey gitnu rognkornini flotna upp í sjógvin, verða klakt. Ungarnir eru uppi í sjónum, til teir í august hvørva.

Ikki veitst enn, hvar teir vaksa upp, og heldur einki veitst um unglonguna, fyrr enn hon er uppi í veiðuni.

## Royðurin

Royður er stórhvalur. Hon gongur einsamøll ella nakrar fáar saman úti á víðum havi. Um summarið strýkur hon í artiskum ella antartiskum sjógvi; men um veturin kemur hon í heitari sjógv.

Royður er grá ella gráblá á bakinum, men ljósari um liðirnar og undir búkinum. Høvdið er stórt, yvirkjafturin tunnur, undirkjafturin tjúkkur og øsið sítt. Hornið er lítið og situr aftarlaga. Sveivin er um 6 m breið, bøksliní um 4 m long. Undir hvøljuni liggur 30 cm tjúkt spik, sum lívir væl. Kropshitin er altíð 35-37°.

Royður er smidliga vaksin og lagað eftir at vera í sjógvi. Ger hon landgongd, doyr hon skjótt, tí hon er tung og bringan veik og fellur saman. Men tak hana í sjónum. Hon er so sterk, at hon loypur sjóleys. Veruliga flýtur royður í sjónum. Henni nýtist einki at gera at halda sær uppi. Spikið ber hana uppi. Beinini í henni eru poknut og løtt og full av feitti.

Verður royður órógvað, svimur hon 40 km um tíman, men vanliga ferðin er 10-18 km. Hon má koma ofta í vatnskorpuna at anda. Tá setur hon bara bollan uppundan, tí báðir nasagluggarnir sita frammarlaga á bollanum. Nasagluggarnir eita blástrið. Royðurin blæsur harðliga út gjøgnum blástrið – andar út. Luftin tynnist nógv, verður

nógv køld, so vatnguvan í luftini veður til ein dropastólpa, tjúkkur sum mansarmur og 7-8 m høgur. Í nøkur sekund blæsur hon um 2000 l av luft úr lungunum. Síðan andar hon 2000 l av luft niður í seg, áðrenn hon fer aftur undir kav.

Er vandaleyst, kann royður vera uppi í vatnskorpuni eina løtu; men hon kemur fleiri ferðir upp at blása. Tá ið hon so hevur verið uppi 10-12 ferðir, ganga 10-20 minuttir, áðrenn hon kemur uppaftur. Í flestum førum er hon ikki meira enn 50 m undir vatnskorpuni, men fær kavað 3-400 m niður.

Royður hevur ikki tenn, men bardur og livir mest av smáum krabbadýrum, ið líkjast rækju; men hon etur eisini mong onnur smádýr, sjósniglar og smáan fisk. Mest æti er í køldum sjógvi, og hon leitar altíð hagar, sum mest æti er. Tí gongur hon víða um høv og kann koma í sjógv, har hon ikki eigur at vera. Onkuntíð er hon havvill og kann koma ov nær strondini og kanska gera landgongd.

Tá ið hon tekur føði, svimur hon við opnum kjafti. Ímeðan fyllist kjafturin við sjógvi. Stórur er kjafturin og verður nógv tambaður. Húðin á undirkjaftinum er gyrðin, og gapið verður upp aftur størri, tá ið faldirnir aftur eftir øsinum og búkinum eisini tambast út. Niður úr gómanum hanga 4-500 bardur, sum sita í tveimum røðum.

Bardur eru trevsutar hornplátur.

Tá ið hon letur kjaftin upp, verða sjógvur og æti sogin inn. Í fullum gapi kunnu vera fleiri milliónir smádýr. Síðan letur royðurin kjaftin aftur. Vøddar taka faldirnar saman aftur, tungan fer upp undir góman, so sjógvurin verður sprændur út gjøgnum kinnklovarnar. Smádýrini hanga føst í bardutrevsunum. Tungan ber so smádýrini at svølgrúminum, ið bara er 20-25 cm í tvørmáli.

Royður má fáa nógv at eta hvønn einasta dag. Um leið eitt tons av æti fær verið í maganum í henni. Krabbadýrini eru altíð uppi undir vatnskorpuni, so henni nýtist ikki at kava eftir teimum. Krabbadýrini mugu fáa plantuæti, og tí eru tey so ovarlaga í sjónum.

Royður fær givið ljóð frá sær; men fólk hoyrir tey ikki. Ljóðini eru so hørð, at tey hoyrast fleiri hundrað kilometrar. Ikki veitst, hvønn týdning ljóðini hava. Kanska finna royðrarnar hvør aðra eftir ljóðinum, og tað er týdningarmikið í makingartíðini.

Á norðurhálvu er makingartíðin í november-mars og á suðurhálvu í mai-september. Kvennroyður er kviðin í 10 mánaðir. Hon leggur vanliga ein hvølp 2. ella 3. hvørt ár. Nýlagdur hvølpur er 7-8 m langur og vigar um 2 tons. Hvølpurin fylgist við móður síni og

sýgur hana, til hann er 7 mánaðir gamal. Hvalamjólk er 5 ferðir so feit sum neytamjólk, so hvølpurin veksur skjótt. 7 mánaða gamal er hvølpurin 18 m langur og vigar um 23 tons. Síðan tekur hann æti sum vaksnu royðrarnar.

Tó at hvølpurin er sjálvbjargin, fylgist hann enn nakrar mánaðir við móður síni. So strýkur hann víða einsamallur ella saman við nøkrum øðrum royðrum. 2-3 ára gamal er hann kynsbúgvin.

Fyrr á døgum var royður ikki so óvanlig her hjá okkum. Mikkjal á Ryggi, sáli, sigur soleiðis frá:

„Um vártíð sóu skipini royður koma undan Írlandi og fara norður um Føroyar. Hvørt ár legði hon hesa somu leiðina – einar 24-30 fjórðingar vestan fyri Mykines – og gekk so hart, at ikki fekst skot á hana.

Eitt annað rend kom í juni. Tá sóust tær koma av Bankanum og seta leiðina beint á Vágafjørð. Tær stevndu vestan fyri Koltursnakk og hildu kósina so beint, at eingin stýrimaður ger tað betur. Tær flestu fóru tá norður gjøgnum Vestmannasund; men summar hildu vestur um Vágar og leitaðu so saman við hinar norðanfyri. Um summarið sveimaðu tær norður ígjøgnum, til ísurin møtti. Móti heysti komu tær suðuraftur og steðgaðu tá stundum í Føroyum.“

Undir Føroyum síggjast tær næstan ikki nú. Tá ið royðrar fyrr á døgum komu henda vegin, mundu tær koma eftir einum lítlum ljóskrabba, sum tær eru grammar eftir. Royður er største dýr, ið til er. Hon verður meira enn 30 m long og vigar tá 150 tons.

### Hávurin

Hávur sveimar víða um botnin og uppi í sjónum í stórum torvum.

Hávur hevur stórt høvd. Kjafturin situr tvørvegis inni undir trantinum. Í kjaftinum eru fleiri røð av hvøssum tonnum. Missir hann tenn, fær hann nýggjar beinan vegin, tí innan fyri tenninar liggja eykatenn. Hávur er grábláur ella morlittur á bakinum og ljósari undir búkinum. Ofta eru ljósir blettir á bakinum og um liðirnar.

Strýkur tú hondina fram eftir hávaskræðu, kennist hon hvøss. Eingin roðsla er í skræðuni, men smáar beintenn, sum liggja aftureftir. Tílíkar húðartenn eru bygdar sum vanligar tenn. Uttan um tær er glering. Á bakinum hevur hávur tveir stórar beintindar – húð-

artenn – framman fyri hvørja ryggfjøður. Í báðum tindunum er foyra aftan, og í foyruni liggja kyknur, sum lata úr sær eitur. Hávur verjir seg við tindunum. Har tindur kemur inn í eitt dýr, elvir eitrið pínu.

Hávur hevur ikki kápu, men 5 táknarivur hvørjumegin. Hann tekur sjógv inn í kjaftin, trýstir so sjógvin út, so hann streymar fram við táknunum, áðrenn hann fer útaftur gjøgnum táknarivurnar.

Umframt 2 ryggfjaðrar hevur hávur uggafjaðrar og búkfjaðrar, men onga gotfjøður. Sterturin er stórur og bendur uppeftir. Fjaðrarnar eru stinnar og tjúkkar, so hávurin fær ikki lagt tær niður.

Tá ið hávur svimur, slær hann kropp og sporl frá síðu til síðu, og allar fjaðrarnar gera, at hann liggur beinur í sjónum. Hann stýrir eisini við fjaðrunum. Hávur svimur ógvuliga skjótt og er fimur fiskur. Hann sær væl, og tevurin er framúr góður, so hann tevjar dýr langt burturi frá sær.

Hávur gongur í torvum. Meginpartin av árinum svimur hann víða eftir føði. Viðhvørt á grunnum vatni, viðhvørt á djúpum. Honum fellur væl sjóhita 6-15°. Vanliga er hann nær botni, tí honum dámar væl tosk, sild, nebbasild, rognkelsi, og so tekur hann eisini krabbadýr. Onkuntíð roynir hann at taka flundrufisk, men flundrufiskur er so breiðvaksin, at illa ber til at svølgja hann.

Allar tenninar standa afturá og eru tí góðar at taka við. Hann fær ikki tugt við teimum. Tí má hann bara svølgja í heilum líki. Hávur er átufrekur. Tá ið hann kemur at føði, stýrir hann við uggafjaðrunum, leggur seg á liðina, letur kjaftin upp, læsir um dýrið og skræðir í seg.

Sum flestu hávasløg gýtir hávur livandi ungar. Um heystið makast kallfiskurin og kvennfiskurin, og so eru tey 4-10 eggini, sum eru í kvennfiskinum, gitin. Ungarnir hava 22 mánaðir um at búnast inni í kvennfiskinum.

Tá ið ungarnir eru gýttir, líkjast teir fullmenta hávinum, og teir eru 20-33 cm langir. Beinan vegin svimja teir og fara at leita sær eftir føði. Í fyrstuni taka teir smáan fisk, men sum teir vaksa, taka teir størri fisk. Hávur veksur seint. Kvennfiskurin er kynsbúgvin, tá ið hann er 13-14 ára gamal, og tá er hann 75-80 cm langur. Kallfiskurin er kynbúgvin um 10 ára gamal og er tá 60-65 cm langur. Hávur verður um 100 cm langur.

**Hvalspýggjan**

Hvalspýggja er serliga at síggja við strendur okkara um summarið. Mangan taka streymur og brim hana við sær og bera hana upp á strondina.

Hvalspýggja líkist holvdari skál. Hon hevur ikki beinagrind, men er sluprut og glær. Verður hon tikin upp úr sjónum, dettur hon sundur. 8 smá innvik ganga inn í tromina. Í hvørjum innviki eru gøgn, sum sansa javnvág og ljós. Um tromina hanga nógvir hundrað smáir og stuttir træðrir, sum eru tætt settir við notukyknum.

Undir miðjuni hanga 4 munnarmar. Millum munnarmarnar er muðurin. Armarnir eru eisini tætt settir við notukyknum. Niður úr munninum gongur magaholan.

Hvalspýggja heldur sær uppi og svimur á tann hátt, at hon ger kroppin kúputan og so fláari. Hon svimur ikki so væl. Er nógv alda í sjónum, megnar hon ikki at svimja, men søkkur á botn. Tó kann hon verða bági fyri bæði garnafiskiskap og trolfiskiskap, tí gørn og trol fyllast við hvalspýggju. Fjarar hon uppi og liggur í sól, so verður bara ein tunn hinna eftir, tí um 95% av dýrinum eru vatn.

Hvalspýggja etur vatnloppur, krabbakelv og onnur smádýr og smáan fisk, sum hon doyvir við notukyknunum, tekur við ørmunum og koyrir í munnin. Føðin verður ikki tugd, men loyst sundur við sevju í magaholuni. Tað, ið ikki sodnar, verður spýtt útaftur gjøgnum munnin.

Notukyknur fara ikki gjøgnum fólkahúð. Sum hvalspýggja eldist, dovnar eitrið í notukyknunum. Men eitrið í teimum ungu hvalspýggjunum, nakrar sentimetrar í tvørmáli, er sterkari. Tær fáa tikið og doyvt fisk, sum er líka stórur sum tær.

Seint um summarið fara 4 reydligir bogar at búnast í dýrinum. Vit plaga at siga, at sært tú hvalspýggju við reydligum ella korkalittum bogum, so er hon kvenndýr. Kalldýrið hevur hvítar bogar. Tá ið hvalspýggja er fullvaksin, hava bæði kvenndýr og kalldýr ljósar bogar. Bogarnir eru kynsgøgnini, og í teimum gerast egg og sáð.

Kalldýrið gýtir sáðkyknur út í sjógvin. Sáðkyknurnar koma síðan inn í munnin á kvenndýrinum og fara haðani í magaholuna, har tær renna saman við eggkyknunum. Úr magaholuni fara tey gitnu eggini út í munnarmarnar, har tey festa seg. Ungarnir koma út gjøgnum munnin á kvenndýrinum.

Ungarnir svimja ta fyrstu tíðina uppi í sjónum. Teir svimja við bivhárum. Síðan seta teir seg á steinar, klett, tara og skeljar. Ungin

líkist bikari, sum fest er á stein við stelki. Muðurin vendir upp. Skjótt fara armar at búnast um munnin, 20-24 langir armar. Føðin er ymiss smákykt.

Nú nevna vit ungan margføtlu. Næsta vár býtir margføtlan seg sundur í nógvar smáar fláir, ið liggja hvør oman á øðrum sum ein stápil av borðiskum. So losna fláirnar hvør frá aðrari og verða smáar hvalspýggjur. Burtur úr einari margføtlu koma 12 hvalspýggjur. Margføtlan situr í fleiri ár og ger hvalspýggjur. Tær nýggju hvalspýggjurnar eru um 2 mm í tvørmáli. Ein mánað gamlar eru tær um 1 cm. Tá ið 3 mánaðir eru farnir, eru tær fullvaksnar og kynbúnar, einar 25 cm í tvørmáli. Út á summarið og heystið doyr hvalspýggja 4-5 mánaðir gomul.

Gullbrandur líkist vanligu hvalspýggjuni, men er um 30 cm í tvørmáli og hevur 5 m langar veiðitræðrir niður úr tromini. Veiðitræðrirnir eru tætt settir við notukyknum. Hesar notukyknurnar hava sterkt eitur, og tær fara lættliga gjøgnum fólkahúð og elva nógvan sviða. Fólk kunnu koma at teimum, tá ið tey svimja á sjónum.

Gullbrandurin breiðir træðrirnar út og dregur teir langt aftan á sær. Kemur fiskur, kanska 20 cm langur, at træðrunum, hongur hann fastur og doyvdur. Síðan styttir dýrið træðrirnar, so at teir bara eru nakrar cm langir, og munnarmarnir taka fiskin og koyra hann í munnin.

**Høgguslokkurin**

Høgguslokkur er vanligur uttansyndis, og hann heldur seg mest í torvum uppi í sjónum.

Á høvdinum eru stór eygu. Framman á høvdinum eru 10 armar. Tveir av ørmunum eita tøkuarmar og eru longri enn hinir. Millum armarnar er stórur kjaftur við tveimum kjaftlimum úr horni. Kjaftlimirnir líkjast øvugtum ránsfuglanevi. Í kjaftinum er rívitunga. Um kroppin liggur kápan, sum bara er fest á bakinum. Á afturendanum eru tveir ravar.

Sjógvurin kemur inn í kápuholuna gjøgnum kápurivuna. Ein tútur liggur út gjøgnum kápurivuna. Tá ið kápuholan er full av sjógvi, letur høgguslokkurin kápurivuna aftur. Samstundis sprænir sjógvurin út gjøgnum tútin, og høgguslokkurin fýkur av stað aftureftir. Høgguslokkurin fær eisini svomið spakuliga frameftir við ravunum.

Úr sjónum í kápuholuni fáa táknurnar súrevni.

Høgguslokkur hevur litkorn í húðini og skiftir lit eftir umstøðunum. Vanliga er hann reyðmorreyður við dimmum blettum og strikum. Tá ið hann er tikin upp úr sjónum, liggur hann alla tíðina og skiftir lit, meðan hann er á lívi. Kemur høgguslokkur í vanda, sprænir hann svarta sevju í kápuholuna, haðani hann so sprænir út í sjógvin. Fíggindin leggur beint í sortan; men tá hevur høgguslokkurin longu sníkt seg burtur.

Høgguslokkur svimur heilt skjótt og er ógvuliga knappur. Eyguni eru stór og góð, og hann sær víða um. Hann lítur á sjónina, tá ið hann veiðir føði og í vanda. Súgskálir eru á øllum 10 ørmunum; men bara úti á endunum á tøkuørmunum. Mest livir hann av fiski, ið hann tekur við tøkuørmunum. Meðan hann heldur fonginum, bítur hann hol á eitt meint stað og spýr eitur í. Fiskurin doyvist, og so tægar hann hann sundur við hvøssu kjaftlimunum. Rívitungan tekur bitarnar niður í vælindið. Magin er vøddamikil, og har verður føðin tugd.

Høgguslokkur gýtir stór egg og klínir tey at steinum og plantum á botninum. Ungarnir svimja uppi í sjónum og vaksa skjótt.

Høgguslokkur er gott agn. Í september-oktober plaga torvur at koma inn á firðir og vágir. Tá plaga menn at veiða hann. Grindahvalur etur nógvan høgguslokk. Viðhvørt gera høggslokkar landgongd á sandinum; ofta undan grindahvalum.

## Vatnloppan

Verður ein silkiposi drigin gjøgnum vatn ella sjógv, so eru nógvar vatnloppur í. Viðhvørt er so nógv til, at sjógvurin er reyður, tí tær lata úr sær reyðar ella gular oljudropar.

Vatnloppur fara upp og niður í sjónum bæði um samdøgurið og eftir árstíðini. Seinnapartin á degi svimja tær upp undir vatnskorpuna, har tær eru, til tað lýsir aftur. Tá antin søkka tær ella svimja niður úr vatnskorpuni.

Hugsa vit um, hvussu smáar tær eru, so er hugtakandi, at hesi smáu dýrini – tey eru 1 cm – skulu fara einar 120 m hvønn vegin í eitt samdøgur. Uppeftir er ferðin 15-30 m um tíman og niðureftir góðar 50 m um tíman. Vatnloppurnar koma upp undir vatnskorpuna eftir plantumurtni.

Í Norðuratlantshavi eru hesar vatnloppurnar um veturin á 600-2000 m dýpi. Um várið koma tær gýtingarføru upp undir vatnskorpuna, har tær gýta og doyggja.

Hetta vatnloppuslagið er góð fiskaføði, serliga sildaføði, og gott íkast hjá barduhvali.

### Ljóskrabbin

Ljóskrabbi líkist rækju, og flestir eru 4-5 cm langir. Hann hevur ljósgøgn í eygnastelkunum og kroppinum. Stórar torvur ganga uppi í sjónum. Í teirri tíðini, teir gýta, er sjógvurin reyður fleiri fjórðingar ummáls.

Sild, makrelur og aðrir fiskar uppi í sjónum eta ljóskrabbar – og eisini barduhvalir.

### Brislingurin

Undir Føroyum er lítið til av brislingi. Í Sundalagnum og á onkrum firði eru smáir stovnar, og teir gýta har.

Brislingur líkist nógv sild, men er hvassari undir búkinum. Eisini líkist hann nógv sild í livihátti; men hann verður ikki meira enn 5 ára gamal og 15-17 cm langur. Sild verður 40-55 cm long og upp ímóti 25 ára gomul.

Rognkornini undan sild leggjast á botnin; men rognkornini undan brislingi flotna og reka uppi í sjónum, til tey eru klakt.

### Sildin

Sild sveimar í stórum torvum úti á víðum havi, har hon leitar sær eftir føði; men hon kemur inn á grynri vatn at gýta.

Sild er smidliga vaksin, blágrøn á bakinum og skyggir sum silvur um liðirnar og undir búkinum. Roðslan er grov og fellur lættliga av. Sært tú sild svimja, so gáar tú um, hvussu spakuliga hon rørir tann sýlda stertin og smýgur gjøgnum sjógvin. Tá ið sild er uppi í torvu, hevur hon meiri ferð. Tá syftir hon snarpliga við sporlinum.

Sild er sera vanlig um alt Norðuratlantshav. Fram við strondunum í Norðurevropa, undir Føroyum, Íslandi, Suðurgrønlandi, fram við Kanadastrondini og Amerikastrondini. Sildin á hesum leiðum er bara eitt slag; men vit siga, at nógvar greinir eru, og allar greinirnar eru ymiskar í livihátti, gongd og gýtingarstøðum.

Sild gongur í torvum uppi í sjónum. Torvurnar kunnu vera upp í mong hundrað túsund tons og aðrar bara nakrar hundrað sildir. Sild

hevur smáar tenn í kjaftinum og livir serliga av murtni. Hon tekur sjógv inn í kjaftin, sílar so murtnið frá gjøgnum tættar, fínar stavir, sum eru á táknabogunum. Murtnið er reyðæti, smátt krabbadýrakelv og onnur kykt.

Reyðætið og mong onnur smákykt fara upp í sjógvin um náttina, tí tá fáa tey mest plantumurtn, men um dagin fara tey niðureftir undan ljósinum. Sildin eltir føðina og er tí um náttina uppi undir vatnskorpuni. Um dagin stendur hon djúpari. Vanliga spjaðir hon seg út í eitt slør um náttina; men um dagin gongur hon aftur í torvum.

Í Norðsjónum er sildagrein, sum nevnd verður norðsjóvarsildin. Hon gýtir úti fyri eysturstrondini í Skotlandi og Onglandi og suður móti vesturstrondini í Fraklandi. Um summarið kemur hin búna norðsjóvarsildin norður móti Hetlandi eftir føði. Tá kann hon onkuntíð koma inn á føroyska landgrunnin.

Víðari enn norðsjóvarsildin gongur sildin í Norðurhavinum. Hon er ein onnur sildagrein, sum nevnd verður atlanto-skandiska sildin ella norðhavssildin. Nakað av hesi norsku sildini plagdi at koma inn á bankarnar eystan fyri Føroyar bæði eftir føði og at gýta. Hon gýtti serliga á Sandoyarbanka og Suðuroyarbanka seinast í mars mánaði.

Umframt havsild er eisini fjarðarsild, sum gýtir í apríl-mai heilt inni í føroyskum fjarðum. Tann smáa sildin, sum fæst inni á fjarðum um summarið og heystið, er ungsild úr hesari greinini.

Tá ið gýtingartíðin nærkast, koma stórar sildatorvur inn á grynri vatn. Sildin gýtir á 100-250 m dýpi yvir sandbotni, har hitin er 4°-7°C. Eftir gýtingina falla rognkornini á botn og festast at gróti, tara og øðrum. Rognfiskurin gýtir 100.000-150.000 rognkorn. Tá ið 2-3 vikur eru farnar, eru rognkornini klakt. Stutt eftir flotna ungarnir upp í sjógvin einar 50 m niður frá vatnskorpuni, og streymurin ber teir víða.

Tær fyrstu 2-3 vikurnar liva ungarnir av eggjareyðaposanum. Tá ið einki er eftir í posanum, kemur ein hættislig tíð, tí nú skulu ungarnir fara at eta plantumurtn. Er ikki nóg nógv til av plantumurtni, so doyggja nógvir ungar. Seinni fara ungarnir at eta smádýr, og aftur er umráðandi, at nógv er til av hesum æti.

Sildin er rak, tá ið hon hevur gýtt. Skjótt fer hon útaftur á djúpari vatn at leita sær eftir føði. Norðan fyri Føroyar koma saman kaldur og heitur streymur, og har trýtur æti ikki.

Nógv sild varð fiskað á okkara leiðum í 1950-60-árunum, og var

tað norðhavssildin, sum fiskað varð. Seinast í 1960-árunum hvarv sildin bæði undir Noregi og Føroyum, og hon er ikki komin fyri seg aftur enn.

### Svartkjafturin

Ungur svartkjaftur er undir Føroyum á 100-250 m dýpi. Stórur svartkjaftastovnur er vestan fyri Bretland. Hann fer norður í Norðurhav, tá ið hann hevur gýtt.

Svartkjaftur er svartur innan um kjaftin og kápuna. Undirkjafturin kemur fram um yvirkjaftin. Hann hevur ikki grunnnøs. Tvær tær fremstu ryggfjaðrarnar eru stuttar, og tað er langt ímillum teirra.

Svartkjaftur er ikki serføroyskur stovnur, tí tað mesta av tí vaksna fiskinum gongur um fleiri sjóleiðir – ímillum gýtingargrunn og staðin, har hann leitar sær eftir føði. Hann etur ymiss krabbadýr og fiskaungar. Norðan fyri Føroyar etur hann mest krabbakelv og ljóskrabba. Fullvaksin er svartkjaftur um 50 cm langur.

Sagt verður vanliga, at svartkjaftur er uppi í sjónum; men veruliga er ungfiskurin niðri við botnin. Vaksni fiskurin kann tó eisini vera har, hóast hann oftast er uppi í sjónum.

Mesti svartkjafturin gýtir fram við hellingini vestan fyri Bretland á 300-500 m dýpi. Nakað gýtir undir Føroyum eisini. Hann gýtir í mars-apríl eitt sindur upp frá botni. Tá ið murtarnir eru 10-15 cm langir, fara teir niður móti botni í august-september. Ungfiskurin veksur upp t.d. inni á føroyska landgrunninum, og sum hann eldist, fer hann út á djúpari vatn.

3-5 ára gamal er hann gýtingarførur. Tá fer meginparturin upp í sjógvin og gongur ógvuliga víða. Í januar-februar fer svartkjafturin á gýtingargrunnarnar vestan fyri Bretland. Tá ið gýtingartíðin er av, fer nógvur svartkjaftur norður í Norðurhav at leita sær eftir føði. Á hesi ferðini gongur hann báðumegin føroyska landgrunnin.

### Hvítingsbróðirin

Hvítingsbróðir fæst mest á bankunum eystanfyri og á Munkagrunninum á 100-250 m dýpi. Eisini er hann á landgrunninum og á bankunum á 40-400 m dýpi.

Undirkjafturin kemur fram um yvirkjaftin, grunnnøsin er lítil og eyguni stór. Dimmur blettur er inni við uggafjaðrarnar.

Hvítingsbróðir er væl støðufastur fiskur, og verður tí sagt, at hvítingsbróðirin undir Føroyum er serstovnur. Hann hevur ikki verið fiskaður her hjá okkum fyrr enn í 1980-árunum, tá ið ídnaðarfiskiskapur tók seg upp.

Hvítingsbróðir gýtir á landgrunni og bankum grynri enn á 200 m dýpi. Vanliga gýtir hann í mars-apríl, men tað kann vera ójavnt. Tey gitnu rognkornini flotna upp í sjógvin, og ungarnir eru eisini uppi í sjónum. Royndir vísa, at ungarnir eru ikki altíð á sama dýpi. Um náttina koma teir upp í sjógvin, men um dagin spjaðast teir. Í august fara murtarnir, ið eru 5 cm langir, niður ímóti botni á landgrunni og bankum á 80-100 m dýpi.

Hvítingsbróðir etur mest vatnloppur, ljóskrabbar og onnur krabbadýr, eisini fiskaungar.

Hann verður ikki meira enn 5 ára gamal. Vanliga er hann gýtingarførur 2 ára gamal, men kann eisini vera gýtingarførur ársgamal.

**Grindahvalurin**

Grindahvalur heldur seg mest á víðum havi, men kemur av og á inn á firðirnar.

Grindahvalur líkist fiski á vakstrarlagi og er væl lagaður eftir at vera í sjónum. Hann er tjúkkastur um miðjuna og mjækkast til báðar endarnar. Væl glíður hann gjøgnum sjógvin, tí hvøljan er hál, og hár eru ikki á kroppinum. Grindahvalur er dimmgráur sum ungur. Teir gomlu hvalirnir eru døkkari.

Høvdið (kúlan) er bøllut og hevur stuttan trant. Hann er ljósagráur undir kvørkrunum, og haðani ganga ljósir teinar aftur at bøkslunum. Ein ljós ál gongur eftir búkinum, og hon breiðkast út framman fyri hamarstjølin. Eyguni eru smá og eru tætt við kinnklovarnar. Oyruni eru tvey evarslítil hol. Uppi á bollanum munna nasagluggarnir út í eitt op, sum eitur blástrið.

Framlimirnir eita bøksl. Hvør liður á bøkslinum er stirvin, men tó ikki akslarliðurin. Hvalur heldur sær beinum í sjónum við bøkslunum, og hann stýrir eisini til viks við teimum. Aftast á hamarstjølinum er sveivin, sum vendir tvørturum í sjónum. Sveivin førir hvalin fram, sum skipsskrúva førir skipið fram. Sveivin er eisini góð at stýra upp og niður við. Eitt lítið horn er á bakinum. Hornið er sum sveivin úr siggi.

Grindahvalur verður 6-8 m langur. Kallhvalurin er heldur størri enn kvennhvalurin. Báðir hava tenn í bæði yvirkjafti og undirkjafti, vanliga um 40 tenn tilsamans. Skilt verður ímillum tvey sløg av grindahvali eftir horninum. Annað slagið hevur breitt innhjólað horn. Hitt slagið hevur smalri og minni innhjólað horn. Bæði sløgini ganga ofta saman í flokki, grindum.

Grindahvalur er í øllum høvum, bæði í Atlantshavi og Kyrrahavi. Hann fer úr flógvum sjógvi bæði norður í Arktis og suður í Antarktis; hann gongur uppi í sjónum í stórum og smáum flokkum, grindum. Flokkarnir eru væl skipaðir, og samanhaldið hvalanna millum er gott. Hvalir hava samband sínámillum við ymsum ljóðum. Menn hava søkt ljóðtak niður í sjógvin og hava tikið upp á band, tá ið hvalirnir „tala" saman. Tá ið ljóðini bera aftur, veit hvalur, hvussu langt hann er frá øðrum hvalum, føðini, og hvussu langt hann er frá botni, strond ella skerjum.

Allir hvalir anda við stórum lungum. Sleppur hvalur ikki upp at anda – blása – kódnar hann. Tá ið hann blæsur, sæst bara eitt sindur av bollanum. Men ger hann landgongd, doyr hann skjótt, tí at bringan tolir ikki tyngdina og fellur saman.

Grindahvalur etur mest høgguslokk, eisini fisk. Ofta eru smá, rund merki at síggja á hvøljuni. Merkini eru eftir súgskálunum á høgguslokki, sum hevur sogið seg fastan at sleppa undan at verða etin.

Grindahvalir makast í flógvum sjógvi, serliga um várið. Í makingartíðini berjast kallhvalirnir um kvennhvalirnar. Teir brenna saman og bítast. Kvennhvalur er kviðin í 15-16 mánaðir. Vanliga leggur hann bara ein hvølp, og hann er raskur at svimja beinan vegin, fylgist við móður síni og sýgur hana. Flestu hvølparnir verða lagdir á hásumri. Nýlagdur er hvølpurin um 180 cm langur og er ljósari enn teir gomlu hvalirnir. Hvølpurin sýgur í 20-22 mánaðir. Kvennhvalur leggur 3. ella 4. hvørt ár. Hann er kynbúgvin 6-7 ára gamal, men kallhvalurin seinni. Grindahvalur verður 40-50 ára gamal.

Grindahvalur sæst ikki nógv á vetri; men út á summarið koma stórar grindir henda vegin aftan á høgguslokkatorvum, sum koma inn á grunt vatn at gýta. Tá kunnu báðir partar gera landgongd. Óivað ger grindahvalur eisini landgongd, tá ið hann flýggjar undan bóghvítuhvali. Í slíkum føri verður hildið, at grindahvalirnir eru so ørkymlaðir, at ekkóskipanin virkar ikki, ella kanska er hann farin skeivur av ekkónum. Stundum síggjast grindahvalir við avkvettum

bøksli ella avkvettum horni og við sárum í spikinum. Tá man bóg-hvítuhvalur hava verið næskur.

Grindahvalur er fundvísur. Stundum skilir grind seg í bólkar, sum sveima langt hvør frá øðrum. Men altíð finna teir saman aftur. Sagt verður, at grindahvalir semjast væl og eru annars hóvligir. Bara tá ið teir eru vitleysir av pínu, bjóða teir til at verja seg. Men tá er tað ikki við mýkindum, teir sláa við hamarstjølinum.

Hvalur kennir pínu sum fólk. Tá ið hvalir slíta seg burtur úr grindadrápi, plaga teir at koma innaftur. Vit siga: teir mala aftur á blóðið. Hildið verður, at tá koma teir innaftur at hjálpa hinum hval-unum.

Grindir kunnu koma allar ársins tíðir. Flestu koma tó í august, síðan juli og september; men minst í januar og februar og mars. Grindahvalur er feitastur um veturin og várið, men soltnastur í juli og august.

Grind hevur frá fyrndartíð verið dripin í londum og oyggjum í Atlantshavi, har Golfstreymurin rennur framvið, og hon hevur verið týdningarmikil. Fyrr á døgum var grindahvalurin lívstreyt í Føroy-um, tá ið fiskaloysi og seyðafelli vóru. Nú á døgum er hann gott íkast til matna, tí annars má samsvarandi kjøt verða innflutt.

# Botnfiskur

## Kalvin

1-3 ára gamal kalvi er vanligur botnfiskur á grunnum vatni inni á víkum, fjørðum og bankum. Tá ið hann er 3-4 ára gamal, rýmir hann haðani, fer á djúpari vatn, ofta í annan sjógv, at sveima eftir føði og seinni at gýta.

Kalvi er ein høgur fiskur. Onnur liðin er dimmgrá og hin hvít. Eyguni eru dimmumegin. Tá ið kalvi svimur ella liggur á botni, vendir hvíta liðin niður. Ryggfjøðurin og gotfjøðurin eru langar.

Kalva fellur best, tá ið hitin í sjónum er 3-9°. Sjógvurin skal eisini vera saltur. Hann gongur eftir árstíðunum. Føðimøguleikarnir eru umráðandi. Ungkalvi etur blandaða føði, krabbadýr og onnur ryggleys dýr og smáan fisk. Vaksin kalvi etur næstan bara fisk, hann mest tekur á bankunum. Tá ið veturin kemur, og sjógvurin verður kaldari, fer kalvi á djúpari vatn, har lítið er til av fiski. Í hesi tíðini livir hann mest av ymsum krabbadýrum.

Um summarið verður sjógvurin aftur heitari. Tá fer kalvin inn aftur á bankarnar at taka fisk. Hann er ránakendur og tekur tosk, hýsu, brosmu, longu og sild. Kalvi tekur ikki bara føði við botnin, men kemur onkuntíð upp undir vatnskorpuna. Dømi eru um, at kalvi hevur slúkt sjófugl.

Gýtingin er á djúpum vatni vestan fyri Føroyar á 800-1000 m dýpi ella djúpari. Kanningar vísa eisini, at kalvi kemur inn á eitt ávíst øki í ein útnyrðing úr Føroyabanka at gýta, og at bestu gýtingarmánaðirnir eru februar-mars. Rognkornini verða gýtt við botnin og flotna spakuliga upp í sjógvin.

Nýklaktir líkjast ungarnir toskaungum. Enn eru teir ikki flatir, og hvørt eyga er sínumegin. Ungarnir eru fyrstu tíðina útiá. Men streymurin ber teir so við og við nærri landi. Tá ið ungin er 4 cm langur, er hann vorðin flatur, og bæði eyguni eru komin á høgru lið. Nú fer hann á botn úti á bankunum.

Hildið verður, at kalvin kemur ikki inn á firðir og vágir, fyrr enn hann er ársgamal, og tá er hann 15-20 cm langur. Hann veksur 15 cm um árið. Kalvin her hjá okkum veksur skjótari enn nakra aðrastaðni. Rognkalvin verður størri enn silkalvin. Fær kalvin frið, verður hann

um 40 ára gamal. Undir Føroyum er sjaldsamt at fáa kalva, sum er meira enn 20 ára gamal, tí so dúgliga verður roynt eftir honum.

Merkingar vísa, at kalvin gongur víða. Smákalvi, sum merktur var inni á fjarðum í Føroyum, er fingin aftur bæði undir Íslandi og í Norðsjónum. Kalvi aðrastaðni kemur higar at gýta sunnan fyri og vestan fyri Føroyar.

Kalvi hevur altíð verið væl umtóktur fiskur, og dýrur eisini; men hann er skjótur at avoyða, tí hann er ikki gýtingarførur, fyrr enn hann er 5-7 ára gamal.

## Tungan

Tungu fellur best harðan botn ella grovan sand. Hon er úr taraskógnum og út á góðar 200 metra dýpi.

Merkingar vísa, at tungan inni á fjarðunum verður verandi har, og at tungan úti á landgrunninum og bankunum fer við streyminum kring oyggjarnar vestureftir. Tunga er heldur støðufastur fiskur.

Tunga gýtir í apríl-september, men tó mest á hásumri. Hon gýtir niðri við botnin úti á bankunum og inni á fjarðum og víkum. Rognkornini flotna upp í sjógvin, og har verða tey klakt. Tá ið ungarnir eru 2,5 cm langir, fara teir niður á botn bæði á djúpum og grunnum vatni.

Føðin er ormar, slangukrossfiskar og smá krabbadýr. Tunga veksur ikki skjótt. Skjótast veksur hon norðan fyri og vestan fyri Mykines, men seinast á Føroyabanka. Rognfiskurin er gýtingarførur 4-6 ára gamal og silfiskurin 3-4 ára gamal. Tungan verður í mesta lagi 67 cm long.

Føroyagrunnurin varð fyrr sagdur at vera ein tann besta tunguleiðin í Norðurevropa.

## Reyðsprøkan

Reyðsprøka er vanlig á fjarðum, víkum og landgrunnum út á um leið 150 m dýpi; men lítið er til av henni.

Merkingar vísa, at reyðsprøka gongur heldur víða um landgrunnin. Hon gýtir ymsastaðni á landgrunninum. Rognini flotna upp í sjógvin og verða klakt har. Ungarnir svimja uppi í sjónum. Í juni fara teir inn á firðir og víkir.

Í juli-august er væl av reyðsprøkumurti at síggja á heilt grunnum vatni, har sandur ella móra er á botni. Serliga úti fyri ósum.

Tey fyrstu 3 árini er reyðsprøkan á grunnum vatni inni á fjarðum, víkum og sundum. Tá ið hon er 3-4 ára gomul, er hon gýtingarfør og fer út á landgrunnin og bankarnar og kemur neyvan innaftur.

Føðin er mest skeljadýr við tunnari skel, bustormar og marflugur. Reyðsprøka veksur ójavnt. Tað veldst um, hvar hon er. Sagt verður, at hon veksur í miðal 10 cm um árið, og rognfiskurin veksur skjótari enn silfiskurin. Reyðsprøka verður í mesta lagi ein metur long og um 50 ára gomul; men so gamlar eru sjáldan at fáa.

**Skrubban**

Skrubba er inni á fjarðum og víkum, har grunt er. Henni dámar væl úti fyri áarósum og tí ofta nevnd ósaskrubba.

Skrubba er eyðkend á beinknútunum, hon hevur fram við ryggfjøður og gotfjøður og strikuni og á kápuni.

Hon gýtir um sama mundið sum reyðsprøka. Um summarið er hon nógv úti fyri áarósum; men um veturin fara nógvar út á djúpari vatn.

Skrubba tekur ormar, marflugu, taralús, skeljadýr og smáan fisk, t.d. nebbasild. Tær eldru skrubburnar eta mest fisk og ymiss lindýr. Skrubban er ídnari at leita sær eftir føði um náttina. Um dagin grava tær stóru skrubburnar seg niður í sandin. Skrubban verður í mesta lagi 50 cm long og um 5 ára gomul.

**Brosman**

Brosma heldur til á grýtutum harðbotni á 200-500 m dýpi. Eldri brosma er eisini at fáa á 1000 m dýpi; men inni á fjarðunum á um leið 70 m.

Brosma er langvaksin, men tjúkkvaksnari enn longa. Hon hevur langa ryggfjøður og langa gotfjøður.

Gýtingartíðin er í apríl-juni. Rognkorn og ungar eru uppi í sjónum. Tá ið brosmumurtarnir eru um 6 cm langir, fara teir niður úr sjónum, og einki sæst aftur til teirra, fyrr enn teir eru um 25 cm langir. Hildið verður, at teir vaksa upp á djúpum vatni, har botnurin er grýtutur og ójavnur.

Brosma etur smáan kongafisk, hvítingsbróður og ymiss krabbadýr, t.d. krabba og hummara.

Flestir fiskar, ið eru á djúpum vatni, vaksa seint. Soleiðis er eisini við brosmu. Tá ið hon er gýtingarfør, er hon 8-9 ára gomul.

## Steinbíturin

Steinbítur er botnfiskur og er úr taraskóginum og út á 400 m dýpi. Mestur er hann frá um 20 m og út á 300 m. Hann heldur til á harðbotni, men kann onkuntíð verða fingin á bleytari botni, serliga inni á fjarðunum.

Steinbítur er dimmgráur ella grámorreyður og hevur 12 dimmar spølir úr ryggfjøðurini niður á liðirnar. Gotfjøðurin er long, uggafjaðrarnar stórar; men hann hevur ongar búkfjaðrar. Høvdið er heldur stórt og kubbut.

Hóast steinbítur er grimur á útsjónd, so er hann ikki so rána-kendur fiskur. Kjafturin er stórur og sterkur, tenninar framúr sterkar. Fremst í kjaftinum standa bogaðar tøkutenn, og í gómanum eru árundar tenn at bróta við.

Føðin er gággur, skeljadýr, tindadýr og krabbar, sjaldan fiskur. Av tí at tenninar mest verða nýttar at skræða føði upp úr botninum, so slítast tær skjótt. Steinbítur missir tenninar í gýtingartíðini, og hann etur einki, fyrr enn tenninar eru vaksnar aftur. Sum dømi um, hvussu sterkar tenn steinbítur hevur, skulu vit nevna, at ein drongur stakk eitt blað á einum borðknívi inn í kjaftin á steinbíti, og steinbíturin breyt blaðið millum tenninar. Lata vit steinbít sleppa at bíta í ein bátsstokk, hongur hann sum einki vatnsrættur í luftini.

Steinbítur gýtir um veturin. Rognkornini verða gýtt í klunkar á botnin, har tey eisini verða klakt. Ungarnir eru við botnin, til eggjareyðaposin er tómur. Síðan fara teir upp í sjógvin og eru har í nakrar mánaðir, til teir um summarið ella heystið fara niður aftur á botn.

Skeljaskip hava ofta fingið rognklunkar í dreggið. Fiskaaling norðuri við Áir hevur bæði fingið klakt rognkornini og fingið ungarnar at vaksa.

Steinbítur verður í mesta lagi 125 cm langur, og hann kann gerast gamal. Kanningar vísa, at 20 ára gamlir steinbítar vóru í miðal knappliga metur langir.

## Havtaskan

Havtaska er á øllum botni og øllum dýpi frá um 20 m og út á 1800 m. Havtaska úr fremmandum sjógvi hópast sunnan fyri Føroyar og í ein útsynning úr Føroyum at gýta.

Havtaska verður í mesta lagi um 2 m long; men vanliga er hon

um ein metur. Høvdið er breitt, flatt og sera stórt, næstan helmingurin av øllum fiskinum. Aftan fyri høvdið smalkast kroppurin nógv aftureftir. Havtaska hevur ikki roðslu; men um kjaftin hevur hon nógvar skúvutar húðarlepar. Táknarivurnar eru undir uggafjaðrunum. Teinarnir í ryggfjaðrunum eru leysir. Frammi á gronini sita tveir langir og liðiligir teinar, ein húðarlepi er á endanum á fremra teininum.

Havtaska gýtir í mars-juni á 1000 m dýpi ella djúpari. Hvørt rognkornið – hon gýtir 1 millión – liggur í einum slímhylki. Meðan hon gýtir, verða rognkornini heft saman í flatar rognálir, sum kunnu vera 4-10 m langar og 30-40 cm breiðar. Rognálirnar flóta uppi í sjónum og reka við streyminum, til klakt er. Ungarnir eru sjaldsamir og líkjast ikki vaksnari havtasku. Teir eru uppi í sjónum til seint um summarið og út á heystið.

Tá ið ungarnir eru 6-7 cm langir, fara teir niður móti botni. Síðan líkjast teir meira og meira vaksna fiskinum. Teir eru so við botnin og falla væl saman við honum.

Havtaska heldur seg mest á botni, har hon skríður á uggafjaðrunum og búkfjaðrunum. Svimjari er hon ringur, og tí liggur hon og lúrir eftir fiski. Tann fremsti tindurin líkist tráðu við agni. Hon liggur so og veittrar aftur og fram við tráðuni og lokkar smáan fisk at sær. Tá ið fiskurin er nóg nær, letur hon stóra gapið upp, og fiskurin verður sogin niður í kjaftin.

Tenninar eru spískar og hvassar. Sjógvurin fer út aftur millum tenninar, men fongurin er innanfyri. Tenninar eru festar við hongsli, so hon fær lagt tær niður inneftir. Tá ið havtaskan skal slúka fongin, koma tenninar ikki í vegin. Fer fiskurin t.d. at gera um seg og glíður út úr kjaftinum, reisast tenninar aftur og halda honum.

Havtaska er sera ránakend og átufrek, tekur alt, at kjafti rekur, t.d. er sjófuglur funnin í maganum á henni. Hon etur mest tosk, hýsu, longu, brosmu, hvítingsbróður, svartkjaft og ymsan flundrufisk.

Av tí at havtaskan meginpartin liggur á botni, nýtir hon ikki so nógva orku, og tí etur hon ikki so nógv, sum hildið hevur verið.

## Gulllaksurin

Gulllaksurin heldur til báðumegin í Atlantshavinum. Eystanfyri er hann vestan fyri Írland til Íslands og Svalbarðs. Í Føroyum er hann norðan fyri og vestan fyri við Føroyabanka. Hann er meira á jøvnum botni enn í hellingini.

Gulllaksur er langvaksin fiskur. Búkfjaðrarnar sita undir aftara kanti á ryggfjøðurini. Kjafturin er heldur lítil. Eyguni stór. Roðslan er grov og situr leys. Aftanfyri á roðsluni standa hvassir tindar.

Gulllaksurin er mest við botnin um dagin og fer upp í sjógvin um náttina. Hann etur smáan flatfisk, krabbadýr og smáan høgguslokk.

Hann er kynsførur 4-5 ára gamalur og gýtir í apríl-mai.

Rognfiskurin veksur skjótari enn silfiskurin; men rognfiskurin verður sjaldan longri enn 55 cm, silfiskurin 30-45 cm. Gulllaksurin verður vanliga um 20 ára gamalur.

#139. Sníkar í sjógvi

## Viðarmaðkurin

Mangan sært tú rekatræ, sum er gatað innan við holum. Uttan á rekatrænum sita nógvir skelmaðkar. Viðarmaðkurin hevur grivið holurnar og ikki skelmaðkurin.

Viðarmaðkurin er langvaksin og gulhvítur á liti. Uttan um kroppin á honum liggur 20-30 cm long kápa. Skeljadýr er hann, men líkari ormi. Um framkroppin hevur viðarmaðkur tvær skeljar; men tær eru so smáar, at tær taka bara um framendan á honum.

Viðarmaðkur er tvíkynjaður. Hann gýtir um eina millión egg í kápuholuna, og tey verða klakt har. Ungarnir eru fyrstu tíðina inni í kápuholuni, áðrenn teir verða gýttir út í sjógvin.

Tá ið ungarnir hava funnið sær t.d. eitt rekatræ at seta seg á, gera teir sær tráð at festa seg á træið við. Ungin fer beinan vegin at gnaga seg inn í viðin. Hetta liggur í unganum. Men enn kemur hann einki áleiðis, tí um hetta mundið hevur hann ikki fingið skeljar. Men hann letur úr sær eitt evni, sum bloytir viðartæðrirnar.

Stutt eftir tjúkna skeljarnar, og kálk setur á tær. Fremsta rondin á skeljunum verður sagtent. Nú bæði sagar og svarvar hann spønir burtur úr viðinum. Ger hirs á seg við fótinum, sum er langur og klænur, og setur skeljarnar í. Viðarmaðkur etur spønirnar umframt smákykt, hann fær úr sjónum gjøgnum andingarpípurnar.

Um nakrar mánaðir er viðarmaðkurin tjúkkari enn holið, hann gjørdi sær í rekatræið, tá ið hann var ungi og kom inn í viðin. Tí noyðist hann at verða alt lívið – 1 1/2 ár – inni í holunum, sum hann hevur gjørt sær inni í rekatrænum. Ofta klæðir hann holurnar innan við kálki. Bara tær longu, glæru andingarpípurnar koma út í sjógvin.

Ofta ger viðarmaðkur feigdina um seg í havnarløgum, har træstólpar standa niður í sandin. Mong evni eru at týna hann við, men torført er at fáa bilbukt við honum, tí hópurin av ungum svimur í sjónum, til reiðar at leggjast á bæði træfør og rekavið.

## Sandmaðkurin

Í fiski eru tvey sløg av sandmaðki vanlig: tann morlitti og tann glæri. Morlitti er vanligur t.d. í toski og upsa, tann glæri í svartkjafti.

Tá ið vit nýta orðið sandmaðkur, nýta vit tað um fleiri sløg av rundormi. Sandmaðkur er vanligur at síggja í fiski, tá ið hann verður kruvdur; men morlitti sandmaðkur og glæri sandmaðkur eru teir vanligastu. Tann glæri er minni enn hin og verri at síggja, tí at hann er samlittur við fiskin. Báðir tveir sita í fiskinum. Onnur sandmaðkasløg liva bara í innvølinum og koma ikki í fiskin.

Fiskur fær sandmaðk í seg úr føðini, bæði æti og øðrum fiski. Sandmaðkur livir tí ikki bara í fiski, men ymsum øðrum dýrum.

Vit siga, at sandmaðkur hevur eina ringrás.

Tá ið sandmaðkur er í fiski, er hann bara á 3. stigi. Skal tann glæri sandmaðkurin búnast meira, má tannhvalur eta fiskin, serliga augustur, nýsa ella grindahvalur. Men skal tann morlitti sandmaðkurin búnast meira, má kópur eta fiskin. Kópur er vanligur inni við land. Tí er tann morlitti eisini vanligur inni við land. Tann glæri er vanligur útiá, tí har gongur hvalurin.

Í hvali búnast og veksur tann glæri, til hann er á 4. og 5. stigi, og tá ið hann er á 5. stigi, er hann fullvaksin og kynsførur. Nú makast kalldýrið og kvenndýrið inni í hvalagørnunum ella maganum. Tey gitnu eggini fara út í sjógvin saman við hvalaskarninum. Meðan hvalurin svimur, syndrar hann eggini allastaðni.

Ungin búnast so inni í egginum til 1. og 2. stig. Eggini verða klakt, og ungin fer út í sjógvin. Smá krabbadýr – æti – eta ungarnar, serliga eitt slag av ljóskrabba.

Fiskaungar eta so ljóskrabbarnar, og svartkjafturin etur fiskaungarnar. Tá ið ljóskrabbarnir eru sodnaðir, er sandmaðkaungin leysur og borar seg út gjøgnum magaveggin, fer til stroks og endar í fiskinum á svartkjaftinum.

Men tá ger svartkjafturin eitt hylki uttan um ungan, so hann fær ikki flutt seg longur. Men nú siga vit, at sandmaðkur er í svartkjaftinum.

## Táknatrøllið

Mangan, tá ið tú kryvur seið ella tosk t.d., sært tú eitt ella fleiri blóðreyð ormlík dýr sita í táknunum. Hetta eru sníkar, sum súgva blóð.

Ungarnir hjá táknatrølli svimja fyrstu tíðina uppi í sjónum við tveimum beinpørum. Síðan festa teir seg í táknurnar á einum flundrufiski við 2 kampum og kjaftlimum. Meðan ungin situr har, broytist hann nógv. Hann hevur súgmunn. Seinni rýmir hann úr flundrufiskinum, svimur aftur í sjónum við 4 beinpørum.

Nú eru ungarnir kynsbúnir. Teir makast, og kalldýrið doyr stutt eftir. Men kvenndýrið svimur nú inn í táknaholuna á toskafiski. Har kastar tað limirnar og verður til blóðreyðan ormlíkan sník, sum hevur krøkt seg tvørtur um táknaboga. Trígreindi framendin á táknatrøllinum stendur niður í holdið. Framendin sýgur blóð, sum fer inn gjøgnum húðina, tí táknatrøll hevur ongar tarmar.

Táknatrøll kann verða nakrar cm langt, og sita nógv í táknunum. Tá verður fiskurin rak. Ein annar síkur borar seg inn í eygað á brislingi. Hann verður $1\frac{1}{2}$ cm langur og er grønbláur. Á einum brislingi vórðu funnir 9 tílíkir síkar, og hesin brislingurin vigaði bara helmingin av tí, hann átti at viga.

**Fiskalúsin**

Fiskalús krøkir seg fasta í skræðuna við gripkrókum. Serliga sita nógvar undir uggafjaðrunum, t.d. á skrubbu og reyðsprøku. Men tær fara eisini glíðandi eftir bakinum á fiski og fáa eisini svomið av einum fiski á annan.

Kjaftlimirnir eru vaksnir til eitt nev, og inni í nevinum liggur eitt amboð at stinga við. Fiskalús sýgur blóð úr fiskinum.

Summi bein eru vaksin til gripkrókar. Annars er fiskalús flatvaksin og væl lagað eftir at sita á fiskaskræðu. Summar hava eygu.

# Á látrinum

### Láturkópurin

Láturkópur er nógv úti fyri gjáum, har myrk hol ganga inn í bergið. Hesi hol eru nevnd látur. Inni á botni er vanliga møl. Látrini eru ofta djúp og trong úti um munnan, sum bæði kann vera oman sjóvar og niðan sjóvar. Láturkópur sæst sjaldan inni á fjarðum. Onkuntíð kann hann standa og skimast úti fyri sjóvarklettinum ella liggja og sóla sær á skerjum, flesjum ella niðarlaga í fjøruni. Tá eru tað vanliga hvølpar ella ungir kópar.

Láturkópur er smidliga vaksin. Hann kann gerast 230 cm langur og tá viga um 300 kg. Brimlarnir eru størri enn opnurnar. Hann er vanliga morgráur á bakinum við dimmum blettum, men ljósari undir búkinum. Ullin er stutt og hvøss. Trýnið er heldur langt. Um kjaftin og eyguni eru stinnir kampar. Oyrnalepar eru eingir, men bara smá hol, nevnd verða oyrnalustir. Undir skinninum er tjúkt spik, sum lívir væl. Framlabbarnir eita lállur og afturlabbarnir fitjur. Halin er stuttur og eitur saks.

Láturkópur bæði sær illa og hoyrir illa, tá ið hann er uppi á landi. Tá lítur hann mest á tevin. Lítið dugir hann eisini uppi á landi; hann fær hvørki grulvað ella gingið, tí hann fær hvørki sett lállur ella fitjur undir seg. Tá ið hann gongur, trýstir hann bringuna niðurat, skjýtur ryggin upp, kreppir afturpartin inn undir seg og spennir ryggin útaftur. Tá kemur hann fram hoppandi á bringuni. Er lendið óslætt, skal maður vera kvikur, skal hann fáa hann aftur. Tí fer kópurin ikki langt frá sjónum. Fyrsta hann tevjar okkurt, fer hann á sjógvin.

Óføra kringur er kópur í sjónum, svimur bæði skjótt á lið, opin ella á grúgvu. Undir kavi svimur hann opin. Nú sær hann betur niður í sjógvin, tí eyguni líta uppeftir, tá ið hann svimur á grúgvu. Í sjónum bæði sær og hoyrir hann væl. Er sjógvurin myrkur ella gruggutur, so lítur hann á kamparnar.

Tá ið kópur skal kava, andar hann út og letur nasagluggar og oyrnalustir aftur. Andardrátturin steðgar. Hjartað, ið frammanundan sló 150 ferðir um minuttin, slær undir kavi bara 15 ferðir. Næstan eingin luft er í lungunum. Blóðæðrarnar til næstan allar partar av kroppinum – uttan hjartað og heilan – falla saman, og tá verður súr-

evnið spart. Súrevnið, sum vøddarnir nýta, kemur tí ikki úr blóðinum; men nakað av súrevni er í vøddunum sjálvum.

Kropshitin verður minni, tá ið kópurin er undir kavi. Hóast kópurin er heitari enn sjógvurin uttan um hann, so missir hann ikki hita, tí spikið lívir so væl. Hann fær kavað 100 m niður og verið undir í 10-20 minuttir. Nú lítur hann á sjónina og ikki á tevin, tí at nasagluggarnir liggja saman.

Meðan hann er undir, leitar hann dúgliga eftir føði. Føðin er mest fiskur, sum hann tekur uppi í sjónum. Hildið verður, at kópurin etur so nógvan gagnfisk um dagin, at tað samsvarar við 3-5% av tí, teir viga tilsamans. Láturkópur vigar í miðal 120 kg, og 3000 munnu vera undir Føroyum. Men kópurin tekur meiri fisk enn hetta, tí mangan etur hann lítið av fonginum, kanska viðhvørt bara livrina. Annars tekur hann eisini krabbadýr og flundrufiskar á botni.

Tenninar líkjast hundstonnum. Tær 4 tøkutenninar eru góðar at drepa og flæsa við, og teir hvøssu jakslirnir at karva sundur í bitar við. Kópur drekkur ikki vatn. Sjógvur hevði verið ov saltur at drukkið. Men vatnið í føðini er kópinum nóg mikið.

Um mikkjalsmessu fer opnan upp á turt inni á látrinum at leggja. Áðrenn hon fór upp, át hon nógv meira, enn hon plagar at eta, tí hon etur einki ta tíðina, hon gevur hvølpinum. Nósin – hvølpurin – er bleikgulur og hevur tætta og síða ull. Nýlagdur vigar hann um 10 kg. Opnan gevur honum at súgva fleiri ferðir um dagin. Nógv fiti er í mjólkini, so nósin veksur skjótt.

Skuldi nósin verið skolaður út av látrinum, fær hann illa svomið og illa kavað, tí hann hevur so síða ull. Hann má tí vera uppi á turrum, til hann 3-4 vikur gamal kastar hvølpaullina. Stutt eftir tað, at hann hevur kastað hvølpaullina, er hann sjálvbjargin, og mamman kastar hann.

Nósin vigar nú um 30 kg og hevur fingið tjúkt spik um allan kroppin. Fyrstu tíðina er hann tó ikki so treystur at svimja. Enn eru vøddarnir ov veikir. Nú veksur hann skjótt. Spikið verður tynri, tí fitin verður nýtt til vøddarnar. Síðan er hann dúgligur svimjari og megnar sum einki harðan streym og síðar aldur.

Í 2-3 ár er ungur kópur meginpartin á sjónum og sveimar víða saman við hinum láturkópunum. 3-4 ára gamal er hann kynsførur.

Um veturnætur plagdu menn at fara til látra, og tað minkaði nógv um láturkópin. Síðan lagt varð av at fara til látra, hevur láturkópurin nørst aftur.

Fyrr var nógvur steinkópur, men um 1850 var hann oyðdripin. Steinkópur leggur í mai-juni á skerjum og smáhólmum inni á fjarðum og sundum. Væl lá tí fyri at sláa steinkóp, og veðrið var eisini til vildar hesa ársins tíð, so steinkópurin kólnaði burtur. Onkur hendinga steinkópur er tó at síggja.

# Fuglakroppurin

## Fjaðurbúnin

Ytstu fjaðrarnar á fugli eita verndarfjaðrar, og tær klæða fuglin uttan. Summstaðni á kroppinum liggja berar, men niður yvir hesar beru blettir liggja verndarfjaðrarnar. Niðast á eini fjøður er posi, sum er opin innan og fullur av luft. Hesin fjaðurposin situr fastur í einari poknu á kroppinum. Upp frá fjaðurposanum gongur fjaðurleggurin, og út frá legginum ganga fyrst teinar og so klænri hjáteinar, ið festir eru saman við smáum krókum. Tí hongur øll fjøðurin saman sum ein sterk pláta.

Undir verndarfjaðrunum er mjúkt dún. Dún hevur ikki legg, men bara mjúkar, langar teinar, sum ongar krókar hava. Dúnið lívir fuglin, tí at ímillum dúnið og fuglakroppin stendur støðuluft. Av verndarfjaðrum eru veingjafjaðrar og velfjaðrar tær størstu. Fjaðrarnar líva væl fyri kulda og stoytum. Tær gera eisini, at vatn rínur ikki við fuglin, tí at feitt liggur í fjaðrunum.

Fjaðurbúnin er lættur, og hann heldur lítið eftir, tá ið fuglur flýgur. Fuglurin fær lit eftir fjaðrunum. Um veturin, tá ið mangan er lítið at eta, er fjaðurbúnin vánaligur. Tá kann vilja so illa til, at fuglar doyggja í kulda, serliga smáfuglar.

Fjaðurbúnin slítst og litferst. Tær gomlu fjaðrarnar losna, og fuglurin kastar tær; men hann fær nýggjar fjaðrar aftur. Fuglur á okkara leiðum verður vanliga fjaðursárur um heystið. Vanliga missir hann næstan allar fjaðrarnar. Eisini veingjafjaðrar og velfjaðrar. Teir fuglar, sum stórur munur er millum summarbúna og vetrarbúna, verða eisini fjaðursárir um várið, men oftast bara lutvíst, tí teir missa ikki veingjafjaðrar og velfjaðrar.

Summir fuglar verða randfjaðursárir – bara fjaðuroddar og fjaðurrendur detta av, og tá kann fuglurin broytast nógv á liti. Men flytifuglur verður fjaðursárur, áðrenn hann flytur.

Fuglur røkkur við nevinum um allan kroppin. Tí fær hann reinsað og hampað fjaðrarnar við nevinum. Hann reinsar skarn og deyða húð burtur úr fjaðrunum. So gníggjar hann fjaðrarnar av nýggjum við feitti, sum hann fær úr einum kertli á drunninum.

Verður nevið skatt, ella fuglurin sjúkur, leggjast lús, loppa og motta á fuglin, so at hann krykur í sníkum.

## Beinagrindin

Fuglur hevur lítið, liðiligt høvd. Ongar tenn eru í kjálkabeinunum, tey eru toygd út í eitt nev. Uttan um nevið liggur fast hornjaður. Hvussu nevið er skapað, veldst um, hvussu fuglurin brúkar nevið, og hvussu hann viðger matin.

Hálsurin er ógvuliga langur og liðiligur, og hann stuðlar fuglinum javnvágina, tá ið hann flýgur. Bringugeislarnir eru fáir og óliðiligir. Lendageislar eru eingir, men nógvir óliðiligir kokugeislar. Rivjabeinini liggja í tveimum. Úr øllum rivjabeinum uttan tí fremsta er ein beinvøkstur, ið liggur niður á tað aftara rivið. Hetta styrkir bringuna.

Bringubeinið er stórt og breitt, og á tí er ein kambur, har teir stóru veingjavøddarnir (vongbrigðan) festa seg. Men fuglur, ið hevur ikki veingir, hann hevur heldur ikki kamb. Fuglur, sum er treystur at flúgva og flýgur skjótt, hevur stóran kamb.

Beinini í veingjunum eru long, serliga beinini undir alboga og handabeinini. Fuglur hevur sterkar herðar. Hann hevur ikki bara herðabløð, men eisini óstbein og ravnanevsbein, sum eru fest at kambinum.

Tá ið fuglur leggur veingirnar saman, kreppist armurin í liðunum, so at albogin liggur út aftureftir, og handliðurin liggur frameftir. Millum liðini og armin liggur gyrðin húð, ið spennist út, tá ið fuglurin breiðir út veingirnar.

Lærleggurin er heldur stuttur, og hann liggur frameftir og niðureftir; men lærleggurin liggur næstan allur fjaldur undir húðini og vøddunum. Framman knæliðin liggur vanliga knæskel. Langleggurin er langur og førur. Ristleggurin er klænur. Millum langleggin og ristleggin er fótliðurin. Á fótinum eru ongantíð fleiri enn fýra tær: framtá, miðtá, úttá og baktá.

## Sansarnir

Nasagluggarnir sita vanliga miðskeiðis á nevinum. Viðhvørt sita teir inni við nevrótina. Vanliga kann verða sagt, at fuglurin hevur ikki góðan tevsans. Inn í nasaholuna gongur eitt ræsi úr einum stórum kertli. Hesin kertilin er mest mentur í sjófugli. Alt tað saltið, ið er til avlops, verður úrskilt gjøgnum henda kertilin og kemur út gjøgnum nasagluggarnar.

Eyguni eru stór og góð. Sjónarsansurin er næstan bara ætlaður at kunna seg við. Fuglur fær lættliga stillað eyguni. Fuglaeygu er stillað eftir at síggja langt frá; men tá ið tey skulu hyggja at onkrum, sum er nær hjá, stillar hann eyguni eftir tí.

Fuglur hevur tvey eygnalok, men niðara eygnalok er bæði størri og liðiligari. Hann hevur blunkhinnu, sum ein serligur vøddi kann draga fyri eygað.

Fuglur hoyrir ikki so væl; men serliga teir, ið veiða um náttina, hoyra tó heilt væl. Oyrnalepar eru eingir. Oyrnaopini síggjast ikki, tí at fjaðrarnar liggja uttan á teimum.

**Sodningarleiðin**

Fuglur er tannleysur og hevur vanliga tunna, smala og óliðiliga tungu. Vælindið er langt og væl vítt. Á mongum fuglum er vælindið niðast víðkað út til eina kjós. Kjósin er í mongum førum nýtt at goyma mat í; men í summum fuglum (t.d. dúgvu og høsnum) verður maturin bloyttur í kjósini.

Fuglamagi er í tveimum: kertilgørn og fógverni.

Kertilgørnin úrskilir sevju, sum líkist slími, og henda sevjan loysir upp ein part av matinum. Fógvernið hevur tveir sterkar vøddar. Innanum á báðum vøddum er óslætt og klætt við hornkendum evni. Tá ið vøddarnir gníggja hvør móti øðrum, verður maturin kroystur og malin sundur. Fuglur etur smásteinar, sum so eisini hjálpa til at kroysta og mala matin sundur.

Fuglur, ið etur hørð fræ, hevur stórt og vøddamikið fógverni; men fuglur, sum etur kjøt, hevur lítið og næstan vøddaleyst fógverni. Hesir fuglar hava stóra kertilgørn, tí í henni verður kjøtið loyst sundur.

**Andarleiðin**

Fuglur andar sum súgdýr við lungum. Lunguni eru heldur smá og ógyrðin, og tey liggja væl vard ímillum geislar, riv og kamb. Barkin er styrktur við bróskringum og greinar seg í tvær lungnapípur. Har ið barkin greinast, eru innvik, og haðani fær fuglur mál. Fuglur hevur eingi málbond.

Blæsur tú gjøgnum barkan á deyðum fugli, fyllast lunguni við luft. Men tú sært eisini stórar, glærar luftbløðrur í innvølinum fyllast við luft. Vanliga eru fimm luftbløðrur uppi í hvørjum lunganum.

Hesar luftbløðrur stuðla andadráttinum. Tær virka sum blásibjølgur, sum sýgur og blæsur luft gjøgnum lunguni, soleiðis at andadráttur og flog fylgjast.

**Nøringin**

Í bøgu er vanliga vinstra eggrót stór og búgvin. Høgra eggrót er bara ein leivd ella eingin. Í ránsfugli (heyki) er høgra eggrót næstan líka væl búgvin sum vinstra.

Í verpingartíðini er eggrótin stór. Eitt tyssi av eggbøllum stendur tá á eggrótini. Inni í eggbølluni er eggjareyðin. Tá ið eggjareyðin er fullbúgvin, losnar hann og glíður niður gjøgnum egggørnina, sum fest er í baktarmin. Á veg niður gjøgnum egggørnina fær reyðin hvíta, hinnur og skal.

Í steggja eru bæði eistu búgvin. At eistunum liggur eitt lítið hjáeista, sum gongur inn í sáðgarnarnar. Tá ið steggi troðar bøgu, verða sáðkyknur latnar inn í hana.

Uttan um eggið liggur sterkt eggjaskal. Eggjahvítin er flótandi og hevur eitt glært jaður, sum fest er í eggjahinnurnar í báðum endum á egginum. Hetta jaðurið verjir eggjareyðan fyri stoyti. Tá ið eggið er vorpið, fara hinnurnar í tí kúputa endanum á egginum hvør frá aðrari, so at har verður eitt luftrúm.

Uttan á eggjareyðanum er ein ljósur blettur, sum eitur troðin, og úr troðanum búnast ungin. Meðan hann liggur í egginum, etur hann hvítan og reyðan. Tá ið ungi skal koma út, skræðir hann við nevinum hol á ta innaru hinnuna og dregur sín fyrsta andadrátt úr luftrúminum har.

Ungi í eggi hevur sterkan vødda í nakkanum, og so hevur hann eisini ein knykil á yvirnevinum, sum eitur nøsin. Tí brýtur hann lættliga hol á eggið, tá ið hann skal koma út. Frá tí, at tað brestur fyri nev, til ungin er útkomin, kunnu vera nakrir tímar ella dagar. Ungin tornar skjótt. Í unganum kann enn vera eitt sindur av reyðanum. Hann kann liva av honum í nakrar dagar – høsnarungar 3-4 dagar, áðrenn teir fáa at eta.

Fuglaungi veksur skjótt og kann sum oftast vera fullvaksin, tá ið nakrar vikur eru farnar; men tá skal hann fáa nógv at eta. Smáfuglur verður kynsførur sama várið, men størri fuglasløg, tá ið 2-4 ár eru liðin.

# Soppar

Mong soppasløg vaksa bara á ávísum lendi. Vit skifta lendið sundur í trý: graslendi, fjøll og viðarlund.

Soppar eru uppi í planturíkinum sum tær grønu planturnar, men soppar hava ikki grønkorn, og teir hava tí ongan blaðgrøna. Tær grønu planturnar fáa orku frá sólini. Skulu plantur fáa orku frá sólini, mugu tær hava grønkorn. Tær grønu planturnar taka vatn og ymiss evni úr jørðini og $CO_2$ úr luftini, um tær skulu vaksa.

Soppar hava ikki grønkorn. Tí mugu teir fáa sær føði á ein annan hátt. Soppar liva tí av rotnandi plantum.

Tá ið vit henta ein sopp, er ein partur av honum eftir niðri í jørðini. Niðri í jørðini er eitt tætt net av klønum træðrum. Hesar klønu træðrirnar nevna vit soppamóður. Tá ið soppur skal nørast, kemur ein hattur oman á soppamóðrina. Hatturin verður nevndur fruktkroppurin, og hann stendur oman á jørðini.

Soppar nørast við evarska smáum grókornum. Grókornini koma til soleiðis, at tvey ymisk sløg av soppamóður renna saman. Vit nevna tey kallmóður og kvennmóður. Burtur úr verður tá ein nýggjur fruktkroppur.

Uttan á fruktkroppinum ella inni í honum koma grókornini til. Tá ið tey eru búgvin, losna tey, og av tí at tey eru løtt og smá, so sveima tey í luftini og fara víða um við vindinum.

Detta grókornini nú á ein hóskiligan stað, so kunnu tey vaksa til nýggja soppamóður.

Soppar trívast, um teir fáa ikki ljós. Teir frukta serliga væl, tá ið tað er lýtt og vátligt, og teir tola bæði frost og turk. Mest soppur er um summarið og heystið, tí tá eru hiti og væta hóskilig.

Í Føroyum hevur ikki verið siður at henta soppar at eta. Lítið hevur verið virt um teir. Tí verða teir nevndir hundaland. Í Føroyum vaksa fleiri soppasløg, sum eru etandi. Men eitrandi soppar eru ikki so vanligir her hjá okkum sum aðrastaðni. Tó eru eisini eitrandi soppar, ið vit skulu ansa væl eftir, at vit eta ikki. Í bókini *Føroyskum soppum*, síggja vit, hvør ið er etandi, og hvør ið er ikki etandi.

**Skónir**

Skónir eru eisini plantur. Tær flestu vaksa á hellu, steinum, nakrar uttan á træbørki og nakrar á jørðini.

Skónir eru soppar, sum liva saman við ávísum algum. Hesar algur eru so smáar, at lítið sæst til teirra. Sopparnir taka algurnar inn í hold sítt. Algurnar trívast inni í soppinum. Av tí at algurnar hava grønkorn, gera tær føðslu úr $CO_2$ í luftini og vatni. Sopparnir geva algunum vatn og ymiss evni, og so gera algurnar føðina. Sopparnir hava ikki grønkorn, og tí kunnu teir ikki gera føði á henda hátt.

Sopparnir liva tí av føði, sum algurnar gera teimum.

Korki, steinamosi, gulaskón, svartaskón og greinaskón vaksa á hellum, steinum og trøum. Í svørðinum vaksa jarðarsipa og reindýraskav.

# Leitorð

admirálur 95
agn 145
agnar 74
agngágga 166
agurka 71
ahorn 24, 25
akurskritt 108
alga 246
alibrúk 127, 128
alidýr 34
alifuglur 41
aling 123
alinót 128
alistøð 123, 124, 126
almenningur 21
alpuviól 70
andarleið 243
anding 207
andingarpípa 167
antarfuglur 186
arvi 76
atlanto-skandiska sildin 224

áarósi 132
áarsíl 120, 121
áartrøll 95, 115å
áin 79
álka 189
állur 118
álmtræ 24, 83
álvaætt 96
árringar 24, 205
ársplanta 79
áseyðaroyting 37

bakkagróður 135
bakkahvonn 23
bakkasløkja 135
bakur 175
baldursbrá 75, 193
barda 217
beinagrind 205, 242
beinbogi 206
beinfiskur 205
beinflís 205
beinmurtur 142
beinteinur 206
ber 20
berg 193
berggylta 155, 211
berjalyngur 77, 79
betlehemsstjørna 70
bikarbløð 20
bitklógv 67, 150
bivormur 113
bjargablomstur 193
bjargahvonn 23, 193
bjargamús 51
bjørg 193
blað 19
blaðgrøni 245
blaðknappur 28
blaðlús 58, 99
blaðæðr 19
blankállur 119
bláberjalyngur 79
bládepla 21
bládúgva 111
bláklukka 91
blákolla 77, 83

blálilja 26
blástur 216
bleikja 121
bleytbotnur 201
blikur 173
blóð 207
blóma 20, 82
blómufluga 98
blómukál 76
blómuknappur 20
blómuleggur 20
blómuplanta 75
blómur 81
blómusáð 20, 81, 82, 99
blómuskipan 20
bløðka 19
bløðrutari 146, 148
boppur 35, 39
botnfiskur 229
bókaormur 65
bókartræ 24
bólatari 148
bótatari 146
Brasil 70
breitt sævarkorn 135
brenning 208
brimil 238
brislingur 223
brobber 26, 79
broddur 35
bromber 28
brosma 231
brosmumurtar 231
brósk 205
bróskfiskur 205
bróskgarður 34
bróskigla 114
bróskteinur 206
brundseyður 37
brunnbátur 129
brúntari 153
brævdúgva 112
bukkabløð 78
bulur 18, 24
burðarhundur 33
bust 39
búfuglur 46
búkfjøður 206
bústaður 101
bygg 75
bøbbur 145
bøga 43, 44
bøksl 226
bøling 173, 174
bøllur 55
børkubóndi 79
børkur 24
børkuvísa 77, 79
bøur 74

$CO_2$ 19, 202, 208

dafnia 113
dagfirvaldur 81
dái 76
dálka 203
deymkertil 53
deymvæta 53
diskblómur 75
doddur 37, 38
dreymsólja 77
drunnhvíti 185, 186, 195
dunna 42, 181
dunnuber 134
dúgva 111
dún 41, 241
dúnurt 78, 83
dýramurtn 201, 202, 203
dýraæti 184, 185

egg 41, 81, 82
eggbølla 244
egggørn 244
eggjahinna 244
eggjahvítaevni 35
eggjahvíti 244
eggjareyði 41, 125, 208, 244
eggjaskal 244
eggkykna 208
egglega 20, 81, 82
eggrót 244
eingjarkarsi 78
eirisgras 77, 135, 193
eista 244
eiturklógv 90
eiturkoppur 66, 89, 90
eiturkrókur 66
eldmurtur 142
eplablomstur 31
epli 28, 30
erla kongsdóttir 48
ertnaskel 114
ertur 17, 20
eygnadregil 45
eygnagras 74, 75
eygnarogn 125
eyrriða 122
eysturíslendski pólstreymurin 202

faks 38
feitilendi 77
feitt 35
feittfjøður 120
feli 36
firvaldur 59, 81, 95, 96, 98
fiskaaling 232
fiskaaling við Áir 123
fiskaeyga 209
fiskaheili 209
fiskakroppur 205
fiskalús 237
fiskaskræða 205
fiskastovnur 203, 204
fiskimási 171, 185
fiti 207
fitja 42, 43, 238
fínagras 22, 75
fjaðurbúni 241
fjaðurleggur 241
fjaðurposi 241
fjaðursárur 41
fjallahagi 77
fjallamýrifípa 77
fjarðarsild 224
fjós 35
fjøra 140
fjørufluga 138
fjørufuglur 171
fjøruklettur 137
fjørukrabbi 150
fjørukúvingur 143, 144
fjørumaðkur 100, 163
fjørurímbløðka 134
fjørusandur 137
fjøruteka 139
fjørutúsundbein 139
flatmaðkur 86, 87
flatormur 89
fleiráraplanta 79
flesk 39
flogfjaðrar 181
floghol 64, 65
flogkykt 20, 55, 81, 95
flotkelda 78
fluga 55, 81, 98
flus 30
fornur bøur 74, 75, 76

fógverni 41, 243
fótbølli 32
fransaterna 178
frensur 32
friðarlilja 70
froðuspretta 99
frostspannari 59
frukt 20, 82, 83
fruktkroppur 245
fruktspjaðing 83
fræ 17, 20, 24, 27, 75, 82, 83, 84
fræhvíti 75
fræspjaðing 83
fuglakroppur 241
fuglaloppa 62
fulkubbi 186
furutrø 24, 25
fyl 38
førilús 37
Føroyabanki 211
føroyskar røtur 76

gagnplanta 24, 28, 75
gammafirvaldur 97
gatiklukka 64, 91
gágga 165, 167, 168
gággukrabbi 165
gágguskel 165, 166, 167
gás 43
gásamura 134
geit 40
gil 78
gimburlamb 35, 37
gitið egg 20
gitnaður 20, 81, 82
gjógv 78
gjólingur 36, 37
glarállur 118
glering 34
glærur snigil 89
gnagdýr 49
golfstreymur 201
got 207
granntræ 24, 25
gras 21, 25, 74, 81
grasagarður 74
graslíð 77
grasormur 98
grasstrá 74
grasætt 75
grádýr 92
grágás 43
grágrælingur 182, 183
gráspurvur 48
grásúla 191
grátítlingur 45
grátt undir steini 92
gráur snigil 88
grein 24
greinaskón 135, 246
grind 227, 228
grindadráp 228
grindahvalur 222, 226
grindalokkur 99
grísur 39
gróðrarblað 17, 18
gróðrarkjarni 17
gróðrarknappur 17
gróðrarleggur 17
gróðrarrót 17
grókorn 149, 245
grótgarður 26
grunnnøs 210
grøn planta 245
grønt blað 19
grønkál 28, 30, 76
grønkorn 245, 246
grønleykur 28

grøntari 146, 147
gularót 28
gulaskón 135, 246
gulállur 118, 119
gullbrandur 215, 221
gulllaksur 233
gýting 142, 208, 209, 211, 224
gýtingargrunnur 208
gøltur 39
gøtubrá 78, 135, 136

hagapartur 36
hagasólja 22, 79, 83
hagi 36, 37, 74, 77
hamari 78
hamarstjølur 226
handilstøð 15
hani 42
hara 52
harðbotnur 201
harufressur 54
harutíð 54
havfuglur 185, 194
havgágga 168
havhestasjúka 195
havhestaungar 195
havhestur 185, 186, 194
havri 75
havsild 224
havtaska 206, 232
havtyrðil 185, 186
havur 40
hawaiiplanta 70
hávur 218
hegl 42
heiðalyngur 79
heiðin 78
heimagás 43
heimahvonn 23
heimamús 51
heimrust 21
hellufuglur 188
helsareyði 186, 199
hestur 38
heygsmaður 95, 96, 115, 116
heygsmannaormvera 115
heystfiskiskapur 213
hindber 28
hjarta 207, 208
hjartaarvi 21
hjartasproti 29
hjáeista 244
hjálpirót 78, 135
holudúgva 112
hoppsterta 137
horn 35, 226
horngeil 142
hornjaður 34
hornskógvur 34, 38
horntindur 32
hoyggj 35, 36
hoyggjangi 26
hógvur 38
hulda 96
hummari 161
hunangur 20, 22, 81, 96, 99
hundaigla 114
hundaland 245
hundaloppa 63
hundur 33
húðarnabbar 164
húsagras 22, 75, 77
húseiturkoppur 67
húsfriður 70
húsvættið gráa 57
húsvættið morreyða 57
húsvættið svarta 58
Hvalba 134

hvalspýggja 220
hvannfræ 23
hvanngarður 21, 23
hvannjólur 23
hvasssíl 142
hveiti 75
hvíti 41, 244
hvítingsbróðir 225
hvítingsmurtur 215
hvítingur 215
hvítkál 76
hvítkjógvi 197
hvítsúla 191
hvítusunnulilja 26
hvonn 21, 23, 28
hylki 27
hýasint 26
hýggj 68
hýsa 206, 213
hýsumurtur 213
høgguslokkur 221
hømilia 21
høna 41, 42
høsnagras 21, 22, 76, 77
høvuðbløka 164
høvuðlús 61

igil 89
iglagras 89
iglasjúka 37
iglasnigil 88, 89
iglasólja 78
igulker 159
inniplanta 70
innrúm 207, 208
innvølur 207

jakslir 32
jarðarkona 107
jarðarsipa 74, 246
jarðber 28, 29
jarðleggur 18, 29
jarnskógvur 38
jákupsskel 168
jomfrúhummari 161
jóansøkugras 22
jóli 28
jólastjørna 70
jótra 34, 36
júgur 35

kallblóma 81
kalvi 229
kampur 32, 55, 61
kattarklógv 79
kaviar 156
kavont 185
kálmølur 59
kálplanta 76
kálrabi 76
kálrót 30
kálspannari 59
kálvur 35
kápuhola 88, 206, 208
kelvi 151, 168
kenning 36
kenningaseyður 36
keppur 34
kertilgørn 41, 243
ketta 32, 51
kettlingur 32
kjógvi 186, 197
kjós 41, 55, 243
kjøtmotta 64, 68
klekibakki 125
klekingartól 42
klekiposi 140, 141
klekistøð 123

klekistrokkur 125
klettagróður 135
klettaspretta 137
kleyv 34, 39
klipping 37
klokkulyngur 79
klógv 32, 33, 41, 49, 50, 55
klukka 64, 65, 91, 92
knavar 35
knæliður 74
kollut baldursbrá 21
kombikk 142
kongadýr 137
kongalilja 26
koralltari 149
korkahinna 149
korkakúvingur 145
korki 135, 246
korn 75
kópur 238, 239
krabbadýr 92
krabbaeiturkoppur 67
kraftfóður 35, 36
kráka 108
krákuspýggja 77
krokus 26
kropslús 62
krossfiskur 145, 152, 157
krubba 36
krúnublað 20
kryddurt 28
kræklingur 144
kurv 75
kúgv 34
kúla 226
kúpuskel 162
kúvingur 143, 165
kvennblóma 81
kvíslaeiturkoppur 89
kvørkveggja 105
kykna 205
kynbótararbeiði 123, 124, 125
køstafluga 57

labbi 32, 49
lagkleyv 34
laksayngul 122
laksur 122, 126, 127, 128, 129
lamb 36, 37
landgrunsfuglur 185, 187
landkomudagur 189
langskel 170
lállur 238
lát 172
látur 238
láturkópur 238
leggur 18
legugras 22, 75
legusmolt 128
leykplanta 26
leykur 26, 70
Leynavatn 121
leyv 79, 80, 146, 147
leyvfall 79
leyvtrø 24, 25
likka 191
litkyknur 205
litur 205
livur 207
líð 77
línbinda 76
líri 198
Lítla Dímun 37
lívfiskur 123, 124
ljós 19, 69, 202
ljóskrabbi 223
ljóssamruni 202
lokkanet 66, 67, 89

lokplanta 26, 75, 76
lomvigapisa 187
lomvigi 185, 187
longa 216
lop 35
loppa 63
loynitræ 24, 25
lógv 104
lómur 179, 185, 186
lundaland 188, 189, 195
lundasina 193
lundi 185, 188, 193
lupin 26
lús 37, 61, 62
lúsakrabbi 152
lyngheiði 79
lyngur 25
lýsi 207
læknaeirisgras 135
lættisoppur 168
løða 32, 54

maðkapirra 120, 122, 126, 127
mannbítur 33
marfluga 140
margaritt 70
margføtla 221
marhálmur 134
marking 37, 43
matmaðkur 56
mánadúgva 112
másafuglar 186
mási 186
meistaraurt 135
meitilberg 132
mirkjalli 148
mjátt sjógras 135
mjólk 39, 40
mjólkarvirki 35
mjølhúsvætti 58
mold 14, 69, 85
mon 38
morgunfróa 70
mortari 146, 148, 153
mortítlingur 47
mosi 77, 78, 79, 193
motta 64
mógvur 79
mórubotnur 161
mótstøðuføri 124
mura 134, 136
murtn 78, 201, 203
murtngróður 204
mús 50, 193
músabróðir 47
músastovnur 51
Mykines 190
myldingur 14
mynta 28
mýggjabitaormvera 114
mýggjabiti 98, 115
mýri 78
mýrifípa 77, 78
mýrihoylús 78
mýrimosi 69, 78, 79, 90
mýrisnípa 103
mýrisóleya 21, 75, 193
mýritistil 78
mýslingar 51
mækja 78
mølheygagróður 134
mølheyggjur 134
mølur 57, 58

nál 17
nálatræ 15, 24, 25, 26, 81
náttfirvaldur 81
neliksætt 75

nelikur 70
nev 55
neyt 34
neytahorn 34
neytakona 35
nigil 99
nitra 62
Norðhavið 211, 213
norðhavssild 224, 225
norðsjóvarsild 224
nota 21, 96
notufirvaldur 96
notukykna 166, 220, 221
nósi 239
nytra 213
nýra 207
nøring 208, 244
nøt 29

$O_2$ 19, 207
oksaeyga 75
oljudálking 174
ompil 191
opinekruarvi 76
opna 239
orka 208
ormaár 98
ormafirvaldur 98
ormur 37
ormvera 59, 62, 63, 95, 96, 97, 98, 99, 114, 115, 117
oskamjólk 35
ovveiða 203
oyrar 136
oyrargróður 136
oyrnalustir 238
oyrnatrantklukka 92

óðinshani 106
ósaskrubba 231

páfirvaldur 96
páskalilja 26
perla 144
perlumóðir 144
persilla 28
pilkimaskina 125
piparrót 28, 30
pílatræ 25, 81
pílur 78, 83
plantuleggur 18
plantumurtn 201, 202, 204
plantuæti 184, 185
porfýrfuglur 97
prýðisplanta 24

rabarba 28
rabarbugarður 28
rabarbujólar 28
radisa 28, 30
randblóma 75
ravnanevsbein 242
ravnur 110
ráki 55
rámjólk 35
ránsdýr 32, 33
ránseiturkoppur 90
ránstonn 32
reiður 141, 142
reiðurstaður 101
reindýraskav 246
reinfan 26
reipatari 148
reiv 56, 57, 58, 62, 63, 115, 117
reivvera 59, 64, 96, 99, 115, 117
rekatari 133
rekil 25
rennil 39
reyðakkuleya 75, 136
reyðblað 149
reyðfiskur 155, 205, 211

reyði 244
reyðkál 76
reyðmaðkur 85, 87
reyðrót 28
reyðsprøka 230
reyðsprøkumurtur 155
reyðtari 146, 149
reyk 41, 42
rivblað 149
rímbløðka 134
rípuskel 100, 169
rís 75
rívitunga 88, 143, 167
roðsla 205
rogn 123, 124, 127, 208
rognabúgv 123
rognállur 119
rogneind 123
rognfiskur 142, 208
rognkelsi 155
rognkorn 208, 209
ross 38
rotta 49, 51, 193
royður 216
roykgras 75
roynitræ 24, 25
rósa 26
rósuhjálpirót 136
rót 18, 28, 35
rótaslag 76
rótfesta 146, 148
rótgrein 18
rugur 75
rukkulakki 34
rundbøllutur fjørukúvingur 144
rundormur 236
rust 21
rútur 42
ryssa 38
ryta 185, 196
rytupisa 196

saks 238
salt 15
samdøgurstig 125
sandbotnur 163
sanddunnuber 134
sandfjørukál 134, 135
sandmaðkur 236
sandmarhálmur 134, 135
sandnalvi 144
Sandur 134, 135
sansir 209, 242
Sargassohav 118, 119
sáð 20, 82
sáðberi 20, 81
sáðfang 20, 81, 82
sáðgarnar 244
sáðgong 20, 81
sáðknappur 20, 81
sáðkykna 208, 244
sáðtráður 81
sáing 81
seiðamurtur 155, 214
seiður 214
set 31
setepli 30, 31
setkvistur 70
sevil 167, 168
seyðafriðaður bøur 74
seyðahundur 33, 36
seyðamaður 36
seyðaskipan 37
seyðavingl 77
seyður 35, 89
sigg 226
sil 142, 208

silállur 119
sild 223
sildatorva 224
sildberi 189
silfiskur 141, 142, 208
silkiband 77, 79
silkipípa 66, 90
silkiteppi 89, 90
silkitráður 66, 67
silpa 41, 42
síl 120
sjófuglur 184, 194
sjógras 77, 135, 136
sjógrælingur 183
sjógvormur 164, 166
sjónopna 32
sjónota 166
sjósíl 120
sjósól 158
sjóvarfalsstreymur 202
skarvsbøli 176
skarvur 176, 185, 186
skatumási 177
skegg 164
skegggágga 164
skelmaðkur 235
skelsandur 134
skinfluga 55, 56
skipan 37
skolopendari 93
Skopun 123
skor 77
skotsk meistaraurt 135
skón 135, 193, 246
skrápur 186, 198
skreytplanta 69
skriðsólja 75
skriðublóma 77
skrubb 37, 64
skrubba 231
skrubbmotta 64
skrubbumurtur 155
skræða 205
skurðfjall 37
skuri 173
skúgvur 185, 186, 198
skúvgarnar 207
skøra 78
slangustjørna 158
sleðuhundur 33
slipa 205
sló 34
slýblað 147
slýggj 147
slýleggur 147
slýtráður 147
sløkja 135
smáfiskur 211
smátari 184
smolt 123, 126, 127
smolting 127
smoltstøð 124
smyrslingur 169
smæra 22, 26, 77
snigil 87, 88, 89
sníkur 235
snjallibjalla 75
snjóhara 54
snjóklokka 26
snjósólja 77
snodd 33, 34, 38
snælda 197
sodningarleið 243
soppamóðir 245
soppur 245, 246
sortugras 83
sólber 28
sóleya 22, 75

sólja 75
sóljuætt 75
sóljukoppur 22
spegil 42, 180, 181
spíri 30
spógvagras 74
spógvi 102
sproti 29
spunahylki 90
spunavørtur 66
staraloppa 62, 63
stari 44
steggi 42, 43, 44
steinamosi 135, 246
steinbítur 206, 232
steinbrot 77
steinkópur 240
steinstólpa 45
steinull 69
stikkulsber 28
stikl 35
stívilsi 30
stjúpmóðurblóma 70
stjørnusteinbrot 78
stovufluga 56
stólparót 18
stórhvalur 216
stóri flatmaðkur 86, 87
strandarfuglur 171, 185
strandgróður 133
strentingur 153
strika 210
strikusansur 210
strond 132
strúking 124, 126, 127
støðuhylur 140
suðurhara 54
sukur 19, 35, 207
sukurtari 148
summardái 21, 75, 77
summarfuglur 96
summarseiður 155, 215
sundbløka 161
sundgrælingur 186
sundmagi 207
sundvongur 144
súgfótur 157
súgskál 157
súgv 39
súla 185, 186, 190
súrevni 19
svartaklukka 91
svartaskón 135, 246
svartbakur 175
svartfuglur 185, 186
svarti snigil 87
svartkjaftur 225
sveiptráður 147
sveiv 226
svín 39
svínasólja 21, 75, 77
svínastíggjur 39
svørður 14, 85
svøvnskarvur 176
sýldi drunnhvíti 186, 195, 196
sýra 21
sævargøtubrá 135
sævarkorn 134
søl 149
sølt 35, 202

taðfall 146
tagl 34, 38
tang 146, 148
tangbjølla 148
tangspógvi 103
taraangi 26
tarablað 148

tarabrosma 153
tarafluga 138
taralús 152
taraskógur 148, 150
taravøkstur 146
tari 146, 201
táknablað 206, 207, 208
táknabogi 206, 207
táknahola 207
táknatrøll 236
táknir 207, 208
tálgargras 74
teinur 20, 81, 82
teisti 177, 185
terna 178, 185
ternumurtur 214
ternupisa 179
tev 53
tevgluggi 119, 210
tindakollur 78
tistilfirvaldur 96
tík 33
títlingskongur 47
títlingur 46, 106
tjaldur 100
tjaldursgrælingur 182
tjaldursungi 102
tjarnaks 78
tjørn 78
tomatplanta 71
tonglatari 146, 148, 149
toppkúvingur 166
torva 211
torvatrøll 67
torvheiðin 78, 79
toskamurtur 155, 212
toskur 211
tógvar 52, 53
traðir 74
trantklukka 91
trevjarót 18
troðin 172, 244
træ 18, 24, 80
træormur 64, 65
træveturseiður 215
trøllakampur 78
trøllanegl 153
trøllasíl 141, 154
tubbaksplanta 31
tulipánur 26, 70
tunga 230
turkadúgva 112
turnips 76
turtildúgva 112
túsundbein 93
túsundblað 79
túvublóma 77
tvíáraplanta 79
tvíkynjaðar blómur 81
tvíkynjaður maðkur 87
tvílemba 36
tvísterta 59
tvæveturseiður 215
tøð 15, 57
tøðevni 184
tøkuarmur 221
tøkutonn 32, 39
tøkuvirki 129

uggafjøður 206
ulka 154
ull 35, 37, 40
undirhagi 77
undirløgugras 79
upprúm 207, 208
upsi 214, 215
urð 78
urt 48

urtagarður 24, 25, 26, 28, 70, 74
urtagarðsbrobber 28
urtapílur 77

útiløgukattur 32
útiplanta 70

vagl 42
vakstrarhús 69
vakstrarringur 213
vallberg 132
vangagrái 189
varðhundur 33
vatn 14, 15, 78, 208
vatnasíl 120, 121
vatnfluga 138
vatnkarsi 28
vatnkálvur 116
vatnloppa 113, 222
Vágahavið 211, 213
vár 16
várfiskiskapur 213
várperla 77
vátlendi 78
veðrur 35
veðurlamb 35, 37
veggjalús 61
veggjasmiður 61
veggjasmyril 61
vegjaðari 22
veiðieiturkoppur 67
veiðihundur 33
veiðitræðrir 221
veingjafjøður 241
veingjaguli 97
velfjøður 241
verndarfjøður 241
verpibroddur 117
verpipípa 56, 67
vetrargrønur vøkstur 26
við Áir 123, 232
viðarlund 24
viðarmaðkur 235
viður 18, 24
vil 34
villdunna 43, 180
villhøna 42
villross 39
villsvín 39
vindur 81
vinstur 34
vistskipan 204
vitamin 35
víggj 56
vomb 34
vongbrigða 242
vøddi 206
vørtutari 149

ylliniviður 26
yngul 120, 123, 124, 125, 126, 127, 155

æða 173
æðr 19
æðublikur 173
æðuvørpa 173
ær 35, 36

øða 145
øshvít gás 43